# Føroyskar bókmentir

í úrvali

4



Føroya Skúlabókagrunnur

Materiál chráněný autorskými právy

Materiál chráněný autorskými právy

Føroyskar
bókmentir
4

This One
HHX5-6QR-6F7U

Materiál chráněný autorskými právy

# Føroyskar bókmentir

## í úrvali

# 4

Lagt til rættis hava Sofus Joensen,
Martin Næs og Hanus A. Samuelsen

FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNUR

TÓRSHAVN 1986

Materiál chráněný autorskými právy

FØROYSKAR BÓKMENTIR Í ÚRVALI 4.
Lagt til rættis hava Sofus Joensen,
Martin Næs og Hanus A. Samuelsen.
Kápumynd: Zacharias Heinesen.
Satsur og prent: Dimmalætting.
Føroya Skúlabókagrunnur, Tórshavn 1986.

Áður útkomið:
FØROYSKAR BÓKMENTIR Í ÚRVALI 2, 1964,
FØROYSKAR BÓKMENTIR Í ÚRVALI 3, 1983.

Materiál chráněný autorskými právy

# Innihald

K. O. VIDERØ:
Ferð mín til Jorsala (Brot) ........................ 11

JÁKUP BERG:
Ein selli ........................................ 47
Á kyndilsmessu ................................... 48

ANDREAS ANDREASEN:
Nú sprettur á fold ............................... 50
Fossá kvøður ..................................... 51

VALDEMAR POULSEN:
Malena og Justitia ............................... 53
Gøla í Eplalandi ................................. 66

G. L. SAMUELSEN:
Ein lítil grúgvuglóð ............................. 73
Tær biðikertur brenna ............................ 74

SIGURÐ JOENSEN:
Eg stoyti heitt .................................. 76
Hugskot uppi yvir einum hálvpiðaðum háryggi ...... 90
Tjúgundi maður umborð ............................ 94

KARSTEN HOYDAL:
Summarkvøld við Rockall .......................... 104
Í kirkjutíð ...................................... 108
Støv ............................................. 115

Materiál chráněný autorskými právy

Vaktarmaðurin ........ 134
Eini hjún ........ 144
Barnið, bergið og blómurnar ........ 148
Tú, sum ert undan á vegnum ........ 149
Myrkrið reyða ........ 151
Tað kemur ein skýming ........ 151
Og rapla varðar allir ........ 152
Ganga nú á meg minnini ........ 153
Klettur ........ 155
Bambusljóð ........ 156
Brúgvar ........ 159

JENS DAM JACOBSEN:
Lítil vármynd ........ 161
Útlit ........ 162
Summarmorgun ........ 163

ÓLI DAHL:
Blóma mín ........ 164
Heyst ........ 165

BERNHARD BRIM:
Tað var í mai ........ 167
Eg elski kvinnur ........ 169

REGIN DAHL:
Hvar er rás? ........ 170
Kona ........ 171
Krákan ........ 171
Kvinnan ........ 172
Vísa ........ 173
Goymi eg minni ........ 173
Til unga frænda ........ 174
Kvæði fremsta framtakskappa landsins ........ 178
Innibyrgdur ........ 179
Genta við vindeygað ........ 181

Materiál chráněný autorskými právy

Døgurðatíð . . . . . . . . . . 181
Lukkuríman ella Eg tími ikki — . . . . . . . . . . 182
Illi bóndi . . . . . . . . . . 183
Blíði bóndi . . . . . . . . . . 183
Lítil samrøða . . . . . . . . . . 184
Bilferð á vetri . . . . . . . . . . 185
Uppi á hagahøvdunum . . . . . . . . . . 186
Teir . . . . . . . . . . 186
Leysasøkk . . . . . . . . . . 187

BERGUR DJURHUUS:
Konutátturin . . . . . . . . . . 189

OSKAR HERMANNSSON:
Fiskagentan . . . . . . . . . . 191
Lítil gongumaður . . . . . . . . . . 193

FLÓVIN FLEKK:
Ein unglingi 1941 . . . . . . . . . . 194
Flóvin og valkyrjan . . . . . . . . . . 199
Tað vakurt er . . . . . . . . . . 201
Rætt mær hond . . . . . . . . . . 202

ESMAR JACOBSEN GATA:
Rakul í Rama . . . . . . . . . . 203
At kunnað . . . . . . . . . . 204

T. N. DJURHUUS:
Eg gangi . . . . . . . . . . 205
Oyggjar í toybili . . . . . . . . . . 206
Vesturskin í viðalund . . . . . . . . . . 207
Jarðareygað . . . . . . . . . . 207
Ein vísa . . . . . . . . . . 208
Konfirmatión . . . . . . . . . . 208
Jalousi . . . . . . . . . . 210
Síggi gjøgnum kirkjuglugga . . . . . . . . . . 210

Materiál chráněný autorskými právy

Rópið ........................................ 211
Á Boðanesi ........................................ 214
Spleen ........................................ 215
Hevur tú hómað ........................................ 216
Ishoy in memoriam ........................................ 216
Í kirkjugarði ........................................ 218
Selatrað 8. juli 1626 ........................................ 219
Og dansurin gongur ........................................ 220
Veðratátturin ........................................ 221
V4 tátturin ........................................ 225

JENS PAULI HEINESEN:
Degningsælið ........................................ 227
Gestur ........................................ 229
Rógv, sonurin, rógv ........................................ 234
Ein einsligur floytitóni ........................................ 238
Brúgvin og mýran ........................................ 251
Hattleysir lítlingar uppi í oyðuni ........................................ 257
Í aldingarðinum ........................................ 265
Heimsins minsti sangur ........................................ 274
Faðir og sonur ........................................ 280

ÓLAVUR MICHELSEN:
Lovorð til lívið ........................................ 291
Eg óttist ........................................ 292
Annika ........................................ 293
Rossini á Skoradali ........................................ 293

STEINGRÍM NICLASEN:
Mítt síðsta tjaldur ........................................ 305
Mínar troyttu hendur ........................................ 306
Átti eg orð ........................................ 307
Undir heimsins súlnagangi ........................................ 309

MAGNUS DAM JACOBSEN:
Nýggjársyrking ........................................ 310

Materiál chráněný autorskými právy

Í Grønlandi við Kongshavn (Brot) .................... 311
Skitsur — býurin og stórbýurin (Brot) ............... 317

STEINBJØRN B. JACOBSEN:
Seiðaberg .................................... 322
Vatnkvæði .................................... 323
2 ............................................ 325
Tøl í degnum ................................. 325
Róðursmenn ................................... 326
Ognartaka ogn okkara ......................... 328
Fólkið frælst ................................ 330
Bilurin ...................................... 331
Tú skal siga og skriva ....................... 332
Regn ......................................... 333
Heygurin ..................................... 334
Einaferð rann ein á .......................... 335
Alt í lagi ................................... 337
Maðurin og hundurin .......................... 337

HANS J. GLERFOSS:
Tey .......................................... 343
Hvør grunar .................................. 344
Lívið ........................................ 344
Til eina skøkju .............................. 345
Tøgn ......................................... 347
Kvirra í reyðum og bláum ..................... 348

LÍGGJAS Í BØ:
Skal tað henda? .............................. 350
Maðurin og moldin ............................ 351
Sólarris ..................................... 353
Vallarar ..................................... 354

RITHØVUNDARNIR:
K. O. Viderø ................................. 357
Jákup Berg ................................... 357

Materiál chráněný autorskými právy

Andreas Andreasen . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 357
Valdemar Poulsen . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 358
Georg Lindenskov Samuelsen . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 358
Sigurð Joensen . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 358
Karsten Hoydal . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 359
Jens Dam Jacobsen . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 359
Óli Dahl . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 360
Bernhard Brim . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 360
Regin Dahl . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 360
Bergur Djurhuus . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 361
Oskar Hermannsson . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 361
Flóvin Flekk . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 362
Esmar Jacobsen Gata . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 362
Tummas Napoleon Djurhuus . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 363
Jens Pauli Heinesen . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 363
Ólavur Michelsen . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 364
Steingrím Niclasen . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 364
Magnus Dam Jacobsen . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 365
Steinbjørn B. Jacobsen . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 365
Hans J. Glerfoss . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 366
Líggjas í Bø . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 366

Materiál chráněný autorskými právy

# K. O. Viderø

*(27/5 1906)*



## Ferð mín til Jorsala
*(Brot)*

Inn í svøvnskemmu mína berast mær alskyns ljóð útan úr bygdini frá starum og tjøldrum, ið kátliga láta har úti, frá børnum, ið fara syngjandi eftir vegnum og frá vaxnum, ið fara til starva, men yvir alt og øll hevja hanarnir sínar ljómføgru røddir svá hátt, at tað ljóðar eins og sigursljóð oman av himni, um at ljósið havi sigrað á myrkrinum.

Eg rívi eyguni sundur og rembist við; í gluggakarminum stendur sólin og gægist inn um gluggan og kagar inn á gólv,

Materiál chráněný autorskými právy

men hevur seg burtur eins og hevði hon sæð nakað uggsamligt fyri innan, sum hon øtast fyri.

Hin tíðleysa nátt hevur verið lætt eins og barnanna leikur har úti, men so hvørt, sum dagurin kemur undan, og vitundin rennur upp, fellur hugurin, eygnalokini vilja ikki upp, og limirnir eru sum kleppaðir. Dimmligt er fyri sálarinnar eygum. Mær finst eins og stórkavi væri lagstur um náttina og havi lokað fyri hurðum og gluggum og byrgt meg inni.

Morgunsólin er aftur í gluggakarminum og lítur nú longur inn á gólv, har duft og bos liggur í viglum og allir lutir í hurlivasa á borðinum, haldaleysir koppar, brotnaðir borðiskar og grønir breyðskálkar, rivin klæði slongd um stólar, úrsvalur kuldi um alt húsið og talandi tøgn, ið virðist mær at siga: »O, sum her er óhugnaligt, sleppið mær burtur úr hesum høli, ið minnir um húsið, sum er komið í ósemju við seg sjálvt og ikki má standast.« Men børnini leika við sama lag, og hanarnir hevja sínar røddir hærri og hærri, morgunsólin gægist og kagar altsamt inn um karmin. Dagurin kemur nærri, men, mær líkar hann einki; hann tykir mær uggsamligur á at líta, fullur av ákærum og sakargiftum. — — — Eg aftri meg, vil einki kennast við hann og líti felmstfullur upp á hann: Hvat er hetta fyri ein dagur? Hann berst mær fyri eins og hin dagurin, ið Ámos spámaður talar um: Hann er myrkur og ikki bjartur — — sum tá ið maður flýggjar undan ljóni og rennur seg á bjørn, kemur heim og styðjar seg við veggin og verður bitin av eiturormi —.

Men dagurin nærkast alt samt án tess at leggja nakað í ótta mín; yvir honum hongur ræðandi skadda. Eg líti rannsakandi á hann og kanni hann gjølla frá øllum síðum, fleiri og fleiri kennimerkini koma undan; smátt um smátt beri eg kensl á hann; og loksins kenni eg hann aftur: Tí kemst ikki undan, hetta er mítt verk — mítt dáraverk!

Hann er dapur og tungur at fara undir, hesin dagur; ikki hugsingur um at sleppa upp undir honum, ei heldur at sleppa burtur undan honum; með tíðarinnar føstu fetum kemur hann nærri í øllum sínum óvikandi veldi — — kemur útan av tíðarinnar havi eins og brotasjógvur, ið eingin fjølkyngislist má leggja niður — — —.

Materiál chráněný autorskými právy

Tíðin birtist eins og berg í omanlopi; sekundini koma eins og steinar, ið rapa niður og vaxa í hvørjum, verða at minuttum, tímum, døgum, vikum, mánaðum, árum..... og við ævilok at veldugum steini, sum tekur meg við sær niður í undirdýpið....

O, nátt, o, góða fjálga nátt,
o, slepp mær ikki, far ei frá mær.
— Hin grimmi dagur komin er á gátt —
o, steðga eina stund enn hjá mær!

Í skikkju tína sveipa meg,
í sorgarinnar svarta klæði,
og tak meg við tær, ber meg langan veg
til landa handan ytsta ægin.

Í skuggadølum reið mær ból
á tínum niðursveipta beði,
har aldri, aldri roðar fyri sól
og aldri lýsir fyri degi.

Eg drekki úr Lethi
eg grulvi á knøum at náttsvørtu Stýx,
mín beður er vátur av Ákerons bárum.
O, móðir, í synd var eg gitin,
í myrkri vevurin stóð.....
nú hómi eg bátin ... tungur, borðfullur av tárum.

Eg hoyri hin skaran,
ið málleysur grátandi ongum tárum,
gnístandi tenn og tungliga tivandi,
hevjar sítt dumba kveinandi kvæði
um æviga tapta land hina livandi.

Tungt er við heljargjáir;
náirnir daprir og gráir
grulva um avoyddar grundir,

Materiál chráněný autorskými právy

huldir í fimbultoku,
leita um stongslar og lokur
— læst fyri hvørjum sundi —.

Sólin er rýmd úr gluggakarminum. Av handahógvi komist eg fram á gólvið; men tegar eg skal fara í klæðini, setist eg aftur og siti sum steinrunnin og lesi brævið, sum liggur á borðinum fyri framman mær, har einhvør av savnaði mínum, ið kallar seg kirkju- og prestavin, finst harðliga at húshaldi og einsetulívi mínum og lovar at ákæra meg fyri kirkjuliga yvirvaldinum, um eg broyti ikki lív mítt og røki ikki embætið betri. Tung og sorandi falla orðini eins og spreingjur niður í tilveru mína, treingja niður í grund, sorla sundur svá, at alt køvir av og myrknar mær fyri sálarinnar eyga.

Eg setist við gluggan og líti út á geilar eins og til tess at ýta av og vita, hvar eg eri.

Har fyri útan mín glugga liggur breiður, góður vegur randaður blómum og fjálgum heimbýlum. Úti fyri durum standa konur með stokkum í hondum og spjalla saman, eygu teirra lýsa av vónum og vænting og í røddunum er ástfolgin hiti. Tær líta út á vegin, har børn, sum fyri stuttum eingin visti nakað um, nú ganga og stetla og leika sær, komin úr øðrum heimi, fagrari enn her á fold; tey renna og brosa, detta og gráta, reisa seg aftur, finna sær træsprek og rista puntar í vegin og hoppa læandi með sóljulittum, fløgrandi hári beint inn í »páradísið«.

Har eru húsini hjá Jákupi og Mikkjali, á tryggari grund — eingin ósemja — úti fyri durum stendur Jákup hvítklæddur með rívu í hendi og skygnast og skoðast um. Við lið hans stendur Magdalena lítil og alvarlig eins og hin dagin, hon stóð fyri altarinum við lið hans blygdarfull og trúrøkin. Lotið fer teskandi gjøgnum grasið á hústekju teirra eins og afturljóð av brúðleypsálminum; bleika heystsólin leggur gullna glæmu um tey, kagar inn í dyrnar og gægist inn um gluggarnar hjá teimum, kínir barnabørnunum, sum renna út og inn og kring um tey, hallandi sær aftur at teimum og heingja seg upp í ommu-

Materiál chráněný autorskými právy

skjúrtið og sveivla sær gjøgnum loftið eins og uppi í kringekju. Og hon letur hondina fara kínandi eftir hári teirra, lítur guðrøkin út á vegin, har Jógvan í Jóhanstovu kemur gangandi með skjólu í hendi og tráðu á øxl, túthúgvan horvandi aftureftir og pípuheysurin niðureftir; hann stígur tungliga, steðgar á og snýr sær til teirra:

»Nú Jákup, nú er ein so dán løta, nú er gaman at liva!«

Jákup lítur seg um og svarar: »Ja, nú er ein dýrdlig løta, vit hava ikki margar slíkar løtur; men ikki man hetta standa leingi yvir; norðmaðurin sigur frá »tjúkningi« á Tampinum og boðar frá ælingi og 'frískum brisi' um Føroyar; í dag man hann tó fara at halda sær. Men nú eru vit svá gamlir báðir, at best er at lata hvønn dag hava nóg mikið í síni plágu. Eg stóð og leit aftur um bak; minnist tú hin dagin við »Teistanum«. Tað var ein slíkur heystdagur; vit dansaðu afturi á hekkuni av heimfarargleði; okkum fannst at vit longu vóru í Hvalvík og troddu dansin með »teimum« við lið. Himinin var sum nú skírur og bláur og skýggj á reki.«

Jógvan brosir við: »Ja skemtiligt var at koma heimaftur til at hoyggja og skera upp — æja, æja, svá broytist alt; tað er nú liðið langt aftur um bak; men skemtiligt var at koma heim aftur.«

Magdalena strýkur svarta høvuðdúkin upp frá enninum og mælir av munni guðrøkiliga: »Ja, vær eigum øll eina heimferð, — tað er gott at mega gleða seg til hennar. Tá verður himinin heiðari enn í dag; ja tað verður dýrdligur dagur……«

Eg siti alt samt við gluggan og taki ýti og kanni eftir og síggi, at har úti er annað lag á øllum, eingin tyngd á tíðini, stundir og dagar koma sum lættar flykrur, tá ið hann kavar á møkum.

Mikkjal kemur blístrandi eftir vegnum, með hondunum djúpt í brókalummunum lættur og rygdarleysur vaggandi eins og hann gingi á skipi, og án tess at skoyta heimsins skeivu gongd eina hugsan stígur hann upp á trappusteinin, stendur og lítur út á vegin, sýgur á vindlingin, flytur hann yvir í hin munnvikan og tveitir síðan stúvin frá sær og fer áhyggjuleysur

Materiál chráněný autorskými právy

inn til Jettu, sum kemur fram at borðinum með turrum fiski og spiki og guvandi eplum, ið høgliga ganga niður.

Dánjal á Toft kemur fljótliga hvítklæddur með rívu í hendi og troyggjuni slongdari yvir øxlina.

Jákup møtir honum: »Nú Dánjal, nú tornar, hetta er frálíkur dagur, hetta minnir um síðstu dagarnar á Eysturlandinum, skýggini vóru sum løgd upp í klúk og nulvingar ella tey lógu sum líggjaskógvar. —«

Dánjal brosir við: »Tá sóu tygum óivað Magdalenu standa har og klúka — jú, jú, heimlangtanin var von at vera sterk; eg minnist tað væl; bygdin gyklaðist fyri oss eins og Streymneshúsini nú har niðri í ánni.«

Hann snýr sær niðan móti Sneis: »Sigið mær, hasin sortin har uppi boðar ikki frá nøkrum góðum?«

Jákup verður alvarligur á málinum: »Nei, hesin terrin man fáa skjótan enda; norðmaðurin sigur frá »tjúkningi« á Tampinum og frískum »brisi« og ælingi um Føroyar.«

Jákup fer fram eftir vegnum undir sínum hvítu hárum — tað mesta av fjørði hans er rógvið; nú damlar hann túnanna millum takklátur og floglættur, søkklaðin og búgvin til hinar síðstu heimferðar.

Stórbóndin situr uppi á vagni á veg frameftir, kring hann er fult av børnum og hoyonnaramboðum; tað minnir um herbúðir Ísraels, tá ið teir tóku úr stað gjøgnum oyðimørkina; hann er lættur og frælsur í øllum røringum; røddin rómar út um bygdina og berst at glugga mínum líka og er at hoyra eins og afturljóð av sterku rødd hins fyrsta manns, ið nam land í hesi vík.

Og har kemur Frammistovubóndin smárennandi, leiðandi ungan son við aðra hondina og rívu í hinari og honum í hølunum konan leiðandi unga dóttur; hátt bera tey høvuð og stíga fljótliga; sami lættleikur er yvir teimum; fyri teimum liggur vegurin breiður og sólfevndur, har tey eitt sinn leiktu sum børn og hoppaðu inn í »páradísið«. Honum ímóti kemur Miðstovubóndin, hvørs gongulag altíð er hitt sama, annaðhvørt hann fer á fjalli ella í kirkju ella í hoyonn, tá ið regn kemur í skróturt hoyggj — og tó aldri ov seinur; eygnabragdið minnir

Materiál chráněný autorskými právy

um havið, sum stendur við klettin svá blikandi kyrt ein vetrardag, tá ið loftvágin stendur á stormi. Hann er hitt klettaharða mótmæli móti Føroya støðugt skiftandi streymum og hvíldarleysa meldri í náttúru hetta lands — — hann er Hvalvíkin sjálv, har hon alvarlig og døpur krýpur aftur undir fjallið, boyggir seg og tekur í tolni við øllum tí regni, sum kemur oman yvir hana og somuleiðis í takklæti við ljósglottunum og í tøkk til Guðs, ið øllum valdar. Børnini fúka hjómlætt til viks fyri honum, renna síðan saman aftur og halda áfram at hoppa inn í »páradísið«.

O, Magdalena, annríka Magdalena! Nakað hava tygum stetlað út og inn um hasa gátt og upp og niður hasar steinstrappurnar, tøgul og alvarlig, sum gingu tygum á heilagum staði, har maður lýtur at fara úr skónum. — — —

Nú kemur hon úr hjallinum með dagverðarpottinum undir hondini og styðjandi seg með hinari aftur at húsavegginum eins og hon kíndi heimili sínum í takklæti fyri eina góða Guðs gávu; tí at har fyri innan hevur hon allan heimin og má siga sum hin ísraelitiska konan: »Meg skortir einki, eg búgvi í miðum fólki mínum.«

Alt í einum er ein himinsins herskari av barnabørnum kring hana, sum læandi, hoppandi tyrpast um hana.

Hon lítur brosandi út á vegin og allir lutir brosa móti henni; men einki brosir sum lítla Sólrún, sum er komin sær upp í arm ommunnar at sita, skræðir høvuðdúkin afturav og roytir hana í hárið; men síðan hálsfevnast tær og kínast, og heystsólin fadmar og kínir teim báðum og øllum lutum.

Jógvan í Jóhanstovu kemur aftur av seiðabergi; glamranin frá tuflunum berst um túnið. Jákup stendur aftur har undir liðini á Magdalenu og talar til hans: »Nú Jógvan, tú tykir mær heldur øvigur; tú kemur með skjólu og tráðu, nú, ið aðrir koma með rívum og líggjum.«

Jógvan steðgar á, tekur um pípuheysin og snýr honum upp eftir, trýstir túthúgvuna aftur á nakka og mælir av munni lítandi út í fjarska: »Æja, æja, tað er svá mangt øvugt í lívinum; her komi eg av seiðabergi, vær endum har, sum vær byrjaðu.



Materiál chráněný autorskými právy

Nicolina bað meg fara út á brúnna og vita, um eg mátti fáa nakrar stertar upp í pottin. Okkum varðar einki um hoyggj og terra, nú ið vit mistu eisini hesa kúnna. Tað er, sum presturin sagdi sunnudagin: alt fer, fer sum eftir ánni. Ja, tað fer langt burtur og kemur aldri aftur. Hvar fer tað?«

Magdalena verður alvarlig og guðrøkin á málinum: »Ja, burtur skulum vær og tað langt, langt burtur á fjarlægið land; men Guð havi lov, vegin tekkjum vær, ein hevur gingið hann undan oss; fótaspor hans síggjast eftir hann; vær vitum vegin — ja, javnvæl hinir fákunnigu mega finna hann og haltir og blindir og elligamlir ganga hann.«

Jógvan snýr sær á og lítur móti glugga mínum: »Ja, lívið er ferð yvir stórt hav; tí høvum vær prestar, at teir skulu stýra og leiða; guðfrøðin er jú einskonar siglingarfrøði; prestarnir skulu stýra kirkjuskipinum — — — men vár prestur sæst ikki, kemur ikki út úr skiparaskemmuni; hann hevur óivað mist stavnhaldið úr eygsjón og hevur onga hugmynd um, hvar vær flótum. Her er ikki rætt vorðið; tá ið eg fór út á brúnna vóru gluggatjøldini enn ikki drigin frá hjá honum — her man vera mangt øvugt.«

Eg hvøkki við og toyggi meg upp í gluggan: Hvørji mundu hasi vera, sum bóru upp fyri karmin? Hjartað ger eitt hopp og bros fer um varrarnar, tegar eg síggi, at tað eru tey, Símun og Anna; ósundurskiljanlig fara tey út eftir hasum breiða, sólfevnda vegi, tengd saman í lívi og deyða eins og Filemon og Baukis; tveir bulir á sama stovni; tá ið annað sjúknar, sjúknar hitt við, og tá ið annað batnar, batnar hitt við; sorg og gleði, vænting og ørvænting og allar tilfinningar fara gjøgnum bæði í senn — — — røtur teirra vavdar saman og vaxnar hvør inn í aðra og svá djúpt niður í lendi með livandi vatni, at javnvæl deyðin fær ikki skilt tey sundur. — — — Men í erva hava heyststormarnir syft tey bløðum og øllum grønum leyvi og skakað og rist teimum illa.

Tey stíga varliga hallandi sær ástuðliga hvørt at øðrum til tess at standast betri móti stormum heystsins og deyðans kulda. Með hugi og øllum hugsanum horva tey í djúpari gleði hvørt móti øðrum — — — eins og tvær permur tengdar með

Materiál chráněný autorskými právy

gullspennum saman um ríka, dýrliga søgu — — ella eins og bløð á blómu, sum á kvøldi leggja seg saman móð og mett av sól eftir ein langan summardag uppi í sólríkari fjallabrekku, har tey hava hoyrt lotið teska og vatnræsið tutla síni loyndarfullu ljóð. — Undrandi eins og Deukalion og Pýrha á hini nýggju jørð, eftir at hin gamla jørðin var liðin undir lok og farin með øllum sínum gløpafulla hávada, og hjartans fegin yvir at vera sloppin undan oyðingini miklu — — — svá ganga tey á nýggjari jørð — — hitt gamla er farið og alt er vorðið nýtt — — tey stevna syngjandi niðan móti nýggju Jorsalaborg og teytandi hin sama songin, ið ljómar frá hinum stóra skara, sum með pálmagreinum í hondum fer lovsyngjandi hin Alvalda, ið hevur bjargað teimum undan oyðing og ævigari glatan.

Tó at tey ganga fram við gravarbakkanum, eru tey ekkaleys, og tey mongu ár, sum tey bera á baki, falla teimum lætt sum snjóflykrur.

Men tó at tey stevna somu leið og hava ein hug og somu hugsan, sama mál og mið, sama Guð, somu skírn og somu trúgv — — — eru tey tó hvørt úr sínum berginum brotið:

Hann — fjallið, sum alt í einum brýtst fram úr jarðardýpinum og hon — landið sum eftir óteljandi øldum lag eftir lag mótast í kyrd og óendiligari tolinmøði. Hann — kallmenskan út í æsir og hon — kvenskan sjálv. Hann — strangur og ótolin, hon — mild og líknsom. — Hann — kappandi av og hon — bindandi saman aftur. Hann — Sinai-fjall í oyðimørkini hult í toruskýggjum og hóttandi eldi, hon — hin blíða, gudabrosandi Gálilea. Hann — lógin, sum ger skilnað millum hins heilaga og hins óheilaga og býður eirindaleyst at oyða úr tjóðini hvønn óumskornan og hvønn tann, sum á hvíldardegnum vinnur nakað verk; og hon — evangeliið, fagnaðarørindið um hann, sum sat til borðs við tollarum og syndarum og fór yvir um tey mark, sum lógin havdi sett.

**O, Símun og Anna! nakað hava tit gingið um hesa bygd og prædikað fyri henni, at tað megi ikki gangast henni eins og Sodumu og Gomorru — — — blóð hennara má, ið hvussu er, ikki verða kravt av hondum tykkara.**

Materiál chráněný autorskými právy

Tey standa og líta oman móti Tøvuni, har skurirnir hoppa um og láta alfegnir yvir sína nýggju tilveru, at teir megu hevja seg frá jørðini og fara gjøgnum loftið með fúkandi ferð; men tað er sum at teir tora ikki at trúgva tí og setast aftur, hoppa stein av steini og standa síðan javnvigandi og hugsa seg um. Ein teirra hevur seg á loft undan Jákupi, sum fer oman um húsini; gambrandi setst hann á annan stein og ristir vel og fjaðrar spottandi móti honum: »Royn teg nú hin gamli á tínum stívu beinum, nú mátt tú einki gera mær! Øðruvísi var í summar, tá ið tú rann eftir mær frammi í Dali; men tak meg nú!«

Niðri í bønum flúgva tjøldrini og floygdu ungar teirra, ið nú spotta allar vandar og minnast, lættir um hjartað, hvussu teir runnu fyri lívinum um heiðarnar undan smádreingjunum. Og alt í einum er allur flokkurin á flogi með fagnandi láti og kliði hátt uppi yvir Streymnesi; fyri teimum er nýtt lív byrjað með veldugum útsýni um fjarlægin lond með sól og himneskari fegurd.

Fríðrikur hivar seg upp á vagnin, reiðir svipuni svá, at tað brestur eftir í loftinum, fer blístrandi út eftir vegnum með tvísporandi hesti og rópar til Símunar og Onnu: »Nú standa tit sum í fyrstu fríggjaradøgunum!«

Símun snýr sær brosandi móti honum: »Nú er ikki at standa, nú er at bjarga inn undir lonir! Jógvan sigur, at Norðmaðurin boðar frá »tjúkningi« á Tampinum, ælingi á Stóregga, og regni um Føroyar.«

Fríðrikur táttar í teymarnar og svarar: »Eg leggi einki í, hvat Norðmaðurin og Danin siga! Vit hava Sneisina; í dag boðar hon frá góðum; vær eigum at líta meir uppá várt egna og nýta teir møguleikar, sum eru her heima hjá oss sjálvum.«

Símun og Anna standa har altsamt og líta oman at floygdu ungunum, ið ongan frið hava á sær av gleði yvir sítt frælsa nýggja lív og fara avstað hátt uppi yvir ánni, sum liggur kyrr með himninum og Streymnes-húsum í fadmi sær — — har niðri á botni standa húsini hjá Pæturi með fagurgrønum taki sum ein ævintýrhøll hjá gydjuni av Atlantis. Og har standa

Materiál chráněný autorskými právy

húsini hjá Lauru, gomul, undir grønari grastekju. Og har síggjast garðar og gróthús og grønir vellir, stórir hoyvagnar og maður uppi á teimum, spákandi hoykonur og leikandi børn — — — ein sokkin steinrunnin heimur — og uppi yvir hesum ævintýrlandi kasta tjaldursungarnir sær á flogi óheftir og frælsir, með sundlandi ferðaætlanum — — út í sjálvan ævinleikan.

Anna kippir í ermuna hjá Símuni: »Nú Símun góði, nú man vera best hjá okkum báðum at fara inn; tað er vorðið eitt sindur kaldari, minnst til krímsjúkunnar.«

Símun snýr sær hvatliga og brosir við: »Eg stóð og eygleiddi hasar ungarnar, hvussu lættir og glaðir teir sveima um í loftinum. — —« Hann steðgar á; tað brosir og lær niðri á botni í sál hans: »O, hvussu verður tað ikki hjá okkum! Hvussu himnahátt skulu vit tá ikki hevja okkum upp yvir allar krímsjúkur, vandar og hættur! Ja, tað verður dýrligt, hvør kann skyn á slíka ferðaætlan? — — Sjá, eg geri allar lutir nýggjar — — vær skulum vera einglum lík — — — aldri troyttast aldri lúgvast — — teir, ið troysta á Drottin, skulu hevja seg á arnarveingjum — — — ja tað verður dýrligt. — — —«

Anna hallar sær inn at honum, gloymandi allar krímsjúkur: »Ja tað undursamasta er, at vit longu nú mega finna til at vera hevjað upp frá jørðini — — — tú hevur mangan roynt tað, hvussu allur hosti og øll trongd hvarv, so skjótt sum tú vart komin upp á talarastólin, og tú havdi fingið orðið fyri teg — Guðsorðið, tí at tað er tað, sum heldur okkum uppi — og øllum heiminum — og sum gevur okkum veingir — ja, hvat er orðið ikki undursamt og ríkt: — brunnur, ið aldri tømist. — — —«

Hamingjufull og lætt sum tjaldursungarnir fara tey niðan í heimbýli sítt, ið liggur fjálgt og trygt við hin breiða, góða vegin, har børnini hoppa inn í »páradísið«.

Eins og nýfloygdur tjaldursungi kemur Eyðbjørg lítla fløgrandi fram við, lítur niðan móti glugganum, har eg siti fyri innan og bíni; hon hopar á og brosir, hvør skal siga: Kom út, kom út — — hví situr tú har og bínir? Her er dýrligt, kom út — — — royn at flúgva — — —

Materiál chráněný autorskými právy

Men alt í einum er dýrdin at enda — — hon rennur á ein stein og fer endilong í vegin. Men brátt er hon aftur á fótum, dregur á bæði, hvørt hon skal gráta ella læa; men henda fagra dag verður brosið við yvirlutan, og hon snýr sær aftur móti glugganum læandi, hvør skal siga: Kom út, legg ikki í, um tú misstígur teg.

Síðan fer hon dansandi og læandi frameftir og kveitir barnsliga aftur um bak og hvørvur handan húsini.

Sólin er nú komin vestur um. Jákup kemur úr hjallinum hvítklæddur með hondunum fullum av gomlum kjøtbeinum til at koyra í súpanarpottin; hann steðgar á trappuni. Kvøldsólin roðar í andliti og gráa hári hans. Har hann stendur umkringdur av børnum berst hann mær fyri eins og bjóðandi í brúðleyp: Komið við, komið við —!

Líðandi fánar dagurin burtur og missir málið, smoykir sær følin og fáligur burtur undan náttini.

Magdalena og Jetta eru nú vorðnar at skuggum, ið hómast fyri innan gluggatjøldini.

Ljósini tendrast. Húsagluggarnir lýsa í náttini eins og trøllaeygu, sum undrandi stara at mær og spyrjandi: »Hví situr tú har?«

Fuglarnir hoyrast láta har úti; kliður og klak teirra berst mær at oyrum eins og afturljóð úr hesum djúpa kalda einmani. Alt í einum hoyri eg fyri útan gluggan fugl, ið syngur eitt egið, annarligt lag, song, sum ger meg ræddan og glaðan alt í senn; rødd hans er eins og silvurskír og há sum himinin; tað er sum at loftið er fult av silvurtræðrum og einglahári. — — — Hann syngur um himinin og Jákupsstigan og einglar Guðs, ið stíga upp og niður — — — um hond, sum er rætt út frá Guðs hásæti og sum maður eigur at grípa um, til tess at hann søkki ikki í undirdýpið — —: »komið nú, tí at nú er hondin útrætt, latist ikki tøla og ginna av heiminum, tí at hann svíkur; tá ið á skal standa, tá hevur hann einki at geva. — —«

Og hann syngur um hvíta skaran, sum fer inn um perluliðið og gongur á gøtum av gulli.

Alt í einum flaksar hann upp í gluggakarmin, ristir sínar nátt-

Materiál chráněný autorskými právy

svørtu fjaðrar og gægist innum og lítur til ymsa kinna, smæin og felmtsfullur, flytur føturnar og hoppar støðuleysur: »Á, sum her er kalt og deytt — — ei undur í, at hetta blómutyssið er følnað — —.«

Hann andvarpar og lítur guðrøkiliga móti himni og tekur at syngja um dagin, sum er komin at enda og náttina, sum er komin nær og um hin algóða Guð.

Røddin er mjúk og fín og lívgandi eins og vársins fyrsti sólargeisli eftir kaldan vetur ... ella sum fyrsti kliður frá afturkomnum tjøldrum ein kaldan várdag ... nakað óveruligt ... ein grønkandi nál upp úr frystum vølli.

Mær finst eins og tá ið Orfeus var komin niður í Hel og leikti har á ljóðpípu síni, svá at náirnir ressaðust við ... svá seta hesir ljómføgru tónar røring í ... æðrar og spengur spennast, træðrir táttast og vøddar knýta seg ... djúpt niðri á botni í sálini tekur at rembast mangt og hvat, sum har hevur ligið jarðað og aldri sæð dagsins ljós ... gamlir dreymar, ætlanir og tráanir reisa seg eins og dreygar upp úr grasvaksnum kirkjugarði og taka at flakka um ... djúpt har niðri í undirvitundini, har dagsins ljós aldri hevur skinið, fara døkkar skepnur trilvandi, grulvandi, samanringdar og avskeplaðar með stubbum av leinkjum uppi í sær, reisa seg upp og lítast um með blindum eygum og síga máttleysar niður aftur — — — aðrar klúgva upp á steinar og tríva um tang og taraslíggj — — hyljar með rotnum vatni koma í røring og undarlig finngálkn koma undan kavi ... hálvt dýr og hálvt menn ... og uppi yvir øllum hesum hin dimma rygdarskadda.

Eg gangi yvir at glugganum og rætti hondina út — sangfuglurin lítur undrandi fram fyri seg, hallar vanga og flytur seg aftur og fram í karminum, og alt í einum situr hann á hond míni og hoppar, letur og kvakar, skygnast og skoðast, støðugt í óró, teytar og syngur um sól og summar og kærleika, sum bræða má hin harðasta ís.

Men samstundis er tað, sum at hann grunar eitthvat loyndarfult; hann verður felmstfullur og lítur tigandi til viks, lurtandi niður móti gólvinum og kring seg, felmtir og ristir fjaðrarnar:

Materiál chráněný autorskými právy

»Á sum her er undarligt; fjáltur kemur á meg. — — — Hví sigur tú einki? — —«

Songfuglurin er flogin og náttin liðin. Hin grimmi dagur stendur aftur í durunum. Eg liggi í míni úrsvølu rekkju með andlitinum niður í koddan og hoyri børnini tyrpast inn í skúlastovuna, og tegar kennari teirra er komin, hevja tey eins og svangir fuglaungar í reiðrinum sínar ljómføgru røddir og taka at fagna deginum, ið rísur úr havinum:

»Hin signaða dag vit síggja fró úr havinum upp at stíga; hann hækkast á himni, og hvør tjóð seg gleðir við ljósið blíða. Tað kennist á okkum ljósins børn, at náttin man burtur líða.«

— Sum gull er hin árla morgunstund — — —

Har hoyri eg rødd Eyðbjargar og røddir barna teirra, sum í gjárkvøldið hoppaðu í »páradísið«.

Eg orni um hjartað, hugsanirnar hevja seg uppfrá. Tað er, sum at eg hoyri suðið av hinum syngjandi skara, ið sveivlar pálmagreinum og er á at líta sum túsund fjøll við kava á. Himinin gloppast, Jákupsstigin hómast, einglarnir stíga oman og niðan; songurin ljómar sum ótal av silvurbjøllum. — — — Tað verður mær alljóst, hví Frelsarin tók børnini í favn og sagdi, at teimum hoyrir himmiríkið til.

Tey syngja meg heim, tey syngja meg aftur í tíðina, tá ið eg var barn og lá í rekkju míni og sá morgunsólina skína inn um gluggan, hoyrdi láina láta sítt syrgna ljóð einhvørsstøðum uppi undir fjallinum, og lýddi á móður, sum niðri í roykstovuni sang um hina heilagu Jerusalem, ið kemur oman av himni, har alt er gott og glæsiligt:

Jerusalem, eilíva borg
og varnarvirki gott,
av hæsta tindi hevjar tú
teg upp móti himni hátt.

Jerusalem, hjá tær er ljós
Guðs milda náðarsól,

Materiál chráněný autorskými právy

og friður sum av øllum ber
og syndasærdum skjól.

Jerusalem tú halga borg
Guðs bústaður á jørð
frá tær fer lóg og rættur út
og orðið hvast sum svørð.

Til tín vær viljum hevja ljóð
og lag várs gleðisongs;
teg lova skal hvør kind hvør tjóð
tú borg hins mikla kongs.

Hesin songur móður ljóðar nú aftur í hugi mínum og birtir mær fyri sjónir Jorsalaborg, ið hevur staðið sum varðtekin fyri menn og tjóðir gjøgnum aldir og sum hevur hini dýrligastu heit og ummæli:

Eg varð glaður, tá ið teir søgdu:

Gongum í hús Drotsins!
føtur várir standa
í liðum tínum Jorsalaborg.
Jorsalaborg hin endurreista,
borgin, har øll tjóðin savnast,
hagar sum kynkvíslirnar fara,
kynkvíslir Drotsins — — —
— — —

Og tað skal verða á hinum síðstu døgum, at fjallið, sum hús Drotsins stendur á, man grundvallað verða á fjallatindi og gnæva fyri oman fjøllini, og hagar munnu lýðirnir streyma; og margar tjóðir munnu búgvast til ferðar og siga:

»Komið, farum niðan á fjall Drotsins og í hús Jákups Guðs, svá at hann kenni oss sínar vegir og vær megum ganga á hans stígum.«

Tí at frá Sion man kenning út ganga og orð Drotsins frá Jorsalaborg:

Materiál chráněný autorskými právy

»Drotturin øskrar frá Sion og frá Jorsølum letur hann rødd sína gjalla .....«

»Og tær skulu ikki svørja við Jorsalaborg, tí at hon er staður hins mikla konungs. ...«

»Á tí degi munu livandi vøtn fljóta út frá Jorsalaborg ....«

»Fólkið, sum býr, hevur fingið fyrigeving misgerða sína.«

»Tær skulu leita til tess staðar (Jorsalaborgar), sum Drotturin Guð ydar mun velja úr øllum kynkvíslum ydar, til tess at lata navn sítt búgva har. Hagar skulu tær føra brennifornir og sláturfornir ydar, tíggjundir og frumburðir av neytum og smalum ydar. Og har skulu tær halda fornarmáltíð frammi fyrir Drotni Guði ydar og gleða ydur ásamt húskjum ydar yvir øllum tí, sum tær hava avlað, yvir tí sum Drotturin Guð tín hevur blessað teg við. — — —«

»Og hann vendi andlitinum til tess at fara til Jorsalaborgar.«

Alt bjartari birtist mær borgin heilaga fyri sjónir, ljómin av henni glógvar og glitrar gjøgnum dimmu skýggini og skínur inn í mín bústað og gyllir hann eins og morgunroðin innan úr havinum.

Tað lýsir alt inn í sálina; vónir vakna og hugskot lætta sær á, tónar frá songi móður streyma inn til mín og renna at hjartanum, hin ævigi songurin um Jorsalir, borgina með teim mongu fyriheitum, hagar menn og margar tjóðir hava tráað — — ja hagar sjálvur frelsarin vendi andliti sínum, soleiðis at eingin máttur megnaði at halda honum frá at fara niðan hagar.

Loksins verður tað mær alljóst, at eg skal fara upp í hin velduga skara, sum hevur lagt avstað til hins heilaga lands og niðan til Jorsalaborgar.

Og áður enn meg varir, havi eg búgvið meg til ferðar og eri á veg oman til strandar. Aftur dragi eg mín bát, sum mangan ringan hevur farið, men sum nú eins og er grógvin fastur við svørðin og tungur at fáa oman.

Eg leggi frá landi og haldi suður eftir. Tað ríkir í borðum og brakar í tollum — — — eins og mælandi móti at fara svá langa og hættisliga ferð.

Inni á landi rýkur úr hvørjum roykbera; konurnar hava kynt

Materiál chráněný autorskými právy

upp og gera morgunmatin til; úti fyri durum standa hvítklædd-ir menn og skygnast og skoðast um. — — Har fer Ansgar með hjólbøru síni á tremur av vørum; hjólið syngur sítt rínandi, hvínandi ljóð eins og eymkandi undir tungari byrði — — — harmaljóð allra hina undirokaðu — — klænt og samankroyst ljóð, ið tolkar lív bygdarinnar, sum er trongd av háum fjøllum og trýst niður av ræðuligum regni. — — —

»Farið væl, farið væl mínir góðu hvalvíkingar, far væl mín góða Hvalvík, har tú liggur døpur og grunsamlig og lítið um-tókt av mongum fyri títt gamla sparneytni — — men eg havi einans alt gott at bera tær — — aldri skorti blíðskapur og góð-ur matur, hvar eg kom á gátt. — — —

Farið væl Símun og Anna og Jákup og Magdalena. — — Far-ið væl børnini, sum leika har í túninum — — — mangan orn-aði eg um hjartað, tá ið tit stóðu í durunum með favninum fullum av sóleyum og summardáum til at geva mær til tess at skreyta mína fátæku kroysu. — — —

O, Hvalvíkin, fríð ert tú frá at fara! Farið væl øll somul. — — — Guð man ráða, hvar vær drekkum onnur jól. —«

Líðandi fer bygdin aftur undir. Sneisin kemur undan eins og guðdómligur fingur, ið toyggir seg inn um og ritar á veggin sítt mene tekel, ufarsin. — — — Jú, víst man eg vera funnin ov léttur; eins og bos fyri vindinum berist eg nú frá landi suður eftir. — — —

Men brátt steðgar mín ferð. Hann øtlar veðrið, so at eg legg-ist veðurfastur. Stormurin dynur og havið leikar ótt.

Eins og maður, ið brotið hevur skip og ongan veg sleppur gangi eg aftur og fram eftir strondini og líti ótolin og langtandi út á havið eftir fararalíkindum og skipi, sum drálar og tykir aldri at koma. Alt virðist mær steingjandi og hindrandi, bæði havið og himinin, ið hongur illbrýntur niður á jørð; allar staðir renni eg á steingjandi grindir og á tað sum verri er, á menn, ið allir spyrja um hitt sama: »Fert tú ikki til Kvívíkar, allir vænta at tú fert at søkja embætið?«

Hesin spurningur finst eins og stingur í ósjónligt sár.

Materiál chráněný autorskými právy

»Nei, eg fari til Jorsala,« svarar tað mudlandi í mær undir luktum loki; men eg fái tað ikki sagt; tað væri at komið sum ketta upp úr høvdatrog — — — og hesin sviði kenst enn bitrari, tegar eg minnist orðrómin um, at ætlanir mínar eru ikki reinmeintar og tilgangir mínir ikki skilvísir.

Óveðrið herðir á; øldurnar koma brótandi útan av havinum og bresta móti strondini. Hvirlurnar fara av stað sum ýlandi ljós, tríva í trø og trýsta teim til jarðar, taka með sær við og flag og varpa tí langar leiðir, sópandi alt fólk burtur av gøtunum. Regnskúrirnir koma með ferð av himni, og inn í millum, tá ið tað lættir í, sæst mánin fara stunandi av stað eins og flytti hann hini størstu boð. Og skýggini, flókin og tøtrut, leggja á flotta eins og óðir hundar með rivnum skinnum. Fossarnir renna beint upp eftir eins og vitleysir av fararhugi. Roykurin úr roykberum stoytir sær á høvdið og kastast til jarðar. Alt er á ferð uttan eg sjálvur.

Foldin er eins og oyðimørk, har rødd ein rópar: »Áfram, áfram, av stað, av stað, steðgið ikki á.« Og inni í sjálvum mær ljóðar sama røddin aftur: »Av stað, av stað!«

Men eg sleppi ongan veg, tí at eingin Barjama kemur.

Við bryggjuna liggur stórur byrðingur, sum er komin með fiski úr Grønlandi. Eg smeykist um borð í myrkrinum, standi har og líti meg um, men hopi afturá, tegar eg síggi inn í alljósan, glæsiligan sal, har nakrir menn sita yvir borðum og kræsast í alskyns krásum; búkdigrir og væl í holdum sita teir og remba sær í skreytbúnum stólum undir stórum ljósakrúnum, mettir og væl hýrdir með stórum vindlum millum tjúkra varra, halla sær hugsunarfullir aftur á, pilka sær væl nøgdir millum tanna og tala um fiskasølu, sum verður av ongum eins og sá roykur, sum teir blása út í loft.

»Æja, æja, hatta er annað lívið;« hugsi eg við mær og síggi ein svelg opna seg millum mín og teirra, sum ikki er hugsandi um at koma yvirum til tess at bera upp ørindi míni. Men í sama bili hoyri eg mann ganga har skamt frá mær og havi meg aftur undir. Men alt í einum er hann hjá mær og spyr meg á donskum: »Hvørjum leita tygum eftir? Hvat gera tygum her?«

Materiál chráněný autorskými právy

»Eg … eg ætlaði mær at tala við skiparan um at sleppa við skipinum sum fartegi.«

»Vær flytum fisk og ikki strákar og menn, ið ganga með vánarvøli. Sleppið tygum aftur í land.«

Eftir at fólk er farið niður, gangi eg mær Yvir við Strond. Har er gott at ganga, tí at náttin er fjálg og mild; hon er tigandi, spyr um einki, hvørki um óreinmeintar ætlanir ella óskilvísar tilgangir. Hon er eins og móðir við sítt sjúka barn, tekur tað blíðan og varliga inn at sær — — — tekur tað soleiðis sum tað er; hon spyr ikki um »hvar« og »hví« og »hvussu«.

Alt tað, sum dagurin havnar og rekur frá sær, tað tekur náttin í fadm og lýkur eygunum aftur fyri lýtum og vommum og lætst sum hon einki síggi.

Hon setur ongar dómstólar og dømir ongan; hon mælir og metir ikki, heldur javnar hon alt út; tess vegna leitar til hennar alt tað, sum ikki má standa tey mát, sum dagurin setur og sum ikki er ment at halda tær lógir, sum hann skipar; fjálgandi breiðir hon sínar móðurligu armar út um tað alt samalt og tekur tað tigandi og líknsamliga inn at sær. Men hon hugsar sítt og tað djúpt og hómar með sínum blindu eygum fyri aftan alt hetta, størri ætlanir og hærri tilgangir enn dagin grunar.

Í kyrdini hoyri eg øldurnar teska har niðri í fjøruni eins og berandi mær boð útan av havinum, at nú komi Barjama.

Ljós koma undan havsbrúnni og flyta seg eftir havinum, men fána burtur aftur og hvørva, summi inn í Skopunarfjørð og Hestfjørð og onnur suður eftir og onnur aftur undir Nólsoynna.

Aftur koma ljós undan og nærkast; tað glampar og glitrar, heilir ljósgarðar av togarum suður eftir Skálavíkar havinum — — — men einki av teimum er frá Barjamu.

Eg siti aftur sum við eldsløkking og undri meg, ja, øtist yvir, at eg soleiðis haldi alt troyst mítt av Barjamu eins og hon mátti bjarga mær og loysa mær úr øllum vandamálum.

Skýggini gloppast, og alt í einum kemur mánin undan — eins og eygað á móður, tá ið hon sat og húkti á torvkassanum með hondunum upp fyri eygunum og at øðrum hvárum glopp-

Materiál chráněný autorskými právy

aði fingrarnar sundur til tess at síggja, um børnini sótu kyrr og lurtaðu eftir, meðan faðir las lestur. Í mánaglæmuni síggi eg Skálhøvda koma undan; dapur og illbrýntur stígur hann eins og av ovurhuga út í havið, móti tí fjándmanni, sum støðugt høggur og slær í hann og brýtur burtur av honum. Ovurvreiður av miklum sárum og skeinum sínum hevjar hann knúkin og veður út móti havinum, til tess at sláa til heljar tess stoltu bylgjur. Men havið sýnir læandi sínar hvítu tenn og spýtur háðandi upp á hann, hevur seg undan eitt sindur og setur síðan aftur renningarlop á seg og slær og berjir hann uttan avlát.

Í hvørvandi mánaglæmu er tað sum at hugur hans tyngist; og at vónirnar um sigur fána; yvirbragdið daprast og boðar frá feigd; hann grunar at hann er deyðadømdur, at havið man verða við yvirlutan, og tann stund koma, tá ið ikki verður steinur oman á steini eftir av honum, tá ið hann lýtur at lúta sín stolta knúk. — —

O, móðir, sárt eru tygum leikin, har sum nú deyðans íður bróta kring tygum, svá at einki má halda. — — — Mær finst tygum at sita úti á útskeri einsamøll, svá einsaman, at tað sker í hjartað. — — — Eingin hoyrir tygum; orðini fána burtur í dyninum frá deyðans øldum; dregur nú sorgartám fyri eyguni, tær smølu varrarnar trýsta seg saman, móð detta eygnalokini niður fyri — — — og um allan sjónarkringin deyðans skadda.

Og vit, sum vóru saman í mangari ferð!

Og nú, nú sita vit bæði niðri við strondina — hvør í sínum lagi — og líta út yvir havið eftir skipi langtandi eftir at sleppa yvir um — — — tygum eftir hinum fari, sum myndaðist í barnahugi mínum, tá ið tygum um kvøldini móð og troytt eftir dagsins strev og stríð syngjandi fullu í svøvn:

»Eg vil leggja meg at sova,
tólv Guðs einglar hava lovað
meg at verja og at leiða
heim til Guðs, ið alt man greiða.«

Ja, gott hevði nú verið at sloppið yvir um, nú ið deyðans

Materiál chráněný autorskými právy

øldur hava svá máað burtur av tí lítla sindri, sum tygum hava eftir av landi, at einans eitt sker er eftir, bert slíggjut har torvelt er at halda sær á fótum — — gróður og alt grønt skolað burtur; hatta síðsta óløgið, sum lagdi með øllum yvir tygum, so at eingin trúði at tygum komu undan aftur, tók alt við sær. — — —

Og tygum, sum hava elskað gróður og alt grønt, alt sum grør og vexur — — — sjálv ein lívgevandi lind með sirennandi vatni, svá at alt grønkaðist og gróði kring tygum.

Skelvur nú hin gangandi fótur, sum tað áður grønkaðist um, og sum vetrarkvøldini tráddu dansin og um dagin vadmalið í tøvingarpottinum, sum stóð har í grønari grastorvu á roykstovugólvinum, har tygum stóðu upp um øklar í súrum landi og tøvdu — vaggandi til beggja liða mudlandi sálmar og kvæði.

Og hinir sólføgru, vónríku várdagar, tá ið tygum stóðu úti í køstinum með barni undir belti, kvísl í hendi og skjúrtið bundið upp á mjødn og fyltu upp á rossini — — — upp um øklar í flógvari, søtt angandi mykju, sum bjóð yvir duldum kreftum og undirdjúpum loyndarmálum. — —

Vársólin geislaði blessandi um tygum og lýsti glitrandi av hvørjum mykjukøkki.

Sóleyukopparnir, stirdir av vetrarkulda, gloppaðu síni gullnu eygu og kagaðu felmstfullir upp úr veitum og vatnræsum varla trúgvandi sínum egnu eygum.

Blaðungir summardáar stóðu tignir og alkyrrir á vøllinum, allir hvítir í erva, nýliga brotið seg upp úr vetrarfonnunum — — — og smærurnar í síni pýramidisku ró angandi frá sær ilm úr annarligum skaldadroymdum heimum.

Várlotið fór kínandi um tygum fult av alskyns ilmi frá angandi urtum og tevjandi tøðum. Og skinflugurnar með sólglitrandi veingjum dansaðu kring tygum, syngjandi sínar songir um summar og sól. Og køstaflugurnar teimum á baki kastandi sær í loftinum villar av várgleði eins og hómandi páradísið aftur — rendu seg eftir høvdinum niður í mykjuna, har tað glógvaði av grønum veltum og gulum akrum, sum hómaðust

Materiál chráněný autorskými právy

har niðri í loyndum dýpum, har fjøll og frumskógir spegladust í silvurblikandi áum, og dásamligir summarfuglar sveimaðu yvir grønar vellir skrýddir føgrum urtum, ið blómurnar á jørð eru einans kámt afturskin av. — — — Og har niðri hómaðust tríggja- og blómudísir, sum leiktu sær um fríðu fløturnar — — tær, ið ráða øllum vøxtri — — sótu teytandi og góvu træðrirnar út og slógu teir í vevnaðin til »hinar gullvovnu kápu« summarsins — — — stundum vøkvandi teir með tárum sínum, vísar tess at alt skal doyggja.

O móðir, lætt vóru tygum á fótum, tá ið vit váladu um torvheiðarnar summardagarnar til tess at fáa torvið til høldar; í tí vóru eisini duldar kreftur, sólarhiti frá fyrndartíðum tá ið frumskógurin huldi landið. Stinnleggjað stigu tygum á vøllin og stóðu upp um øklar og undir axlar í mógvi, har sum eitt sinn í fyrndini glumdi av øskran og ýlan frá frumdýrunum og loftið dundi av drekum og flúgvandi nødrum — — — og vøtnini full av nykum og alskyns annarligum skepnum. Nú var alt øðru vísi; tigandi lá landið og droymdi; úr fjøllunum hoyrdist rødd seyðamannsins eins og afturljóð úr hini fornu tíð, tá ið landið uddi í alskyns kvikindum.

Tað var hátíðarligt. Har var nakað av jorsalafarargleði; hugurin víðkaðist, nýggjar vónir birtust; tað var sum at fara burtur í aðrar tíðir og onnur lond; onnur fjøll koma undan og áður ótektir dalar opnaðust og drógu hugin langt burtur; onnur høv koma undan og aðrar havsbrúnir; hugin sundlaði; tað var sum at líta inn í sjálvan ævinleikan, har hinir heilagu Jorsalir hómaðust, ið tygum søgdu vera komnar niður av himni og sum tygum altíð sungu um og tøldu mær frá — — og sum vit nú bæði, hvør í sínum lagi, langta eftir.

Og hini mjørkakámu summarkvøldini, tá ið tygum váladu um hagarnar skóleys með mjólkabiði á baki og stokkunum í hondunum bindandi pløgg upp á kroppin á teim mongu børnum, rennandi til viks eftir ullarløgdum, komu heim aftur útmødd við tómum biði, settust at bíða dimmið av, meðan fuglarnir dúraðu, og alt var undarligt og trøllsligt, og markaskilini millum huldufólksins og mannanna hvurvu, og seyður og neyt

Materiál chráněný autorskými právy

úr báðum heimum blandaðust saman, svá at hvørt gekk um annað. Og síðan aftur at leita; vætan dreiv av stubbuleggøldunum og náttardøggin av hárinum. Sum dvørgamoyggj vóru tygum á at líta har uppi í mjørkanum altsamt syngjandi um hina himnesku Jorsalaborg og dýrdina har og tað erviðisleysa lív, sum eitt sinn skuldi lotnast oss. — — —

Og summarið leið, grasið vax, og blomstur og urtir skrýddu allar vellir, velturnar grønskaðust, og akrarnir vórðu gulir, og barnið kom undir belti, ormar brugdu hami, fingu veingir og flugu fegnir yvir hin blómuprýdda vøllin — — — alt sum køstaflugurnar høvdu hómað niðri í duldum dýpum og sungið um, tað var nú komið upp í dagin og vorðið at veruleika.

Í sodnhúsinum vóru miklar fyrireikingar, har tygum bjuggu til av einslistum eins og til tess at taka ímóti tignum gesti; gólvið varð sópað, og høli skilað frá, tak lagt yvir flórin, øskan borin út, sodnkerið reinsað, og spølirnir lagdir á, treskitrø og tíningartrog borin fram, og ripari settur upp.

Og har kom gesturin í allari sínari tign — — úr fjarlagdum landi, fullur av gøðum og góðum lutum — — tað skróvaði sum av silki og perlusettum klæðum í sodnhúsdurunum, har sum kornið kom inn á gólv. Men ein undarlig køld tøgn var yvir tí, afturlatið og hulisligt, smæið og felmstfult yvir at vera komið svá langt burtur frá staði sínum — — allar rótartágar rivnar upp, øll bond kvett, eingin vegur aftur — — hvassur og stríggjutur á yvirbragdi og heldur illsligur á at líta var hesin góði gestur.

Men tygum, sum frá várinum høvdu virkað fyri at fáa henda gest og hoyrt songin um hann og vistu, hvat gøði og góðir lutir máttu fáast frá honum, tygum vóru skjót eftir besta Hvalnestorvi til at kynda eld í sodnkersmunnanum, løgdu frálíkasta strálingarhálm upp á spølirnar og fingu kornið hagar upp at liggja til tess at fáa varma í tað, snúgva og snara tí og hugla um tað og gera alt gott fyri henda góða gest, ið var komin eins og sending av himni, sum leyt at verða virðuliga viðfarin.

Og eldurin livnaði og toygdi sínar logar inn í sodnkerið og upp undir sodnspølirnar, lýsti upp har inni í sodnkersmyrkr-



Materiál chráněný autorskými právy

inum, sum var at líta inn í eins og sjálvt frummyrkrið; tað glampaði og lýsti har inni av sodneldinum eins og afturskin av hini fyrndargomlu sól, hvørjar ljós og hita frumskógvurin havdi drukkið í seg.

Har inni í undarliga trylska sodnkerinum kyknaði upp saman við eldinum alskyns avskeplað kvikindi; gálvandi reyðlig trýni og blóðrondut eygu hómaðust har inni; gráir samanringdir búkar og svartir dvørgar undir reyðum stórum húgvum, ið hingu niður á øxl; — — alt samalt eitt trølsligt afturskin frá hini fornu tíð, tá ið landið lá á brunaveginum og uddi í frumdýrum og var avtakið skógum.

Men tegar eldurin var brendur niður og dansurin í sodnkerinum hasaði av og dimmligt var vorðið um alt sodnhúsið, tá fóru tygum úr skónum, eins og Móses á sinni, og fóru varliga upp gjøgnum stigan mudlandi og tutlandi sálmar og andilig ljóð, eins og tygum væru at nærkast hinum heilaga.

Gott var at hoyra tygum syngja har uppi um hina ljósu Jorsalaborg, meðan tygum huglaðu um kornið, lyftu og vendu tí og teytandi uppi yvir tí, eins og móðir, ið leggur barn sítt at sova.

Tað sum hin várdagin var dreymur í huga og sum køstaflugurnar havdi hómað, og sum várlotið kínandi havdi boðað tygum, nú var tað her í hondum tygar — Guðs undurfulla gáva, sum ikki mátti traðka undir fótum, ja ikki hin minsta mola.

Og tegar aftur var dagur, hoyrdist dynur um allar geilar frá treskitrøunum, sum glumdu í sodnhúsgólvið, har tygum lógu á knøum og tresktu kornið, til tess at fáa burtur úr tí góðu lutir og gøði tess — huld í skýggi av dumbu, korni og axaknokkum; treskitrøini gingu upp og niður, títtari enn nakað eyga mátti fylgja við, fuku ymsar vegir og bardu øxini sundur, inntil øll kornrúgvan lá bard skerfløt.

Seinni um dagin stóðu tygum við veggin með tíningartrogi í hendi og foyktu dumbuna frá kjarnanum í trúarrøkni og guðsótta, syngjandi um síðsta dag og forløg hina guðleysu, sum skulu fara fyri vindinum, eins og dumban av lávanum.

Fagrir vóru dagarnir í hoyonn, tá vit gingu um bøin av ein-

Materiál chráněný autorskými právy

um stykkinum á annað, hvørt við sínum merkiliga navni, sum sagdi frá einumhvørjum, komu fram við húsum, har eg aldri havi verið á gátt, har annar dámur var á øllum, og annað lag. Eisini á tygum var tá annað lag, tygum vóru vorðin fínari og full av veitsluhugi, rólig gleði lýsti av tygum, gleði yvir at hava lagt svá mikið úr hondum.

Og veturin kom og myrkrið; vársins og summarsins songir køvdnaðu í stormum og glymjandi regni og kavaroki; alt hitt ljósa og litfagra var eins og blást burtur av kalda andadrátti yvirnáttúrligrar veru.

Sólin sást ikki aftur, og mánin kom onkuntíð fram, men fór með fúkandi ferð eftir himnahválvinum eins og eitthvat ræðuligt væri borið til; og skýggini fóru avstað eins og rýmandi undan vreiðinnar síðsta degi.

Og havið, sum havdi ligið slætt og róligt, tók nú at leika ótt, hvæsti og froysti sjógvin langt upp í loft og gjørdi seg inn á alt og allar. Í vreiði síni rændi tað eginmenn frá konum og tók dagverðamatin úr munni barna teirra. Niðri í tí livdu dásamligar skepnur, og har meðal teirra rókust sjólátnir menn með tvøstflakum og seiðagreipum í hondunum, og hvalir, svá stórir sum long hús, fóru gjøgnum náttarmyrkrið með sjógvi á baki, hagar sum menn vóru gingnir burtur.

Í hóttandi tøgn stóðu fjøllini døpur á yvirbragdi og dagaðu upp móti myrka, vreiðiliga himninum.

Um allar leiðir og breytir lógu ræðslur á loynum, myrkrið var ræðuligt at líta út í, og niðri við strondina, sum brimið dundi móti, var kirkjugarðurin, fullur av deyðum monnum, ið gingu aftur og sýndu seg fyri monnum alt uppi undir Íslandi og søgdu teimum frá fiski og feigdum.

Hvør heyggjur var fullur av huldufólki, og í steinunum bølaðust vætrar; allar staðir var íbygt og hættisligt at ganga. Í sodnhúsinum búði Sodnkersmarjun klødd í búna, sum var vovin av sóti og øsku og perlusettur klukkum og torvatrøllum. Á høvdinum havdi hon stríggjutan krans av hálmi og strúgva og um hálsin men úr øxum. Hendur hennar vóru logar, sum hon rætti krámandi fram mudlandi út úr sodnkerinum: »Fjøri

Materiál chráněný autorskými právy

mítt, fjøri mítt!« Og muður hennar — ein sodnkersmunni með kyndum eldi — gloypti børnum og muldi tey sundur með sínum sodnspølatonnum og át tey upp á svaðasvørði.

Javnvæl á bróstinum í roykstovuni mátti um kvøldini hóma skuggarnar av dreygum og dysjadólgum. Og úti í hvørjum skoti og króki sótu trøllini fyri, altíð reiðubúgvin til at loypa á; tey vóru svá áleitin, at hættisligt var at sita uttast við dyr. — — —

Og so hvørt, sum hugurin víðkaðist og heimurin støkkaðist, komu nýggjar hættur og ræðslur undan. Tilveran gjørdist alt meira og meira uggsamlig:

Jørðin hekk í leysari luft og mól í kring; tá ið hon havdi snúð sær á, komu høvuð manna til at horva niður eftir og beinini upp eftir. Lítið hjálpti at ugga seg með tí, sum tygum móður høvdu sagt, at ikki eitt hár skuldi falla av høvdinum, nema Guð vildi tað. Og har var hin undursami garðurin, har Guð spákaði sær í kvøldarlotinum, og talaði við menninar, har var ormur, sum talaði með mannamáli og apaldurstrø með dásamligum eplum og úti fyri liðinum logandi svørð, ið sneri sær í allar ættir svá, at snarljósini sóust fara gjøgnum alt loftið.

Hátt uppi yvir jørðini var himinin, fullur av dásamligum, ræðandi lutum. Har sat Guð í glæsiligum hásæti, ið mikil ljómi stóð av; eygu hans vóru eldslogar, og røddin var toruslátur, hvíti síði kyrtil hans lá um hann eins og kavin oman eftir »skriðubakka«; út úr munni hans stóð tvíeggjað svørð beint út í loft; kring um hásætið vóru undarligar verur og skepnur. Stórir mannaskarar í hvítum klæðum og mikil ljómfagur songur. Fyri framman hásætið mikil bók, størri enn Brockmaður, allar gerðir ritaðar í hana — hvør einasta, — ræðuligt at hugsa sær. Gamalur maður, sum lá fyri deyðanum, havdi sæð hana. Hann havdi spurt tey, sum inni vóru, um tey einki sóu — tann bók var uggsamlig, gykladist mær í dreymum — allir menn á fold at savnast fyri hásætið og verða dømdir eftir tí, sum í henni stóð, skildir sundur í tvinnar flokkar, annar skipaður til høgru liðar hásætinum, og hin til vinstru, hann skuldi verða bølvaður og rindaður oman av himni alt

Materiál chráněný autorskými právy

niður í eldsjógvin, har Illimaður høladist, og haðan púkar og illir andar komu upp á jørðina til tess at gera mein og draga menn niður hagar.

Stundum komu logarnir upp gjøgnum jørðina, sum klovnaði sundur og gloypti heilum mannahópum livandi. Yviri á Heiði var svartur maður komin í fylgi við mann, sum var á heimleið úr aðrari bygd, var farin undan honum og leiddi hann út av.

Sum ýlandi ljón gekk Illimaður um og gloypti øllum, sum hann mátti fáa fang á — verri enn mannaúlvurin, sum summarnæturnar var vanur at standa fyri oman bøgarðarnar og ýla með høvdinum uppi á garðinum støðugt fúsur til at loypa á.

Stjørnurnar vóru ikki longur gøt á himnahválvinum eftir píkstavinum hjá Guði, tá ið hann var úti og gekk um kvøldini; nú vóru tær knøttir størri enn jørðin, hingu í ongum, og mátti rapa niður, tá ið menn minst um vardi.

Har uppi var alt regnið, og einum sinni vóru allar stívlur tiknar burtur og allar lokur drignar frá, so at alt regnið stoyptist niður í 40 dagar og stóð fleiri favnar fyri oman »skriðubakka«.

Guðrun í Gomlustovu kom á kvøldi með stokkum, sat á bakarhurðini og ruggaði og mudlaði út gjøgnum afturlatnar varrar eins loyndarfull og Gamlastova sjálv, orð hennar fullu eins og tá ið síðstu laggadropar verða heltir burtur úr træílati. Hon virtist at vita meir enn orð hennar máttu siga frá, full av loyndardómum og óupplatnum innsiglum. Hon mudlaði um huldugentur og um tíggju sjólátnar menn, sum gingu inni í haganum með hvítum manni á odda; hann havdi hvítar blondur niðan eftir skøvningunum — hin ellivti maðurin var ikki við, honum havdi Illimaður fingið fang á og drigið hann niður í eldsjógvin.

Men hitt uggsamligasta av øllum var, at síðsti dagur var nú fyri durum. Loyndarfull trýsti Guðrun varrarnar saman, blunkaði títt og mudlaði um eina stjørnu, sum longu var losnað og nú stevndi við miklari ferð beint á jørðina; hon havdi langan gløðandi hala, sum sýndist í loftinum um næturnar. Og hon

Materiál chráněný autorskými právy

mudlaði um ogurligt dýr með tíggju hornum og sjey høvdum, sum við síðstu tíð skuldi koma upp úr havinum — — — nú var tað longu komið til Rómaborgar, har tað sat í hásætinum hjá dreka nøkrum, men skuldi verða kastað í eldsjógvin ásamt »Illamanni og øllum vondum monnum« — — —.

Ræðuligur var hesin síðsti dagur, hvørja løtu mátti hann bresta á. Mikið klandur og stríð skuldi vera fyri hesum degi, og tað skorti ikki í húsunum, vermøður risu upp móti sonarkonum og børn móti foreldrum; rópini vóru mangan mikil og hørð. Og tegar omma sagdi at Illimaður skjótt mundi fara at gera vart við seg — tá fór faðir úr rokkinum, sló nevan í bitan og bað hana tiga við sær og hóttaði hana með óheillavænligum dreymum, sum hann havdi droymt um hana.

Háur og vreiður með stórum skeggi stóð hann á gólvinum uppøstur av guðdómligum vandlæti eins og Móses, tá ið hann kom oman av fjallinum og breyt tøvlurnar og smildraði gullkálvin.

Nei, hesin ræðuligi síðsti dagur var longu at renna upp, vreiða rødd føður uppi í húma tróðrinum ljóðaði niður í roykstovuna eins og dómadagslúðurin, ið boðaði frá, at nú var halastjørnan í nánd, og allar stjørnur at losna, og alt at rapa, allir hinir deyðu at koma upp úr havinum og kirkjugørðunum, helviti opnast og Illimaður og púkar hans koma upp á jørðina — — — tað bar móti hini ræðuligu oyðing.

Ikki var mikil styrkur í náttverðinum, sum var bæði tunnur og turrligur, skolasúpan, og ein turrur seiður aftur við. Men onnur kraft var í hini andaligu føðini, sum kom aftan á, tá ið faðir settist at lesa kvøldbøn fyri øllum heimilisfólkinum. Tað var mjøk fjølbroyttari og sló ikki falskar mentir; tá vóru rættirnir bæði margir og væl mergjaðir og með alskyns sjáldsomum nøvnum. Har var bæði Brockmaður og Kingo og Aandelige Betragtninger over Jesu Vunder og Saar og Tárapersan, Pontupedán og Petur Dass, Brorson, Kosseba, Grønabók og Tjúkkabók, Sjungandi Tíðsfordrív, Aandeligt Sjungkór, Norðlandstrompetin, Túsundtal, Bíbliukernan ..... Ja, har skorti ikki at velja av.

Slíkt var ikki grælingafjaðrar.

Materiál chráněný autorskými právy

Tá ið rokkur og karðar vóru beindir burtur, náttverðin etin og gólvið sópað, og alt verk at enda, tá kom dagsins hátíðarligasta stund. Mitt í bølamyrkrinum fekk alt ein ljósari dám. Hátt hevjaður og tíguligur, eins og ovasti prestur, settist faðir á »spunakrakkin« í miðjari roykstovuni við lampuna, streyk ullina av troyggju og brókum og terdi súpanina, sum dreyp úr síða skegginum, eins og »hin dýrliga olja, sum dreyp niður í skegg Árons«, »eins og Hermandøgg, ið fellur á Sion-fjall«.

Allur hin stóri barnaflokkur tyrptist um hann, kleyv upp á skamlar og stólar og toygdi seg upp ímóti honum til tess at síggja í tær merkiligu bøkurnar, sum søgdu frá síðsta degi og øllum hesum dásamliga bæði í himni og á jørð og undir jørðini. Har hjá føður kendist eins og skái mitt í stormi hinar ogurligu oyðingar. Har var gott at vera.

Troystur og tryggur sat hann har á krakkinum, las og sang með rødd, sum kom úr hjartadýpinum. Á honum sást eingin ótti, ne nakar ivi. Andlitið hult í skeggi, og róligu eygu hans fjald fyri aftan hársíðar eygnabrúnir, fastur í sæti og dyggur á at líta. Hann virtist mær at gnæva fyri oman allar hættur og háskar og vita um alt millum himins og jarðar. Guðrøkiliga flutti hann fingurin orð av orði og reglu av reglu, eins og leitandi eftir dýrmætum, fínum perlum. Bungutu, kringlutu reglurnar á stóru kronglutu veðurbardu fingrunum líktust bókstøvunum, ið vóru stórir og kringlutir og tøtrugir um allar rendur og minti með øllum móti á bunguta himnahválvið; nei, bókstavir hesir vóru ikki ritaðir av monnum, heldur með Guðs egna fingri og innblástir av anda hans. Í teimum lógu folgin himnesk loyndarmál, sum tað ráddi um at finna. Haðan átti at koma hin bjargandi máttur, sum skuldi birta ljós í ogurliga myrkrinum og vinna á øllum hesum ræðuliga.

»Spunakrakkurin« var ikki longur venjuligur sessur, heldur vorðin at gudahásæti og roykstovan ein Nóaørk, ið bar okkum gjøgnum allar háskar og vandar — — — eitt himnaskip, ið flutti oss »hesum vonda heimi frá«, gjøgnum stjørnuregn og helheims íður og boðabrot.

Úti í náttini glampaðu kám ljós ymsar staðir, eins og trølla-

Materiál chráněný autorskými právy

eygu. Yviri á Garði høvdu teir verið á fjalli, kovin fullur av seyðarhøvdum. Alt í einum brestur hurðin upp á bak, og høvdini fúkandi út á gólv, har tey blóðug lógu og veltu sær. Eitt fór yvir móti hinum vegginum, har maður stóð og spann, kom fast í snælduna og snerist í kring andskræmiliga jarmandi.

Har gekk deyður maður og vakti menn upp um næturnar.

Skamt haðan annað trølsliga glampandi ljósið. Haraldur gamli, snimma morgun í húminum út at draga hoyggj; alt í einum svartur púkur, sum tjótandi rennur seg úr loftinum eftir høvdinum, beint niður í desina og dreivdi henni upp í loft, har hon sundraðist í allar ættir.

Og har úti í myrkrinum lá havið í sínum undirdjúpa einmani og breytst av miklari øði, eins og rándjór í leinkjum. Skýggini fóru fram við, sum óðir vargar, og hvirlurnar brustu móti himnafloy vári, eins og neyðarróp frá monnum í havsneyð. Undan hvørjum steini og heyggi toygdu vættrar og dvørgar sínar gálvandi snáir fram; rínandi og hvínandi fóru trøllini fram við og skrímsl og púkar gløddu með glóðreyðum eygum upp í gluggarnar og fóru gnístandi á breyt!

Ógnarlig var halastjørnan, sum nærkaðist í hvørjum, glæman av henni hómaðist longu á bróstinum. Ræðslur í bæði borð, og síðsti dagur fyri stavni.

Men kring um »spunakrakkin« og faðir var ljós og friður. Hann virtist at vaxa í hvørjum og taka alt upp í himinin. Margvísur sat hann har í himneskari ró og sang í góðum troysti, meðan vær stevndum fram móti nýggjum himni og nýggjari jørð:

Helheims púkar, skrímsl og trøll
ørvaskot hins Versta øll
ikki skulu saka meg.
Guð til verju havi eg.

Og um stríð og styrjøld hørð
Gongur á um alla jørð.
Himnadráttur lívsins sól
tú ert skjøldur mín og skjól.

Materiál chráněný autorskými právy

Nú í tínar hendur eg
leggi alt og sjálvan meg,
gjøgnum heimsins myrka dal
før oss heim í himnasal.

Tá tók hugurin at lætna, og vónin vaknaði um, at ferðin skuldi eydnast hóast allar deyðans íður og skaðvæn sker og hóast øll ørvaskot hins versta. Øll syndarinnar bond og festi, sum hann spenti fyri oss, brustu. Ljómin av hini himnesku Jorsalaborg lýsti fyri stavni, har Guðs einglar stigu upp og stigu niður.

Hugurin víðkaðist og hovst til himins; tað kendist eins og foldin øll var vorðin fagrari. Sviðin av teim mongu skeinum og sárum, ið dagurin havdi sligið, lintist, bitur og beisk orð gloymdust, hugstoytir og ósigrir á leikvøllum fánaðu burtur, tárini tornaðu, og hjartað lætnaði. Alt dapurt og tungt minkaði burtur í einki aftur ímóti øllum tí velduga, sum faðir las og sang um, og sum ljóðaði eins og úr Guðs egna munni.

Og vit børn sótu har kring hann, litu upp til hans, og toygdu oss upp ímóti honum til tess at taka undir við honum — eitt livandi dømi um øll mannanna børn, ið líta upp til skapara síns — — —.

Ikki var altíð blítt á brúnaskorum við eldstaðin, har tygum, móðir, sótu øðru megin á torvkassanum og húktu, og omma hinu megin illfús yvir, at tygum høvdu sett hana frá róðrinum. Av teirri orsøk stóðst, at floyin mangan rendi djúpt, og at øldurnar ofta brutu inn yvir hana.

Eitt sinn steðgaði songurin alt í einum. Ovfarin og óttafull lítaðust øll um og hvør bíndi á annan: Aftur ein ræðslan, men nú innan borða: Elsti bróðir, sum havdi ligið og sovið, reistist illfýsin yvir at verða hirtur fyri sína óguðræðslu, turkaði svøvnskruvurnar úr eygunum og mælti av munni: »Trúgva tit, at alt er rætt, sum prestarnir siga?«

Hetta kom eins og harðveðurshvirla av heiðum himni, treiv í floyina og risti og skók henni illa. Tað fanst eins og rent væri upp á boða og alt í hurlivasa. Og tygum móðir tóku hendurnar frá andlitinum og spurdu bilsin eins og út í tóman heim, hvaðan

Materiál chráněný autorskými právy

hetta mundi koma, tí at ikki hevði hann tað haðan úr húsinum, har Guðs orðið havdi ljóðað alt; frá vøggustabbanum reint og skírt.

Men brátt mintust tygum ritningarinnar orð um, at Illimaður skal sleppa leysur við síðstu tíð, og at trúgvin tá varla skal finnast á jørðini. Hesi orð um prestarnar komu eins og høgg frá øx, ið lá við røtur trúar tygara, røtur svá djúpar, at tær toygdu tágar sínar alt til hinar heilagu Jorsalaborgar, hagar allur hugur tygara stóð, og hagar vær stevndum øll á veg heim aftur í hitt sanna føðurlandið.

Hátt brutu øldurnar, men fyri Guðs orðinum lutu tær at lúta og allir andskotar og púkar at víkja.

Men tegar lokið var honum og songum, og eg lá aftur í seingini í loftsherberginum, tá tyrptust aftur ræðslurnar úr øllum ættum kring seingina og í øllum líkjum. Men verst av øllum var halastjørnan, sum nærkaðist í hvørjum. Glæman av henni hómaðist á bróstinum, og allar hinar mongu, mongu stjørnur, sum hingu í ongum og brátt fóru at regna niður á jørðina.

Trøllini vóru nú aftur har í krókum og skotum og komu grulvandi yvir móti seingini. Uppi í klokkhúsinum við gluggan lá bókin með myndini av Illamanni. Hann var í síðum, svørtum skjúrti, sum var vítt og spølut, eins og skjúrtið hjá ommu. Í neðra komu tveir hestahógvar undan; á høvdinum havdi hann krúnu tinduta alt í kring, eins og kransurin á stovuovninum; hendurnar vóru glóðreyðar, trítindutar kvíslar; hann toygdi seg fram eftir, á loynum og lúrin eins og kørturin eftir smáfuglum.

Móti øllum hesum megnaðu Guðs tólv einglar einki, sum eg havdi biðið Guð um at seta sum verndargarð kring um seingina. Ræðslurnar brutust inn um einglagarðin. Men tað, sum einglarnir vóru ikki førir fyri, tað megnaðu tygum, móðir — tí fátt er sum faðir, men einki er sum móðir. Fyri tygum leyt alt at halda av; javnvæl halastjørnan tók aðra leið og gloymdist. Fyrst lemmurin fór upp, og eg hoyrdi fótafet tygara niðan gjøgnum stigan, lætti frá hjartanum; tungliga stigu tygum á trøppurnar móð og troytt eftir dagsins strit og strev syngjandi:

Materiál chráněný autorskými právy

»Se Solen går ner og Dagen aftager jo mer og mer.
Hver Fugl til sin Hvile forføjer sig hen.
De Blomster på Marken nu lukker sig hen.
Luk du så mit Hjerte med Laagen i Løn.
En gudelig Bøn.«

Tað ljósnaði úti á »mittloftinum«. Kvistarnir í bróstinum og allir lutir, sum høvdu verið eins og gálvandi trøllasnáðir á at líta, broyttust og fingu aftur sítt náttúrliga yvirbragd, hitt ýlandi ljónið tagnaði, trøll og púkar lutu at rýma, og einglarnir komu fram aftur at seingini. Treystliga stigu tygum inn í svøvnskemmuna altsamt syngjandi ekkaleys og rólig:

»Var du ej min Skjold,
da havdi mig Satan snart udi sin Vold;
den brølende Løve hun løber gesvind,
hun vil mig opsluge, dertil staar dens Sind,
men du det afværger, jeg blir ej dens Rov,
des mere dig Lov.«

Og tygum settust á reyðu kistuna við bróstið undir klokkhúsinum yvir av seingini, drógu sokkarnar av fótleggunum, sum av tungari gongu vóru fullir av sprongdum æðrum, koynum og kílum og knortlutir eins og klótuteinar, sum staðið hava djúpt í jørðini. Drálandi loystu tygum stimarnar um barmin, og hárið, sum fell niður um herðar, og komu yvir at seingini altsamt syngjandi:

»Derpaa jeg nu vil mine Klæder afføre
og lave mig til at søge mit Leje
og hvile min Krop, til Dagen mig minder
igjen at staa op.« — — —

Syngjandi komu tygum upp í seingina, og syngjandi lógu tygum, inntil tygum bórust burtur í blundi, syngjandi somu songir, sum høvdu ljóðað við vøggu tygara og vøggu foreldra tyg-

Materiál chráněný autorskými právy

ara og vøggu foreldra teirra, og svá ættarlið eftir ættarlið, alt aftur til hins heilaga lands og til Reyðahavsins bakka, har Mirjam, systir Mósesar, á sinni hov hin frelsunnar takkarsongin, sum allur kristin sálmasongur er sprottin av.

Men tó bar lítið til at sovna, nýggjar hugsanir órógvaðu, áður ótekkt ræðsla kom undan kavi: Hvat var hetta, tey sungu um at liggja í jørðini í fýra fjølum og einum laki? Hvat var deyðin?

Uppi í klokkhúsinum stóð klokkan og spjallaði fyri seg sjálva; smátt um smátt lærdi eg at skilja talu hennar, at tað var um tíðina, hon spjallaði, tíðina, sum fer av stað og tekur dagarnar frá mannanna børnum, eisini frá móður — ein nýggj ógnarlig hugsan: — tíðin, sum ger enda á øllum, men sjálv ongan enda tekur og er án byrjanar, hin óendiliga tíð — hvat var tað at doyggja, og — hvat var tað at vera ævinliga til?

Ogurligur tómleiki fylti hugin og tilfinning av undirdjúpum einmani, sum kom av, at tíðin — deyðin skuldi taka tygum frá mær.

Og meðan eg soleiðis lá í sveittabroti og grundaði yvir vandamál deyðans og lívsins, lógu tygum hálvt vakin og hálvt sovandi og mudlaðu bønir og teytaðu songir, hvørja síðstu orð fánaðu burtur inni í landi svøvnsins. Alspentur lagdi eg meg tætt inn at tygum og lurtaði eftir andadráttinum og stumpaði undir tygum til tess, at tygum skuldu ikki sovna frá bønunum, tí at tað havdi faðir sungið um, at tey, sum vaka og biðja, skuldu ikki síggja deyðan.

Sterkur søtkendur angi stóð av tygum og várligur ilmur, sum minti á hin várdagin, tá ið tygum stóðu úti í køstinum og fyltu upp á rossini, og allar flugur sungu, og allar blómur angaðu kring tygum. Tungliga hovst og lægdist barmurin eins og bøllut sker, sum øldurnar fløða yvir. Við hina lið tygara lá lítla systir í fasta svøvni, reyt hátt og velti sær langt inni í landi svøvnsins fjart frá øllum áhyggjum og rygdum, kleyv upp á barm tygar og bóltaði síðan av aftur eins og kópur av skeri; vavd í sítt gula hár lá hon har eins og hin havfrúgvin, sum eftir frásøgn føður var rikin upp á land og lá uppi í urðini, og langa hár hennar breitt út eftir malargrótinum. Grindaflokkur, sum havdi sæð tað lýsa í

Materiál chráněný autorskými právy

náttarmyrkrinum, var gingin eftir tí og havdi rent seg upp í urðina.

Gott var at vakna um morgunin og síggja ljósan dag aftur og heimin allan nýggjan, at hoyra dynin av kvørnini í durunum, har tygum stóðu og mólu og sungu:

Tykir leiðin torfør mær,
tó mítt eyga tíðum sær
handan reyn og oyðusand
lívsins undurfulla land.

Og gott var at kenna roykin av nýbakaðum drílum leggja upp gjøgnum stigan og ilmin av sodnum skarngørnum og steiktum sperðlum og hoyra snurrið av snældu og rokki og spjallan og stákan av fólki. Men einki var sum dynurin av kvørnini; í honum vóru øll hini ljúvu ljóð, sum køstaflugur og firvaldar høvdu sungið, og sum vindarnir høvdu teytað yvir grønum fløtum og gulum økrum, — lívsins æviga kvørnkvæði — — —. Tað var sum aftur at hóma hina nýggju jørðina og hin nýggja himinin — — — lívsins undurfulla land — — —, hina nýggju Jorsalaborg.

O, móðir, tá var heimurin víður og opin, himinin á jørð, og jørðin í himinum, sunnudagur alla vikuna; lestur, sálmar og bønir hvønn gerandisdag, og Guðs orðið havt á munni bæði á sjógvi og landi, alt frá morgni til myrkurs. Nútímans ídnfrøðiliga samfelagsskipan havdi enn ikki skild helg frá sýkndøgum, ne vinnu frá heimilislívi, ne tað gudiliga frá tí gerandisliga, ei heldur gjørt kristnilívið at tvinnum kostum at velja í millum — Guð ella heimurin — heldur var Guð í og yvir øllum. Tygara átrúnaðarlív fylgdi ikki tí rásini, sum liggur frá guðspjallinum gjøgnum Platon og grikksku heimspekinga og síðan gjøgnum kleystrini í longum bugi fyri útan heimin og hitt náttúrliga lívið — lýst eina best av Augustinusar orðum: »Mín sál og Guð, Guð og mín sál, og einki annað.«

Heldur fylgdu tygum hini rásini, sum liggur frá guðspjallinum beint gjøgnum heimin, gjøgnum gular akrar og yvir liljuskrýddar

Materiál chráněný autorskými právy

vellir, gjøgnum víngarðar og fiskaratorp, gjøgnum ervidisvinnu, stríð og klandur, taratøð og barnaburðir, — gjøgnum ljóð av køstaflugum og treskitrøum, kvarnadyni og barnagráti — ei undur í, at tygum vistu tygum í tryggum sambandi við »hitt upprunaliga, skilvísa, sanna, óblandaða guðsorð, sum Illimaður og púkar hans lutu at lúta fyri, ja, fyri hvørjum deyðans íður og boðabrot mistu sín brodd, svá at tygum »handan reyn og oyðisand« máttu hóma »lívsins undurfulla land«.

Eingin Barjama — — — — —:

Eg gangi mær oman at strondini og komi fram á børn, ið leika har og bera kensl aftur á meg og tyrpast um meg. Eitt teirra, ein smágenta, með hondunum fullum av grasi, strýkur með skøvninginum frísuta hár sítt upp frá enninum og lítur undrandi upp á meg: »Hvar búgvir tú?«

Mær bregdur við orð hennar, tí at reina opna andlit hennar er sum skuggsjá at líta í, sum sýnir mær avskeplaða mynd av mær sjálvum. Tegar eg bilsin og sum burtur í øðrum heimi líti á hana og spyrji hana um navn hennar, strýkur hon aftur með skøvninginum hárið frá enninum og lítur upp á meg með fjørugum eygnabragdi: »Eg eiti Lív.«

Mær verður bilt við — eins og hómaði eg aftur tað lív, ið maðurin upprunaliga var ætlaður at liva, tá ið alt var mjøk gott. Rødd hennar berst mær fyri eins og afturljóð av hini rødd í páradísinum:

»Adam, hvar ert tú?« »Maður, hvar búgvir tú?« »Á hvørjum vegi ert tú, lívsins ella deyðans?«

Materiál chráněný autorskými právy

# Jákup Berg

(9/10 1905)



## Ein selli

Ein sella her
tú sær á ferð,
hann ongantíð var ræddur.
Hann ofta fer,
har vandi er —
har oftast hann er sæddur.

Ei kom í kór
hann, sum í flór
sær niður sjálvur tráar,

Materiál chráněný autorskými právy

so sigur hann,
áh jú mín sann,
og hægri upp hann náar.

So nær, so nær
hann leggur sær
altíð í øllum førum;
hann altíð er,
eg sigi tær,
í sera góðum skørum.

Royn raskur ver
sum hesin her,
tú fram tá kemur, frægi!
Og legg tær nær
á tíni ferð,
tí tað er rætta lagið.

## Á kyndilsmessu

Á kyndilsmessu altíð gamalt var
í bøin fastandi at ragga sær,
í hondina at taka sær ein stein,
ein torvkongul og so eitt seyðabein.

Á kyndilsmessu bøur kykur gekk —
tí hvør var tann, ið hetta við ei hekk
og ikki vildi leggja fyrndarmið:
er kykt mær lagað — og hvaðani við lið?

O, neyðar kráka — í teg skomm og last!
Hon visti ikki av, fyrrenn tað brast —
hon ofta land av leni skeytst, mín sann,
at vísa manni vív og vívi mann.

Materiál chráněný autorskými právy

Ásanna hetta hjún tann dag í dag
og kenna seg í kyndilsmessulag —
men ommur, abbar, hugsi eg tó bert —
tey yngru annað nomið hava og lært!



Materiál chráněný autorskými právy

# Andreas Andreasen

*(26/3 1906)*



## Nú sprettur á fold

Nú sprettur á fold og spírar,
nú summar í hondum er,
nú grønkast heiðar og mýrar,
brátt búnast øll krákuber.

Nú tysja túsundtals urtir
av burðarbúnari jørð.
Nú kámast minnini burtur
um storm og stálfrystan svørð.

Materiál chráněný autorskými právy

Nú láta láir í lyngi
og æður um ytstu sker,
nú lundin flýgur í ringi,
og ternan um heiðar fer.

Nú pisur úr koppi kaga,
Gud signi tey smáu nev.
Í lofti, bergi og haga
fæst fuglur við fegið strev.

Nú leikar seiður á íðum,
av æti er sundið reytt.
Nú hongur mjørkin í líðum,
og havið er stoytt við klett.

Alt ljómar á ljósum degi
og teskar um miðju nátt:
Far út og nør tína megi,
hoyr summarsins andadrátt.

## Fossá kvøður

Runnið havi eg um æviskeið,
áðrenn maður sást um hesa leið.
Minnist eg hitt fyrsta terratám
og hitt fyrsta fleyr og fuglanám.

Ei í forðum hoyrdist annað ljóð
uttan fossadun og áarsjóð.
Men tá eg var lítil ella fryst,
hevði tøgnin dal og hamrar kyst.

Materiál chráněný autorskými právy

So um langa tíð kom maður her,
setti seg á hesi vøkru sker,
reisti búgv og nørdist við og við.
Aldri sá eg mannin binda frið.

Longst so hevur mær í langa tíð
eftir hondina at taka í
til at inna verk í bý og bygd,
landsins børnum veita vón og trygd.

Lítið orki eg, tó ikki sørt,
heldur ikki virða teir meg stórt,
nevna mína megi bert eitt sev,
tó hon fara skal um nes og nev.

Birta skal eg ljós í hvørji vrá.
Náttin hvørva skal so myrk og grá.
Mínar kreftir so eg spenna skal,
at tað spyrst um bæði fjall og dal.

Aldri møðist eg á míni ferð,
um eg renni, ongan mun tað ger.
Hvussu nógv av mær í havið gekk.
altíð líka nógv eg aftur fekk.

Hesin meldur aldri steðga fer,
settur hann í verk av einum er,
sum er sterkari enn tú og eg,
leiðir alt á beina rás og veg.

Materiál chráněný autorskými právy

# Valdemar Poulsen

(20/4 1909)



## Malena og Justitia

Ein frostkláran heystardag, so tindrandi vakran við stilli og sól av heiðum himli, fekk hon boðini. Beint sum alt var friður og samljóð úti og inni, og í henni sjálvari.

Fyri bert løtu síðani hevði hon staðið og leitað sær nakrar konglar upp úr torvkassanum, lagt afturat á grúgvuni og hongt døgurðapottin uppyvir.

Tað barst henni fyri, meðan hon stóð í friði og náðum og læt niður í pottin, at hetta var ein gævustund. Ein av hesum sjáldsomu løtum, tá ið alt er sum tað eigur at vera; tá ein bert kennir seg eydnuríkan — uttan at vita hví.

Materiál chráněný autorskými právy

Hon hevði sett seg við vindeygað við teim seks smáu rútunum og gav sær á fyrsta sinni rættiliga far um, hvussu sólargeislarnir vórðu býttir sundur í seks lýsandi puntar á bróstinum yvirav. Hon mundi hava sæð hetta so mangan, men í dag nam tað so løgið við huglag hennara — hon frøddist við tað.

Fjørðurin lá stillur og blankur, hvør bátur á floti. Gøtan var harðfryst; tuflufetini gneltu, tá ið onkur gekk framvið, og barnarøddirnar ljóðaðu so kátar í túnunum millum smátturnar. Friður og hugni úti og inni.

Í dag vildi hon ikki hugsa um framtíðina; higartil hevði hon goldið hvørjum sítt. Hesi fimm árini, hon hevði sitið einkja, høvdu ikki verið tey ringastu í so máta...

Har niðri kom politisturin gangandi so herðabreiður hendur aftan fyri bak. Hon visti, at vinstra hond hansara helt um skøvningin á høgru við hasum gula pappírinum.

Álvarsamur og tignarligur kom hann niðaneftir, hesin umboðsmaður fyri lóg og rætt; ófrættisligur eins og við lagnu í hvørjum fótafari. Gular knappar, gult band um húgvuna og gult pappír í hondini aftan fyri bak.

Pappírið sá hon ikki enn, men tað var har, tá hann hevði hatta gongulagið. Miðvíst gekk hann brekkuna, seigliga, uttan skund; maður í embætisørindum.

Hvør mundi eiga slíka vitjan á ein so vælsignaðan dag? Ájú — ikki hevði tað altíð so nógv at týða, og ikki spurdist altíð so nógv burturúr. Men tann, ið ongan góðan átti: sum hevði ikki passaliga sterkt aftan fyri seg, kundi mangan koma illa fyri av lítlum.

Hann var nú komin næstan áraka húsunum hjá henni, hann skákaði tvørtur um gøtuna... nú kom hann yvir at durunum...

Hurðin varð latin upp, hann stóð á gáttini við gulum pappíri í hondini. Forstova var eingin; hann hugdi beint inn á hana, og hurðin snaraði spakuliga aftur á bak.

— Um hon var Malena Hansdóttir?

Eins og hann visti ikki tað; tey vóru konfirmerað saman fyri einum tjúgu árum síðani... men nú var hann jú í tænastu, ájú.

Hon fór uttar til hansara. — Jú, hon var Malena Hansdóttir.

Materiál chráněný autorskými právy

— Ja, hann hevði eina stevning til hennara. Hann leitaði í pappírunum, aftur og fram. Har lógu nøkur hvít pappír innan í hinum gula. Tey vóru ikki fleiri enn trý, helt hon seg síggja, so hví skuldi hann... men nú rakti hon við andlitið á honum; álvarsamt og brúnasítt, undirvørrin skúgvað upp, so hon bar næstan við tað svarta yvirskeggið — ábyrgdarmaður í ábyrgdarstarvi, og sum visti av tí.

At enda steðgaði hann við eitt av teim hvítu pappírunum, tók tað upp, skróvaði við tí og harkaði...

Tað var ikki dámligt at hava hann standandi har í eyðkennisbúna og geva sær góðar stundir at handfara gult og hvítt pappír. Tað gula var óivað ætlað at verja fyri handaskarni. Hon hugsaði um opnu hurðina og beyð honum innar. Men nú var hann longu farin at lesa stevningina upp fyri henni.

Orðini fullu hørð og knøpp. Eisini tey, sum hann tóktist ikki at vera heilt kunnigur við, fingu eitt løgregluligt, ákærandi snið, og reystur var hann á málinum. Í húsunum á skák yvirav varð eitt vindeyga spakuliga latið upp á glopp...

Hví hevði hon verið so tápuliga eydnurík nettupp í dag? Hví var hon framvegis so burturi í øðrum heimi, at hon fataði ikki rættiliga tað, hann las... og hví fór hon ikki uttar á gáttina og læt aftur eftir honum...?

Hon visti tað ikki; var kanska so ófyrireikað at taka hetta beint nú; tað var komið so óvart á hana. Tað var eins og eitt tám var sigið niður millum hana og politistin frá teirri løtu, hann kom inn til hennara; eins og hevði hon upplivað hetta einaferð áður, men hómaði ikki nær ella hvar — — —

Bert einstøk brot úr stevningini rinu kámt við huga hennara: at hon var meldað... at hon skuldi til yvirhoyringar...

Tað var eins og alt hetta kom ikki henni við, tó at tað kendist sum ónd hóttan, men so fjart og ógreiniligt. Og samstundis varnaði hon tað løgna, at okkurt smávegis, sum hevði so lítið at týða afturímóti, stóð so merkiliga greitt fyri henni: hesi einstøku orðini, sum hann snávaði um; tað svarta yvirskeggið, sum livdi og leikaði í, upp og niður, út og inn, meðan hann las; hitt eyðkenda orðalagið og hesin flógvi deymurin av skrá,

Materiál chráněný autorskými právy

sum kom rekandi ímóti henni. Hann hevði tjúkkar varrar og gular tenn.

Hann segði punktum, tá ið hann var liðugur at lesa, handaði henni stevningina og tók uppaftur, at hon var stevnd at møta til yvirhoyring hjá fútanum næsta dagin klokkan 10 fyrrapartin.

Malena spurdi, hvat hon var stevnd fyri.

Politisturin svaraði ikki; varð standandi og skráaði álvarsliga og hugsunarsamt, sum tað sømir manni við ábyrgd. Hann legði hendurnar við hinum gula pappírinum á pláss aftan fyri bak, harkaði løgregluliga, seyg kjálkarnar saman og spýtti útum, knapt og avgerandi.

Nú vóru fleiri vindeygu farin upp á glopp, ansin eygu og oyru hómaðust aftanfyri; tann fríska luftin var jú heilsugóð at fáa inn ein so vælsignaðan dag. Nøkur fólk høvdu eisini einihvørji ørindi hesa løtuna fram við dyrnar hjá Malenu...

Politisturin varð framvegis standandi og hugdi at henni. Hvørjum mundi hann bíða eftir?

Alt í einum raknaði hon við: Hatta eygnabráið var ikki at misskilja. Hon visti, at hon sá væl út, hvørjum hon so var í. Henni nýttist ikki dýr klæðir fyri at gera vart við seg, átti tey heldur ikki. Men hon var tann, hon var; eigilig kvinna uppá sítt besta. Hon stóð hendur í favn við hvítum, mjúkum ørmum undir høgum barmi.

Nú hevði hann slept tí sindri av hita út, ið inni var; hvat fór tað næsta at vera? Smátt um smátt kendi hon seg ilskast, men aftraði seg; hann skuldi eiga næsta orðið.

Hann hugdi at henni allari sum hon var. Nú jaglaði hann vinsamt, spýtti dælt og streyk eftir varrunum við handarbakinum.

— Tað var jú so, segði hann at enda, at hann var ikki komin í egnum ørindum; hevði bert gjørt sína embætisskyldu. Hann rætti seg eftir hurðini og læt aftur. — Jú, tað var bert hetta hann hugsaði um, at kundi hann hjálpt henni á onkran hátt, lagt henni einihvørji ráð, so kundi hann gingið niðan til hennara okkurt kvøldið, tá hann var ikki í tænastu og — og...

Materiál chráněný autorskými právy

Malena spurdi aftur, hvat hon var stevnd fyri og hvør, ið meldað hevði.

— Ne-ei, tað visti hann ikki, hevði í hvussu var ikki loyvi at siga tað. Men sum sagt, hann kundi gingið inn á gólvið, um so var.

— Til hvat? spurdi Malena.

— Til hvat — ja, tað fingu tey at síggja; eitt nú hvat tey kundu semjast um.

— Hvussu tá?

— Jú-ú, hon kundi kanska havt onkran fyrimun av tí, um so var, at — at... hann jaglaði títt og pliaði upp á hana.

Hon stóð eina løtu og leit at honum og gjørdist meira uppreitt í hvørjum: Hah — gult band um húgvuna, gular knappar, gult pappír, gular tenn, skrá um varrarnar, svartar negl, dugdi illa at lesa... embætismaður í tænastu — jújú!

— Hvør skuldi hesin fyrimunur verið? spurdi hon mestsum fyri at siga nakað.

— Jú-ú, sum hann segði og — og hann dugdi at tiga.

— Við hvørjum?

— Á-a, henni nýttist ikki at látast so... hon mundi hava sýnt so mongum blíðskap á ymsan hátt og havt — em — vinning av tí; tað kundi verið okkurt sovorðið, hon var meldað fyri, og... og hann meinti so við, at mann í hansara starvi var altíð betri at hava til vin enn...

Eitt greitt svar lá henni á tunguni, eitt rættiliga greitt svar. Stóð hann ikki har so hippin — løgreglan! Og hótti afturat.

— Hvussu hevur konan tað? spurdi hon fólkaliga — og børnini?

Hann hvakk við, gloppaði hurðina og spýtti útum. — Jú, tey livdu væl tíbetur — men, sum sagt — hatta tey tosaðu um...

Hon visti ikki, um hon skuldi flenna ella hvat. Sum hann stóð har kom hann henni fyri sum stórur drongur í nýggjum matrósaklæðum, lakress um andlitið, og nú mungar eftir at fáa sukurkandi.

Men hetta mátti halda uppat. Hon læt hurðina upp og segði lagaliga, men avgerandi: — Nú havi eg fingið stevningina; og

Materiál chráněný autorskými právy

eru ikki onnur boð til mín frá fútanum, so haldi eg hann roknar við, at stundin er komin at siga farvæl.

Hann hugdi ákærandi at henni og harkaði løgregluliga; nú var hann aftur politisturin. So fór hann miðvíst av durunum við hesum eyðkenda gongulagnum og helt leiðina víðari fram við gulum pappíri veittrandi aftan fyri bak.

Malena læt aftur eftir honum. Hon vendi sær innar, gekk nøkur fet eftir gólvinum og varð standandi eitt bil, meðan tankarnir mólu í klingur.

Tað lítla rúmið var framvegis fult av sterkum, lívgandi ljósi. Sólpuntarnir lýstu framvegis á bróstinum, teir høvdu flutt seg eitt sindur, annars var alt sum áður — at síggja. Men hitt hugfangandi samljóðið var burturi; tað kendist, sum svart skýggj var komið fyri sólina.

Smávegis — bert smávegis og lítilsverd ting nomu við huga hennara beint í løtuni, men so nágreiniliga og átrokandi: Sum hon drálaði har í óvissu við stevningini í hondini, gjørdist hon var við, at nakað innan fyri breddan stóð tummilin á politistinum so sjónskur, har hann hevði hildið, meðan hann las; ein gulligur blettur og pappírið meltað rundan um. Hetta og mangt annað stóð so høpisleysa greitt fyri henni; men aftanfyri bøldi hitt nívandi huglagið eftir hesa óunniligu vitjan.

Mestsum hissini fór hon yvir at grúgvuni. Nú var farið at rúka úr pottinum, hon rakaði gløðurnar saman og setti seg aftur við vindeygað. Sum frá leið fekk hon greiðu á tonkunum. Hon var illa stødd; tað var ikki nóg mikið, at hon visti seg óseka; heldur ikki at sleppa undan revsing. Bert tað, at hon var meldað, var ein ólukka; tann bletturin fór altíð at verða sitandi. Tað var eyðsæð, at nakar vildi henni ilt og hevði ynskt at seta henda blett á hana.

Kundi tað vera øvund? Hevði hon nakað framíhjá, sum vert var at øvunda? Tað var illa hugsandi; hon átti einki uttan hesa gomlu smáttu: køkur, lítil stova og kamar; fáur hevði minni, og óvin visti hon sær ongan. Hon var von at svara hvørjum sítt og... ja, var ikki nakað har...?

Materiál chráněný autorskými právy

Hevði hon ikki hoyrt okkurt hánarorðið fyri, at hon vildi heldur svølta enn skylda nøkrum nakað, og at hon bar á at vera hástór, tá hon legði ikki í at koma sær upp í nakran størri vasa? Og kanska eisini hetta, at hon las onkra bók av og á; tað var illa umhildið. Ikki nettupp hetta at lesa, men at hon las bøkur eins og tey stóru.

Hon hevði mangan seymað fyri eina av hesum frúunum, eina hina mætastu á staðnum. Hendan hevði av og til borið henni eina bók; soleiðis var tað byrjað. Og eitt kvøldið, frúan hevði verið og passað og givið sær rættiliga góðar stundir, var maðurin, ein fínur harri, komin at sóknast eftir konuni, tí myrkt var og ringt geingi. Tá hevði hesin høgi harri goldið henni fyri seymingina og tað væl meira, enn hon hevði lagt á. Hetta gullstykkið goymdi hon enn. Jú, soleiðis kundu tey eisini vera, men hon hevði altíð gjørt arbeiði sítt av einlistum.

Mundi hon hava sagt nakrari vinkonu frá hesum gullstykki? Í hvussu var hevði meira enn ein teirra rakt við onkra bók og annað inni hjá henni og sagt sítt um tað, og kanska borið tað víðari á sín egna hátt. Jú, tað kundi vera alt hetta tilsamans og okkurt afturat, sum gjørdi at hon bar orð fyri at vera annarleiðis; at líkjast burturúr — og tað var ikki gamansleikur. Bert evars lítið skuldi til; javnlíkum hennara dámdi einki betur enn at happa síni egnu...

Ongan óvin? Hvat visti hon eginliga um tað? Tað var ikki altíð neyðugt at gera nøkrum ilt fyri at fáa sær ein óvin; mangan var nóg mikið at gera væl. Eitt nú Marjun, sum bønaði hana um at læna sær nøkur oyru á sinni, tí børnini grótu av svongd. Tað var ongantíð afturborið og kundi eisini vera harvið; men Marjun hevði hvørki hugt ella talað eftir tað...

Jú, tað kundi vera so mangt. Men tað batti ikki at sita og stúra og gita.

Í morgin mundi hon fáa at vita.

Fyrrapartin dagin eftir stóð Malena Hansdóttir inni á skrivstovuni hjá fútanum. Beint sum klokkan uppi í kirkjutorninum sló tíggju sløg, var hon komin inn um dyrnar. Fútin sat og

Materiál chráněný autorskými právy

skrivaði. Ein løta gekk, hon varð standandi har uttari.

Hann skrivaði framvegis. Har var heitt inni og kvirt, einki hoyrdist uttan pennurin, ið fór skavandi eftir pappírinum.

Fútin var skarpur og gráhærdur, næstan hvítur, hóast hann neyvan var farin upp um tey hálvthundrað. Hendurnar vóru smáar og bleikar. Sum hann sat har í gráum jakka og tí gráa bróstinum aftan fyri seg, var hann so undarliga litleysur at síggja.

Av og á drap hann pennin niður í blekkglasið, sletti burtur av og skrivaði víðari fram.

Tøgnin og hitt tvungna yrkisloysið kendust Malenu meira nívandi í hvørjum; tað var eins og hon var ikki longur til sum menniskja; bert eitthvørt ting, ið skuldi standa har, til brúk var fyri tí.

Sum frá leið kom ein undarlig tyngd á hana. Í fyrstuni hevði hon hugt uttan um seg. Har vóru stórar hillar við tjúkkum bókum í leðurbindi, uppi yvir hingu einstakar ljósmyndir, og mitt á aftasta brósti ein málningur av manni í litføgrum hermannabúna við medaljum í bringuni.

Hon hevði skimast og skift vektina av einum beini á annað og kent løtuna meira óunniliga í hvørjum. Uttanfyri skein sólin so fagurliga aftur í dag, men ikki fyri henni; tað var eins og hon longu var innibyrgd. Av og á fór okkurt fólk framvið har niðri á vegnum, í áðni ein hestavognur við øskutøðum, hvíslin stóð og riðaði á skák upp úr dunganum...

Eina løtu var tað eins og hon raknaði upp úr dula og gjørdist var við, at hon stóð og stardi at gráari kettu, ið lá uppi á lágari flagtekju og royndi at lúra seg framat einum stara. Hon kleindi seg niður í grasið og vaggaði við halanum, meðan hon varliga otaði seg nærri, klørnar leiktu og kreptust...

Fútin harkaði einaferð og skrivaði framvegis. Ja, hvat var tað nú, hon hevði ætlað sær at siga, tá... tá hetta kom fyri? Tað lá so raðið fyri henni í morgun, og hon hevði tikið tað uppaftur innantanna, meðan hon var á veg higar. Okkurt brot rann framfyri hana aftur, men ikki so greitt sum áður; tað var hetta, at hon...

Materiál chráněný autorskými právy

Klokkan í torninum sló eitt slag — eitt korter til ellivu. Hvat var tað nú... jú, tað var hetta, at hon kendi seg ikki seka í nøkrum ólógligum, og hon... nei, hon mintist ikki rættiliga, og hon hevði heldur ikki hoyrt ákæruna enn; bert hetta sum glapp politistinum úr munni í gjár. Men eitt vildi hon hava at vita: hvør hesin persónur var, sum hevði lagt ilt fyri hana; tí um rættvísi var til, so kundi...

Í hesi løtu gjørdi fútin vart við seg. Tað kom so óvart á hana, at hann noyddist at taka tað uppaftur; hann bað hana koma nærri. Hon so gjørdi, og stóð nú beint yvirav honum.

Hann legði albogarnar á borðið, setti fingrasnipparnar saman undir høkuna og hugdi tigandi at henni. Malena hugdi afturímóti. Ein løta gekk við hetta lag.

So var tað eins og nakað reitti hann; eins og nakað hevði ikki lagað seg reiðiliga so, sum hann hevði ætlað. Hann spurdi harðliga, um hon var Malena Hansdóttir, um hon hevði fastan bústað her í sóknini, um hon var straffað áður, og annað, sum tóktist at vera sera umráðandi at fáa greiðu á.

Malena hugsaði við sær, at hetta mundi hann vita væl frammanundan. Men, hitt formliga mátti jú vera í lagi; maskinan skuldi í gongd á fyriskipaðan hátt.

So kom hann til klaguna: At hon var meldað fyri at hava livað í siðloysi.

Malena segði avgjørt nei til hetta og kravdi tann, ið klagað hevði um hana, straffaðan fyri ósanna skuldseting.

Fútin bað hana bert svara sum hon var spurd, legði henni eina við at siga sannleikan og ikki royna at dylja nakað.

Malena helt fast við tað, hon hevði sagt.

Fútin lætst ikki at hoyra. Hann byrjaði av nýggjum: Hon var meldað fyri at hava havt ymsar vitjanir seint á kvøldi; at siðloysi var farið fram í heimi hennara, og at hon hevði notið peningaligan fyrimun av hesum. Um hon viðgekk skyld sína nú beinanvegin, fór hon kanska at sleppa frægari burturúr. Men noktaði hon framvegis, kom málið helst fyri rættin við honum sum ákærara, og tá var óvist, hvussu mildan dóm hon mundi fáa.

Materiál chráněný autorskými právy

Malena bað hann ráða fyri tí; hon vildi bert siga fyri seinastu ferð, at har hevði einki tílíkt verið, hvørki fyri ella uttan pening.

Hetta skuldu tey koma aftur til, segði fútin. Men nú vildi hann hava at vita, hvørjum hon livdi av; hon hevði jú ongan góðan her á staðnum, og heilt ongum kundi hon ikki liva av.

Tað var ikki sørt at Malena fór at reitast av hesum roksuta spyrjingarlagnum; hann mundi vita um hana tað, hann legði í at vita. Eisini hjá fútafrúuni hevði hon gingið til handar og vaskað upp og niður fyri lítið og lætt. Til hin dagin, tá frúan leyp framav, tí Malena skuldi hava etið ov mikið av teimum køldu døgurðaleivdunum, henni vóru bodnar eftir ein strevnan dag, og hon hevði takkað fyri seg...

— Hon livdi av tí, hon arbeiddi fyri, svaraði hon.

— Men hon mundi neyvan spinna gull av tí? segði fútin mestsum hissini.

— Nei, sannaði hon á, — tað gjørdi hon vissuliga ikki.

— Alt í einum klamsaði hann hondina niður í borðið, stardi illgrunandi at henni og spurdi, um tað ikki var so, at hon hevði eitt gullstykki heima við hús?

— Gullstykki?

— Eitt gullstykki, ja!

— Jú, tað hevði hon.

— Um hon fekk gullpening afturfyri at vaska upp og niður?

— Nei, segði Malena, — tað átti fútin at vita so væl sum nakar.

— Hvaðan hon so hevði tað?

Malena spurdi, um hon nú eisini var meldað fyri stuldur.

— Hon skuldi bert svara, hvesti fútin í hana.

— Nei, tað kom ongum við.

Fútin sló aftur í borðið. — Nú skuldi hon siga sannleikan; hon visti, hvat hon var skuldsett fyri, og kundi hon ikki greiða gjølla frá hesum stóra peningi var líkt til, at hon hevði fingið hann fyri — em — á óregluligan hátt.

Malena tagdi eina løtu. Fútin sat alspentur framman fyri henni; fingrar hansara leiktu og kreptust. Hon kendi á sær, at

Materiál chráněný autorskými právy

her var eingin miskunn at vænta. At enda segði hon spakuliga, at gullstykkið hevði hon fingið frá einum manni.

— Ná-a, nú fara vit at nærkast, segði fútin speiliga. — Nær og hvar?

— Jú, tað var eitt kvøldið... hann hevði verið inni hjá henni.

— Fyri hvat, og hvør var hesin maðurin! rópti fútin.

— Nei, hon vildi helst ikki nevna nakað navn, tá ið tað var komið soleiðis fyri.

— Hetta veksur bert um illgrunan til tygara! herdi fútin á.

— Hvør var hesin maðurin?

Malena tagdi eina løtu. Mundi hann hava nakran rætt at spyrja hana so... Jú, hann hevði maktina, makt var ofta tað sama sum rættur — og hon hevði ongan rætt av sama slag at seta afturímóti.

— Eg veit ikki um honum hevði líkað, at eg nevndi navn hansara her.

— Líkað... um honum hevði líkað?...! flenti fútin háðandi. — Her verður ikki spurt um, hvat einum tílíkum kvøldargesti hevði líkað, men hvør hann er. Og trúgvið mær, tað skulu tygum sleppa at siga.

— Eg beri eisini ótta fyri, at hann kann gerast firtin, um eg...

— Firtin... søgdu tygum firtin? Sigið mær, vilja tygum hava meg at trúgva, at tað var kongur sjálvur, ið heiðraði smáttu tygara við kvøldarvitjan?

Nei, tað var ikki kongur.

— Ná, so var tað tó ikki, segði fútin speiliga.

— Nei. Men starv hansara man kortini vera hægri enn tygara.

— Fyri seinastu ferð: Eg ráði tygum til at svara fólkaliga og siga sannleikan!

— Ja, tá ið tygum noyða meg. So havi eg tað til umbering; tí eg veit ikki, um hann leggur í at verða vavdur upp í hetta.

— Vilja tygum nú siga sannleikan... ja — ella nei!

— Ja.

— Komið so í gongd.

Materiál chráněný autorskými právy

— Hesin harri...

— Harri...??

— Ja, her verður hann nevndur harri — eins og tygum verða nevndur harra fúti.

— Sera áhugavert, tað verður betri og betri... hah! Og so?

— Hesin harri gongur vanliga í svørtum frakka og hatti. Hann hevur ljóst høkuskegg, gongur oftast í galosjum og hevur gulan stav við silvurhólki, hann...

— Jaja, nú er gott, segði fútin og rassaðist í sessinum.

— Eg eri hørm um hetta, men tá ið tygum krevja tað, noyðist eg helst eisini at siga, hvør...

— Nei, nei — her er longu sagt nóg mikið! segði fútin kvikliga og hevði hondina upp.

Malena læt ikki við seg koma. — Tað var fyrst frúan, ið var inni hjá mær, meðan eg totaðist við kjóla hennara. Tað var seint, tá hesin harrin kom at sóknast eftir henni; men frúan var so væl nøgd við alt, at hon takkaði umframt, at maðurin lønti mær við einum gullstykki.

— Ná, ja... men tað var jú bara gott, segði fútin nipin og fór at ótolnast eftir at fáa hetta liðugt, men visti ikki rættiliga hvussu.

— Jú, tey eru ógvuliga menniskjanslig. So eg haldi, at nú eg eri komin so illa fyri, fer hann kortini ikki at lasta meg, um eg biði um hansara hjálp — ikki meg! Navn hansara er...

— Nei nei! — Ikki eitt orð meira um hatta! segði fútin munandi blíðkaður. — Steðgið mær eitt sindur... hann reistist, fór eftir einum stóli og beyð henni at sessast. — Hetta átti eg sjálvandi at boðið tygum beinanvegin, smáflenti hann.

— Eg skilji, segði Malena og varð standandi.

— Fútin hugdi kannandi at henni, meðan hann setti seg aftur, men sá bert tvey rólig eygu, sum einki var at lesa í.

— Tygum eru nú ikki heilt — haha — royndi hann at skemta, fetti sær í stólinum og krossaði armarnar. — Men nú er best at tala hóvliga saman og finna fram á eina rímiliga loysing.

— Hvat halda tygum vera eina rímiliga loysing í hesum føri?

Materiál chráněný autorskými právy

spurdi Malena so fólkaliga, at fútin sá greiniliga, hon royndi at leggja band á seg.

— Eg — tygum mugu royna at skilja, at eg vil ongum ilt; geri bert mína embætisskyldu.

— Júst tað sama segði politisturin í gjár, hugsaði Malena: gjørdi bert sína embætisskyldu. Og samstundis hevði hann eggjað henni til nakað, sum als ikki samsvaraði við hesa skyldu — ja beint sum hann hevði stamað seg gjøgnum stevningina.

— Hvussu tá? spurdi hon umsíðir.

— Jú, nú havi eg talað við tygum, sum skylda mín var. Eg síggi onga orsøk til at flyta fram ákæru; tygum kunnu fara ekkaleys hiðani. Men — nú hava tygum roynt sjálv, hvussu fólk kunnu vera, so... best er at tiga við hesum. Skulu vit vera samd um tað?

— Eg eri ikki nøgd við at sleppa undan ákæru bert av tí, at einki er prógvað! segði Malena avgjørd. — Eg vil verða reinskað! Og verði eg ikki tað, so veit eg, at hesin harri, sum eg nú knappliga ikki má nevna, er maður fyri at...

— Nú, nú, nú-ú, segði fútin blídliga hartandi, — tygum eru firtin, tað skilji eg so væl; vit kunnu øll gerast firtin. Men eg havi ikki sagt alt enn: Sum fúti er skylda mín ikki einans at ákæra, men eisini at verja. Klagan um tygum verður afturvíst. Og viðvíkjandi ynski tygara at verða reinskað, so skal klaffarin fáa at kenna, at ein kann eisini sleppa at bøta fyri sín munn.

— Nei, eg ætli kortini ikki... eg vildi bert...

— Ja, tað verða tygum nú. Tað er einans at lata meg um rest og royna at gloyma hetta, segði fútin blíðlátin, meðan hann fór á føtur og gjørdi seg kurteisliga til at fylgja henni av durunum.

Meðan tey gingu fram við vindeyganum, var Malenu hyggjandi út á flagtekjuna yvirav. Starin var farin á flog. Tann gráa kettan fór krúpandi so nakkalong oman aftur í túnið.



Materiál chráněný autorskými právy

## Gøla í Eplalandi

Einaferð var eitt land, sum æt Eplaland. Har var gott at vera; øll arbeiddu og øll vóru væl nøgd.

Upprunaliga hevði landið itið nakað annað; men so við og við, sum eplir gjørdust høvuðsframleiðslan, bæði til egna nýtslu og til stóran útflutning, varð landið ikki rópað annað enn Eplaland, og fólkið, sum har búði, varð vanliga skírt eplalendingar. Hetta seinasta onkuntíð við lítlum brosi ella umberandi hirsi.

Ikki so at skilja; einki beinleiðis var at flenna at; gjaldoyrað hjá hesum landi var til dømis eitt hitt tryggasta í heiminum. Og tó at tað í skemti ofta varð rópt epladálar, so lá kortini altíð virðing aftanfyri. Men — tað var framvegis eins og Eplalandi restaði nakað í at vera mett heilt á jøvnum føti við aðrar tjóðir.

Mundi tað hóast alt vera navnið? Nei, helst ikki einans tað; og neyvan heldur, at landið var lítið. Tað kundi vera so mangt og hvat, sum tilsamans gjørdi, at Eplaland í vanligari meting varð ikki altíð tikið í fullum álvara. Eitt nú hetta, at Eplaland aldri hevði verið í bardaga við onnur lond; hevði ongar stoltar traditiónir at vísa á. Ongar standmyndir av djørvum herleiðarum; ongar minnisvarðar yvir blóðigar sigrar á vígvølli; ongar kirkjugarðar fullar av dripnum hermonnum. Og tjóðarmerkið, sum ongantíð hevði fingið blóðdópin, hvussu var tað vorðið? Har vóru hvørki leyvur ella svørð; hvørki stjørnur, hjálmar ella skjøldur at síggja. Bert ein bláur dúkur við trimum ljóslittum puntum, ið summi vildu vera við kundu líkst nýupptiknum eplum.

Tað gjørdi kanska eisini sítt, at so lítið av spennandi tilburðum var at frætta um úr Eplalandi. Eingin uppreistur, ongar kravgongur. Ikki av tí, at har var harðræði, sum køvdi allan møguleika fyri tilíkum; men fólk vóru nøgd, tí teimum tørvaði einki. Og av tí, at øll sum sagt arbeiddu, hugsaðu tey meira um at fáa tíðina at røkka, enn at gera enda á henni.

Tey høvdu virðing fyri myndugleikunum, og myndugleikar-

Materiál chráněný autorskými právy

nir høvdu virðing fyri fólkinum, sum hevði valt teir. Siður var til dømis, at hvørt bræv til myndugleikarnar fekk svar; eisini brøv frá fólki, ið bert átti eina lítla veltu. Hvørt mál varð viðgjørt á reiðiligan og sømiligan hátt og uttan mannamun. Mutur í fyrisitingini var nakað, tey bert kendu frá tíðindum úr útlondum.

Sum so mangar tjóðir hevði Eplaland eisini sína grundlóg. Og tað var bert rímiligt, at henda lóg hevði dámin av høvuðsvinnuni og stundum nýtti eplir sum dømi og virðismet. Ein grein í hesi lóg byrjaði til dømis so: »Hvør borgari í Eplalandi hevur rætt til úrtøku eftir ídni: Tann, ið setir niður eina tunnu, fær ta nøgd av eplum, henda eina tunna fruktar. Setir hann tvær, fær hann ágóðan av hesum somu tveimum tunnum o.s.fr. Eina aðra staðni stóð: »Tann, ið einki setir niður, hevur einki at taka upp«. Hetta var kanska nakað roksut orðað, sum lógir ofta eru, og gomul var hon; men greið og ikki at misskilja. Alt hetta gjørdi kanska til, at Eplaland av summum var hildið at vera eitt løgið land.

Og ímeðan gekk lívið sína stillu og regluligu gongd í Eplalandi. Ikki so at skilja, at øll veltu eplir og einki annað fingust við. Har var bæði ídnaður, handverk og annað tørvandi arbeiði gjørt; mong høvdu als ikki tíð at velta, men keyptu í staðin. Tó var eplaframleiðslan framvegis hin stóra høvuðsvinnan.

Gamalt var, at eplir skuldi eingin noyðast at sakna. Var nakar, ið ongan góðan átti, sum hevði ikki heilsuna ella á annan hátt var illa fyri, so var siður at lívga um tey á ymsan hátt, eisini við eplum; hetta var ein rættur, tey áttu.

Nú er tað so, at einki er fullkomið, heldur ikki í Eplalandi. Nøkur, ið annars vóru heilsugóð, høvdu minni og vildu hava meira. Men teimum var flent at, tí oftast var orsøkin tann, at tey høvdu velt ov lítið. Einstøk veltu einki, men fingu kortini so mikið, sum tey høvdu brúk fyri, tó at hetta var hildið at vera skomm.

Men nýggjar tíðir, nýggir siðir, sum tikið verður til. So líðandi gjørdust tey fleiri, ið hugsaðu ikki stórvegis um at velta, men so mikið meira um at taka upp. Og ein dagin kom so gøla

Materiál chráněný autorskými právy

í, tann fyrsta av hesum slag í Eplalandi, sum nakar visti um at siga.

Tað var um heystið og turrveður. Víða hvar vóru fólk í veltunum og totaðust við at fáa sum mest av eplum undir tak. Tá komu tríggir menn gangandi framvið. Tveir teirra vóru ungir at síggja; hin triði kundi vera mitt um aldur. Allir høvdu teir posa undir arminum. Teir steðgaðu við eina stóra veltu. Eina løtu stóðu teir og eygleiddu, meðan tey reinu, nossligu eplini vórðu tikin upp og løgd í stórar rúgvur. Teir yngru tosaðu fýrisliga og høvdu hug at tveita eitthvørt hánarorð eftir fólkinum í veltuni. Tann elsti royndi at sissa teir: — Gevið nú tol eitt bil og latið meg hava orðið: so satt, sum eg eiti Nassberg, skulu tit fáa okkurt at síggja.

Hann gav eitt tekin. Alt í einum blakaðu teir posarnar á eina eplarúgvu og Nassberg kravdi framliga at fáa teir fyltar. Hetta kom so óvart og var so óvanligt, at fólkið í veltuni — har vóru bæði kvinnur og menn — helt uppat við sínum; stóð púra bilsið og bert hugdi.

At enda gekk hann, ið veltuna átti, nøkur fet fram ímóti teim fremmandu. Hann varð nevndur Eplakongurin, tí hann átti fleiri stórar veltur — bert ein var mettur javnt við hann; tað var hin gitni Potétus, ið búði nakað ovari. Eplakongurin stóð har, breiður og vælvaksin og hugdi gjølla at teimum.

— Tit vita væl, segði hann, — at hvørki eg ella starvsfelagar mínir eru vanir at sýta nøkrum eplir, sum biður hampiliga um; men tit hava einki at krevja.

— Ikki tað! rópti Nassberg. Tú verður klókari um ikki so leingi; eplaframleiðslan er almannaogn. Vit vilja hava upp í posarnar og tað beinan vegin; tit skulu fylla okkum teir!

Endin var, at teir fingu loyvi at fylla hvør upp í sín posa. Teir takkaðu ikki fyri, men klagaðu um vánaliga tænastu.

Sum frá leið frættist, at hetta hevði verið lagið víða um í Eplalandi; fleiri og fleiri vóru komin við kravi um at fáa eplir. Nøkur blakaðu bert posarnar við boðum um, at teir skuldu vera fyltir, tá ið tey komu aftur. Mong illstøðan birtist í av hesum og veltingarmenn fóru smátt um smátt at missa tolið. Einstakir

Materiál chráněný autorskými právy

noktaðu bart út fyri at lata eplir á henda hátt. Annars fingu velturnar vanliga frið á náttartíð. Tað vóru upptikin eplir, hetta nýggja viðskiftafólk vildi hava, og tey skuldu sjálvandi vera umhyggiliga skild og av besta slag.

Árið eftir, tá tíðin var komin at taka upp, komu teir tríggir aftur at vitja í somu veltu. Teir vildu hava eplir; fáa posarnar fyltar og síðani bornar ella koyrdar til hús.

Hesa ferð fingu teir ikki so góða móttøku. Eplakongurin bað teir sleppa sær av stað; nú hevði hann fingið nóg mikið av hesum slagnum, ið bert vildi heysta, men ikki sáa.

Tá flenti Nassberg háðuliga. — Minnist tú ikki tað, eg segði tær í fjør, at tú mundi skjótt fara at vera klókari? Tú eigur ikki meira í hesum eplum enn eg og felagar mínir; nú krevja vit okkara part — vit býta javnt!

— Hvussu nógv av hesum hevur tú sett niður? spurdi Eplakongurin.

— Tað kemur ikki tí við, svaraði Nassberg. — Eplir eru almannaogn.

— Almannaogn...?

— Ja, tey eru samfelagsskapt virði og tískil almannaogn.

— Við hvørjum rætti sigur tú so?

— Tað sigi eg við rætti teirra eplaleysu.

— Hevur nakar nakrantíð sýtt nøkrum eplir her í Eplalandi?

— Tað gjørdi tú beint nú! rópti Nassberg, og felagar hansara tóku dyggiliga undir við honum.

— Tú bað ikki um eplir, segði Eplakongurin róliga, — tú kravdi.

— Sjálvandi gjørdi eg tað. Vit hava nóg leingi verið í vanvirdari biddarastøðu; nú krevja vit rætt okkara!

— Handa rættin kenni eg ikki.

— Nei, tað ber til, segði Nassberg. — Men nú fær tú hann at kenna. Enn er tað bert ein moralskur rættur, um tú veitst hvat tað er. Men bíða tú bara til lógarbroytingin kemur; tá verður tað ikki bert hin krøkni einstaklingurin, sum hevur rætt til landsins ognir.

Eplakongurin gjørdist harmur í huga. — Íðan, hevur nakar sýtt tær at velta sjálvur, ella jørð at velta í!

Materiál chráněný autorskými právy

— Tað er ikki tað, ið talan er um; men at tann samlaða framleiðslan er almannaogn.

— Tær dámar so væl at tosa um almannaogn, segði Eplakongurin, — men hvat veitst tú um almenna skyldu!

— Tað er nakað, sum tú og tínir skjótt fáa at kenna; skylduna at lata — fólkið krevur tað!

— Eplakongurin hugsaði eina løtu. — Bíða nú, bíða nú... almannaogn, samfelagsskapt virði, fólkið krevur tað, lógarbroyting... hatta orðalagið komist eg við. So siga tíðindini ikki skeivt um hin illa gitna Nassberg.

— Nei, og tú fært skjótt at frætta annað og meira frá mær.

— Eg veit, segði Eplakongurin, at tú hevur verið í hóslag við ein politikara, ein orðbrasnan lógvataks-politikara, sum ongantíð er sloppin rættiliga framat. Men hvat gjørdi hann — hann flenti at tær.

— Jú, hann flenti, tað gjørdi hann.

— Har sært tú!

— Hoyr nú meg, segði Nassberg alfaðirliga. — Hann flenti hvørki at mær ella tí eg segði. Hann flenti av tí, at vit vóru so fáir. Men tað er so mangt, sum er broytt síðani tá. Og har atkvøður eru, vil ein politikari altíð vera tøkur.

— Tú ert eitt spott! Far heldur og hugsa um at velta.

— Eg fari, svaraði Nassberg seigliga, — og eg skal eisini hugsa, men tað verður um kollvelting! Veitst tú, hvussu nógvir ið nú eru. Vit eru so passaliga nógvir, at sami politikari var hjá mær nú í summar. Tá flenti hann ikki. Hann beyð sær til at stovna nýggjan flokk við honum og mær á odda — »Flokk teirra Eplaleysu!«

— — — —

Við næsta val kom Flokkur teirra Eplaleysu mannsterkur inn í stjórnina. Meirilutan fingu teir ikki; men tað eydnaðist teimum at handla sær til einstakar lógarbroytingar. Hetta gjørdi so mikið, at veltast mátti væl meira fyri at hava somu úrtøku.

Fýra ár gingu. Tá fekk Flokkur teirra Eplaleysu reinan meiriluta. Nassberg vann sær ráðharrasess, og nú kom rættilig broyting í. Tað almenna legðist ikki beinleiðis á eplini, men

Materiál chráněný autorskými právy

hækkaði skattin í stórum. Av hesum skatti varð latið so mikið í studningi og aðrari hjálp til hvønn tann, ið kundi prógva, at hann einki hevði velt, at hann kundi keypa nóg mikið av eplum, um tað var tað, hann hevði hug at brúka peningin til. Men hesum ráddi hann so fyri sjálvur.

Á hvørjum ári høvdu veltingarmenn skyldu, undir trúnaðarváttan og sektarábyrgd, sum tað nú æt, at geva upp hvussu nógv, teir høvdu sett niður og hvat ávøksturin var. Tann, ið einki gjørdi, hevði sjálvandi ikki skyldu at svara uppá nakað; hann hevði síni rættindi at røkja. Og fyri at hann skuldi ikki skammast, varð á hægsta stað eitt nýtt orð smíðað til hansara brúk, og sum hann kundi hava at verja seg við. Hann var nevndur »virðiliga treingjandi«. Av hesum stóðst, at tað, ið áður var olmussa, nú hevði fingið dámin av virðisløn.

— — — —

Eitt árið, tá vársíðan var komin, stóð Eplakongurin ivingarsamur í veltuni. Hvussu mikið mundi hann hava ráð at seta niður í ár…? Neyvan tað sama sum seinast; tá mundi hann ikki verið bótarførur. Hann kundi minka tað niður í helvt og tó hava somu úrtøku at kalla.

Men tað var hesin arbeiðshugurin; honum dámdi best at síggja tað grógva og trívast uttan um seg… og mundi ikki einhvør rokna við tí…?

Har kom ein maður gangandi framvið, pyntaður. Hann steðgaði við veltuna. Hvør mundi hesin maðurin… nei, um tað ikki var hin gitni Potétus!

— Nú, segði Potétus, — aftur at velta?

— Eg veit ikki, svaraði Eplakongurin. — Meira eg velti, minni eg fái. Í fjør velti eg so nógv, at minsti parturin var eftir, tá eg hevði rindað nýggju gjaldskylduna; nóg illa til seteplir.

— Íðan, so velt eina tunnu av tí; tað sindrið sleppur tú kanska at hava — um tú leggur í at velta.

— Jú — jú, segði Eplakongurin troyttur, — tað er so við.

— Nei eg orki hetta ikki longur. Teir skattaðu eplini av mær — men ikki hakan.

— Hvat gert tú so meðni, Potétus?

Materiál chráněný autorskými právy

— Eg veit ikki í løtuni, hvat best er. Men tó so; í gjár rann mær nakað í huga, sum eg lærdi einaferð á barnaárum; lærdómur verdur at hugsa um.

— Hvat... hvør lærdi teg? spurdi Eplakongurin.

— Ein høna.

— Ein — høna...?

— Ja, segði Potétus álvarsliga. — Og í hesum er hønan klókari enn vit.

— Skal... skal hetta vera skemt?

— Nei, nei — alt annað enn skemt. Potétus tagdi eina løtu. — Tú veitst óivað, at ein høna, hvussu væl hon verpur, er ikki býttari enn, at verður rænt so tráliga í longri tíð, at enn ikki reiðraeggið sleppur at liggja, tá fer hon at verpa burtur. Sigur hetta tær nakað?

— Ikki er tað heilt sørt; tað samtykkir ikki við náttúru hennara at blíva við at framleiða og einki sæst eftir. Hon roynir at verja sítt. Á ein ella annan hátt kennir hon á sær, at hatta er ikki gott reiður at verpa í.

— Og hvat gert tú so nú?

— Eg haldi, segði Eplakongurin, at eg fari at seta eina tunnu niður fyri fyrst, so fái eg at síggja. Og tú?

— E-eg? Eg havi sanniliga velt fyri meg — og latið mín part; havi leingi verið útslitin. Nú eri eg eisini vónsvikin.

— Ætlar tú so einki at seta niður? spurdi Eplakongurin.

— Nei. Eg kenni bert til strev — at lata og hava skyldur. Nú vil eg royna einaferð at gera sum tey, ið flenna at okkum: taka mær av løttum; at fáa — at hava rættindi!

— Hatta var kanska ein møguleiki. Men... men bert so mikið, at tú hevur nakað sjálvur?

— Eingin vandi er fyri eplatroti enn, segði Potétus, — so leingi tú og tínir líkar royna at treiskast. Til heystar kann eg prógva, at eg einki havi velt — við teirri samsýning, ið tað hevur við sær — og ímeðan hugsi eg um at líma meg inn í Felag teirra Eplaleysu.

Materiál chráněný autorskými právy

# G. L. Samuelsen

*(8/1 1910)*



## Ein lítil grúgvuglóð

**Um halga stund tá mánin langskýggj gylti,**
**og jarðarinnar kvirr mær aldi ljóð,**
**av gloymdum minnisbrotum stovu fylti,**
**úr døkku syll og brósti anga dró —**
**mær varrar bivaðu, og eygu tártung**
**í fjarum brái søktu grúgvuglóð:**
**úr eimi steig tú, brosandi og várung,**
**og fyri framman andlit' mínum stóð.**

Materiál chráněný autorskými právy

Í blíðum teski kvøldarløta styttist,
og hugar søktu út, á náttarferð,
av himnabárum undir loft teir lyftust
og funnu inn í vænu eina-verð.
Har gøta sólsett beindist undir beini
og føtur mannabarna aldri bar,
vit settu bú í dreymaborg tí reinu,
um stund eg bygdi eina tær og — mær.

Men dagar fuku eftir jarðarklótu,
í blindum tømdust heimsins tímagløs;
tær góðu stovu vættrar syrgnar grótu,
og sorgarkvæði bóru tekjugrøs.
Men tá á kvøldi mánin langskýggj gyllir
og kvirrið jarðarinnar elur ljóð,
er bróstið døkt og skirvnar stovusyllir,
*hon* anir tó — hin lítla grúgvuglóð.

## Tær biðikertur brenna —

Tær biðikertur brenna
á aldadýpsins nátt,
og túsund áir renna
inn yvir gylta gátt,
har reinir andar kalla
á stakling heims, ið burt
úr drúgvu dagferð valla
eitt gleðifon fekk spurt.

Eg dugdi ei at stunda
tí vígdu høll framvið,

Materiál chráněný autorskými právy

har halgar hetjur blunda
í friði lið um lið.
Um enn við beiskum stinni
eg royndi aðra kós,
eg kendi meg í sinni
sum viti uttan ljós.

Tá hvíld á kvøldarløtu
meg leiðir inn í blund
at tryggu ættargøtu
í kristingrøna lund,
mær hugarheimur fjarar
á halgu hallargátt,
og meitilflykrur gjarar
Gudshondin mær í mátt.

Materiál chráněný autorskými právy

# Sigurð Joensen

*(27/4 1911)*



## Eg stoyti heitt

Tað vóru tvær vættrar so stórar sum eina sponn, tær búðu í Gomlustovu norðuri á Eiði ímillum stavs og veggja og høvdu fult hús av børnum.

Tað var eitt kvøldið, at vættrapápin kom illur til húsa. Hann hevði brent seg í beinið, so tað sveið, og tí var hann illur. »Hvussu ber tað til, at tú hevur brent teg í beinið?« spurdi vættramamman.

»Her er ikki búgvandi longur,« segði vættrapápin. »Tað kom eitt út úr Gomlustovu í skýmingini at renna av pottinum, og

Materiál chráněný autorskými právy

har spruttaði tann sjóðheiti løgur út um allar geilar, eg fekk ein skvett og kolaði skinnabeinið. Eg sigi tær, kona, at her verða vit ikki búgvandi. Leingi hava tey virt lítið um okkum vættrar, men eg haldi, at tá ið tey nú eru farin at látast, sum vit vóru ikki til, so mugu vit rýma.«

»Tú meylar,« segði vættramamman, »ert tú ikki so mikið gamal, at tú dugir at ansa eftir tær? Tað er verri við børnunum hjá okkum, sum altíð apast upp at húsdurunum.«

»Ja, hvat heldur tú,« segði vættrapápin, »her liggur tann elsti drongurin hjá okkum brendur til ólívis, og so nakrar dagar seinni verði eg kolaður. Tað skal loysa seg at ganga gomlustovufólkinum til handa og verða kolaður afturfyri. Hevur tú, fjørið mítt, hug at ganga og ansa eftir, at hønurnar í Gomlustovu verpa ikki burtur og kýrnar eta ikki hvast niður í seg, tá ið tey ikki løna okkum betur enn so?

»Nei,« segði vættramamman, og ilskaðist, nú maðurin minti hana um tann brenda sonin. »Neyðardýrið, hann liggur og pínist av brunasárum, eg royni at leggja hømiliuslíggj uppá, tað linnar pínuna, men ilt er at grøða tað, ið brent er. Nei,« segði hon, »ikki er tað sum tá ið eg var smágenta. Tá gingu vættrabørnini óbrend á køstagørðunum í eiðistúni. Og ikki var tað tí, altíð vóru vit framvið at søkja okkum eitt uggabein, tá ið døgurðapotturin kom út, lítið skal til hjá vættrabørnum. »Eg stoyti heitt, eg stoyti heitt, allar Guds vættrar, varið tykkum nú,« soleiðis ljóðaði tá, hvørja ferð potturin kom út í ljósatendringini, tey vistu sum var, at vit vóru ikki langt burturi og ikki tola vit meir enn eitt sprutt, tí lítlar eru vættrar í vavi.«

»Ja, satt sigur tú kona, her er nógv umskipað, síðan vit vóru børn. Tá skipaði gomlustovubóndin Sjúrðarkvæðið í roykstovuni á jólum, og eg og pápi sótu uppi á bitanum og lurtaðu eftir. Tað spældi hvør liður í pápa, minnist eg, sjálvur hevði eg so lítið skil á nøkrum. Fleiri ferðir var hann um at leypa niður av bitanum niður í høvdið á gomlustovubóndanum, tá ið hann var okkum næstur. Teir vóru væl í øgn, pápi og tann gamli bóndin, og vistu altíð hvør til annan, hó teir ongantíð sóust. Tað var ein sjáldan maður, hevði hann livað nú, hevði

Materiál chráněný autorskými právy

hann verið loysingarmaður, men hann doyði, áðrenn sjálvstýris- og sambandsflokkurin vóru íkomnir, tíansheldur.«

»He! nú var hann í politikkinum,« segði vættramamman. »At trúgvi eg ikki, tað er so politisk vættur til sum tú.«

»Íðan, tað er tað, ið um ræður.«

»Um politikk?«

»Ja, hvat er tað annað vit oyggjavættrar, vit sum hava búð her nógv longur enn føroyingar, vilja hava teir at vera uttan politikarar.«

»Íðan, meðni, so hava tit teir nú sum tit vilja, nú vevur alt í politikki.«

»Kona, kona, tú tosar, sum tú hevur skil til, heldur tú meg meina við tað slagið av politikki, sum her á landi hevur verið havdur av tingi og bløðum, nei, søta mín, tað veitst tú so væl sum eg, at slíkt kalla vit vættrar ikki politikk, politikkur er bert tað, sum miðar ímóti at geva Føroyum sítt forna frælsi aftur.«

»Frælsi?«

»Ja, so segði eg, vit eru frælsar landvættrar og kunnu ikki verða búgvandi hjá ófrælsum monnum.«

»Hoyr nú málið í honum. Um tað var sjálvur vættrakongurin á Nesi, hevði hann ikki verið mælskari.«

»Tú skalt lurta eftir mær, kona. Tá norðmenn komu her á land fyri túsund árum, tá.....«

»Húsj, nú vaknaði hatta neyðardýrið Terri, hann fær ikki sovið fyri sárunum, bara ikki hini eisini fara at vakna. Nú noyðist eg at fara til børnini.«

»Steðga nú, lat meg nú sleppa at siga tær tíðindini.«

»Tíðindi?«

»Ja, tey sum eg langt síðan hevði havt sagt tær, hevði eg sloppið at tosað fyri tær.«

»Sig tey so meðni.«

»Tað verður vættrating á veturnáttum.«

»Ting?«

»Ja, og tað stórting, allar eysturoyarvættrar fylkjast millum Fjarða ungt og gamalt, maður og kona, hvør einasta vættur í allari Eysturoynni.«

Materiál chráněný autorskými právy

»Eg sleppi ongan veg,« segði vættramamman, »tí eg eri so ring av gikt, eg eri ikki gongufør.«

»Við mást tú,« segði vættrapápin, »tá ið kongur hevur sent boð út um oynna, ber ikki til at sita heima. Tað er ikki á hvørjum bragdi, at slík ting verða hildin.«

»Nei, tað hevur ikki verið í mínari tíð, og líka leggi eg í, eg nái ikki á ting. Hvat verður nú á hasum tinginum?«

»Eg veit ikki, ja, eg haldi meg nú hava ein varhuga um tað, men tað man so lítið bata at tosa um tað við teg. Tað er niðurfaringartíð, legg kalda hømiliu upp á beinið á Terra, so kanska hann sovnar.«

Tá ið hjúnini vóru niðurfarin, løgdust tey aftur at práta, men tað var mest um gomlustovufólkið.

Tey vóru farin at spæla grammofon, sum tey vóru von um kvøldið, og óður var vættrapápin. Hann lá og mutlaði, at »her fæst ikki næturfriður, og hví skal hatta slagið altíð eftir grammofonini, tá ið niður skal farast, er tað skil í at sita og spæla bridge hvørt kvøld og at dansa eingilskdans og spæla grammofon, betur sitið og tøtt.«

»Og hirða løgin út í tún, hvat ið fyri er. Píggj,« segði vættrapápin og sovnaði. Vættrar eru kvøldsvævdar, tær fara tíðliga niður.

Tað gingu nakrir dagar. Brunasárini hjá Terra lítla batnaðu, tað var fyri neyðini, tí veturnætur vóru í hond, og roksið var ógvuligt; ikki bara í Gomlustovu, ikki bara á Eiði, men í allari Eysturoynni.

Hann, sum ferðaðist um Eysturoynna hesar veturnæturnar eftir ljósatendring, fekk ein merkiligan varhuga av, at skørðini skriðu skørp av einumhvørjum smáum, ella rættari, øll oyggin gekk kyk. Vættraljósini stóðu á hvørjum steini, hvurvu í gloprum og komu aftur til sjóndar á næstu túgvuni. Tað tusti og tosaði, vættrarnar, sum eru smámenni til stødd, men stórmenni til ond, stevndu til tings millum Fjarða í Eysturoynni. Har á slættanum, sum Vesturdalsá kemur oman og ikki veit í fyrstuni, hvønn veg hon skal renna, stundum ætlar hon sær í Funningsfjørð og so aftur í Skálafjørð, her hevur áin himprast

Materiál chráněný autorskými právy

og fjakkað so leingi í døpurhuga í fornøldini, áðrenn hon tók ta norðaru leiðina, at hon gjørdi nógvar oyrar, tær fríðastu í oynni. Her í einum kráarlag við valladum gólvi á tí størstu oyrini hevði hansara hátign, hin lítli og mikli á Nesi, stevnt tegnum sínum, eysturoyarvættrum, til tings og stevnu.

Tær titaðu nú í Skørðunum fyri eystan og fyri vestan og fyri norðan, men sunnaneftir kom kongur við stórum fylgi. Tað var hin tættbygda Søldfjarðarsíðan við Rituvík, og Skálasíðan við, ið møttust í Skálafirði og tustu niðan við Fjarðará. So komu tær úr Sundalagnum, sunnan Streym, í Oyrarskarð, oman Lokkafelsgjógv. Trælavatnsskarð, Breiðaskarð, Jøklaskarð, lambavættrar, gøtuvættrar, lorvíksvættrar, fuglfjarðarvættrar.

Geisli bóndi, vættur fyri uttan Vegg í Oyndarfirði, Guds náð, hann kom á Heltnina, og so komu allar oyndfjarðarvættrar, helluvættrar, elduvíksvættrar.

Har komu vættrar úr Funningi og frá Gjógv, sum heiman vóru farnar 8 dagar fyri veturnætur til at vera á fundarstaðnum veturnáttardag, so langan og ringan veg høvdu tær.

Skálaskarð, Kvíandalsskarð, Blámansskarð, norðskálavættrar, svínáarvættrar, eiðisvættrar.

Byrur bóndi, vættur millum Stavs og Veggja í Gomlustovu norðuri á Eiði, sum áður er gitin í søguni, og kona hansara, Hýsa, og Terri lítli, sum mátti leiðast, tí hann var brendur, og øll hini fimtan børnini, tey vóru komin í Blámansskarð, tá ið fýra dagar vóru eftir til veturnætur. Nú var komið á hallið og heldur skjótari at ganga. Tað mátti koyrast á, meðan náttin var, tí tað helt Byrur bóndi vera óðavættraverk at ganga um dagin; tað eru bæði gæs og onnur stórdýr, sum hava so lítla virðing fyri vættrum, at tey eta tær, tá ið tey síggja tær. Sjálvur gekk hann á oddanum við ljósi, og húski hans alt kom honum á baki. Tað gekk long tíð, tá ið fylgið fór um gil, til vættraljósið sást aftur á tí seinna gilbakkanum, og komu tey í kullur, vildi húsið hjá Byri bónda næstan ikki koma afturíaftur, tí tað er ikki ov mikið sagt, at einki av øllum stóð upp úr rossaspori.

Soleiðis stríddu tey seg inn gjøgnum Sáttarennishagan inn eftir Reiðgøtu og hildu seg í erva har, sum áirnar eru smæstar. Tá

Materiál chráněný autorskými právy

fóru sporini at tyngjast hjá Hýsu, konu Byrjar, sum var so lamin, at tað vísti seg at vera ringast hjá henni at ganga undan brekkuni, og tá ið tað var komið so langt, at tað sást oman í Funningsfjørð og út ímillum Fjarða, tá orkaði hon ikki longur at fylgja, men mátti vera eftir við tí elstu dóttrini; hini settu á høvdið oman úteftir og gingu eftir ljósunum á tingstaðnum.

Tey komu í lýsingini veturnáttardag. Tingið var fjølment.

Byrur hitti skjótt Mógv mág sín, sum var giftur til Rituvíkar. Mógvur visti frá konusystur síni Sild, sum helt til niðri á áarbakkanum við børnunum Dýrd, Silvitni, Logn og Streymloysi, at maður hennara, Stilli bóndi, vættur niðri við Neyst í Runavík, sum stóð kongi næstur og var í kongsbúðini, sum stóð nakað niðanfrá, hevði sagt frá hansara hátign, at tingið skuldi setast í hálvaskýmingini, og tað skuldi ikki setast í kráarlagnum hjá Sámali í Funningsfirði, tí tað var ikki hugsingur um, at allar eysturoyarvættrar rúmaðust har, men í eini rúmligari seyðastøðu somumegin ánna.

Nú gekk tíðin, og lítið sást til vættrarnar, meðan dagur var á luftini. Hvør høldist hjá sínum, hvør bygdin fyri seg. Tað hendi seg, at menninir gingu ímillum; konurnar ansaðu eftir børnunum. Byrur bóndi sóknaðist eftir Geisla bónda og konu hansara Fliðu, sum hann var eitt sindur í ætt við. Hann hitti elduvíkingar, sum hildu til inni í einum samanrullaðum kráarflag, og Veftur bóndi á Tekjuni í Elduvík, sum var staddur uttarlaga í flagnum við konu síni Hosu, hann vildi einki vera við, at oyndfirðingar vóru komnir, men helt at teir mundu fara at koma vegin fram, áðrenn tingið var sett, »tí ikki hugsi eg, teir eru meir enn nakrar reipslongdir burtur,« segði hann.

»Tað er teimum so líkt, oyndfirðingum,« helt Byrur, »tað sámi teimum, at vera í seinna lagi,« segði hann.

Fuglfirðingar og elduvíkingar, gøtuskurar og lambaburðar vóru ikki langt haðani, sum elduvíkingar hildu til. Byrur kendi sum einki av hesum vættrafólkinum; hann hevði hoyrt um hjúnini Hug og Gleði fyri oman Garð í Fuglafirði við børnunum Frælsi og Eydnu og eisini um Gand bónda undir Hjallinum í Gøtu, men legði ikki í at fara at tosa við tey; hesir mætu menninir



Materiál chráněný autorskými právy

mundu fara at taka til máls, tá ið tingið var sett. Byrur gekk sær tí norðurniðaneftir hagar, sum gjáarvættrar og funningsvættrar vóru setstar at bíða. Tær vóru ikki langt hvørjar frá øðrum, vættradreingirnir gingu ímillum at berjast í øllum góðum, sum vera man, tí tað er ikki ilt skapt í eysturoyarvættrum. Byrur ætlaði sær at hitta Fisk bónda við Grúgvu í Heimarustovu við Gjógv og sá hann beinanvegin. Hann sat úti á berajólum, eins og hinir roddarnir, við konu síni Logn og synunum sum báðir itu Kyrrindi, annar á Vestfalli, hin á Eystfalli. Teir báðir gomlu settust at práta, teir høvdu altíð hitst av og á, hó tað hevði ikki verið hvørt ár. Alt vildi Fiskur fregnast, hví kongur mundi hava stevnt teimum saman. Byrur dugdi ikki at svara honum, men alt mundi tað fara at birtast upp, tá ið tingið var sett, tók hann til.

So fór Byrur. Hann var hjá eiðisvættrum tað, sum eftir var av degnum. Eiðisvættrar vóru tær einastu umframt kongshirðina, sum høvdu sett upp tjøld at vera í. Millum vættra á tingstaðnum var hetta hildið nógv avgjørt, og so at seta búðirnar tætt upp at kongsbúðini, ikki var tað av púra ongum, at tað tosaðist um eiðis*harrar*.

Drúgt var at bíða eftir skýmingini. Tað unga vættrafólkið ótolnaðist og serliga tey úr teimum norðaru bygdunum, sum ongantíð høvdu sæð kong ella hoyrt hann tala. Endin var tann, at skýggini fóru at rodna fyri vestan, skýmingin var komin, og vættrarnar tendraðu ljósini. Tær tyrptust í seyðastøðuni, nú dagurin fór at verða burtur.

Tey, sum kenna hesa seyðastøðuna, vita, hvussu góð hon er hjá vættrum at hava ting í. Hon er sum tveir viðtøkugarðar við ongari rætt innanfyri, mest lík framendanum á einum ógvuliga breiðum skipi. Flaggarðarnir munnu onkuntíð hava verið hægri enn nú, nú líva teir ikki nógv seyði, teir eru so lágir, at vættrar sleppa væl upp á teir, so tjúkkir í grundini og vegvaksnir, at tað ber væl til hjá vættrunum at sita upp eftir skráanum.

Eitt ótal av vættraljósum sást eftir garðalagnum í bæði borð. Har sótu smáir menn við ljósi, skeggjutir og skeggleysir, summir í koti aðrir í troyggju, úr allari Eysturoynni, norðarlaga og sunnarlaga. Innan fyri hendan manngarðin sóust eisini nógv ljós og

Materiál chráněný autorskými právy

eitt ørgrynni av konum og børnum, men har sum garðarnir komu saman í stevninum á hesum glæsiliga skipi, glitrandi av ljósum, sum eysturoyarvættrar mannaðu hetta kvøldið úti ímillum Fjarða, har var vættrakongur longu stigin upp á tingsteinin, ein ógvuligur klettur, størri enn nakar klíggjasteinur, og byrjaði røðu sína:

»Góðvættrar úr allari Eysturoynni, hini bestu í Føroyum, mínir vitugu og hollu tegnar. Vær høvum stevnt tykkum higar eftir besta manna ráðum, tí Reki bóndi niðri í Fjøru í Lamba og Stilli bóndi niðri við Neyst í Runavík ráddu okkum til at stevna til stórtings um tað mál, sum fleiri ferðir hevur verið havt á lofti og nú skal setast í verk. Og nú munnu tit, mínir tegnar, vera forvitnir at vita, hvat hetta mikla mál er. Málið er tað sama, sum støðugt hevur verið umrøtt tær seinastu øldirnar, hvørja ferð vættrating hevur verið, og sum í seinastu tingsetu 1907 mundi verið samtykt. Tað, sum vær høvum í hyggju, og sum eg veit, at allar vættrar har suðuri á oynni eru á einum máli um er, *at vit skulu rýma úr Eysturoynni.*«

Nú var gjørdur rómur so mikil, sum vættrar eru førar. Vættraróp í allari tingstøðuni, sveiggjan við ljósum, og fá vóru tey, sum hildu ímóti hesum kongsorðum.

Geisli bóndi, vættur fyri uttan Vegg í Oyndarfirði, var ein teirra. Hann var nú framkomin og hevði hoyrt hesi seinastu orðini og legði skeggið upp á flaggarðin og, »Guds náð«, segði hann, »hví skulu vit rýma?«

Kongur hevði nú mál upp av nýggjum. Hann segði seg at vilja geva eitt stutt yvirlit yvir vættrasøgu Føroya.

»Tá ið norðmenn komu her á land fyri meir enn túsund árum, tá høvdu vit búð her síðan landið grasaðist. Vit búðu í bergi og undir fjøllum. Haðan komu vit oman og tóku væl móti Grími Kambani og monnum hans. Hetta vóru menn, ið okkum dámdi. Hugdjarvir menn, ið heldur enn at lúta undir øðrum settu súlurnar í óbygdum landi og vistu tó ikki hvussu oyggjavættrarnar fóru at verða teimum sinnaðar. Men einki høvdu teir at óttast. Tað fór at verða væl lambað í Funningi, tá ið Grímur Kamban var setstur har. Vit tyrptust um hann og øllum ansaðu vit eftir. Vit

Materiál chráněný autorskými právy

leiddu hann fram á seiðatorvur og bjargafugl, og ikki skuldu smálomb detta í glopur hjá tilíkum manni. Funningur hevur aldrin verið so íbygdur av vættrum sum tá.

Á døgum Tróndar vóru tær eisini tættar í Gøtu, hvør lærdi hann gand, vóru tað ikki vit. Tað stóð hart um at verja sjálvstýri landsins, okkara partur lá ikki eftir.

Tá ið Sigmundur bar fram ta kristnu trúnna á Havnartingi varð sum kunnugt fyrsta vættrating í Eysturoynni. Okkum dámdi ikki ta eysturlendsku læruna, og tað var okkum hart ímóti, at føroyingar góvu seg inn undir norskan kong.

So gingu ár og øldir, eitt ættarliðið fyri og annað eftir fór í grøvina av vættrum og monnum, fólkið broyttist, men vættrarnar vóru tær somu. Vit sóu land okkara fara undir kong, og fólkið lætst ikki um vón. Hvat skuldu vit gera, vit eru góðvættrar og gera ongum ilt, heldur rýma vit, men tað hildu vit ikki bera til at rýma frá ætt Gríms Kambans, tá hon var í neyð, hóast tað ofta var av egnum ávum. Tí vórðu vit búgvandi hjá teimum og hjálptu teimum við seyði og tøting. Hví gjørdu vit tað? Hví sótu vit og tøttu við føroyingum í fýrahundrað ár niður í danskin, hóast teir satt at siga heldur skuldu givið embætismonnunum pørini um ryggin? Og hví søgdu vit teim frá grind, tá ið ringast stóð til, eg rokni ikki Skálafjørðin uppí, har sum ikki hevur verið grind síðan faðir mín, Fimti kongur á Nesi, bað dylja hvørja grind, til tað búðu sjálvstýrismenn báðumegin fjørðin.

Ja, var tað ikki vónin um, at einaferð mundu teir fara at lyfta høvdið? Vit vildu ikki lata teir doyggja í rossaraki, áðrenn tann dagur upprann. Og stundum vaks vónin. Tað hava verið reystmenni og sannir vættravinir í allar hesar øldir, sum Magnus Heinason og Nólsoyar Páll, og sáran lótu vit, tá ið teir fullu. Vit stóðu undir liðini á teimum. Nógvar vættrar gingu burtur við Royndini, og fleiri abbar og langabbar hjá teimum, ið her sita í kvøld.

Hvat battu slíkir glottar kortini í niðuni. Armóðin vaks, sum tíðin gekk. Tað gekst so illa, at hvørt mansbarn í oyggjunum hevði gloymt hvat frælsi var, alt vit royndu at lýða teimum tað í oyrað, og ófrælsið gjørdi landsmenn okkara fátækar og vesallig-

Materiál chráněný autorskými právy

ar. Enn høvdu teir kortini ikki gloymt okkum vættrar, men teir skapaðu okkum um í sínum vesala líki. Teir hildu okkum vera somu ófrælsu góðdýrini, sum teir vóru sjálvir, góðdýr og innisælir og súpanarkíkar. Men nú er so illa vorðið, at børnini, sum altíð hava verið okkara bestu vinir, kenna okkum ikki longur, og ei er tað løgið. Vit eru ikki longur á teirra leiðum. Fleiri og fleiri bygdir hava avvættrast hesi seinnu árini. Tær hava ikki viljað verið húsvættrar hjá hesum fólki, ið ikki kendist við tær. Royndu tær at seta seg á skúlabeinkin hjá børnunum, læra tey at stava og venja tey til rættar føroyingar, so var tað til onga nyttu. Vættrarnar fingu einki hjálpt børnunum, tí tær skiltu ikki málið í teimum bókum, børnini lósu. Ikki fingu tær heldur lært børnini landsins søgu, tí børnini lósu eina aðra, sum vættrarnar einki vistu um.

Hetta er lagið. Ei dáni, vit tóku til rýmingar og høldust uttanhýsis. Tað er ikki rukkublikkið og bensinroykurin, sum hevur stygt okkum burtur, tó tey so siga, men tann óføroyski politikkurin. Er ikki so mínir lurtandi tegnar?«

»Jú, harra kongur,« ljóðaði í seyðastøðuni.

»Vit hava uggað okkum við,« tók hansara hátign afturíaftur og fettist á klíggjasteininum, »at okkara kroppstóru landsmenn hava eingi líkindi havt higartildags at taka land sítt aftur.

Men mínir tegnar, nú í hesum árum, tá ið — sum vit hava frætt — illvættrar eru uppi um allan heim, hava føroyingar nú brúkt tey sjáldan líkindi, at hava bert góðvættrar í sínum landi? Er lyndið í teimum kroppstóru nú soleiðis broytt, at tað sømir seg fyri okkum at búgva undir somu lon sum teir? Hvussu er við løgtingsvættrunum, sum hava noyðst at búgva í gloprum uppi á Kirkjubøreyni, næstan síðan Tróndur var á døgum, og bert onkuntíð, eitt nú tá ið Niels Winther talaði í tinginum, sett høvdið innum, summar av teimum, og hendingaferð síðan? Hava tingvættrarnar aftur tikið sess á Løgtingi? Nei, tær hyggja ikki á gátt.

Og nú, mínir tegnar, haldi eg ikki hetta fólkið hevur nakað at umbera seg við longur, fyri okkara egnu skuld noyðast vit at rýma til Noregs.«

Materiál chráněný autorskými právy

»Til Noregs, til Noregs,« róptu allir vættrar úr sunnaru helvt av Eysturoynni og nógvar norðaneftir.

»Men,« segði Sætti kongur á Nesi, »hóast tit hava kosið meg til kong, vil eg treyðugt lata nøkur boð ganga út, sum vættratjóðin ikki er á einum máli um, og skal tí mætasta vættur úr hvørji bygd siga, hvat hon og hennara bygdarvættrar halda.«

Tá ið kongur hevði talað, settist hann skamt frá tingsteininum har, sum Mógvur bóndi úti í Haga í Rituvík og Stilli bóndi niðri við Neyst í Runavík sótu. Tað var tøgn á tingstøðuni, vættrarnar høvdu fingið nógv at hugsa um. Tað var long tøgn, til Geisli bóndi fyri uttan Vegg í Oyndarfirði, sum nú var komin upp á flaggarðin, tók til orða.

»Guds náð,« segði hann, »tað verður sólleyst í oyggjunum, tá ið vit eru farnar. Hvussu skulu føroyingar liva, harra kongur, tá ið sólin ongantíð sleppur útúraftur.«

»Og, tygara hátign,« tók Fiskur bóndi við Grúgvu í Heimarustovu við Gjógv aftur í orðið, »tað verður fiskaloysi hjá føroyingum, tá vit eru farnar.«

»Ja,« legði Byrur bóndi, vættur ímillum Stavs og Veggja í Gomlustovu norðuri á Eiði, afturat, »og fara teir á flot, verður tað einki uttan andróður. Teir fara at rógva seg upp í rak eftir ongum.«

»Alt hetta vita vit sunnaru vættrarnar,« segði Stilli bóndi, vættur niðri við Neyst í Runavík, sum nú var komin upp á steinin. »Eg havi spurt Sild, konu mína, um hon leggur nakað í, um sildatorvurnar í Skálafirði fara sama veg sum grindirnar, og hon hevur sagt, at tað gerst ikki við; tað verður ikki okkara skuld, men teirra, ið styggja okkum burtur. Eg sigi sum kongur, til Noregs, um so Runavíkin verður slíkt brimpláss, tá ið eg eri farin, at neystini fara út og húsini við. Hvat heldur tú, skyldkonan?« rópti hann á Logn, sum nú sat langt burturi undir liðini á Fiski, manninum.

Logn reistist, henda vakra svarthærda vættrakonan, og segði, at tað visti hon við sær sjálvari, at fór hon, fór tað ikki at verða tespiligt hjá gjáarmonnum at rógva út ella fara til bjargar. Politiskt helt hon nú ikki skilið vera so heilt út av lagi, sum tær sunn-

Materiál chráněný autorskými právy

aru vættrarnar vildu vera við, »men satt er tað,« tók hon til, »at tað var ikki ov skjótt, um mannkynið í oynni tók eitt annað skinn um bak og tey eisini, sum vóru von at kalla seg sjálvstýrisfólk.« Men kom tingið á samt um at rýma, skuldu hon og maður hennara ikki sita einsamøll eftir í oynni av vættrum.

Hetta hoyrdi Mógvur bóndi úti í Haga í Rituvík og helt seg hoyra á lagnum, at tær norðaru vættrarnar himpraðust. Hann leyp á føtur, og var sum eitt síl eftir flaggarðinum til hann kom at tingsteininum og rópti so hart, at tað hoyrdist um allan tingstaðin, at heldur enn hann varð verandi í Rituvík, skuldi tað bráðna undir svørðinum, og hvørt mósindur flotna út á sjógv, og suðureysturoyingar ongan kongul fáa til hús. »Líka leggi eg í,« físti hann, »um tað verður tann kolsvarti eldsløkkingur sunnan fyri Gøtuvík, nú skulu teir fáa tað so svart, sum teir vilja, eg havi einki friðskjól notið inni við eldin hjá teimum, meðan teir høvdu torvið.«

Tað visti eingin um, at nøkur vættur nakrantíð hevði tikið so ilsliga til orða. Stilli bóndi niðri við Neyst í Runavík togaði í kotið á Mógvi, og bað hann ikki standa og tosa sum eitt óvætti.

»Tað man vera,« sigur hann, »at hatta slagið tú tosar um, er ikki betri vert og ongan rætt hevur til at pína eld burtur úr føðilandi okkara, sum tað svíkur hvønn dag, men tú mást ikki hótta, svágur, tað sømir ikki góðvættrum úr Eysturoynni; vit rýma við sorg og ynskja alt gott fyri okkara trøllvaksnu landsmenn, hóast vit vita, at tað fer at ganga teimum illa, tá ið vit eru farnar.«

Tá settist Mógvur bóndi úti í Haga í Rituvík, men tað var skilligt, at nú var ilt komið í nógvar av teimum sunnaru vættrunum. Reki bóndi niðri í Fjøru í Lamba reistist og tók soleiðis til, at tað fór at verða harvið, um tað ikki rak upp undir einar tuflur aftur á Lambavík. »Ikki skal eg seta tykkum aftur.«

Tað sá illa út fyri eysturoyingum, tá ið Veftur bóndi á Tekjuni í Elduvík reistist har, sum hann stóð, og snúðist beint móti tí seinasta talaranum. »O beiggi, tygum og rituvíkingurin, tit halda so lítið um suðureysturoyingar, tit kenna teir betur enn eg, so eg skal einki siga, eg kenni bert elduvíkingar, og teimum beri eg alt gott. Satt er tað, at vit hava noyðst at búgva uppi á tekjuni, men

Materiál chráněný autorskými právy

tað er gott tilfar í elduvíkingum, og so mikið haldi eg meg hava hoyrt og sæð niður ígjøgnum ljóaran, at tað verður ikki leingi, til teir aftur unna frælsisvættrunum sess inni við eldstaðin. Man tað ikki fara at ganga tann vegin har suðuri á landinum eisini? Vit vættrar í Elduvík hava ongan hug at rýma, men fer kongur, skulu vit fylgja.«

Nú sást ein ógvuliga prúð vættur við stórum skeggi ganga yvir at tingsteininum. Leingi stóð hann tigandi, og øll hugdu upp á hann, tí eingin hevði sæð so sítt skegg. Tað var Hugur bóndi, vættur fyri oman Garð í Fuglafirði.

»Tað er vættrum kunnugt,« byrjaði hann, »at síðan Andras kom at verða sýslumaður í bygdini, hevur eingin vættur búð innan fyri garðarnar í Fuglafirði. Tað hava vit fuglfjarðarvættrar tikið til ráða, og haldi eg hetta vera slíkt, ið liggur øllum eysturoyarvættrum á, og mæli eg til at rýma sum skjótast, tí eingin fer at siga okkum ringar fyri tað.«

Síðan talaði Stilli bóndi aftur leingi við nýtum orðum og var á einum máli við teir Hug, Reka og Mógv.

Gandur bóndi, vættur undir Hjallinum í Gøtu, hann dró á bæði, men niðurstøðan hjá honum var tann, at »farast má, vit hava so leingi væntað Trónd Annan í Gøtu, og enn hevur hann ikki verið komin.«

Tað var farið at lýsa fyri degi, og enn var tað ikki avgjørt ímillum Fjarða, um tann sovandi sambandsoyggin skuldi vera vættraleys ella ikki.

Tá reistist ein lítil berskøllut vættur við vitugum eygnabrá aftarlaga í støðuni og segði, hann var úr Funningi. Øll skimaðust. »Eg eri Seiður bóndi undir Skjøldrinum í Niðarustovu í Funningi. Eg havi leingi hugsað um henda spurningin, sum her er til umrøðu, og undrast á, at vit ikki langt síðan eru rýmdar. Sum nú er, haldi eg ikki, vit skulu rýma. Illvættrar eru uppi um allan heim, hvar skulu vit fara? Eg haldi eisini, at vit skulu geva okkara stórvaksnu landsmonnum freist til heimsbardagin, sum illvættrar uttanlands hava spunnið í, er lokin, og eitt ár afturat. Tá skulu vit hittast aftur, og verður tað annaðhvørt fráfaringarfundur ella gleðifundur, tí eysturoyingar hava boðið frælsisvættrum heiðurssess.«

Materiál chráněný autorskými právy

Hetta var so væl talað, at alt tingið gjørdi fagnaðarróm, tær sunnaru vættrarnar við.

Kongur gjørdi seg til at røða og brátt stóð hann á steininum við Stilla bónda, vættur niðri við Neyst í Runavík, undir liðini. Hasi vitugu orðini, sum handa skilavættur úr Funningi hevði borið fram, vildi nú kongur gera til síni, »tí ikki skulu vit rýma, tá ið vit ikki eru á einum máli um tað.«

»Og ikki dylst tað,« segði hann, »at framgongd hevur verið í øllum bygdum í stríðsárunum, tó ikki nóg mikil. Tað eru nú míni boð, at vit hittast á tingstaðnum ár eftir friðin, tá krevja vit ta romu broyting og ongar millumleiðir. Loysing ella vættraloysi, tað skulu oyggjaskeggjarnir vita, sum nú munnu vakna úr svøvni í bygdunum fram við sjónum kring um oyggj okkara. Tað er hálvaljóst, tað sær illa út í veðrinum. Mínir tegnar, farið til gongu hvør, ið hættar sær at fara ímóti degi. Okkum sunnaru bilar ikki, vit eru so væl mannaðar.«

Tingið var slitið. Vættrarnar heilsaðust. Byrur bóndi, vættur millum Stavs og Veggja í Gomlustovu norðuri á Eiði, fór við børnunum, og allar eiðisvættrar. Tær royndu at sleppa sær niðanfrá, áðrenn tað var alljóst.

Byrur bóndi tók seg skjótt burtur frá hinum. Hann fór at leita eftir konuni. Hann mátti nú ganga á degi, skuldi hann finna konuna, tí stórur er hagin og vættrar smáar. Hann fann møðgurnar oman fyri Funningsfjørð, har gingu tær og hentaðu ber og vístu seg at hava gloymt fundin. Tær høvdu funnið eini hálvthundrað ber, so alt húsið fekk døgurða.

Síðan taldi Hýsa børnini. Tey fóru til gongu. Byrur helt, at heldur skuldu tey ganga á degi enn liggja óveður á seg; tað var ikki gamansleikur, skuldi kavi leggjast, at liggja uppi við fjøll við smábørnum, sum ikki vóru størri enn flykrur, lítiðbetur.

Enn var einki tosað um fundin, men tá ið tey vóru komin norður í Sáttarenni, fór Hýsa at fregnast, og glað var hon, tá ið hon frætti, at enn skuldi ikki rýmast.

»Eg havi gingið og hugsað og hugsað um, hvussu vit skuldu fáa allar búnytturnar við okkum. Og, góði Byrur, eg skal siga tær, at tað hevði nitið í hjartað at farið úr Gomlustovu, har sum eg havi búð so leingi og átt fimtan børn.«

Materiál chráněný autorskými právy

»Tú hugsar nú bert um teg sjálva,« segði Byrur.

»Tað er rímiligt, hugsi eg kanska ikki eisini um børnini?«

»Og um børnini,« játtaði Byrur, og fór nú at halda taluna, sum hann ikki hevði hildið á tinginum. Hann segði tað mesta, sum hinir høvdu sagt, og Hýsa lurtaði lítið eftir, fyrr enn hann tók hesi orðini uppaftur, »at tað dylst ikki, at framgongd hevur verið í stríðsárunum;« tá støkk fram úr henni, at »kanska tey fara at skikka sær betur í Gomlustovu.« Men tá ið Byrur tók til orðini, ið Veftur bóndi á Tekjuni í Elduvík hevði sagt og rendi sýruleggin, hann brúkti til stav, í jørðina við hesum orðum: »Tað man ikki fara at vera leingi, til eysturoyingar aftur fara at bjóða vættrunum heiðurssess inni við eldstaðin,« tá glógvaðu eyguni í Hýsu.

»Vælsignaður Byrur,« segði hon, »heldur tú vit sleppa at búgva aftan fyri torvkassan í Gomlustovu, tað havi eg leingi hugsað um —.« Hýsa táraði. Hon mintist aftur á øll árini, hon hevði pínst av gikt úti undir væðingini. Og dreymin um torvkassan, sum hon ongantíð hevði torað at sagt manninum frá fyrr enn nú. »Heldur tú vit fara oman, Byrur?«

»Eg veit ikki, um vit hirða,« segði Byrur. »Tað veldst um gomlustovufólkið.«

»Har hevði eisini verið so rúmsátt,« segði Hýsa, »minst til, at børnini vaksa í hvørjum. Heldur tú, tað verður til tað?«

»Eingin kann ætla,« segði Byrur, og tendraði lyktina. Tað var myrkt nú, og Byrur ætlaði ikki at unna teimum svøvn fyrr enn aftur ímóti morgni.

## Hugskot

*uppi yvir einum hálvpiðaðum háryggi*

Stundum havi eg hoyrt onkun siga, at honum dámti skerpikjøt. Slætt og rætt: honum dámti skerpikjøt.

Slíkan mann vil eg ikki vita meira um. Honum nýtist ikki at siga meira, eg haldi meg longu kenna hann inn at sálini. Eg fái

Materiál chráněný autorskými právy

hug at siga við hann: Tú veitst ikki, hvat skerpikjøt er, tú etur kjøt sum grind, tú ert barbárur. Undarligt at spyrja, ert tú giftur? Eigur tú eina vakra konu ella unnustu? Tá ið nú hon hellir vanga og lýðir tær í oyra, at hon elskar teg fram um allar aðrar menn, rópar tú so aftur ímóti slætt og rætt, at tær dámar konufólk? Gert tú ongan mun á konufólki?

Forna føroyska kjøtmentan! Mær ert tú kær, men hvørt djúpt ert tú sokkin! Fedrarnir kortløgdu krovið, tað føroyska krovið — teir funnu bitarnar. Eins og hoyvandur seyður, sum sleppur fram at einum skjøtli, luttar seg fram, rakstrarhoyggið letur hann vera, hann hyggur ikki at tí tøðufreka, leitar og luttar, til hann finnur tey stráini, honum dámar, nóg turr, nóg forn, nóg angandi. Soleiðis kannar tann sanni kjøtátarin sær sítt stykki av teimum tjúgu, ið krovið hevur.

Sig ikki, tær dámar kjøt! Sig, tær dámar válgara ella tjógv, men skila til, um tú vilt hava ærtjógv ella lambstjógv; skal tað vera veðurlamb ella gimburlamb? Hvussu vilt tú hava tað? Nýturt?

Kjøt valdast. Hárógvin svíkur ikki. Kanska tú velur tær hana. Eins og *hin* gyllinamaðurin, sum átti inni í hjá markabóndanum. Hetta var á klipping og bert hálvt til gyllinin. Gyllinamaðurin fletti og býtti á skinninum: Hárógvin móti øllum krovinum umframt hana. Tá flenti hann, tá ið hann sat eftir við hárógvini, bóndin hevði tikið eftir nøgdini. Lítið dugdi hann at meta gleði gyllinamansins uppi yvir hárógvini, hó hon var einsamøll.

Eg kendi eina gamla konu; hon liggur nú í sínari grøv, hon hevði kjøtvit og doyði lukkulig. Tá ið hon náddi at býta avroð saman við øðrum konum, tá segði hon við tær, at vinstrina tók hon, um enn hon var aleina. Hon segði tað frammanundan, tær skuldu ikki tí leggja í at leggja nakað upp á hana. Eitt langt lív hevði lært hesa gomlu, at av tí, sum innan í krovinum var, var einki ímóti vinstrini.

Tað er sjáldan, at tann ungi maðurin hevur tað rætta kjøtsinnalagið. Tað er so mangt, sum vil ørkymla hann. Hann hugsar so mangt. Um kvinnuna, føðilandið, Várharra og allan heimsins vakurleika, roysnisbrøgd. Alt hetta ger, at hann telgir kjøtið niður í seg, og sálin er burtur øðrumegin.

Materiál chráněný autorskými právy

Tann hugsunarsama kjøtgleðin fellur tær ikki í lut, fyrr enn tú fert at vera um hálvan aldur. Tá fert tú at vera inntonktur og velja tær teir lutir, sum tyngstir eru uppi í hondini, men bert teir, sum hava varandi virði. Kjøtið kemur aftur hvørt ár, og eldri tú verður, minni hugsar tú um annað enn tað, til tú sovnar burtur á ellisárum við tí seinasta rákanum í munninum.

Leingi havi eg ivast í, hvat ið besta stykkið var á krovinum. Himpraðist millum soltistykkini og tey feitu. Eg var um ivin at taka fastamatin, men geldærarivið væl turt og hagagott, tað sanniliga beyð ikki ímóti heldur.

Nú havi eg kosið mær háryggin, og tann, sum velur hann, hann velur ikki uppaftur. Trúgva skalt tú mær, at veðurlambsháryggurin hevur nógv fram um onnur kjøtstykki. Hann hevur tann djúpa rákan, sum livir í minninum. Eg tosi ikki um útmatin, men um tað drivna inni við bein og inn í millum anganna. Tað er síða og tjógv í senn, men betri, feitt og soltið samanvovið frá náttúrunnar hond, ófatuliga smakkgott.

Og so tað, at tað er so ringt at sleppa at tí. At telgja uttan av einum háryggi, tað dugir hvørt konufólk, men tað er mansverk at piða hárygg. Far nú ikki og loyp tað út í orð, at eg eri ikki góður við konuna, hon fær alt, hon sleppur alt! Uttan at piða hárygg. Tað skal gerast væl. Tað vil eg sjálvur gera, og eg vil hava hvassan knív.

Summir brýna knívin, áðrenn teir fara í grind, aðrir tá ið teir leggja upp undir tuflur, men tá ið háryggurin er so mikið etin, at tað sæst bein, tá fari eg á steinin.

Ein regndag, tá ið einki gerst úti, seti eg meg við hárygginum á ein lágan skammul, hendurnar fram á knøini, eg gevi mær góðar stundir og leggi einki í, um eg eri einsamallur. —

Hann er tungur uppi í hondini, hesin háryggurin. Jú, jú, tað var eitt rættskaffið lamb, minnist eg, sjáldsama kjøtugt. Eg minnist, tá ið tað varð lembt hesa tíðina í fjør, tá vart tú klantrasligt, neyðardýrið, tú hekst uppi í mammu tínari.

Skjótt fór tað at taka strá sum mamman. Fyrst var tað summardáarnir, tú leitaði eftir, býttlingurin, teir vóru vakrastir. Tú tanlaði teir eina løtu og spýtti teir út aftur. Aftur at renna eftir

Materiál chráněný autorskými právy

summarfuglunum, tað var stuttligari. Men ongantíð gloymdi tú súgvingina. Tað verða bitar á veturnáttum, hugsaði eg.

Mangt er at minnast, meðan tú piðar hárygg. Tá ið seyðurin fór av bønum, var tað longu væl stórt, knavarnir vóru vaksnir. Tá var renning og snjøll jarming. So titaði tú til fjals í hølunum á mammu tínari.

Títtari leikar knívurin á háryggi mínum. Smærri verða nartlini, eg dragi upp í meg. Tað ger einki, tí, søti mín, tað er ikki nøgdin, men dygdin, sum ger smakkin.

— Tað er heilsu- og sálarbót hjá tungførum manni at sita við hárygginum, meðan tankarnir eru hjá lambinum, hann skar hann av, og fylgja tí í uppvøkstrinum.

Eg sá tað undir rókunum, meðan sólin skein, tá var tað skjótt, tú dróst hold á teg, og ryggurin tók at leingjast. Aftur komst tú frá fjallinum við mosa undir barkanum. Tá vart tú grovmælt og ógvuliga frammikið. Knavarnir vóru horn nú, tung horn, til tess at háryggurin skuldi mennast av at bera tey. Hann er tí fastur nú, góður og drúgvur.

Tað verður ikki í dag, eg verði liðugur við hann. Tað verður næstan sum hjá hinum, ið hevði hárygg við sær yvir á Suðurlandið, át av honum hvønn dag og hevði hann síðan heim aftur við sær, tí hann var ikki liðugur at piða hann.

Hvussu gott er tað ikki at hava ein hárygg at ganga á. Í morgin fari eg aftur at eygleiða lambið við móðurlið, sum livdi sína ævi eitt langt summar við móðurmjólk og grønt gras.

Meg skal einsemi ikki nerva ella tungir tankar. Tað er sól, eg eti, og døggvátar nálir, sum spruttu millum skriðusteinar uppi við fjøll.

Verðin er góð. Lívið er væl livandi.

Materiál chráněný autorskými právy

## Tjúgundi maður umborð

Oman frá sýslumansskrivstovuni er ein smøl gøta, sum gongur fram við eini á, ið rennur so møk, at vatnið í henni er mest sum støðuvatn. Tað er ikki fyrr enn tú kemur næstan oman á bakkan, at áin tekur ferð á seg, og tú sært, at tað er ikki meir enn ein løkur, og tað er ein langur hylur, tú hevur gingið framvið....

Hetta var ein góðveðursdag seinast í mars. Skipini vóru farin. Uttan ein gomul slupp, sum lá við bryggjuna. Manningin kom oman frá sýslumanninum. Teir gingu hvør aftaná øðrum, skiparin fyrstur, uttan ein maður, sum gekk hinumegin ánna, tað var bestimaðurin.

Eingin talaði. Skiparin hugdi aftur um bak sum til at kanna henda riðilin av monnum í stivlum og posatroyggju. Læt eyguni dvølja við hvønn einstakan. Tá ið hann kom til bestamannin, sum gekk hinumegin ánna, vendi hann skjótt høvdinum aftur og hugdi sum fyrr niður í vegin.

Heldur løgligur maður, hasin sunnanmaðurin. Tað var, sum um hann skildi seg burtur úr hinum fólkinum. Men gott var tað tó, at hann fekk ein bestamann. Máti við, sum tað hevði gingið illa at fáa fólk í ár. Og so, tá ið farast skuldi, legðist tann gamli bestimaðurin sjúkur. Eina viku hevði hann bíðað, men tá ið hann so fór á sjúkrahúsið, so batti ikki at bíða longur. Tá kom hasin fremmandi maðurin og beyð seg til. Raskur skuldi hann vera. Bestimaður hevði hann verið fleiri ár við suðuroyarskipum, men her kendi eingin hann. Hitt var alt kent fólk, norðoyingar, summir høvdu verið við honum í nógv ár.

Skiparin kastaði uppaftur eyga at bestamanninum hinumegin ánna. Løgligur maður, gekk og stardi niður í ánna. Skiparin mátti eisini lata eyguni snjúgva tann vegin. Spegilsmyndirnar av manningini førkaðu seg omaneftir áraka menninar í posatroyggju og stivlum. Løgligur maður, hasin sunnanmaðurin, heldur at vilja hyggja at spegilsmyndini av monnunum enn at manningini sjálvari ella ganga saman við monnunum.

Manningin var nú komin á tann breiða vegin fram við vánni, og brátt vóru teir umborð. Alt var klárt. So varð leyst. Skipið

Materiál chráněný autorskými právy

stimaði út av vánni henda blikastilla seinnapart. Alt fólkið var á dekkinum. Tað var sum av sær sjálvum, at fólkið savnaðist millum vantini. Vaktirnar skuldu setast. Nú komu yvirmenninir framat. Bestimaðurin vísti seg at fara at roynast. Alt vísti seg at liggja raðið fyri honum. Á skipsdekki var hann heimakunnigur. Hann var ikki tigandi longur.

»Íðan,« sigur hann heldur lívliga við skiparan, »tað vera so tíggju á vakt.« Tá hugdu summir, aðrir smíltust. Ein gamal svartskeggjutur maður, sum leingi hevði verið við, teir kallaðu hann gamla Tummas, hugdi fyrst uppá skiparan, so uppá bestamannin. »Tað verður so við lemparanum,« segði hann. Tað var so merkiligt at hoyra henda gamla mannin siga hetta orðið, sum skuldi verða sagt til stuttleika, við gravalvorligum andliti. »Hann hevur nú ikki verið roknaður uppí,« segði ein annar eldri maður, sum eisini hevði verið við skipinum í mong ár, teir kallaðu hann Símun har Niðri. Skiparin tók nú orðið: »Tað verða tíggju til stýriborð og níggju til bakborð. Vit skiftast at taka, aðruhvørja ferð. Vel tær nú fyrst ein mann.

Bestimaðurin vísti seg nú at telja menninar. Tað vísti seg at ørkymla hann, at hann fekk ikki meira enn átjan umframt tann í stýrihúsinum. Tá ið skiparin nú einaferð aftrat bað hann taka fyrsta mannin, mutlaði hann okkurt sovorðið sum, at hann kendi ikki fólkið, bað skiparan velja sína vakt. Síðan bráðtagnaði bestimaðurin. Hetta var nú einki. Vaktirnar vóru býttar og lutur kastaður. Bestimaðurin fekk frívakt, og teir báðir Símun og Tummas við honum. Har vóru tveir hálvvaksnir dreingir, Pól og Jóannes.

Hann setti eitt tjúkn eystur í havi, góðveðrið mundi vera yvirstaðið.

So varð skaffað og inntørnað.

Har var skiparakamar og kahútt har afturi, men kahúttin hevði bert tríggjar koyggjur. Tað vóru teir bestimaðurin, motorpassarin og kokkurin, ið har skuldu vera. Motorpassarin var á bakborðsvakt, men hann skuldi vera hjá motorinum fyri fyrst — bestimaðurin var einsamallur. Hann legði í koyggjuna sum av handahógvi. Smoygdi sær úr troyggjuni og var inntørnaður. »Forbannað tvætl,« sigur hann við seg sjálvan. »Fult av pátrúgv,« tekur

Materiál chráněný autorskými právy

hann afturíaftur. Hann snarar sær á í koyggjuni. Nei, tað ber einki til at sovna, tað er ikki beinanvegin at sovna eftir vaktum. Bestimaðurin leggur seg fram á stokk at balla eina sigarett. — Merkiligur tilburður kortini. Hann sær aftur manningina fyri sær, tá ið hon kom gangandi oman gjøgnum bøin. Nítjan menn hvør aftan á øðrum sum um teir vóru samanbundnir, longst ímillum tveir teir seinastu. Ein repil av sáttligum norðoyingum. Nei, tann seinasti maðurin líktist burtur úr bæði í klæðum og medferð. Ein merkilig sjón, tann seinasti maðurin, sum eitt ið gekk í svøvni, sum eitt ið hinir drógu aftaná sær.

Bestimaðurin royndi at minna seg aftur á andlitið á hesum seinasta manninum. Nei, hann mintist tað ikki. Hevði hann í grundini nakrantíð sæð tað? Í hvussu hann hugsaði, kundi hann ikki síggja tað fyri sær. Hann kom ikki longur enn upp til turriklæðið, hetta merkiliga flákrandi turriklæðið, hvussu var tað, tað var vorðið? Var tað hvítt, ella var tað reytt, tað var? Ella var tað ikki bæði hvítt og reytt?

Nú mintist bestimaðurin, at tað var ikki fyrr enn hann sum av óvart fór at hyggja niður í ánna, at hann fekk eyga á tann seinasta mannin, spegilsmyndina av honum. Tað var har, hann hevði talt nítjan menn umframt seg sjálvan. Ja, hevði hann í grundini sæð tann seinasta mannin uppi á bakkanum? Nei, hann hevði ikki. »Merkiligt, at eg havi ikki hugsað um tað fyrr enn nú,« segði bestimaðurin við seg sjálvan. »Nú er tað dekan og seint, nú eg havi verið til gjøldur: ikki at vita talið á manningini umborð.«

»Hevði eg vitað tað, at høvuðleysa helviti títt ikki var til uttan undir vatni,« royndi bestimaðurin at skemta fyri seg sjálvan, men tað eydnaðist nú ikki reiðiliga at rista tann tjúgunda mannin av sær.

»Hvat fanin er hetta, er tað ikki nóg mikið, at norðanmenninir eru fullir av pátrúgv?«

»Ha, ha,« royndi hann uppaftur at skemta. »Ert tú mynstraður? Og slapst ikki við? Hvussu? teir taldu ikki meir enn nítjan frammi á miðjuni í áðni?«

»Eg eri við.«

»Hvat fanin er hatta, eg helt meg hoyra innan fyri garneringina. Halt kjaft, eri eg nú eisini farin at hoyra yvir meg? Er skipið

Materiál chráněný autorskými právy

gandað? Nei, her verður eingin svøvnur í kvøld.« Bestimaðurin ballaði sær eina sigarett afturat.

»Við ella ikki við, eitt sum ikki vísir seg uttan í áum sum nykur, ætli eg mær einki at leggja í. Her skal eg ráða á míni vakt í hvussu er.«

»Tú sært meg aftur.«

»Halt kjaft.«

Merkiligir tankar, ið koma á menn við hvørt um várið, tá ið teir fara út. Bestimaðurin royndi nú at hugsa um fólkið, ið við var, og helst um sína vakt. Alt norðoyingar. Ja, hví ikki tað. Tað vísti seg at vera hampamenn. Men hvørki so er tað at koma sum yvirmaður og ongan kenna. Tað var best at gera seg til vins við hesar báðar prentusarnar, Pól og Jóannes, fyrst, fittir dreingir.

Útpurring!! Ja, so kom fyrsta hundavaktin. Skipið fekk ein hivara. »Eg meini hann ruskar.« — »Ja, tað er longu nógvur vindur.« — »Hvussu sigla vit?« — »Rúman bidevind.«

Bestimaðurin fór á dekkið. Kolmyrkt. Tað hvítti reiðiliga í aldunum, men teir sigldu við fullum seglum. »Fyri mær skulu tey standa, ræddan skulu teir ikki kalla meg,« helt bestimaðurin fyri seg sjálvan. Hann loysti av, men læt skjótt Pól fáa róðrið. Símun var hjá honum. Bestimaðurin fór fram at fáa sær kaffi.

Her hevði deksvaktin longu lagt seg á beinkin, uttan Tummas og Jóannes, teir sótu fram á borðið. Bestimaðurin skonkti sær kaffi og settist við borðið tímegin, sum tann ungi drongurin, Jóannes, sat. Tøgn. Bestimaðurin smurdi sær uppá eina keks. Har frammi var ófriðarligt, og skipið gav seg, tí seglini vóru stór eftir vindinum.

»Tygum hava verið fyrr við hesum skipinum,« segði tá bestimaðurin við gamla Tummas.

»Fimtan ár.«

»So kenna tygum skipið, hvussu er hon til styrki? Hon gevur seg nakað illa frammi í skarpinum.«

»Eitt toyggir, annað slítur. Hon hevur verið nógv pressað hesi fimtan árini á Suðurlandinum.«

»Ja, eg hoyri hann roynir hvørt ár í Meðallandsbuktini. Har hava nógv lagt beinini, sum ikki sluppu útfrá aftur, tá ið hann kom lágt. Tað kemur sum eitt skot.«



Materiál chráněný autorskými právy

»Okkum hevur ikki bilað. Hann plagar at siga frá í góðari tíð.«

»Ja, hvat tygum?«

Tøgn eina løtu.

»Sigið mær eitt, tygum Tummas. Tygum taka mær tað ikki illa upp: Hvat meintu tygum við í gjár, tá ið tygum nevndu lemparan? Hvør er lemparin?«

Gamli bar seg undan.

»Íðan, sum tygum vilja.« Bestimaðurin gjørdi seg til at fara á dekkið, hann bað Jóannes koma við sær.

»Hann vil okkum einki ringt,« hoyrdu teir gamla siga, tá ið teir fóru upp gjøgnum leytaran.

Vindurin trilkaðist. Bestimaðurin og Jóannes tóku sær løgi aftur eftir dekkinum aftur í stýrihúsið.

»Tú Jóannes, far mær niður í seglkoyggjuna. Vita um ein minni klyvari liggur toluliga klárur. Eg hugsi, vit mugu taka tólvdúkin.« Jóannes var trekur. »Far nú, søti mín.« Bestimaðurin var ikki vanur við, at menn ikki gjørdu sum hann segði. »Hví fert tú ikki?«

Tá kom svarið: »Eg tori ikki.«

— »Torir ikki niður í lastina? Hví?«

»Tað er ein deyður maður har niðri.«

»Hvat fanin tvætlar tú? Hvat er tað fyri maður?«

»Lemparin.«

»Hvat veitst tú um lemparan. Ha! Sig mær tað!«

»Pápi sigur....«

»Pápi, hvør er tað?«

»Tummas er pápi mín!«

»So.«

»Pápi sigur, at lemparin hevur verið við øll tey fimtan árini, hann hevur verið við skipinum. Næstan hvørt ár hevur hann givið seg til kennar onkuntíð. Summi ár meira, summi ár minni. Ongantíð fyrr enn henda túrin hevur hann verið við til at mynstra. Hann veit altíð fisk ella feigd í. Pápi sigur, tað verður ikki fagnartúrur.«

»Hoyr lítli mín, pápi tín er fullur av pátrúgv. Lurta ikki eftir. Lat okkum báðar fara niður í seglkoyggjuna.«

Teir fóru niður og hálaðu ein sjeydúk fram. Har var einki merkiligt.

Materiál chráněný autorskými právy

»Nú Jóannes rádni, sum tú sært. Ber pátrúgv. Sig mær, hvussu skuldi hesin góði lempari verið komin í lastina á skipinum?«

»Pápi sigur, at tá ið skipið var keypt í Onglandi, og teir skuldu fara at taka eitt sindur av barlast úr tí, funnu teir eitt manshøvd í kjølinum. So løgdu teir afturyviraftur. Kroppurin skal liggja eftir í kjølinum.«

Teir vóru nú komnir aftur í stýrihúsið.

»Hoyr Pól, hevur tú eisini hoyrt um mannin í lastini?«

»Allir vita um mannin í lastini. Hann er vinmaður við skiparan.«

»Hevur tú sæð hann?«

»Ikki enn.«

»Ja, eg fari fram. Tit verða skjótt avloystir.«

Bestimaðurin fór fram aftur í lugarið. Tað bataði ikki at siga annað. Hann fekk ikki tann høvuðleysa mannin úr tonkunum.

Lugarið sá út sum í áðni. Lampan hekk og sveiggjaði undir skeilettinum og kastaði merkiligar skuggar í tí hálvmyrka rúminum.

Tummas sat fram á borðið, hann vísti seg ikki at hava vikað sær síðan í áðni. Eitt merkiligt skip. Tøgn og eingin gjørdi nakað. Bestimaðurin skonkti sær kaffi.

»Nú smýgur hon.«

Tummas stakk upp, hann hevði durvað sitandi.

»Skjótt yvirum við hetta lag.«

»Hm.«

Tað hoyrdist gongd á bógnum. »Hvør gongur í trægaggum her umborð?« spurdi bestimaðurin.

»Lemparin,« svaraði Tummas.

Bestimaðurin reyk upp í kappan.

»Hvat f....« Eiðurin steðgaði í hálsinum á bestamanninum. Hann sá ein høvuðleysan mann standa og fanglast við úthálaran á klyvaranum.

Tá ið hann kom niður aftur í lugarið, var Tummas longu í oljuklæðunum.

Bestimaðurin settist aftur at drekka kaffi.

»Íðan, skulu vit ikki taka klyvaran?« spurdi Tummas spakuliga sum í svøvni.

Materiál chráněný autorskými právy

»Hví fanin skal klyvarin takast?«

»Lemparin...«

»Halt kjaft við hasum lemparanum. Nú skal eg siga tygum eitt. Hetta er mín vakt. Her skal eingin uttan eg siga, nær klyvarin skal takast.«

»Tygum treiskast. Sum tygum vilja.«

Hinir á vaktini, sum eisini stríddust við at lata seg í oljuklæðini, tóku sydvestin av høvdinum. Har var ikki meira sagt.

Bestimaðurin skonkti sær uppíaftur.

So setti skipið nakað djúpt, so spritið mundið vera væl undir. Tað hoyrdist eitt skrædl og ein hvøllur brestur. »Nú reyk tólvdúkurin,« søgdu fleiri í senn, og varð hetta sagt, sum um tað var, sum tað átti at vera.

Allir á dekkið. »Henda túrin hevur hann sjálvur nógv um at vera,« mutlaði Tummas, tá ið hann fór upp gjøgnum leytaran. Áðrenn hundavaktin var yvirstaðin, var sjeydúkurin fyriafturkomin. Tað var ivaleysa stórur klyvari, sum nú var vindurin.

Bakborðsvakt tørnaði inn. Tá ið bestimaðurin tørnaði út aftur, var stórseglið repað og tvey í mesaninum. Hann var rúmari nú. Hon gekk sum á gróti.

»Skjótt yvirum sum nú gongur, Tummas, ha,« segði bestimaðurin, tá ið hann var framkomin at fáa sær tevatn.

»Hm.«

»Vit leggja í Meðallandsbuktina beinanvegin. Har hava tygum havt mangt tørnið, veit eg — eitt lúsa farvatn, ha!«

»Okkum hevur ikki bilað — — hann sigur frá, tá ið grynnist.«

»Hvør.«

Allir hugdu uppá bestamannin, hvør skal siga, er tað nakað at spyrja um.

Har varð ikki meiri tos — — —.

Nú gekk vakt av vakt, veðrið blíðkaði. Ferðin var góð. Skiparin var lítið uppi. Tað segðist, hann var sjúkur.

Lotið datt burtur. Besta fiskiveður. Fólkið gjørdi sær reiðskap. Tað var komið eystur á Meðallandsbuktina. Teir stimaðu enn.

Bestimaðurin hevði vakt, hann kom niðurundir har frammi. Hetta var seinnapartin.

Materiál chráněný autorskými právy

»Nú Tummas, eitt vælsignað veður.«

»Hm, ja í dag verður kanska toluligt, men hann brennir ringan afturáaftur.« —

Kaffi kom á borðið.

Tummas gjørdi skjótt av. Hann drakk eitt hálvt krúss, fór so í beinkin eftir svintuni.

»Óluksáligt, sum tygum eru bráður Tummas, enn er ikki avhálað.«

»Hann…« Tummas bendi høvdinum aftur ímóti lastini.

Hvat nú! allir tagnaðu. Tá hoyrdi bestimaðurin. Har var einki at ivast í. Eitt stóð og lempaði salt í lastini.

»Hvør er farin á banjaran?« Einki svar. Allir hugdu uppá hann, hvør skal siga, hví spyrt tú um tað.

»Vit hála av um ein tíma,« næstan rópti bestimaðurin, tó at hann, tá ið hann kom fram, hevði ætlað at hála av so skjótt, kaffið var drukkið. »Teir skulu fanan heldur enn taka meg av ráði á hesum gandaða skipi,« mutlaði hann innantanna og leyp til kappan, men tá var skiparin longu á kappanum og rópti niður, at »nú fara vit at bumma av.«

»Teir vita, hvar teir flóta,« mutlaði Tummas.

So vóru báðar vaktir á dekkinum. Bestimaðurin beit tenninar saman og bað teir taka forseglini og koyra skjøtini út.

Teir brendu í fisk. Men tá ið kvøldvaktin tók við, var longu nógvur vindur á landsynningi. Teir vóru heilt nær. Ræini av tveimum fransaskonnartum sóust langt niðri í læ. So tjúkti hann av. Fiskurin var í heinta.

Tá ið soleiðis ber til, kappast fiskigreðin við óttan um at fara á land. Bestimaðurin stóð, sum vant er at vera, aftastur. Hann dró sum harðast. Góður fiskimaður.

Stundum kveitti hann fram við lúnningini. Ein repil av monnum við vøttum og svintu, summir fílaðu, summir drógu, aðrir tóku fiskar inn.

Ein aldri helmandi heild av fólki, sum kortini arbeiddi hvør í sínum lagi. Nú kom kokkurin við tveimum frammi á konginum. An' grammur ikki er at hava kastað longu fyrsta dagin. Nú var bestamanninum aftur hyggjandi fram við lúnningini. Hann fekk

Materiál chráněný autorskými právy

ikki barað sær, men mátti bera hetta rað av lívligum monnum saman við hitt raðið av deydum, sum hann tá helt vera, tá ið teir komu av sýslumansskrivstovuni.

So hugdi hann oman í læ. Hvat var hatta? Hví stóð hasin eini maðurin og helt framman fyri stórvantið í læ? Har kundi ikki standa niður.

Bestimaðurin var komin á borð við tveimum fiskum, men hann orkaði ikki at taka teir inn, tí nú sá hann tað merkiliga hálsturriklæði, sum hvørki var reytt ella hvítt, framman fyri stórvantið í læ. Og hvat gjørdi handa óhugnaliga hvørvisjónin: Gjørdi snørið upp.

Bestimaðurin syfti av ovurhuga toskarnar inn um lúnningina og noyddi eygu síni uppaftur í lu.

Tað var týðuligt, at ampi var komin á fólkið, tí allir vistu, at teir vóru nær, og nú menti hann so skjótt vindin.

Merkiligt, at skiparin var ikki í stýrihúsinum. Og náttmyrkrið kom. Nú sá hann, at Tummas ætlaði sær ikki at kasta aftur. Hann loysti svintuna av sær.

Hvat f... Illsinnið reyk í bestamannin. Hann setti fast og reyk fram til hansara.

Tá rópti skiparin í stýrihúsinum: »Snørini inn. Setið á segl. Lat tað ganga skjótt. Set eisini motorin í gongd.«

Teir pressaðu alla kvøldvaktina. Tað sást ikki fram um sprytið fyri kavaroki.

Einki rep var í stórseglinum. Kortini var tað ikki meir, enn teir hildu pláss, tí teir tordu ikki at liggja meir enn ein knappan tíma hvønn vegin. Teir dúvaðu uppá, at hann skuldi støkka annan vegin.

Her svav eingin maður, men frívaktin lá í klæðunum. Tað var ikki hugsingur um at gera reint, sum nú var veðrið. Klokkan tólv tók bestimaðurin við vakt. Tá var ódn. Bestimaðurin var á dekkinum og fýra aðrir av vaktini. Teir báðir gomlu, Tummas og Símun, hildu seg í lugarinum og teir báðir hálvvaksnu, Pól og Jóannes, eisini, allir í oljuklæðum.

Teir ungu vildu blikna, hvørja ferð hon rendi gronina undir og kastaði seg til læ. Pól sat hjartkiptur og bíðaði hvørja ferð, til hon

Materiál chráněný autorskými právy

rættaði seg uppaftur. Tummas uggaði sonin: »Nei, søti mín, tað ger einki, bert tað er nóg djúpt. Eitt er at ræðast, tað er landið.«

Teir gomlu tosaðu um Meðallandsbuktina. Ofta hevur verið trongt. Eitt lúsapláss, tú veitst ikki av, fyrr enn tú stendur. Einki at líta uppá. Rivini flyta seg. Og tað ringasta er, at kumpassin er ikki eftirfarandi heldur. Teir siga, at botnurin ger hana óða í høvdinum, so tað fæst ikki ættarskil.

Nú kom bestimaðurin fram. Hann skonkti sær ein kaffimunn. »Og nú stendur væl til,« segði hann við Tummas.

»Hm.«

»Jú; hann er gingin eina hálva ætt eysturá síðan á midnátt. Eg vænti, vit fara at liggja uppá henda bógvin alla hesa vaktina.«

»Man tað vera?«

»Man tað vera? Heldur tú meg ikki kenna kumpass, gamli?«

Bestimaðurin fór aftur á dekkið. Tað gekk ein tími. Siglingin varð grovari og grovari. Tá ógvaðist Tummas, tá ið hann helt seg hoyra suðið á sandi í Meðallandsbuktini, tí tað er feigd.

»Leyp í kappan, sonur mín, vita um tú sært grunnbrot.«

Pól leyp í kappan.

»Hvat sært tú, sonur?«

Tað hoyrdist eitt skríggj. Drongurin kom eftir nakkanum niður aftur ígjøgnum leytaran.

»Hvat sást tú, sonur?«

Bestimaðurin bardist í stýrihúsinum við ein høvuðleysan mann.«

»Hvat berjast teir um?«

»Teir berjast um róðrið.«

»Væl veri lemparanum, hann vil bjarga okkum. Far upp aftur, sonur, og vita, hvør ið vinnur.«

»Eg tori ikki.«

»Far tú, Jóannes,« rópti Símun. Jóannes tók seg upp gjøgnum leytaran sum av ovurhuga.

»Hvat sært tú Jóannes?«

»Eg sá ein høvuðleysan mann renna fram eftir dekkinum og stoyta seg fyri borð framman fyri stórvantið í læ. — Nú síggi eg brim undir læbógvi.«

»Guð hjálpi okkum,« søgdu teir gomlu menninir.

Materiál chráněný autorskými právy

# Karsten Hoydal

*(28/3 1912)*



## Summarkvøld við Rockall

Vit vóru og leitaðu eftir einari dunnu, Diddan og eg. Tað var liðið so nógv út á summarið, at tjøldrini høvdu fingið ungar, og stararnir lógu aðru ferð. Tann gráflekkuta dunnan var órein, tá ið so langt var útliðið, og smoygdi sær altíð burtur um kvøldini og steggin við henni. Eg gav honum skyldina, men Harrin viti, um tað var ikki hon, ið dró hann við sær. Tí tá ið eg hugsi meg um, var tað altíð hon, sum var á odda, hann gekk mest og slómaði aftaná.

Materiál chráněný autorskými právy

Vit høvdu leitað nakað leingi, Diddan og eg, men einki vit høvdu funnið. Nú vóru vit komin oman at ánni, sum rann spakuliga í mjúkum bugum eftir slættanum. Tað var so seint á kvøldi, at seyðurin var farin at leggja seg á ból uppi á høvdunum, sumstaðni dagaði onkur upp ímóti luftini og stóð og bíndi dovisliga vestureftir.

Tað plagdi at yðja av sílum niðri í ánni, men í kvøld sóust tey ikki. Vatnið var so svart og djúpt. Diddan spurdi, um tey svóvu, og hvussu tey svóvu, um tey lógu á rygginum ella á búkinum. Eg visti ikki rættiliga, men lætst at vera klókari enn hon og svaraði, at tey lógu á liðini.

Niðri við Rockall steðgaðu vit. Tað er ein stórur steinur, sum stendur út úr áarbakkanum og gongur út í dýpið. Maður grynnir valla niður við honum. Eg var vanur at sita og fiska síl her líðilangar dagar, kendi hvørja tinnu í steininum og ræddist als ikki fyri at fara út á hann. Men Diddan tordi ikki. Eg bað hana koma við, men ikki at bjóða til. Sjálvt tá ið eg tók í hondina á henni, aftraði hon seg og kom nøtrandi aftan á mær.

Hon hugdi við stórum glómum niður í tað svarta vatnið og spurdi, um tað var djúpt. Eg svaraði, at tað var minni enn so, at hon grynti har. Hon spurdi, um eg grynti. Men fyri at hon skuldi ikki halda meg vera líka lítlan sum hon sjálv, svaraði eg, at einki vaksið fólk var so stórt, at tað grynti har.

Eg segði henni, hvussu øgiliga stór sílini vóru undir Rockall. Tey vóru ikki fiskandi við vanligum maðki. Tað var ov smátt agn, tey fýltust á tað og vildu ikki taka. Og sjálvt um tey høvdu tikið, var eingin maður í verðini so sterkur, at hann orkaði at syfta tey upp á land.

Diddan øtaðist og eyguni vuksu.

»So stór,« segði eg og fevndi, so at armarnir peikaðu beint aftureftir og eg sjálvur mundi farið av fótunum.

»Hvat er hatta?« spurdi Diddan og peikaði á tað svarta grasið, sum vaks á botninum fram við steininum. »Er hatta tari?«

Eg kveitti at Didduni, og alt í einum barst tað mær fyri, at grasið á botninum líktist hárinum á henni, sum hekk í dimmum trevsum niður eftir bakinum, kleimið av døgg.

Materiál chráněný autorskými právy

»Hatta er hár,« svaraði eg og segði henni, at ein lítil genta eina ferð datt út í ánna her og druknaði. »Jú, sanniliga,« tók eg afturíaftur orðið og hugdi gjølla at Didduni, um hon trúði mær ella ikki. Sjálvur trúði eg tí, men gav mær í løtuni ikki far um, hvaðan søgan var komin.

»Streymurin tók hana,« segði eg, »og førdi hana inn undir Rockall. Hon druknaði. Eingin sá hana nakrantíð aftur. Men aftaná tók hárið á henni at vaksa og breiddi seg út undan steininum allastaðni. Tað er tað, sum tú sært niðri á botninum.«

Hvør ið hevði sagt mær søguna, spurdi Diddan. »Eingin,« segði eg, »men tað er kortini satt, sum eg sigi,« skilaði eg til. »Tað er so ónatúrliga langt síðan tað hendi. Tú vart ikki fødd tá.« Um eg var føddur, spurdi Diddan. Eg hevði ikki væntað henda spurningin og visti ikki rættiliga, hvat eg skuldi svara. Svaraði eg nei, kundi hon halda okkum bæði vera javngomul og tí missa álitið á mær.

Tí svaraði eg: »Tú ert býtt — nógv longri síðan. Pápi var ikki føddur, abbi heldur ikki.« Hetta ljóðaði øgiligt.

Hon tók so fast í hondina á mær, at hon næstan klípti meg og royndi at toga meg inn av steininum. Eg eftirlíkaði henni, og vit fóru so hond í hond bæði tøssandi ígjøgnum grasið oman við ánni.

Nú mól dunnan fram fyri okkum aftur. Hana høvdu vit heilt gloymt.

Hvar ið hon mundi vera? Diddan helt, at hon kanska sjálv var komin at húsum, og at vit fyrst skuldu fara niðan í túnið at vita, um hon var har. Men tað helt eg vera steinbýtt, tí so tóku tey okkum og koyrdu okkum í song beinan vegin, og eg hevði nú nógv betri hug til annað.

»Hon man helst vera farin oman ígjøgnum alla ánna, oman á Boðanes,« helt eg. Tað hevði hon gjørt fleiri ferðir. Diddan mølmaði okkurt um, at tað var so langt, og at hon var móð, men eg lovaði at leiða hana allan vegin, og so eftirlíkaði hon mær.

Tað skuldi hon ikki havt gjørt, tí eg var orðloysingur og slepti hondini aðruhvørja løtu. Komu vit til eitt stað á áarbakkanum, sum líkindi vóru at reiðrast undir hjá eini dunnu, so var eg burt-

Materiál chráněný autorskými právy

ur, og Diddan stóð einsamøll eftir. Eg feyk sum ein hvirla aftur og fram, fram og aftur stein av steini tvørtur um ánna, otaði meg longri og longri oman, meðan hon trúliga fylgdi mær øðrumegin við. Við hvørt rópti hon á meg, at nú vendi hon aftur, men tá lovaði eg at koma beinan vegin og ikki fara frá henni aftur, og so gekk hon aftur eitt petti. At enda hevði eg soleiðis gingið og lokkað hana heilt oman á fløtuna niðan fyri fossin, men tá eydnaðist eisini at finna dunnuna. Hon lá á einum eyri tætt inni undir áarbakkanum og krógvaði seg og steggin hjá henni so tætt við, at veingirnir á teimum bóru saman.

Eg veit ikki, hvussu seint tað var á kvøldi, tá ið vit fóru at reka dunnuparið at húsum — vit góvu okkum ikki far um tíð og klokkutíma — men lyngurin á brekkuni vestan fyri ánna var svartur og hellan niðri á Boðanesi var svørt, og á gøtuni eystan fyri ánna fóru tvey vaksin fólk, sum gingu tætt til samans, og sum eisini vóru svørt.

Diddan spurdi, hvat tey gjørdu, og hvar tey fóru og setti meg fastan. Eg visti ikki rættiliga, hvat tað hevði at týða, tá ið vaksin gingu so tætt til samans, men hevði kortini varhugan av onkrum. Í hvussu er visti eg heimanífrá, at tað var sovorðið, sum teskað var um, og sum skuldi dyljast fyri børnum — júst sum tá ið kettan fekk kettlingar, og at tað var nakað, sum børn ikki áttu at tosa um. Men eg kendi ótemjandi hug at siga Didduni frá onkrum av tí, sum eg visti. Tað minkaði als ikki um virðið av mær í hennara eygum, tvørturímóti.

»Tey fríggja,« segði eg spakuliga. Hvat ið tað var? »Tað er, tá ið tey ganga soleiðis sum tey bæði har yviri á gøtuni. Tey fara oman á Boðanes, segði eg við alvitandi eygnabrá. Hví tey fóru har oman? spurdi Diddan. »Tí børnini skulu ikki síggja tey,« svaraði eg. Hví børnini ikki máttu síggja tey? spurdi hon uppaftur. Men tá stóð eg fastur. Tað var mark sjálvt fyri mínum skili — ørandi mark.

Vit fóru vappandi niðan við ánni hond í hond rekandi dunnuna og steggjan framman fyri okkum. Eg mátti næstan draga Didduna aftan á mær, tí hon var deyðgivin og gekk og flættaði við fótunum. Vit sóu ikki bert eitt par fara oman á Boðanes, men

Materiál chráněný autorskými právy

fleiri, tey gliðu sum dimmir skuggar fram ígjøgnum brekkuna eystan fyri ánna, hvørt so meinlíkt øðrum, at vit hildu tað vera tað sama parið, sum gekk upp í saman.

Uppi í túninum skiltust Diddan og eg. Tá lovaði eg henni, at vit kvøldið eftir skuldu fara oman aftur at ánni og hyggja at hárinum, sum vaks út undan Rockall.

## Í kirkjutíð

Var várið komið, so livdi og læt allastaðni. Landslagið var so vorðið, at tað elvdi at sær alt, sum veingir hevði, tí har var so frálíka veðurgott. Hamarin eystanfyri, høvdirnar norðan-, vestan- og sunnanfyri ringdu seg sum ein lívdargarður rundan um allan dalin. Bara lið á í tveimum støðum: í útsynningshorninum, har áin við einum hvítum fossi stoytti seg oman í dalin, og í landsynningshorninum, har hon í slættari legu líðandi legði á ta stuttu hálvfjórðingsleið, sum var millum dalin og havið.

Stóð tú niðri í dalinum á tí grøna bønum, sá tú havið sum ein hyl langt burturi. Hann víðkaðist, longur og longur tú kom niðan í brekkuna, so tú á høvdunum sá havsbrúnna úti millum grannaoyggjar bæði fyri sunnan og eystan.

Til størstu grannabygd var banaður vegur: eitt grátt eyrband, sum lá frá húsunum á skák niðast í brekkunum út í bergið. Her úti við fossin var vegurin skotin inn í hamarin, klettur øðrumegin jaðarin, hinumegin snipst niðurfyri beint í ánna, sum her kom sjóðandi oman gjøgnum grót og skursl. Tætt uttan fyri bergið var brúgvin: ein spentur grótbogi við øðrum beininum norðan fyri øðrum sunnan fyri ánna. Hiðani fór vegurin út gjøgnum hagan, fyrst eitt lítið petti beint suðureftir, gjørdi so krók á seg og helt so vestureftir líka á hálsin, haðani húsini í grannabygdini sóust, og kirkjuklokkan hoyrdist, fór so oman suðureftir skákandi í ymsar ættir.

Tað var so veðurgott í dalinum, at onkur, sum verið hevði í útheiminum og saknaði viðavøkstur, tá ið hann kom aftur, setti

Materiál chráněný autorskými právy

nakrar nælingar av grann og furu niður onkustaðni uppi í brekkunum, nøkur fá hím, sum stóðu og andu í fleiri ár, áðrenn tey torgaðu at kaga upp úr lynginum. Men so tóku tey dik á seg, og brátt vóru brekkurnar skógvaksnar í støðum....

Tað var á hesum veðurgóða plássi, sjúkrahúsið varð sett. Her fingu tey frælsi, neyðardýrini, sum tuberklarnir piðaðu, her skuldu tey eta seg feit og spáka sær heilsuna aftur.

Men ikki var altíð eftir ætlan. Dalurin við sínari mildu, liviligu náttúru gjørdist plássið, har deyðsóttin var ristur á hvørt andlit. Var tað ikki so, at børnini kendu deyðan í námind við og gjørdu mótstøðu? Í hvussu varð lupu tey framav í mongum lutum og kendu sær ikki samljóð í huganum. Sjálvt í villasta spæli sá tú ikki hitt reina kæti skyggja á andlitunum. Brøgdini um munnin og eyguni vóru alsamt bundin og døpur og søgdu frá sálarligum mótburðum og ringari samvitsku.

Gjørdist spælið heldur harðmælt nærindis húsunum, so skramblaði beinanvegin eitt vindeyga í kørmunum, og eitt konufólk setti høvdið útum: »Verið friðarlig, her liggur fólk fyri deyðanum.« Røddin ljóðaði sum ein dómur, ið legði tey undir at hava tikið lívið av fólki.

Hvørja ferð hetta bar á, tóktist Pálli tað vera sum at detta á sjógv. Nakað soleiðis átti tað at vera at søkka á skordýpi. Ljósið hvarv, hann sakk í grønari niðu, sjógvurin súsaði í oyrunum, týndi sansirnar og sløkti vitið. Tá ið hann hoyrdi smellið frá vindeyganum, tá ið tað var afturlatið, var hann komin á botn. Liðugt var.

Páll mintist ikki, nær tað var, hann rakti við hellið uppi í hamrinum, men síðan plagdi hann altíð at fara hagar niðan, tá ið vitið rann aftur á hann. Tá ið hann nærkaðist hamrinum, gjørdi hann ferð á seg og hvarv sum eitt fok inn í hellið. Dagurin slóknaði, hann stóð í grønari niðu mitt inni í tyssum av trøllakampum, sum vóru so høgir, at teir næstan fjaldu hann. Køvandi seig kuldin og myrkrið saman um hann, tað var sum at sjólátast. Skelvandi av ræðslu skundaði hann sær út aftur. Tá ið hann so hálvt í ørviti kom trilvandi út aftur í ljósmála, hevði hann altíð eina kenslu av, at hann hevði forgjørt sær. Hann hevði ikki biðið um fyrigeving,

Materiál chráněný autorskými právy

men gjørt tað, sum mansligari var: hann hevði rindað við lívinum brotsgerð sína. Ein øtandi megi var í hellinum. Har vuksu trøllakampar, sum vóru so stórir sum hann sjálvur, á tí bera klettinum, har ljós slapp næstan ikki at. Hesa megina trúði hann uppá, hon var før fyri at reinska hansara samvitsku.

Men so var tað ein dagin, hann kom at hellinum og tordi ikki at fara inn í tað. Tað var ein sunnudag í kirkjutíð...

Fyrsta Páll var uppi tann dagin, fór hann av húsunum. Hann gekk umveg, til tess at ikki loypa illgruna á fólk, um so var at onkur bar eyga við hann. Nú var ein máni síðan, hann rændi ta hvítu dunnuna uppi undir trøunum.

Hann hevði byrgt hana inni eitt kvøldið, var so farin av seingini við degnum at ræna hana. Hann hevði elt hana gjøgnum tað døggváta grasið, og reiðrið hevði hann funnið. Hon hevði vorpið í einari lítlari lægd uppi í brekkuni undir einum tí største trænum, har sum grasið var so sítt, at ikki var bjóðandi til at raka við hjá honum, sum visti ikki av frammanundan. Sjey blá egg hevði hon, tí áttanda gekk hon við.

Páll var so tikin av tí loynimáli, sum hendan lítla dunnan hevðist at henda fagra summarmorgunin, at hann gjørdi av, at hann skuldi hjálpa henni at dylja, hóast tað fór at kosta honum eina lygn, tá ið hann kom aftur at húsum. Tað var honum so øvug ein hugsan at fara at skræða dunnuna av reiðrinum og ræna eggini við sínum lívsneistum í. Tað var beinleiðis dráp. Hann troystaði sær ikki.

Tá ið hann kom aftur at húsum, hevði mamman fregnast. Nei, ikki hevði hann funnið hana. Hann hevði elt hana leingi, knappliga var hon horvin, meðan hann hevði hugt burtur einaferð. Hann hevði sóknast allastaðni....

Og nú var ein máni síðan. Hann hevði verið at reiðrinum kvøldið fyri, tá var brostið fyri nev. Hann hevði ligið við teimum heitu eggunum tætt inn at oyranum og lurtað, hvussu ungarnir kvakladust og royndu at remba skalið av sær. Tá hugsaði hann minst av øllum um ta lygnina, sum atvoldin var til so stóra lukku í fugla- og mannaheiminum, og um tað óføri, hon skuldi koma honum í...

Materiál chráněný autorskými právy

Nú var hann á veg niðan at vita, hvussu nógvir ungarnir vóru.

Hann gekk beint niðan í brekkuna fyrst, til køksvindeygað var afturundir, so skákaði hann vestureftir yvir í eitt gil, har ein lítil áarløkur rann, fór so omaneftir. Tá ið hann var komin oman áraka trøini, bar tað honum til at koma sær ósæddur at reiðrinum. Trøini krógvaðu hann burtur.

Áðrenn hann tók hondina inn undir dunnuna og varliga lyfti hana av reiðrinum, setti hann seg at hyggja at henni, hvussu hon royndi at krógva seg. Nakkin var bendur tætt niður millum veingirnar, og nevið stakk beint fram í grasið. So pinnstill lá hon, bara eyguni bragdaðu skínandi svørt.

So rætti hann hondina inn undir hana og trilvaði í tí heitu ungarúgvuni, meðan dunnan vardi seg við nevinum og klípti hann í skøvningin og gjørdi seg til at lemja við veingjunum. Tá tók hann hana av og legði hana undir hondina. Og nú lá reiðrið bert: ein yðjandi lagdur av sóljugulum dúni. Páll taldi ein, tveir, tríggir, fýra — so støðgar hann knappliga. Hvat var hattar? Beint hann telur, ber hann eyga við eitt dimt í reiðrinum. Tað var livandi eisini. Hann trívir eftir tí. Tað er ein dunnuungi. Páll telur teir, sum eftir eru í reiðrinum. Har vóru sjey. — Sjey ljósir og ein dimmur. — Hann legði ungan aftur í reiðrið og slepti dunnuni á. So fór hann frá reiðrinum somu leið, hann var komin.

Á vegnum at húsum fataði hann so við og við, hvørja ódn hann hevði vilt seg útí. Tað var lygnin, ið her gekk aftur. Illimaður kundi stinga seg upp í so mongum líki, hugsaði hann, hví ikki tá í dunnuungahami eisini. Tað var Illamann, sum hann hevði sæð í reiðrinum, tað ivaðist hann ikki í.

Meðan dunnan lá, kom hon av við hvørt og oman at húsum at fáa sær at eta; tá setti hann mat fyri hana beinanvegin, so at hon fekk gjørt skjótt av, og samstundis gekk hann inni hjá mammuni og sýndi henni so frálíka umsorgan, at hon ikki nenti sær at fara út fyri dyr. Hin fyrsta lygnin hevði tikið so manga aðra við sær, meðan dunnan hevði ligið. Og nú hevði hann fingið lønina afturfyri: ein dimmur blettur mitt í tí sóljugula dúninum. Hin dimmi ungin fór at verða malandi fyri fótunum á honum sum ein øgilig ákæra, hann ongantíð fór at sleppa undan.

Materiál chráněný autorskými právy

Mamman fór at spyrja: »Hví er hasin ungin dimmur?« Fólk fóru at spyrja: »Hví líkist ein ungin burturúr?« Hundrað ferðir, túsund ferðir sami spurningur. Og har fór hann at standa við synd sínari í alsamari nøran, nívdur av ringari samvitsku.

Hellið rann fram fyri Páll. Skuldi hann fara har niðan at rinda syndini? Nei. Tað mundi ikki fara at broyta litin á unganum. Ein ræðulig hugsan tók seg upp í honum. Hann vardi seg í fyrstuni, fór at renna at húsum, men kortini dró hon líðandi upp á seg, til tess hon stóð sterk og hóttandi klár í huganum. Hann noyddist at drepa hin dimma dunnuungan....

Tá ið Páll kom aftur at húsum, var so nógv framliðið, at tey vóru farin at gera seg til at fara í kirkju. Fýra sálmabøkur sløddust á stovuborðinum. Pápin sat innari í stovuni og dró sunnudagshosurnar upp á seg. Systkini gingu hálvílatin og smádeildu og leitaðu eftir ymsum klædnapløggum, sum lyndi høvdu at stinga seg burtur í goymslum, so var komið út ímóti kirkjutíð. Úti í køkinum stóð mamman og snákaði sær framman fyri speglinum.

»Hvaðani kemur tú?« spurdi hon. »Tað var ein gásaflokkur komin inn um stikið, eg jagstraði hann útum aftur,« svaraði Páll.

»Hvør átti?« spurdi mamman. »Eg eri ikki vísur í, hvør ið átti,« svaraði Páll píndur av at standa mammuni til svars. Hann hevði besta hugin at rýma av durunum.

»Fer tú ikki at lata teg í« spurdi mamman aftur.

Páll, sum hevði væntað henda spurningin frá mammuni, og sum á vegnum at húsum hevði gjørt av ikki at fara í kirkjuna, skákaði sær undan. Hann kom at verða ov seinur nú, tað var so nógv fram. Hann hevði eisini verið í kirkju nú hesar tríggjar seinastu sunnudagarnar, umbar hann seg.

Mamman snaraði sær frá speglinum og kveitti yvir at Pálli. »Tað heldur tú so vera nóg mikið, íðan sum tú vil,« segði hon.

Páll ivaðist, men varð sitandi. Hevði mamman bara vitað tað, sum hann hevði í kvittanum, hugsaði hann.

Tá ið tey fóru av durunum, pápin á odda, so systkini og mamman aftast, snaraði hon sær á. »Nú minnist tú til, at tú spælir ikki í kirkjutíð,« segði hon...

Materiál chráněný autorskými právy

Nú var Páll einsamallur. Hann sat stillur og bíndi móti hurðini og lurtaði eftir gongulagnum á teimum, í kirkju fóru. Tá ið tað doyði burtur vestan fyri húsini, fór hann sum í ørviti innar í stovuna, tætt fram at vindeyganum. Hann sá tey fara oman eftir vegnum, við sama lagi tey vóru farin av durunum, mamman aftast, sum rak hon hini undan sær. Niðri í berginum sá hann, at hon snaraði sær á og hugdi niðan at húsum, til tess at kanna eftir, hugsaði hann, um alt var, sum tað átti at vera, ella kanska at vita, um Páll ikki kortini hevði iðrað seg um, at hann ikki var komin við og nú kom stórleypandi aftaná, men hon varð svikin.

Tá ið tey vóru afturundirfarin niðri á vegnum, fór Páll uttar í køkin, har tók hann ein lítlan telgimudd í slíðra, knepti hann upp á ein buksuknapp, koyrdi posatroyggjuna væl niðurfyri, og soleiðis útgjørdur fór hann av húsum.

Tað var ein tung leið, men hann gekk hana skundisliga. Ivi kom á hann, tí hann var ikki heilt vísur í søk sínari. Fór hann nú skeivur, hugsaði hann. Kanska var hin dimmi ungin bara ein vanligur dunnuungi eins og teir ljósu. Men so rann fram fyri hann, hvussu spurt fór at verða. »Hví líkist hasin ungin burturúr?« Hann visti tað væl, men noyddist at lúgva ella smoyggja sær burtur og ikki svara.

Søgan um Káin og Abel rann honum í huga; tá ið Káin hevur dripið, og Harrin rópar á hann: »Hvat *hevur* tú gjørt, blóðið *rópar* av jørðini til mín?« Var Gud til, mátti hann lata henda eitt undur eins og hjá Ábrahami, tá ið hann hevði bundið Ísak á offuraltarið og rætti seg eftir knívinum: »Legg tú ikki hond á…«

Komin at reiðrinum stóð hann og ivaðist leingi, skimaðist av knívinum niður í reiðrið, upp í luftina og oman í dalin. Tað var eingin sól meira, luftin var grá. Niðan úr berginum hoyrdist dunið av fossinum hvølt og tætt hjá sum undan avgongu. Eyguni leitaðu oman við ánni, heilt oman í landsynningshornið á dalinum, haðan norð eftir hamrinum, dvaldu, har hellið var, fóru so allan vegin runt eftir høvdunum líka oman aftur í bergið.

Einki tekin nakrastaðni.

Hann tók knívin úr slíðranum og føldi við fingrunum fram eftir eggini. Men tá óttaðist hann blóðið og stakk skundisliga

8

Materiál chráněný autorskými právy

knívin í aftur slíðran. Tað var kortini, eins og hann østist, tá ið hann kendi knívsoddin móti holdinum. Nú fór hann at drepa beinanvegin, tí hann kendi tað á sær, at fór hann at himprast, fór dirvið at bila.

Snarliga treiv hann eftir dunnuni og skræddi hana av reiðrinum, so rokið av dúni stóð frá tí. Hin dimmi lá mitt í ungarúgvuni. Hann ripti hann burtur úr reiðrinum, slepti dunnuni og fór so kvikur yvir at einum steini, sum var tætt hjá, og ripaði ungan hart ímóti. Hann datt niður í grasið, tað lirraði ikki í honum...

Páll skalv um allan kroppin, so fast hevði tað tikið honum. Eyguni sveimaðu oman eftir vegnum, so langt tey sluppu. Hann ynskti, hann nú var hjá teimum. Nú sótu tey og sungu í kirkjuni. Hann sá tey í huganum, har tey sótu í kirkjustólinum. Hann hevði so mangan sunnudagin sjálvur sitið har. Nú gekk hann her og tókst við Illamann einsamallur og píndist illa, tí hann var ikki rættiliga vísur í søk sínari.

Bara einum var hann vísur í, at var hann farin skeivur, so var hann náðileysur í kirkjuni og útihýstur haðani við alla.

Men eftir var hellið, hagar kundi hann altíð fara. Har inni, sum teir øgiligu trøllakamparnir vuksu í myrkri á berari hellu, har kundi hann, sum bert hevði dirvi, veita sær náði og fyrigeving. Hann hevði roynt tað sjálvur so mangan.

Páll stappaði nú ungan upp undir troyggjuna og helt beint yvir ímóti hamrinum. Hann rann, tað dýrasta hann orkaði, tí hann vildi fegin sleppa frá unganum sum skjótast, og hann setti sær fyri at fara heilt inn á botn við honum og leggja hann har, sum trøllakampurin var síðastur, tí har var turrast og fjálgast at liggja.

So nærkaðist Páll hellinum og gjørdi ferð á seg, sum hann var vanur; men beint fyri hellismunnanum vendi hann við, tí nú bilaði dirvi honum, hann himpraðist nakað, royndi so aftur, men tað gekk í sama navn, og somuleiðis triðju og fjórðu ferð. Hvørja ferð hann kom á tað markið, har dagurin og hin grøna niðan í hellinum runnu saman, brast dirvið, og hann kúvendi vitleysur av ræðslu við tí deyða dunnuunganum í hondini. Har var einki við at gera, hann noyddist at gevast. Men til tess at fáa dunnuungan burtur úr eygunum, tók hann og slongdi hann inn í hellið,

Materiál chráněný autorskými právy

so hann hoyrdi, tá ið hann bar við inni á botni. Dovið og mjúkt sum dún varð ljóðið hangandi í oyrunum, sum gandað fast. Nú var hann vísur í, at hann var farin skeivur, tí ella hevði hann ikki verið tikin av sovorðnari ræðslu, at hann tordi ikki at fara inn í hellið. Hann kendi tað á sær, at hann fór ongantíð á ævi sínari at tora inn aftur í hellið. Her var hann nú eisini útihýstur eins og úr kirkjuni...

Tá ið Páll nærkaðist húsunum, var honum hyggjandi oman á vegin; tá sá hann tey koma aftur úr kirkjuni. Systkini spælandi undan mammuni og pápanum. Páll trilvaði óvart við hondini upp undir troyggjuna; hann hvakk við, tá ið hann føldi knívin, og skundaði sær inn og legði hann, haðan hann hevði tikið hann.

## Støv

Tá ið Marjun og Karl giftust, vóru fyrstu sementhúsini farin at síggjast í bygdini. Hann hevði tá verið burtur í eini tíggju ár, og lítið annað hevði hann havt í huganum uttan at spara og spara, til tess hann átti fyri húsini.

Tey gjørdu av at stoypa sær hús upp, hóast Karl kendi seg ótryggan við henda nýggja byggiháttin. Av og á hevði hann tikið eina hond í við onkrum manni, sum stoypti okkurt smávegis, hevði verið uppií, tá ið vælt varð um lendingina, men ótryggleikin hevði fylgt honum trúliga, hvørja ferð hann hevði fingist við sement. Hann ivaðist altíð í um tað, sum stoypt varð, mundi fara at halda. At stoypa sement burtur úr posa og standa og blanda tað saman við sand og eyr, helt hann heldur ikki vera tespiligt arbeiði. Hetta gráa, fína støvið, teir róptu sement, var argt at fúka upp í eyguni og nøsina, steðgaði ikki har, men kreyp inn í munnin, kendist millum tenninar, fór niður í hálsin og lunguni, legðist sum hella fyri bróstið. Tað batti lítið at hvæsa. Hevði Karl, sum hevði lyndi til at vera trongur fyri bróstinum, sjálvur sloppið at ráða, vórðu húsini reist úr viði. Men hann mátti her sum so mangan ásanna, at hann var ein veikur, ivingarsamur maður í

Materiál chráněný autorskými právy

eini fátækari broytingartíð, læt altíð avgerðina gleppa sær av hondum.

Faðirleysur 12 ára gamal varð Karl latin til fosturs hjá skyldfólki. Hann hevði altíð kent seg fremmandan í bygdini. Smæðin og nærtikin helt hann seg mest fyri seg sjálvan. Ikki var tað tí: hugurin at renna saman við bygdarfólkið bilaði honum ikki, men hann hevði kensluna av, at hurðin millum tey og hann var farin í lás, og at lykilin ongastaðni var at finna.

Tá ið avgerðin varð tikin, hvussu byggjast skuldi, var tað nóg illa Karl varð eftirspurdur. Marjun átti tvær vinkonur, sum báðar búðu í sementhúsum, hon tók Karl av ræði. Segði tað ikki beinleiðis, men Karl skilti, hvat hon vildi. Hon vildi ikki standa aftari enn tær báðar vinkonurnar. Hvussu húsini fóru at taka seg upp, vistu tær ikki, tí tey vóru so nýggj enn. Men stór og stásilig vóru tey, gjørd sum úr heilum við kjallara, trimpli og kvisti — 10 og 12. »Og ta dygdina hava tey,« royndi Marjun at tøla Karl, »eru tey fyrst uppkomin, standa tey uttan at krevja serliga røkt. Tey rotna ikki sum hús úr viði. Fáa tey eitt sindur av máling upp á hurðar og vindeygu av og á, so skuldu tey hildið okkum út.« Karl dugdi væl at síggja henda fyrimunin, og tað var útlitið til smáar útreiðslur til røkt av húsinum, sum fekk hann at eftirlíka Marjuni, tá ið saman um kom. Og so var tað eisini tað, at fyri eyrin og sandin skuldi einki verða latið uttan fyri at flyta hetta tilfarið á plássið. Vatnið fekst fyri einki.

Um tað mundið, Karl bygdi, vóru fáir menn, sum tordu at taka upp á seg at standa fyri stoyping av húsum, og uppaftur færri vóru teir, sum høvdu kunnleika og skil at elta sement, sand, eyr og vatn saman sum runukøku á slíkan hátt, at tú kundi vera fullvísur í, at tað fór at halda. Tað gevur at bíta: fleiri hús, sum tá vórðu bygd, eru rudd niður aftur í grund sum torvmold. Mangan undraði tað Karl, at hugurin var so bergtikin av tí ókenda, dularfulla sementinum, at tá ið menn hittust, svitaðist ikki, at prátið datt niður á stoyping og sementhús. Og kortini, hugsaði Karl mangan fyri seg sjálvan, at tað at stoypa er einki nýtt kynstri: steinarnir í Kirkjubømúrinum eru bundnir saman við sementi, og hann hevur hildið. Hýkur uppi enn, og meira enn so tað, við sín-

Materiál chráněný autorskými právy

um 700 árum á baki. Ikki tí, elli sást á. Grasnálin hevði krøkt seg fasta ymsastaðni í Múrinum, hevði givið seg í hóslag við vind og veður og vildi týna hann. Men soleiðis er gongdin hjá øllum tí skapta, er ikki ætlað at halda allar ævir. Slíkar hugsanir runnu fram fyri Karl, meðan hann tókst við at fáa sær húsini upp. Tað var at undrast á, hugsaði hann, at eitt sovorðið kynstri, sum teir áttu, ið bygt høvdu Múrin, var kólnað heilt burtur.

Húsini hjá Karli vóru nú 15 ára gomul, og tey høvdu vart seg hampiliga væl. Men tað var ein sjón, tá ið tú komst fram við teimum vetrardag, myrkt var í veðrinum. Grá og grómut stóðu tey oman fyri vegin, dagaðu so høg upp ímóti luftini, sum ein fremmand hóttandi vera, vilst var inn í bøin, og sum ongantíð rættiliga vildi marknast her. Pengar høvdu ikki verið at gera húsini liðug fyri. Útveggirnir vóru óslættir og mosagingnir. Tað sást týðuliga, at ikki hevði eyrur verið spardur og sandur og vatn, tá ið stoypt varð.

Men Karl og Marjun sóu ikki longur, hvussu húsini sóu út — hvørki uttan ella innan. Tey høvdu búð so leingi í teimum, at tey vóru teimum so kunnug, at tey als ikki dugdu at síggja, annaðhvørt tey vóru vøkur ella ljót, vóru væl umsitin ella ikki. Hvørt ár, Karl kom aftur av skipi, gleddi hann seg sum eitt barn at koma aftur undir lonina til Marjuna og tey 7 børnini, tað elsta ikki stórt yngri enn húsini.

Meðan Karl var burtur, droymdi hann altíð um alt tað nógva, hann skuldi avrika, tá ið hann kom aftur, á burturferð var einki óført, helst fyrru helvt av túrinum. Hann hevði ofta varnast um, at so hvørt sum leið móti endanum, minkaði dirvið og áræðið. Og tá ið teir nærkaðust Føroyum aftur, var tað eins og fánaðu allar ætlanir burtur. Ein vakran dag stóð hann aftur í bygdini og mátti ásanna, at hann fór lítið og einki at fáa upp í lag, til næsti túrur byrjaði. Peningatrot javnt og samt, men tað var nú ikki bara tað, sum elvdi máttloysið. Hann var ikki einsamallur um hesa máttloysiskensluna. Hann kendi fleiri menn, sum vistu frá tí sama at siga. Fullir av dreymi og dirvi á útiferð, sum lundar slignir á nevið, tá ið teir vóru heimaftur komnir, kendu seg sum komnar í tippi. Við hvørt, tá ið Karl sat og dró hýr á seg, kundi

Materiál chráněný autorským právy

hann sita og kasta sær fyri, at hann var maður uttan fyri bygdina, men heimastaddur einki uttan eitt burturkast....

Eitt var sum Marjun og Karl leingi høvdu havt skomm og ampa av. Tað var av trappuni. So neyvt hevði Karl ætlað til av tí, sum peningur skuldi latast fyri, meðan húsini vórðu bygd, at tá ið trappa skuldi stoypast, var lítið og einki eftir av sementi, og ikki helt hann seg hava vegir at keypa afturat. Hann dragsaði sær tí grót saman og laðaði trappuna so væl, sum hann dugdi, blandaði tað, sum eftir var av sementi saman við sandi og vatni og klíndi í gloppini millum steinarnar. Trappan sá heilt hampilig út, tá ið hon var liðug.

Men ov veikt mundi hava verið blandað. Ikki helt. Longu fyrsta veturin ansaði Karl eftir — aftan á eitt frost — at tað stoypta var farið at molna burtur. Tá hvakk hann við, fór at óttast fyri, at húsini kanska eisini fóru at verða frostetin. Mangan dagin stóð hann undir trappuni og trilvaði við fingrunum eftir tí stoypta, kendi hvussu sandurin ruddi burtur millum fingrarnar. Tá ið myrkt var, og eingin sá, gekk hann ofta rundan um húsini og kávaði við hondunum uppi á veggjunum at vita, um teir eisini vóru farnir at molna. Harrin havi lov, einki varð hann varur við tað. Eitt sindur av mosa var farið at grógva í støðum. Karl uggaði seg við, at mosin kanska meira vardi enn hann tærdi. Men hvat visti hann í grundini um hetta?

Trappan var nú so illa farin, at hon lá mest sum ein urð fyri durunum. Tað var ikki vandaleyst at koma á hana í myrkri. Órøkjuskapi, sum rakst fyri fótunum, var altíð mest ansað eftir, hugsaði Karl. Mundi ikki Marjun, tá ið hon skúraði gátt av einlistum, eisini hava hetta í huga. Hann gjørdi av at fara til Havnar at keypa sær 3 posar av sementi.

Leiðin var drúgv, fyrst við bili og so við báti, og lítil var munurin á tí, sum latast skuldi fyri ferðina aftur og fram og fyri sementið. Tá ið Karl um morgunin fór upp í bilin, stóðu Marjun og øll børnini á trappuni og veittraðu farvæl. Hann kendi seg so heitan um hjartað. Ferðin var stutt, á kvøldi var hann aftur at húsum. Tað var mangan tungt at slíta seg leysan. At fara til

Materiál chráněný autorskými právy

Havnar eftir trimum posum av sementi var meira sum ein stuttleikaferð.

Meðan Karl sat í bilinum, handlaði hann í heilum pengapungin, sum lá so slonkin í lummanum. Hann visti, hvat ið var í honum, tað var taldur peningur. Lítið var at taka burturav, kortini kendi hann seg ikki lítlan og fátækan. Andlitini á Marjun og børnunum mólu í heilum fram fyri hann, gingu í ring og saman við teimum húsini. Heimið hevði Karl við bit og slit hildið uppi í 15 ár, og tað kendist honum sum var hann lokaður inni í einum helli, so at hann lítið varnaðist alt tað, sum uttanfyri var. Lívið er so merkiligt, hugsaði hann, sum hann sat: tvey fólk taka seg saman og setast í búgv, fáa børn, alt er yðjandi lív uttan um tey, men áðrenn tey rættiliga fáa upp í lag at hugsa seg um og gera alt tað, sum tey ætla, er reiðrið spjatt, húsini tigandi og tóm, kanska niðurrivin ella rudd niður aftur sum torvmold og øska. Tað skapta hevur lyndi til at molna burtur eins og hús stoypt við blanding, sum ov lítið sement ella ov nógv vatn verður koyrt í. Tað var fyri honum sum í gjár, Marjun og hann giftust, og nú vóru tey elstu børnini longu fittliga tilkomin. Nøkur ár afturat, so fór at tømast í reiðrinum. Karl hevði skomm av sær sjálvum, at hann hevði ikki longu fingið upp í lag at væla um trappuna. Hetta átti langt síðan at verið gjørt. Men tað, sum fyrst kemur í drag, kemur seint í lag, hugsaði hann og kroysti pengapungin í lummanum.

Hann var komin at sita undir liðini á bilmanninum. Sat tigandi, visti sum var, at teir sum koyrdu bilarnar høvdu hug at fregnast, hvørji ørindini vóru hjá teimum, sum komu uppí. Við hvørt kanska meira enn sámiligt var. »Tú fert til Havnar,« sigur bilmaðurin. »Ja,« sigur Karl, »havi nøkur smáørindi at gera. Tað elsta hjá okkum verður fermt í heyst. Marjun vildi fegin hava okkurt smáting úr Havn. Ætlaði eisini at keypa mær tríggjar posar av sementi. Tú hevði kanska latið meg fingið teir upp í bilin, tá ið eg komi aftur.« »Tað er gaman í,« segði bilmaðurin. »Tú fært lagt teir onkustaðni upp í lastina.«

»Tú ætlar tær at stoypa,« kom bilmaðurin aftur so spakuliga. »Ja,« svaraði Karl, »ætli at væla mær um trappuna. Tað skuldi longu havt verið gjørt,« legði hann afturat.

Materiál chráněný autorskými právy

Karl sat alla tíðina og bað eftir, at dagurin fór at taka seg væl upp, at ikki fór at regna. Tað var ikki tespiligt at hava sement í viðføri í regni. Hann visti, hvussu plagdi at vera um borð í postbátinum og í bilinum, har slapp tann framat, sum sterkastur var. Sjálvur hevði hann ongantíð havt lyndi til at troka seg fram um hini.

Nógv fólk var við bátinum. Karl helt seg mest fyri seg sjálvan um fjørðin. Einaferð, skiparin kemur framvið, orðar hann við hann um at sleppa sær at hava tríggjar posar av sementi í lastini aftur úr Havn. Skiparin helt, at tað kundi hann einki lova, tí hann visti ikki, hvussu nógv vøra fór at vera, men verður pláss, skulu posarnir sleppa í lastina, tað lovaði hann. »Ja, sjálvandi,« nikkaði Karl, »eg spurdi bara.« Hann hugdi upp í luftina, tað sá ikki verri út enn ilt av útsynningi at vera. Hann var kortini glaður um, at hann um morgunin hevði havt frakkan við sær. Hetta var brúðgómsfrakkin, annan átti hann ikki, ein gráur gabardinufrakki — elli var farið at síggjast á honum, men at ferðast í var hann nóg góður enn. Karl var í gummiskóm, longum buksum, morreyðari posatroyggju og undir kasjett. Hann var ein stórur, heldur skrámutur, loftskotin maður.

Tað var ikki ofta, hann ferðaðist til Havnar. Slíkan ferðadag kendi hann seg sum fremmandamann sjálvt millum sínar bygdarmenn, sum gingu og mólu uttan um hann sum letivætti, hálvstásaðir, meira tigandi enn teir vóru vanir at vera, vistu ikki rættiliga, hvussu teir skuldu bera seg. Talaðu teir, var tað við ansalæti og heldur hábærsligari enn heima í túninum. Munur mundi vera á, tá ið menn fyrr í tíðini fóru um fjørðin við árabáti, hugsaði hann. Tá átti hvør maður sín sess, árin lá í hondini, teir høvdu ivaleyst at takast við. Tað kom fjáltur á menn, tá ið teir einki høvdu uppi í hondunum.

Komnir suður um Kirkjubø sær Karl, at ein dráttur fer um fjallið. Hann gevur sær ikki nógv far um hetta, men eina løtu aftaná ansar hann eftir, at hann er dottin niður í sunnan í ælinum. Ódámligt, hugsaði hann og læt seg í frakkan, sum hann hevði havt undir hondini, kendi seg eitt sindur kaldan. Hevði havt krím einar tvær vikur, hostað meira enn vanligt og verið so kulsin.

Materiál chráněný autorskými právy

Sum hann stendur og hyggur inn á land, kemur ein maður til hansara. »Hegnismenn hava verið,« sigur Karl og mimar inn ímóti Múrinum. »Ótrúligt sum hann hevur vart seg væl. Teir hava dugað at klípa og blanda sement tá í tíðini.« Maðurin ásannaði, legði afturat, at teir tá ikki nýttu sama slag av sementi, sum nú verður nýtt. Hann hevði lisið onkustaðni, at teir lótu mjólk út í brendar skeljar og sand. Hetta blandið rann í stein og gjørdist nógv harðari og sterkari enn sement. »Nýttu teir so einki vatn?« spurdi Karl. Tað visti maðurin ikki. Karl undraðist kortini á, hvussu nógv hesin maðurin visti, hevði húsini og trappuna hjá sær sjálvum í huganum, honum hevði ongantíð dámt, at so nógv vatn varð koyrt upp í sementið.

Tað var hjá Karli sum hjá so mongum, ið ferðandi kemur til eina avtoftaða bygd: niðurrapaðir húsaveggir, garðløg sokkin niður í vøllin, svøllingarveitir, bøur í mosa, afturgrónar gøtur. Ein døpur kensla av, hvussu fáfongt mannaverk var, seig saman um hann og fekk hann at kenna seg so evurlítlan og lítisverdan: ein lítil steinpirra úr einum veggi, sum dettur niður í svørðin og verður fjald. Tá ið báturin er úti fyri Bø, stendur Karl og starir inn á land. Her høvdu fyrr verið tvey hús, visti hann, barnarómur, fólk í bø og túnum. Nú var tøgn, alt sum sópað oman av jørðini. Hansara egna stríð og strev, hvat var tað vert? Hvat fór at síggjast eftir? Einar toftir, tá ið avtornaði. Tað dró eitt fáligt bros um varrarnar, og hann skakaði høvur eitt lítið sindur, tá ið hansara smáu ørindi til Havnar runnu honum aftur í huga. Tríggjar posar av sementi til at væla um eina trappu. Harra Gud sum hesi ørindini eru smá, mutlaði hann innantanna. Men tey skuldu so eisini gerast, áttu longu at verið gjørd. Hann sá knappliga fyri sær andlitið á Marjuni so týðuliga, sum stóð hon beint framman fyri honum, og ræðsla fyri at missa hana kom á hann. Tey høvdu livað saman so leingi, at hon var vorðin sum ein limur av honum. Hevði hon farið, var hann púra óhjálpin. Tá ið hann var við hús, var altíð so nógv at taka hondina í. Sjálvt um tað hevði lítið upp á seg, mangt sum fjøtraði, stjól tað kortini so mikið av hansara orku, at hann hevði lítlar stundir at hugsa um Marjuna og børnini. Á burturferð var øðrvísi, tá kendist tað eins og komu tey honum nærri, fráleik-

Materiál chráněný autorskými právy

in fekk tey at rúgva meira upp í huganum, hann sá tey týðuligari fyri sær. Somu kenslu hevði hann viðhvørt havt, tá ið onkur, sum hann hevði kent væl, var deyður. Myndin av teimum: andlitsbrøgd, gongulag og medferð stóðu greiniligari, enn tá ið tey vóru á lívi.

Um Nesið var heldur óslætt. Karl stóð og stardi inn í brimið. Rennisúgurin brýndi og sleikti klettin. Marjun hevði so leingi ynskt sær at fáa trappuna umvælda, ikki skuldi hon verða svikin. Í morgin sum ein annan dag skuldi trappan verða afturgjørd, tað lovaði hann.

So skjótt sum báturin hevði lagt at í Havn, skundaði Karl sær á land. Hann vildi gera ørindini burtur av sær beinan vegin. Meðan hann gekk út eftir bryggjuni, varnaðist hann um, at hann setti eitt æl um Reynið.

Innkomin í handilin bað hann lata seg fáa 3 posar av sementi. Útflýggjarin spurdi, hvat slag tað skuldi vera: »rapid ella portland.« Karl visti einki at svara, uttan at hann skuldi hava sement at væla um eina trappu. »Íðan, so skulu tygum hava portland. Tað regnar kanska nógv har sum tygum eru frá, neyvan so nógv, at tygum skulu nýta rapidsement at stoypa trappu. Tað verður nýtt at stoypa undir vatni: brimgarðar og bryggjur.« Karl noyddist einaferð afturat at ásanna, hvussu lítið hann visti. »Tygum kunnu gjalda nú, so verða posarnir koyrdir oman til bátin og umborð,« segði útflýggjarin. »Tøkk skulu tygum hava fyri ómakin,« segði Karl, »kanska høvdu tygum roynt at fingið mær teir í lastina,« legði hann spakuliga afturat. »Tað skal eg royna,« var svarið. Karl fekk honum pengarnar. Nú var sloppið, hugsaði hann. Nú hevði hann ongan skund, kundi í frið og náðum gera hini ørindini.

Hann gav sær góðar stundir inn eftir bryggjuni. Ikki var Kongabrúgvin í góðum standi, sá hann, har var fittliga nógv matað burtur í støðum, so steinsetingin kom undan. Tað var minni munurin á Kongabrúnni og trappuni hjá honum sjálvum. Blandingin mundi hava verið heldur veik. Hann spurdi ein gamlan mann, sum stóð undir neystunum, nær Kongabrúgvin mundi vera gjørd. »Tað skal eg so væl siga tygum, tað var, tá ið Chr.

Materiál chráněný autorskými právy

kongur IX var í Føroyum í 1874. Eg var smádrongur tá, minnist tað so týðuliga.« Hon hevði staðið móti brimi, nakað hevði hon tolt, hugsaði Karl.

Nú var reiðiliga farið at kennast úr honum. Karl skundaði sær niðan í býin, keypti tað, sum Marjun hevði biðið hann. Hann fekk stundir at støkka inn á gólvið hjá eini skyldkonu, áðrenn báturin fór.

Hann sat ikki leingi, men tá ið hann kom út aftur oysti niður. Hann skundaði sær oman á bryggjuna, glaður um at vita posarnar í øllum góðum í lastini.

Men tað fyrsta, hann ber eygað við, hann kemur oman til bátin, eru posarnir. Teir liggja tveittir á bryggjuni, hylur er komin at standa undir teimum. Tað batti einki at tosa við skiparan. Ógjørligt at fáa posarnar í lastina, lúkan var longu á. Hann noyddist at hava nógva vøru á dekkinum. Bað Karl fáa posarnar inn á dekkið sum skjótast. Her vóru allar leiðir stongdar. Karl kendi, hvussu hann ornaði, sinnið setti sum ein alda upp í hálsin, tók um kvørkrarnar, men hann fekk ikki givið ilt av sær, har var so nógv fólk allastaðni uttan um hann. »Fanans orðloysingur,« mutlaði hann innantanna, meðan hann bar posarnar umborð. Tá ið báturin legði frá bryggjuni, sat Karl í sínum gráa frakka á sementposunum framman fyri stýrihúsið, royndi at breiða frakkavelini oman yvir posarnar, hann var ikki ólíkur einum stórum gráum fugli, sum lá og bøldi.

Hevði tað av illum verið viður, hann hevði í viðføri, hevði minni ligið á, um vatn kom at. Men sement í posa. Tað skuldi næstan einki til, fyrr enn tað rann í stein og spiltist. »Vána dagur at velja sær,« kastaði hann sær fyri, »skuldi heldur verið farin fyrr og ikki altíð havt lyndi at drála.« Hann hevði varhugan av, at júst henda dagin, hann hevði valt at fara til Havnar, høvdu allir tvørleikar hildið ting og svorið seg saman ímóti honum, vildu forða honum. Hann kundi kýta seg, tað hann vildi, snikkaleysur slapp hann ikki aftur at húsum. Hann rassaðist av og á, helt seg kenna, hvussu sementið harðnaði undir sær. Hetta var sum at kapprenna við skuggan av sær sjálvum. Tú slapst ongantíð frá honum, hann mól uttan um teg til ymsar liðir sum pinnurin á

Materiál chráněný autorskými právy

klokku, føturnir á honum altíð fastir í tínum fótum. Sær sól ella máni í bakið, tá ið tú kemur at durunum, er hann undan tær inn um gáttina. Hvør ið er pinnurin á klokkuni, sum spannar tíðina sundur, tú ella skuggin, fært tú ongantíð at vita. Vakin og gløggur sum hann var vorðin av trupulleikunum, sær hann sum í einari glæmu fyri sær andlitið á abbanum, sum hann hevði sitið uppi yvir, tá ið hann lá fyri deyðanum. Tað barst honum fyri, tey farnu vóru sum renning, tey livandi sum veftur í sama vadmali.

Báturin fekk eina leðring, tað reyk inn yvir hann, Karl fekk ein skvamp beint í eyguni. Hann stakk við. Mundi hann hava dúrað eina lítla løtu? Tá ið vit eru komnir um Nesið fer at vera meira undan, tá fer at líva her undir stýrihúsinum, uggaði hann seg. Tá skuldi í hvussu er ikki meiri sjógvur farið at komið at posunum.

»Her sita tygum,« sigur ein maður, sum hyggur fram á dekkið. Karl kveitir upp. Tað er maðurin, hann tosaði við, tá ið teir vóru úti fyri Kirkjubø um morgunin. »Ja, eg noyðist at sita her og verja viðførið hjá mær. Sement tolir ikki nógv av. Eg fekk ikki posarnar í lastina,« svaraði Karl. »Tað verður ikki mætari í bilinum. — Pappírsposar, teir fara ikki at tola ristingarnar eftir vegnum, gjøgnumdruknaðir sum teir eru. Nú er dagurin eisini so nógv liðin, at sjálvt um eg fái teir heilar at húsum, verður einki gjørt við stoyping í dag. Í morgin er sementið helst runnið í stein ella hevur mist kraftina.« »Verið nú ikki so stúrin,« tosaði maðurin at ugga. »Stoyta tygum tað, sum turt er burtur úr pappírsposunum og í turrar posar, so skjótt sum tygum koma at húsum, skuldi ikki bilað.« Hann legði afturat: »Í onkrum brimplássi havi eg sæð teir stjóra mjølposar á land. Ikki bilaði, bara stoytt varð burturúr nóg skjótt. Ein skón verður hangandi eftir innan í tí váta posanum, men tað er ímillum nakað og einki, sum fer til spillis.« Tað var Karli stórur uggi at tosa við henda skilamannin. Hann hevði sitið so einsamallur, tað fløvaði hann at sleppa at skifta orð við fólk. Hann visti væl, hvør ið maðurin var, men hann hevði ongantíð skift orð við hann fyrr. Hann fekk sovorðnan hug at hava hann hjá sær um fjørðin, binda hann aftur at sær við práti.

»Tað kann haldast at vera smáørindi, eg havi verið í í Havn,« segði Karl, »havi keypt mær tríggjar posar av sementi, og nú siti

Materiál chráněný autorskými právy

eg tjóðraður aftur at teimum og royni at verja teir móti regni og sjógvi. Hvørji hava tygara ørindi verið í Havn?« spurdi hann mannin.

»Eg havi verið og vitjað pápa mín,« svaraði hann. »Liggur á hospitalinum. Hevði fingið eitt sár á vørrina, sum vildi ikki batna aftur. Læknarnir hava roynt at skorið, men tað tykist sum hava teir ikki fingið ilskuna upp við rót. Pápi mín er gamal nú, búgvin at doyggja. — Tað man lítið fara at bata at skera burtur av tí sindrinum av støvi, sum eftir er av mær, helt hann við meg, tá ið eg vitjaði hann í dag. Hýrurin var góður.«

Støv. Karl loftaði hesum orðinum. Hvat er ikki støv her í heiminum, suffaði hann. Her sat hann og vardi tríggjar posar av eiturfínum sementstøvi, sum hevði tað verið gull, bara fyri at sleppa at klína tað í eina trappu, har sum tað er rutt burturav sum torvmold. Hann kendi seg foyan av teimum smáørindunum, hann var í. Men so stóðu Marjun og børnini knappliga sum í einari glæmu í huganum. Tað vóru teirra ørindi, hann hevði rikið. Lat tey vera so smá, tey vera vilja, tey eru ein lutur av teirra og mínum lívi, tey skulu gerast. Karl segði lágmæltur, eins og bað hann um umbering fyri, at hann bar seg og síni upp á mál: »Eg havi konu og sjey børn, eri burtur á hvørjum ári, tað verður altíð okkurt at taka hondina í, tá ið eg eri heima. Tað elsta verður fermt í heyst. Tíðin gongur so skjótt. Viðhvørt kemur sovorðin ótti á meg fyri at missa onkun av mínum.« Hann rassaðist á posunum, harkaði eins og vildi hann taka seg aftur í orðunum, spurdi so spakmæltur mannin: »Hava tygum eisini kensluna av, at grundin alla tíðina molnar burtur?« »Ja,« smílkaði maðurin, »at rísa og ryðja um somu tíð, tað er lívsins gongd.« Og við hesum orðum fór hann. Hesin maðurin dugdi at orðbera seg, Karl mátti ásanna, at skil hevði verið í øllum, hann hevði sagt. Nú hann aftur var einsamallur, sá hann fyri sær molnandi bergið, hann var komin fram við tætt frammanundan, Kongabrúnna, sum so illa var farin, Kirkjubømúrin og trappuna hjá sær sjálvum, sum hevði ligið sum ein skomm í nógv ár. Bara nú sementið er nýtiligt, tá ið eg komi at húsum við tí, bað hann.

Karl sat í lívd, sjógvur kom eingin á hann, nú vóru teir skjótt

Materiál chráněný autorskými právy

komnir um fjørðin, regnið var líka grovt. Hann var at kroppi, frakkavelini vardu ikki posarnar longur. So skjótt sum báturin hevði lagt at, fekk hann posarnar upp í bilin, setti seg oman á teir við sama lag sum í bátinum. Hann var so eymur um posarnar, at hann var um at rópa, hvørja ferð bilurin gjørdi eitt hirs. Men hann hevði gávurnar at finna sær okkurt til ugga, tá ið illa stóð til. Nú var tað eitt minni, sum hann var vanur at lata renna fram fyri seg, serliga tá ið hann var burturstaddur, kendi seg einsamallan og lítið mentan: Hann var á veg eftir ljósmammuni, tá ið Marjun fekk fyrsta barnið. Tað var eina kalda vetrarnátt klárt í veðrinum, himmalin stroyddur við stjørnustøvi. Brekkur og hamrar reistu seg í myrkari tøgn uttan um hann. Hann kendi seg so lítlan sum eitt eiturfon, ein stórtøkin náttúra letur hvirlurnar spæla sær við, kendi seg bæði armóðsligan og ríkan í senn. Hann var komin fram við húsinum, sum Marjun var úr og dansistovuni. Deyðatøgn. Hann mintist løtuna, hann fyrstu ferð visti seg fáa tokka til Marjunar. Hann hevði so ofta sæð hana fyri uttan at geva henni gætur, men nú stóð hon framman fyri honum sum ein umskapt vera, ið hann bar kenslu á bæði við kroppinum og øllum sonsum. Hon mundi vera eini átjan ár tá. Og nú høvdu tey verið gift í 15 ár og áttu sjey børn.

Karl raknaði við, tá ið bilurin steðgaði heimi í bygdini, leyp burturúr beinanvegin at standa klárur at taka ímóti sementposunum. Men í tí hann leyp, hendi eitt óhapp, sum legði stein oman á byrðu: frakkin kom fastur í ein seym og varð álaður eftir bakinum líka upp millum herðabløðini. Tá var tolið uppi hjá honum. Meðan bilmaðurin fekk posarnar burturúr, stóð Karl við nevunum yvir høvdið og bannaði bæði hann og hansara bil niður og norður. Hol var komið á ein posa, sementstøvið fór við vatninum, sum streymaði eftir vegnum. Frakkavelini flagsaðu uttan um hann í vindinum, hann sá út sum ein stórur fuglur, ið royndi at fara á flog, men sum ikki slapp uppfrá. Sissaður eitt sindur aftur, tá ið bilurin var farin, ballaði hann frakkan uttan um teir báðar posarnar, sum heilir vóru, og bar teir varisliga inn í kjallaran. Tann kruvda posan var einki at gera við, hann setti fótin undir hann og hirdi hann oman av vegnum. Tá feyk eitt sløð av sement-

Materiál chráněný autorskými právy

støvi upp í eyguni á honum, hann kendi tað eisini í nøsini og hálsinum og fór at hvæsa. Alt hevði ikki tikið við vætu, sá hann.

Tað var meira enn so hálvskýmt, tá ið Karl stakk høvdið upp gjøgnum kjallaralemmin. Ljós var í køkinum. Marjun og børnini sóu beinan vegin á honum, at ikki var alt, sum tað átti, hann var meira tigandi og álvarsamur, enn hann var vanur. Hann fekk børnunum ein posa av bommum og Marjuni tað, hann hevði keypt fyri hana. Bað lata seg fáa okkurt at eta, tí hann var gorhungraður.

Hann sat tigandi og fekk sær. Tað fóru at vera løgi at siga frá ferðini, tá ið Marjun og hann vóru tveyeini, hugsaði hann. Hon legði heldur ikki í at fregnast, læt hann sita í friði og fáa sær.

Ikki fyrr enn børnini vóru løgst, fór Marjun at spyrja, hvussu ferðin hevði verið. Karl greiddi gjølla frá. Hann hevði einki gott at bera teimum, hann hevði verið í ferðalag við uttan manninum, sum hann hevði prátað við um borð á bátinum. Tað var ein skilamaður. Hevði ikki sagt nógv, men tað var ein uggi í hvørjum orði, ein maður, sum ongantíð hevði fingið seg til at halda teg fyri gjøldur, tá ið illa gekk í hond. Karl var vísur í — og hetta píndi hann — at fólk nú sótu runt í bygdini og flentu at honum, gjørdu gjøldur burtur úr hansara óeydnisferð til Havnar. »Skuldu betur havt rætt mær eina hjálpandi hond,« segði hann og hugdi so hjálparleysur upp á Marjuna, at henni tókti synd í honum.

»Og hvussu við sementinum,« spyr Marjun, »fekst tú posarnar heilar at húsum?« Karl segði, hvussu vorðið var. Einki hevði verið honum til vildar, hann hevði rent seg ímóti allan dagin, var í sama stað sum tá ið hann fór frá húsum um morgunin. Ein sementposi flotnaður sundur á vegnum, frakkin álaður. »Legg tú einki í tað, tað man vera seymurin, sum farin er. Ver glaður um, at tú ert komin heilur aftur sjálvur.« Hóast trupulleikarnar hevði Karl varhugan av, at ferðin hevði ikki verið til fánýtis. Smáørindum hevði hann verið í, men tvørleikarnir, honum høvdu verið fyri, høvdu eins og lyft hann upp um seg sjálvan, upp um tær kenslur og hugleiðingar, hann gekk og tókst við, tá ið hann gekk heima við hús. Hann hvakk sjálvur við, tá ið hann suffaði fram fyri seg: »Støv, støv, støv, alt er støv.« Marjun steðgaði á og

Materiál chráněný autorskými právy

hugdi bilsin upp á hann: »Hvat er tað fyri støv, tú situr og møsnar um?« »Eg tosaði bara við meg sjálvan,« svaraði Karl. »Viðhvørt, tá ið eg hugsi um, hvussu lítilsvert alt er, sum eg gangi og takist við, og hvussu lítið eg fái burturúr, hvussu fáfongt alt mítt verk er, gangi eg og mutli innantanna, viðhvørt so hart, at eg hvøkki við sjálvur.« »Hví situr tú so og møsnar,« sigur Marjun, »títt verk er ikki minni vert enn hjá so mongum øðrum. Vit eiga húsini og skylda ongum nakað. Gloymir tú meg — og børnini uppi á loftinum?« Karl sá, at tað dró um andlitið á Marjuni, hon var um at tára, men tað var einki løgið, tá ið hann sat og møsnaði, sum hann gjørdi — rak treystið úr henni. Hann rassaðist í sæti. »Eg fari út fyri dyr, áðrenn vit leggjast. Nú fer at seinka,« segði hann heldur lotur. Hann hevði skomm av sær sjálvum. Afturkomin av ferð átti hann at verið væl hýrdur og tíðindafróður, men nú høvdu Marjun og hann sitið í køkinum alt kvøldið og lítið og einki sagt. Men hvat var at siga. Óeydnisdagur hevði verið, var fátækari hann kom aftur, enn tá ið hann fór. —

Beinan vegin, hann steig út um gáttina, kendi hann á sær, at hann hevði skift ætt, kuldin kom inn at holdinum. Hann støplaði oman trappuna, kom út í glæmuna frá købslampuni í túninum, tá glitraði fyri fótunum. Hann var farin at frysta. Luftin var klár, himmalin stroyddur við stjørnusandi. Sum av gomlum vana og ræðslu fyri, at húsini ruddu niður aftur, læt hann hondina trilva eftir vegginum, tá ið hann fór framvið. Komin út undir vegg, stóð hann og slotaði og skimaðist uttan um seg, hómaði hús og býlingar vestur gjøgnum bøin — og kirkjuna. Uttan um hann reistu hamrarnir seg í myrkari tøgn. Hann kendi seg so lítlan og einkisverdan, so tóman, sum var øll megi sogin burtur úr honum. Hetta var eingin fremmand kensla, hon hevði vitjað hann um borð á skipi, tá ið óhugur kom á hann og ótti fyri útkomu og teimum, sum heima sótu. Lítið hevði hann lisið, men so fræga hylling hevði hann á opinberingarbókini, at hann, tá ið so var, uggaði seg við orðunum um tann nýggja himmalin og ta nýggju jørðina og havið, sum ikki longur var til. Nú komu hesi orðini til hansara, og samstundis smílkaði hann, tí hann mintist eina samrøðu, hann einaferð hevði hoyrt millum tveir trúboðarar, hann hevði

Materiál chráněný autorskými právy

fylgst við um fjørðin ein illveðursdag. Annar var av ítarstu útróðrarmonnum, hin fór ikki á sjógv, uttan hann noyddist. Landkrákan, sum situr næstan deyð í sjóverki, sigur: »Gott verður, tá ið vit koma til hin æviga staðin, har einki hav verður.« Hin stendur eina løtu, so sigur hann: »Kann vera, men nakað deydligt man tað fara at vera ongantíð at sleppa á flot.«

Áðrenn hann fór inn aftur, var honum hyggjandi vestur á Skorarnar. Tað barst honum fyri, at ein bleik glæma lá um fjallagreinina. Tá runnu sum av sær sjálvum onnur orð úr opinberingarbókini fram fyri hann. Orðini vóru eins og fødd av ísi og eldi: frostinum í túninum, glæmuni um Skorarnar og stjørnunum á himmalinum. Hann tók tey upp spakuliga: »Og hann flutti meg í anda niðan á stórt høgt fjall, og hann vísti mær staðin heilaga við tólv perluportrum og gøtu úr reinum gulli, sum skyggið glar.« Hesa fyrijáttan áttu øll, eisini tey, sum einki áttu gullið og ongan eyðin her á fold, lágur eins og høgur, sjógarpurin eins og landkrákan. Tað var bara her í hesum heimi, ójavnt var býtt, hugsaði Karl. Hví kann býtið ikki vera javnt her í heiminum? Býttligt at spyrja, suffaði hann, ein mátti ugga seg við, at dreymurin og vónin fóru ongantíð at doyggja, og at einaferð fór alt tað stóra og góða, sum droymt verður, at ganga út hesumegin grøvina, men til tað fór at henda, var einki annað at gera uttan at ugga seg við fyrijáttanini um hin æviga staðin. »Ugga seg,« tók hann upp aftur, uggin er einki annað uttan bráðfeingishjálp og viðbering hjá evnaleysum fólki, sovorðnum veiklyntum mótloysingi sum mær sjálvum, sum væl dugir at síggja brekini, men sum hvørki eigur gávuna ella tilboðið at bøta um viðurskiftini og fáa vend í. Ússaligari tú ert, dýrari verður uggin tær.

Karl raknaði við úr hesum tonkum, tá ið hann varnaðist, at ljósið var sløkt í summum køkum. Nú fóru tey at leggja seg, signaðu seg og sovnaðu øll tey mongu, sum høvdu sitið og gjørt gjøldur burtur úr hansara havnarferð og flent at honum. Nú var stundin komin at geva seg í Harrans hond eitt stokkut náttarbil. Onkuntíð er tað javnbýtið til, sum opinberingarbókin fyrijáttar!

Knappliga er tað fyri Karli, sum onkur rópar á hann. Hann helt seg týðuliga hoyra navn sítt nevnt. Mundi tað vera Marjun, sum



Materiál chráněný autorskými právy

rópt hevði? Hann slotaði við opnum oyrum og munni. Tá fær hann eina kenslu, sum verður hann í einum taki riptur út úr sær sjálvum. Tað er fyri honum eins og stendur hann burturfrá og sær seg sjálvan, Marjuna, børnini, húsini og alla bygdina. Á burturferðum hevði hann av og á havt ein feril av hesi kenslu, men ongantíð hevði hon verið so sterk sum beint nú: Hann sá seg sjálvan koma spákandi sunnudagsklæddan eystur eftir gøtuni móti húsunum. Sólskinið spældi uttan um hann. Øll, sum hann møtti, vóru sunnudagsklødd og smíltust so fagurlátin upp á hann. Øll bygdin fagnaði honum. Húsini skinu nýpussað framman fyri honum, hurðar og vindeygu upp á víðan vegg, og hvítur sandur stroyddur eftir gøtuni, sum tá ið høgtíð var ella onkur fór til gravar. Hann hoyrdi týðuliga, hvussu tað brakaði undir fótunum. Á trappuni stóðu Marjun og børnini sunnudagsklødd og veittraðu ímóti honum. Tað var fyri honum, sum vóru fyrri himmalin og fyrra jørðin longu horvin, og nýggi heimurin komin. Men havið kundi ikki vera horvið, tí hann varnaðist, at hann gekk við einari blankari fiskateyggju í hondini. »Maturin, altíð kemur maturin uppí,« glapp Karli av munni. —

Komin uppaftur á trappuna var hann áhaldsin í myrkrinum og mundi dottið. Hann fekk ræðuliga ilt í annan fótliðin. Tá ið hann kom inn í forsdyrnar, svór hann við, at nú støkti hann beinið tvørturav. »Ja, so kanst tú leggja teg í friði og náðum eftir fullgjørt dagsverk,« segði Marjun, sum kendi hansara lótir. »Fekst tú ilt?« spurdi hon. »Ilt,« tók hann uppaftur, »tú heldur kanska vera pínuleyst at bróta beinini?« »Tað kann ikki liggja heilt av,« segði Marjun, »tú stígur á tað.« »Tað veit eg ikki,« svaraði Karl, »tað kendist sum støktist tað tvørturav. Eg fekk ólukksáliga ilt.«

Tey fjasaðust eitt sindur í køkinum, áðrenn tey fóru at leggja seg. Hann hevði so vist ætlað sær niður í kjallaran at stoyta sementið í turrar posar, men hann var móður, tilboðið bilaði, fekk ikki upp í lag at fara. Bara hugsanin um at fáa tað eiturfína sementstøvið upp í nøsina og niður í lunguni, áðrenn hann legði seg, fekk hann at harka og hvæsa, sum var hann um at kódna av bróstmøði. Tað fór at verða harvið til í morgin. Tað ruddi so kortini niðuraftur alt tað, sum hann evndi til...

Materiál chráněný autorskými právy

Karl rassaði seingina niður, áðrenn hann fekk eyguni saman. Marjun, sum sovnaði, so skjótt sum høvdið kom niðurat, vaknaði fleiri ferðir, hóast hann royndi at fara spakuliga um, hvørja ferð hann vendi sær. Seingin var eisini ov trong til tvey, men tað hevði verið við henni sum við so mongum øðrum. Ikki høvdu verið vegir at taka stóran til. Spara og spara, tað hevði verið hansara lív, síðan hann fór í vinnu. Sum hann altíð hevði ligið trongt, hugsaði hann, hevði sjaldan rættiliga fingið hvílt seg og vent sær, hvørki heima ella um borð á skipi. Koyggjan var lítið rúmari enn ein líkkista. Hann hevði ikki havt gott svøvnlag umborð, hevði havt manga vøkuløtuna í koyggjuni við hugleiðingum reikandi í ringi rundan um seg sjálvan. Hevði droymt um tíðir við betri korum, sum fóru at koma, men hevði ikki tort at trúgva upp á dreymin. Tíðin, ið er, hevur valdið á mær, og sjálvt um broyting kemur og nýggj tíð, liggi eg helst í grøvini, áðrenn hon hevur fingið valdið. Eg eri sum seyður, ið rikin er inn um viðtøkugarðin, endi í rættini, hvussu víkur og vendir, sleppi ikki út aftur fyrr enn tikið verður burtur úr smoguni, hugsaði hann.

»Nei, nú vil eg ikki liggja longur og hugsa dapurt. Nú vil eg draga okkurt vakurt minni fram fyri meg, sum kann veita mær hvíld, til svøvnurin líðandi sníkir seg inn á meg og køvir sansir og tilvitan.« Hetta var ikki fyrsta ferð, hann kyrraði seg við hesum orðum. Tá ið hann soleiðis í svøvnloysi vildi taka seg burtur úr døprum hugleiðingum, kom oftast sama myndin fram fyri hann: Ein heystmorgun teir koma siglandi inn móti Føroyum undan Íslandi. Spegilsklárt. Steinar og ljósir seyðir lýsa á fjøllunum í sólarrenningini. Tað sæst á haganum, at summarið er av, deyðin hevur nomið grasið. Hann minnist týðuliga hesa sjónina, hevur so ofta uggað seg við hana. Tað var hetta heystið, hann møtti Marjuni, tá ið hann kom við klæðsekki á baki út gjøgnum bygdina nýheimkomin, fyrsta ferð hann rættiliga varnaðist hana, fekk tokka til hennara bæði við sál og kroppi. Hetta var fyrsta ferðin, hann hevði havt eina sterka kenslu av, at menniskjað var borið til at vera ein ljóslyntur og glaður skapningur, einasta ferð hann sjálvur hevði havt hug at seta orð saman í ørindi og syngja tey fram, so at allur heimurin uttan um hann hoyrdi songin.

Materiál chránený autorskými právy

Karl hevði ikki meira enn verið burtur, tá stakk hann uppaftur, gjørdist klárvakin. Hann føldi seg so undarligan. Luftin var so tung og slagin, húsini fuktaðu so illa, at tá ið kalt var, rann niður eftir norðurbróstinum í kamarinum. Hann fór at hvæsa, royndi at doyva hostan, so at Marjun ikki vaknaði, men tað batti so lítið, hostin vildi fram.

Tað var liðið nakað út á náttina, tá kennir hann ein sting inn undir herðablaðið, hvørja ferð hann andar djúpt, og hvørja ferð hann hostar. Tá gerst hann bangin. Ræðslan fyri at doyggja sígur saman um hann. At doyggja frá konu og sjey børnum ikki 40 ára gamal, einki at eiga eftir seg uttan eitt sindur av slitnum klæðum, sum fara at hanga sum tómur hamur eftir á onkrum knabba, konu og sjey børn, einki undansloppið enn. Hvat hevði lívsverk hansara verið? Húsini, sum hann hevði spart saman til, líka frá tí hann fór í vinnu, fóru at standa sum ein minnisvarði eftir hann, sum ein skomm, ópussað, grá, grómut og mosagingin, trappan sum ein urð fyri gáttini. Hvussu leingi mundu tey fara at standa uppi? Gud viti, hvussu Marjun skuldi bjarga sær, um hann doyði. Hon fór helst at sita eftir við tí yngsta og tí elsta, hini fóru at verða latin út til fosturs hjá góðum fólki eins og hann sjálvur, tá ið hann var 12 ára gamal. Hann visti av royndum, hvussu tað var at missa pápan, og ikki minni sárt mundi tað vera at missa mammuna: lívið skifti knappliga lag og lit, ein rødd bráðtagnaði, eitt kært, álítandi andlit hvarv, tvær hendur, sum høvdu hildið tær uppi, og sum í hvørjum liði og hvørjum bragdi vóru tær kunnugar, sást tú ongantíð aftur, eitt band, sum bant teg at lívinum og gjørdi teg tryggan, knappliga kvett av sum við einari øks.

Løtur frá dreingjaárunum runnu fram fyri hann, áðrenn hann varð latin út til fosturs. Ein lognardag var hann á floti við abbanum. Teir høvdu nakrar húkar uppi í eini línu, sum teir settu eitt sindur út frá landi. Abbin hevði nakrar torvur og ketil við í bátinum, og meðan línan stóð, vóru teir uppi á landi og gjørdu sær drekka. Abbin kyndi eld millum nakrar steinar. Meðan teir sótu tigandi og stardu út á sjógv, vaknaði ein dráttur og longsul í Karli eftir at sleppa út um landoddarnar, sterkari enn hann áður hevði

Materiál chráněný autorskými právy

kent hann. Hann mintist nú, sum hann lá, alt so týðuliga: bátin, torvroykin, ið stóðu sum stevnið á skipi út í sjógvin. Abbin sat og kvað okkurt ørindi, murraði fram fyri seg, soleiðis sum hann var vanur, tá ið hýrurin var góður. Hann sat og stardi langliga burtur í fjarleikan, eins og sá hann okkurt langt handan sjónarringin.

Man eg nakrantíð hava havt hug til sjógvin? spurdi Karl seg sjálvan. Hann ivaðist. Tað byrjaði sum ein barnslig langtan. Fyrsti túrurin, á Eysturlandið, var mest at kalla spæl, men spælið gjørdist ein álvarsamur leikur, sum frá leið, og tað tók ongan enda, hann slapp ikki burtur úr tí aftur. Onkuntíð hevði hann droymt um at fara út í verðina at sigla, síggja fremmand lond, vinna sær gull og heiður, men hann fekk ikki upp í lag at fara. Einastu fremmandu lond, hann hevði sæð, vóru Ísland og Grønland, og har var hvørki gull ella heiður at vinna, fátækdømi ikki minni enn heima.

Mitt um náttina kendi Karl seg so ússaligan, at hann mátti vekja Marjuna. Hon beyð sær at fara upp at geva honum okkurt heitt at drekka, men hann hevði ikki sinni til nakað, lá bert og tivaði og klagaði um stingin undir herðablaðnum, sum hevði breitt seg og nú eisini kendist meinur inn undir síðuna. Marjun fór kortini fram, og eina løtu eftir tað kom hon aftur við einum tógva, hon hevði vermt í bakarovninum, legði honum upp á bringuna. Tá helt Karl seg kenna ein linna, tað var sum hann dovnaði burtur.

Um morgunin kendi hann seg so móðan og linan, at hann beyð ikki til at fara úr seingini. Armar, bein og høvd kendust so tung, at hann helt seg liggja undir fargi. Eina ferð Marjun kemur innar, sigur hann: »Vælsignaða, tak hesar sementposarnar oman av mær, eg eri um at kódna. Eg orki ikki at hava teir liggjandi oman á bringuni.« Tá varnaðist Marjun, at hann var ikki klárur, sá eisini, at hann hevði nógvan hita.

Karl lá og stríddist í nógvar dagar, áðrenn hitin linkaði. Hann var púra avmaktaður. Men hitin vildi ikki hvørva, tí varð boð sent eftir doktara. Hann lurtaði í lunguni, og tað var beinan vegin, hann fann sjúkuna. Karl hevði fingið vatn undir síðuna. Doktarin spurdi hann, um hann mintist seg hava havt knútarósin.

Materiál chráněný autorskými právy

»Ja,« svaraði Karl,« »hana havi eg havt.« Hann gjørdist prátingarsamur, segði doktaranum frá, at hann tá hevði ligið rættiliga leingi í seingini, var so eymur í liðamótunum, at hann fekk ikki gingið. »Tað hevur verið tíðliga um summarið,« segði hann, »tí tað var grønkað so nógv, meðan eg hevði ligið, at fyrstu ferð mamma tók meg upp, bar meg yvir at vindeyganum og vísti mær út, helt eg heimin verða púra umskaptan, so grønur var bøurin. Eg havi ikki sæð hann so grønan hvørki fyrr ella seinni.«

»Eg haldi tað besta man vera, at tygum fara eina tíð á bróstsjúkuhúsið,« segði doktarin, »tygum treingja til hvíld og at styrkna aftur.«

Karl undraðist á, hvussu lítlan mun hesi boðini gjørdu sær. Hann smílkaði upp á doktaran og segði fáligur: »Tað er helst einki annað at gera uttan at fara.« Hann var so troyttur, kendi seg so líkasælan, at sjálvt um doktarin hevði sagt honum, at hann bert hevði stutta tíð eftir at liva, hevði tað ikki gjørt honum mun.

## Vaktarmaðurin

Í mestur tvey ár hava vit búð við ytstu strendur Suðurameriku; andlitið horvandi móti Stóra og Kyrra Havinum. Næsta land úr stovuvindeyganum man vera Indokina og oyggjarnar norðan fyri Australiu. Sigldu vit beina leið undir Linjuni vestureftir, komu vit til Singapore, tá ið 3000 míl vóru lagdar aftur um bak.

Húsini hjá okkum eru so tætt niðri við sjógvin, at tá ið háflóð er, er stígandi av trappusteininum og beint útí. Ljós og blíð breiðir lógvin seg báðumegin húsini, og ljóðið frá henni leikar í oyranum nátt sum dag. Aldurørslur, sum taka seg upp yviri við strendur Asiu, bróta á lónni her og vera til einki uttan eitt stokkut suð, sum oyrað loftar og goymir.

Dráttur er beint norðan fyri húsini. Har er støð hjá einum 20 bátum, og nótabáturin hjá vinmanni mínum Anchundia verður eisini drigin upp har. Tað fyrsta, eg beri eyga við um morgnar-

Materiál chráněný autorskými právy

nar, tá ið eg í lýsingini seti høvdið útum, er Anchundia. Við hvørt situr hann á sandinum og bínir út á sjógv, ætlar um, hvørji líkindini eru; við hvørt er nótin longu sett, og hann stendur upp undir hendur og dregur. Anchundia og nógvir fiskimenn við honum halda mest niðri á støð millum teir svørtu bátarnar, sum tilevndir eru úr heilum, holaðir uppi í skóginum úr stórum viðabulum og dragsaðir oman á sjógv. Afturkomnir um middagsleitið liggja menn ofta á sandinum og sova, halda »siesta« millum bátarnar, og um kvøldini, tá ið sandurin við hvørt er slagin av døgg, liggja teir uppi í bátunum. Tú heldur teg vera einsamallan í støðni, men knappliga hvøkkur tú við, tá ið tú sært høvd daga upp um stokkarnar. —

Anchundia er altíð væl mannaður, tá ið nótakast er fyri, og havi eg skilt hann rætt, er tað bæði gott og ilt. Sjálvur havi eg ongantíð viljað verið nærspurin, men onkur hevur sagt mær, at hann eigur 17 børn, og ikki man tað vera nógv skeivt. Átta av nótamonnunum eru ógvuliga átøkir honum, lágir, heldur tættir unglingar, eitt sindur hjólbeintir og dimmir á holdinum, men tað er nú einki eyðkenni, her sum øll eru myrkleitt. Skilligt er, at blóðið er toluliga upprunaligt, og ikki man nógv av tí fína spanska vera blandað uppí. Anchundia hevur sagt mær, at fýra døtur eru »farnar«. Uttan at hava spurt nærri, havi eg skilt hann so, at tær hava tikið seg saman við onkrum mansevni og eru ikki longur í húsinum hjá Anchundia. Her, sum tveir triðingar av fólkinum, áðrenn tað eftir okkara hugsan er giftingarført, tekur seg saman sum hjún uttan at vera tað, sum vit rópa løgliga gift, eigur ein at vera eitt sindur varin og ikki spyrja innvølin burtur úr fólki. Men tríggjar eru døturnar eftir, tað hevur Anchundia sjálvur sagt mær, og tær hava mangan verið at sætt á sandinum, tá ið nótakast var. Bæði nótin og báturin — eitt heldur ósnøgt far og tungt sum ein ólukka at fáa niðanfrá — eru ogn Anchundia.

Ein burtur úr eftirstøðuni av gentum hjá Anchundia kom sær soleiðis fyri, at hann fekk ein munnin meira at metta, ið hvussu er eitt skifti. —

Ein sunnumorgun snimma — tað líður nú út móti hálvum øðrum ári síðan — vaknaðu vit av, at tað bankaði hart uppá. Tá ið eg

Materiál chráněný autorskými právy

læt upp, stóðu Anchundia og tríggir synir uttanfyri. Skilligt var á øllum brøgdum, at teir vóru sinnisrørdir. Teir bóðu meg koma við sær á politistøðina beinanvegin; men av tí at eg helt tað vera ráðiligast at fáa skil á, hvørji ørindini vóru, áðrenn farið var til politiið, og eg sjálvur einki brotsverk visti meg at hava gjørt, gjørdi eg tað, sum sámuligast tókti mær, beyð teimum innum at greiða mær frá.

Eg noyðist her at siga frá, at eg skjótt grunaði eitt samanhang, sum eg av á hevði havt ein feril av, men sum eg hevði mist burtur aftur úr huganum, hóast tað at eg kanska átti at havt lagt betur í geyma og talað at, áðrenn ov seint var. Men hetta er tað gamla lagið hjá mær, altíð at hava álit á fólki og líta summum betur til, enn tey hava uppiborið. Kanska er tað skeivt av mær at halda, at flestu fløkjur hava lyndi til at rekja seg upp av sær sjálvum. Líka veit eg. —

Ein knappan hálvfjórðing eystan fyri húsini, vit búgva í, byggja vit eini hús at frysta fisk í. Tað fyrsta, vit fóru undir, var at gera eina smáttu av bambusviði til ein vaktarmann. Hund átti hann, sum var ógvuliga glúpskur. Men av tí at tað var ikki óvanligt, at vaktarmenn vóru dripnir bæði um borð á bátum, sum lógu fyri íla útfyri, og á landi við, keyptu vit honum eina byrsu afturat og fingu honum skrivligt loyvi til at nýta hana, sum hann sjálvur dugdi ikki at lesa ein stav í. Soleiðis útgjørdan hildu vit hann fara at vera føran fyri at verja seg undir øllum umstøðum, um onkur fór at gera seg inn á hann á nátt. Smáttan var ikki meira enn einar tvær reipslongdir frá húsunum hjá Anchundia, og av tí at ongar lyktir vóru longur út enn til húsini hjá okkum, so var bølamyrkt har úti, tá ið sólin var undir farin og ikki var mánalýsi.

Um dagarnar, tá ið eg var og ansaði eftir at arbeiðið varð gjørt, so sum skipað var fyri, varnaðist eg onkuntíð, at ein av døtrunum hjá Anchundia hevði fyri at ganga og fjasast við høsnarungar ella hevði okkurt annað hjáputur fyri uttan um húsini. Eg hevði eisini ansað eftir, at hon av og á sendi eygnakøst á snið yvir til okkara og at Vicente, soleiðis var vaktarmaðurin nevndur, loftaði og svaraði aftur. Eg kendi gentuna, hevði so ofta eygleitt hana niðri á sandinum um morgnarnar, tá ið hon hjálpti teimum at draga

Materiál chráněný autorskými právy

nótina á land. Altíð stóð hon berbeinað og dró, í einum tunnum, ljósum kjóla, sum legði seg tepur at kroppinum, hvørja ferð hon tók á. Eg hevði ætlað, at hon mundi vera eini sekstan ár. Einaferð sá eg hundin — eitt stórt, svart beist, sum eg ikki tordi at koma nærhendis — fara látandi við halanum yvir til gentuna, blíður sum eitt bros. Tá hugsaði eg mítt, men segði einki, gloymdi alt hetta burtur aftur.

»Hvørji eru so ørindi tykkara til politiið?« spyrji eg Anchundia.

Ein av synunum ætlaði sær at taka orðið, men Anchundia støðgaði honum. »Tað er best, at eg greiði frá sjálvur,« helt hann fyri. Og tá ið hann hevði hugsað seg um eitt lítið bil, segði hann: »Tað er hasin vaktarmaðurin, tit hava, ið hevur gjørt seg inn á eina av døtrunum hjá mær.«

Hann var so álvarsamur, tá ið hann segði hetta, at eg hvakk við. Og av tí at eg støðugt hevði hundin og byrsuna í huganum, var eg bráður eftir at vita, um hon hevði fingið nakað mein.

»Hevur hann beitt hundin eftir henni?« spyrji eg.

»Nei,« svaraði Anchundia, »tað skuldi hann betur havt gjørt.«

»Íðan, byrsuna hevur hann so ikki nýtt?«

Tá ið eg spurdi hetta, sá eg á Anchundia, at hann helt, at annaðhvørt lætst eg at vera býttari, enn eg var, ella eg helt hann fyri gjøldur. Tað var tøgn eina løtu. Eg sá, at hann sat og royndi at leggja sær orðini í munnin, so at hann í einum taki fekk sagt tað, sum var at siga, uttan at lata meg sleppa framat aftur at spyrja.

»Tá ið vit komu aftur av sandinum í gjárkvøldið, segði konan við meg, at hon helt ikki ta yngstu dóttrina — Esperanza eitur hon — vera fríska. Eg hevði einki far givið mær um hetta, men komin at húsum sá eg skilliga, at konan hevði grein í máli sínum. Esperanza var afturfarin, og hon var gulari á dæmi enn vanligt. Vit søgdu hetta við hana, men hon gjørdist lúnut og vildi als ikki vera við, at henni bagdi nakað. Tað varð til grát. Eg vildi so einki siga meira tá, men seinni á kvøldinum kom konan og segði mær, at Esperanza var við barn. Tað var púra óneyðugt,« legði Anchundia aftrat, »eg hevði longu gitt, hvussu vorðið var.«

Materiál chráněný autorskými právy

»Og hetta ætla tygum so at leggja vaktarmannin undir?«

»Eg dugi ikki at finna nakran, sum hevur verið gentuni nærri enn Vicente,« segði Anchundia. »Í morgun tóku vit hana í forhoyr, og tá kom tað fram úr henni,« hann støðgaði á og harkaði. »Ja, eg sigi tað bart fram. Vit leggja Vicente undir at hava neyðtikið Esperanzu!«

Anchundia breiddi armarnar út frá sær við lógvunum upp. Eg skilti tað, sum vildi hann á henda hátt siga mær, deils at hann fór á húsagang við hetta lag, deils at hann hevði sagt tað, sum var at siga. Hann hugdi firtin niður í gólvið. »Hon er fimtan ár,« legði hann afturat og setti við hesum fýra smáorðum eina grova og álvarsama striku undir tað, sum hann hevði sagt.

»Hava tit verið hjá Vicente?« spurdi eg.

»Ja,« svaraði Anchundia, »men hann segði seg vera púra ósekan. Sjálvandi.«

»Og hvat ætla tit so hjá politiinum?«

Anchundia svaraði mær við tað sama: »Hann skal gjalda, og vil hann ikki tað, so skal hann inn at sita.«

At bera í bøtuflaka fyri Vicente helt eg vera óráð. Eg beyð mær at koyra hann, so hann gjørdi ikki Anchundia fleiri ónáðir. Men tað skuldi eg ikki havt gjørt, tí Anchundia segði, at uppskot mítt var verri enn einki.

»Annaðhvørt skal hann taka gentuna til sín, ella skal hann gjalda.«

Eyð veri tað. Tá ið treytirnar vóru slíkar, var tað ikki løgið, at Anchundia einki vildi vita av, at Vicente varð koyrdur. Politiið skuldi nýtast at fáa tamarhald á hann. Ætlan Anchundia var løtt at skilja. Tóku vit í fyrstu atløgu tað lønta arbeiðið frá Vicente, stóðu vit eftir á berum.

»Eg haldi, tit eiga at støðga at fara til politiið,« helt eg fyri, »latið heldur meg sleppa at tosa við Vicente fyrst.« Anchundia læt sær eftirlíka, men bað meg kortini lata Vicente vita, at teir ætlaðu sær til politiið. Hetta var ein hóttan, sum allur ungdómur ræddist illa, tí politiið nýtti harðskap. —

Uttan fyri húsini skiltist eg frá Anchundia og synunum. Teir fóru niðan á sandheygarnar oman fyri húsini. Har settu teir seg,

Materiál chráněný autorskými právy

meðan eg fór út eftir sandinum, út at tosa við Vicente, so sum eg hevði lovað.

Sólin skein so fagurliga. Vinstrumegin var havið, kyrt og blankt. Uppi á sandheygunum høgrumegin sløddust bambussmátturnar hjá fiskimonnunum, allar bygdar á stólpum, vardar móti rottu og skriðkykti, gólvið eina manshædd uppfrá. Onkustaðni sást ein nýggj smátta, liturin sum á hálmi, tær gomlu vóru gráar eins og sandurin; men nú ið sólin sá, fingu bæði tær og sandurin ein silvurgráan dám. Bátar sóust á sandinum allan vegin, summir holvdir. Undir onkrum lá ein avdottin fiskimaður, sum hevði verið í veitslu kvøldið fyri, og sum hevði tikið so nógv til sín, at hann hevði ikki vunnið upp land. Einar tveir holvdar bátar sá eg, sum vóru skjól hjá fríggjarapørum, ið lógu og hálsfevndust. Tveir deyðar hundar bar eg eyga við. Uttan um teir flyktust gribbarnir, hesir stóru, óhugnakendu, munkakløddu fuglarnir, sum hjástaddir eru allastaðni, har sum ein skapningur doyr úti.

Komin út áraka frystihúsið, vit byggja, og húsið hjá vaktarmanninum stóð eg eina løtu og eygleiddi fólk, sum vóru komin oman at baða sær, áðrenn eg tók meg upp í sandheygin, sum fjaldi húsini. Konufólkini fóru útí í kjóla, og tá ið tey hópaðust við tað stóra og gátumikla havið, tóku tey sjógv upp í lógvan, tváaðu sær um andlitið og signaðu seg. Tær ungu genturnar signaðu seg skundisliga, meðan tær við hinari hondini royndu at halda kjólanum niðri, so hann fór ikki uppum. Esperanza rann mær í huga. Eg hevði fleiri ferðir sæð hana signa seg, tá ið hon fór útí.

Vicente stóð uttanfyri, tá ið eg kom at húsinum. Hann var heldur fryntligari og meira fagurlátin enn vanligt, men tað gjørdi mær ongan mun.

»Hevur Anchundia verið her og tosað við teg?« spurdi eg.

»Ja,« svaraði Vicente, »hann vitjar íðuliga higar.«

»Hevur hann verið her í morgun?«

Vicente tók sigarettina úr munninum og gav seg til at kanna eldin á henni eina góða løtu. So hugdi hann upp á meg. Andlitið var eins og á einum barni, áður tað veit frá nøkrum illum at siga. »Nei,« svaraði hann, »í morgun hevur Anchundia ikki verið her.«

Materiál chráněný autorskými právy

»Og hvussu er við Esperanzu? Eg frætti, at hon vitjar teg av og á.«

Eg sá, at Vicente fánaði.

»Sig mær nú sannleikan, sum hann er,« helt eg fram, »tú kemur onga leið við at standa og lúgva fyri mær. Anchundia sjálvur fjórði hevur verið hjá mær í morgun, og eg veit, at teir komu beint frá tær. Mær nýtist ikki at greiða tær frá, at ætlan teirra er at fara til politiið at klaga teg fyri at hava neyðtikið Esperanzu.«

»Neyðtikið,« tók Vicente uppaftur. »Eg havi illa fingið gingið í frið fyri henni.«

»Tað man ikki vera meira enn hálvur sannleikin, tú nú sigur mær,« helt eg fyri. »Tú veitst óivað betur enn eg, at hon er við barn, og Anchundia er ikki tann maður, ið letur teg sleppa uttan at gjalda skaðabøtur.«

Tá eg spurdi Vicente, hvat hann ætlaði sær at gera, stóð hann og smíltist eins og eitt, ið fávitskut er, og sum hvørki veit út ella inn. Mær tókti synd í honum. Tað skein av honum, hvussu ungur og óbúgvin hann var. Ikki vóru árini fleiri enn átjan.

»Hjá tær er eitt av tveimum at gera, annaðhvørt at taka Esperanzu til tín ella at gjalda tað, sum Anchundia leggur á.«

Beinleiðis svar fekk eg einki frá Vicente. Hann lovaði at hugsa seg um til seinnapartin.

Meðan eg stóð og tosaði við Vicente, kendi eg á mær, at vit vóru ikki tveireinir. Fólk eygleiddu okkum. Eg visti, at tey stóðu inni í húsunum hjá Anchundia og kagaðu út millum bambusrimarnar. Eg hevði eisini ansað eftir, at Anchundia og synirnir høvdu sett seg soleiðis fyri á sandheygunum, at teir sóu á okkum. Men vísur var eg ikki í tí. Til tess at eingin ivi skuldi vera, legði eg leiðina aftur at húsum gjøgnum »el bosque«. Soleiðis var skógarlendið aftan fyri sandheygarnar rópað. Altíð tá ið eg gekk her, fekk eg hug at spæla blundast og krógvast. Her var lagamanni at goyma seg burtur. Trøini vóru lág og so tøtt, at uttan fyri gøturnar slapst ikki fram, uttan greinar vórðu brotnar burturfrá. Tá ið fólk gekk eftir gøtunum, dagaðu høvdini undan. Í útjaðaranum á hesum skógarlendinum var frystihúsið, smáttan hjá

Materiál chráněný autorskými právy

vaktarmanninum og longur inni hús Anchundia. Eg hevði við hvørt sæð Anchundia høgga sær sneisar at brenna úti á skógunum; tá nýtti hann altíð eina »macheta« — ein knívur sum eitt svørð, hálvaaðru alin langur, nýttur sum øks at høgga við.

Eg hevði gitt beint. Tá ið eg nærkaðist húsum, reistust Anchundia og synirnir og komu mær á møti. Teimum dámdi lítið, at eg hevði eingi onnur tíðindi at bera teimum uttan tey, at eg skuldi fara út aftur seinnapartin at tosa við Vicente. Anchundia helt fyri, at hann hevði havt væntað eina avgerð. —

Tá ið eg á veg aftur at tosa við Vicente nærkaðist vaktarhúsinum, undraði tað meg at hurðin var aftur, og at eg einki sá til hundin. Hurðin var vanliga opin um dagin, og var hundurin ikki uttanfyri, kom hann rúsandi út, tá ið fólk nærkaðist.

Komin at durum gjørdist eg rættiliga skakkur. Hurðin var læst uttanífrá. Tá ið eg kagaði inn millum rimarnar, sá eg, at hundurin var inni. Men byrsan — eygu míni vóru kvik sum snarljósið upp í tað hornið, har hon plagdi at hanga. Hon var horvin.

Anchundia, sum hevur so ljóðligan atburð, mundi hava havt varhugan av, hvat ið var á vási. Áðrenn eg visti av, stóð hann undir liðini á mær. Eg helt meg síggja farvegin eftir einum smíli, sum feyk eftir andlitinum á honum. Eg legði tað út, sum ásannaði hann einaferð enn, at »el gringo«, fremmandamaðurin, onga avgerð hevði fingið við Vicente enn, og at tað valla fór at eydnast honum. »Hurðin læst,« segði Anchundia, og so kagaði hann inn millum rimarnar. Óivað var hann varur við tað sama sum eg. Men hvørgin av okkum segði nakað.

Tá ið vit skiltust, kendi eg á mær, at Anchundia hevði uppiborið, at eg segði okkurt, sum miðaði móti einari loysn, nøkur álítandi orð um, at bæði eg og Vicente fóru at veita honum sømdir. Men eg fann eingi orð. »Eg komi út aftur í morgin ári,« var tað einasta, eg fekk upp í lag at siga. Tað ljóðaði púra fjákut og tómt.

Dagin eftir við degnum fór eg út at finna Vicente. Komin upp á sandheygin úti við vaktarhúsið var mær hyggjandi inn yvir »el bosque«. Tá sá eg høvdini á nøkrum monnum, sum komu eftir gøtuni berandi okkurt millum sín. Teir høvdu gjørt okkurt fast á eina tjúkka bambusstong, sum tveir menn bóru á økslunum, hvør

Materiál chráněný autorskými právy

undir sínum endanum. Menninir stevndu beint á vaktarhúsið. Nú kendi eg teir, tað vóru Anchundia-synirnir.

Tá ið teir komu út úr skóginum, sá eg, at tað, teir bóru á stongini, var eitt fólk. Tað var ballað inn í segldúk. Eg hevði fleiri ferðir sæð menn bera sjúk til doktara á sama hátt. Men nú sá eg, at segldúkurin var blóðdálkaður.

Teir komu at húsinum, fimm vóru teir. Ein bar byrsuna hjá Vicente. — Gjørdu segldúkin leysan frá stongini, bóru hann inn við tí, sum í var, og løgdu á gólvið í vaktarhúsinum. Teir gjørdu hetta sáttliga og tigandi, eins og var tað ein setningur, teir høvdu fyri, og sum skuldi fáast frá hondini. Andlitini lótu ikki eitt vet av iðran koma til sjóndar. Lásið brutu teir leyst úr hurðini til tess at sleppa inn, bóru seg at sum teir áttu alt, sum har var um leiðir. Hundurin fekk eitt høgg við einari »macheta«, so tað spann ikki í honum.

Eg hevði staðið sum í dula, visti ikki rættiliga aftur til mín, fyrr enn eg hoyrdi málið í einum av Anchundia-synunum. »Hann er deyður,« segði hann. »Hvussu?« spurdi eg. Ein av synunum reiggjaði við einari »macheta«. »Við hesari,« segði hann. »Vit drupu hann ikki, hann bløddi burtur. Eg noyddist at høgga hann til tess at verja okkum. Hann skeyt fyrst, men rakti ikki. So var einki annað hjá okkum at gera. Nú fara vit til politiið at siga frá.«

»Tit sleppa ikki undan at vera revsaðir fyri hesa gerðina, tit hava gjørt,« segði eg og var bæði harmur og sinnisrørdur.

»Vit hava sagt tær, at vit noyddust at verja okkum,« svaraði hann, sum bar byrsuna hjá Vicente. »Hevði hann loyvi at ganga og reika úti á villini heiði við hesari?« spurdi hann, og helt byrsuna upp móti mær. —

Anchundia-synirnir vóru farnir um kvøldið at leita eftir Vicente. Í lýsingini vóru teir komnir fram á hann. Onkur hevur sagt mær, at Vicente var so ræddur, at hann fekk ikki upp í lag at skjóta. Men prógv fekst so einki fyri hesum. Byrsuna hevði hann havt hjá sær, tað skarst so ikki burtur.

Eg meira enn kendi á mær, at einki fór at verða gjørt við Anchundia-synirnar, visti um fleiri hevndardráp, har drápsmaðurin var ikki sektaður.

Materiál chráněný autorskými právy

Men Vicente var so ungur og óbúgvin. Óivað var hann rýmdur av tí, at hann óttaðist politiið, sum nýtti harðskap og næstan bardi lívið úr unglingum. Vicente hevur ikki dugað at fata og skilja ummálið av gerðum sínum. Ræðslan var farin við honum.

Tá ið tey komu eftir honum at bera hann til húsar, var eg ikki hjástaddur. Nakrar dagar seinni kom pápi hansara eftir tí, sum var eftir hann. Einki var. Einar tvær skjúrtur og einir svartaskógvar, sum hann hevði keypt sær fyri teir fyrstu pengarnar, hann fekk sum vaktarmaður. Tað vóru fyrstu skógvar, hann átti, og teir vóru altíð so skínandi blankir. Pápin segði mær, at Vicente hevði fingið eitt groft høgg niður á høgru øksl. —

Tað gremur meg, at eg nakrantíð fór at fritlast við ósemjuna millum Vicente og Anchundia. Endin hevði ikki verið verri, um teir høvdu roynt at greiða fløkjuna sjálvir. Men Anchundia kom til mín, og mær tókti tað vera synd at lata Vicente upp í hendurnar á politiinum. —

Seinnapartin tollaksmessudag kom Anchundia væl mannaður oman á sandin, og í skýmingini varð nótin drigin upp á land og fitt í henni, smáfiskur til støddar sum veturgamal seiður. Báturin varð drigin niðanfrá við fiskinum. Hann stóð so niðarlaga í støðni, at vit sóu hann úr stovuvindeyganum, tá ið vit hugdu til viks. Loftið var heitt og tungt og kendist kvalið innanhýsis.

Dýrd var. Tá ið tað var myrkt, tendraði Anchundia eitt stórt ljós og setti á ein bekk í nótabátinum. Og so settu øll seg — ung og gomul, børn og abbabørn — uttan um bátin at bíða, til fiskurin var avreiddur til fólk, sum komu framvið hissini. Anchundia og synirnir sótu í skugganum aftur undir bátinum og skimaðust. Konan hevði sett seg upp í bátin, og tá ið fólk keyptu, handaði hon teimum fiskin og tók peningin. Tvær døtur hjálptu henni. Esperanza var eisini har. Hon sat í ljósglæmuni eitt sindur burtur frá Anchundia við einum lítlum dreingjabarni í fanginum, rein og vøkur sum madonna við barninum. — Og hóast ikki var annað samband uttan ein kensla av heilaghaldi undir høga stjørnuhimninum, kom fram fyri meg mynd úr bók Maxim Gorkis: Barndómurin, har hann sigur frá, tá ið omman og hann

Materiál chráněný autorskými právy

løgdu seg út í urtagarðin at sova eitt stjørnubjart kvøld. —

Eg fór oman til bátin at keypa mær tveir fiskar. Anchundia reistist, tá ið hann sá meg, rætti mær sjálvur fiskarnar og legði prís á. Eg plagdi altíð at tingast við hann um prísin, men hesa ferð læt eg vera, hóast tað at prísurin var minst dupult so høgur sum vanligt. Anchundia smírdist so findarblíður, tá ið eg fekk honum peningin.

## Eini hjún

Tá ið eg var og ferðaðist í bygdini N, noyddist eg altíð at støkka inn á gólvið hjá Jákupi. Tað bar á, at eg hevði sovorðnan skund, at eg fekk ikki stundir at vitja. Tá varð hann firtin og hevði tað á orði, tá ið vit hittust aftur.

Seinastu ferð eg var inni hjá honum, læt hann ikki væl at sær. Hann tótaði tá upp ímóti teimum áttati, og var longu fráfarin sum lærari í bygdini. Tað var sovorðið ørilsi komið á hann, segði hann. Holvdi hann seg framyvir, vildi hann alt fara á heysin. Beinini vóru farin at bila eisini.

Eg royndi at ugga hann. »Tygum skulu vera glaður um, at tað er ikki høvdið, sum er viknað. Skilið hava tygum gott enn.«

Jákup fetti sær á. »Eg hoyri teg, góði,« segði hann. »Nei, tíbetur, høvdinum bilar einki, haldi eg sjálvur. Har dugi eg ongan mun at síggja. Eg havi altíð roynt at gera, sum mamma lærdi meg. Tú skalt brúka høvdið og tað góða skilið, sum skaparin hevur givið tær, plagdi hon at siga, tí nýtir tú ikki høvdið og vitið, verður tín verð sum støðuvatn. Rot kemur í.«

Eg hugsaði við mær sjálvum, einki ert tú broyttur, gamli. Erpni, álit á egnar dygdir og lyndi at rósa sær sjálvum eru, sum tey altíð hava verið.

Jákup var á mangan hátt ein skilagóður maður, men øll hugsan hansara og tala drógu seg so dyggiliga saman um hann sjálvan, at hann tóktist ikki at hava virðing fyri nøkrum menniskja uttan sær

Materiál chráněný autorskými právy

sjálvum. Jákup var einkarsonur, og tú komst ikki á tal við hann, uttan hann tók til mammuna. Visti tú ikki betur, hevði tú væl kunnað hildið hann verið leysingarbarn, so sjáldan hoyrdi tú hann taka pápan upp á tunguna.

Jákup var um miðjan aldur, tá ið hann giftist. Konan var úr Havn og nógv yngri enn hann.

Eg hevði altíð havt varhugan av, at hjúnalagið var ikki gott. Hon var sum ein skuggi undir liðini á honum. Nosslig og tigandi gekk hon og stákaðist inni í húsinum, borðreiddi fyri honum og bar honum alt upp í hendurnar. At vera um mannin og røkja hann — sum tikið verður til — var ein skylda hon hevði tikið upp á seg, og hon gjørdi sína skyldu uttan at fáa tøkk afturfyri. Hann virdi henni ikki nógv orð. Børn fingu tey eingi.

Tá ið Jákup fór til gravar, kom eg í fylgi við henni aftur úr kirkjugarðinum.

Hon hevði tá búð nógv ár í bygdini, men líkt var til, at tað ongantíð var runnið saman millum hana og bygdarfólkið. Tey fáu, sum fylgdust við okkum í fyrstuni, hvurvu so við og við, og tá ið vit komu at durunum hjá Jákupi, vóru vit tveyeini.

Tá ið eg skuldi biðja farvæl, beyð hon mær inn, og hóast eg hevði onkur ørindi at gera og ikki hevði góðar stundir, tók eg av. Helt at tað mundi vera henni ovboðið at koma einsamøll aftur undir lonina beint av grøvini.

Hon beyð mær fyrst inn í køkin, fór sjálv innar í stásstovuna, har hon stákaðist eina løtu, áðrenn hon beyð mær innar.

Her hevði Jákup staðið undir børu. Farvegurin eftir hann lá enn um alla stovuna.

Myndirnar á bróstinum vóru mær kunnigar. Hann var uppi á teimum flestu. Har var mynd av mammuni og honum, tá ið hann fór til dópins. Hann er í síðum, hvítum blondukjóla, mamman stendur við honum í føvninginum, smílandi og andbráð sum átti hon allan heimin. Í uppvøkstrinum var hann tikin av fleiri ferðir saman við mammuni. Mamman var eisini uppi á myndini av honum, tá ið hann varð fermdur. Tað var týðiligt at síggja, at her var ein drongur, sum ikki smæddi seg burtur. Mamman sat á einum stóli, hann stóð undir liðini á henni, helt hondina niður á



Materiál chráněný autorskými právy

økslina á henni. Vinstra bein stóð fremst, eins og vildi hann stíga treystliga fram úr myndini. So vóru myndir frá stevnum, útferðum og fólkafundum. Sjálvt um nógv fólk vóru uppi á myndunum, var Jákup lættur at finna. Hann stóð altíð frammarlaga. Bara uppi á einari mynd sást konan. Hon var tikin brúdleypsdagin. Bragdið um andlitið á honum kendi eg so væl. Tað var opið og slotandi, soleiðis sum eg so ofta hevði sæð tað, tá eg hevði sitið og tosað við hann og hann dyrgdi eftir at verða róstur. Hann var í føroyskum klæðum. Hon stóð svinn og smæðin undir liðini á honum og hugdi beint fram. Hon var eitt vakurt og smidligt bygt fólk.

Tá ið hon hevði borðreitt fyri mær, spurdi eg hana mest fyri at benda huga hennara móti framtíðini, um hon ætlaði sær at flyta aftur til Havnar.

»Tað veit eg ikki rættiliga,« svaraði hon. »Tað veldst alt um, um eg sleppi av við húsini. Tað er ikki so lætt úti á bygd.«

»Ja, men tygum hava kortini útkomu, fáa eftirløn,« segði eg.

»Útkomuni stúri eg einki fyri,« segði hon. »tað er bara ikki so lætt at flyta. Mær hevur altíð longst aftur til Havnar, men nú havi eg verið so nógv ár her í bygdini, at Havnin er vorðin mær fremmand. Eitt er at gera ferðir til Havnar av og á, annað er at sita har einkja. Nú havi eg verið burtur so nógv ár, og tygum vita, hvussu tað er. Sjálvt okkara bestu vinfólkum grógva vit burturfrá, tá ið langt er ímillum, vit hittast. Flyti eg til Havnar, man mangur dagur fara at kennast drúgvur. Men kanska verður frægast at flyta. Líka veit eg.«

Eg dugdi ikki at ráða henni, men helt kortini fyri, at tað kanska var frægast, at hon varð verandi.

Tá segði hon: »Eg var fyri teirri ringu lagnu, at tað ongantíð rann saman millum meg og bygdarfólkið. Eg veit ikki, um eg hevði skyldina. Kanska havi eg ongantíð havt fólkaeydnu. Frá fyrsta degi eg kom higar, ansaði eg eftir, at Jákup var ikki væl lýddur. Hann hevði nógvar øvundarmenn. Fólk hildu seg burtur frá okkum. Eg tók mær tykni av hesum.«

»Íðan, hetta tókti einki at nerva Jákup,« segði eg.

Tað var tøgn eina løtu. Hon leitaði eftir orðum, áðrenn hon

Materiál chráněný autorskými právy

svaraði. »Nei,« segði hon. »Jákup hevði ta eydnu, ella hvussu eg skal siga, tað barnsliga lyndi, at hann ikki rættiliga fataði, hvat ið fyrifórst uttan um hann. Tað kom honum ongantíð til hugs, at hann kundi mistaka seg, og at fólk funnust at honum. Øvund og illgruni livdu sítt tigandi lív uttan um okkum, uttan at hann sansaði tað. Men eg visti, hvussu vorðið var, um ikki frá øðrum so frá børnunum. Tey duga ikki at dylja og nýta hulinskap. Í fyrstuni vit vóru gift, royndi eg so spakuliga at tala at, tá ið eg helt Jákup vera ov sjálvglaðan, men tí helt eg skjótt uppat við. Hann toldi ikki, at eg fanst at honum, enn og minni mammu hansara, sum tá var hjá okkum. Tygum vita, at Jákup var einkarsonur og sjálvandi lýtaleysur í hennara eygum. Tá ið av tornaði, var tað altíð eg, sum sat eftir og iðraði meg um, at eg dugdi ikki at tiga. Men tað lærdi eg meg.«

Eg var eitt sindur illa við, at hon var so opinskárað at siga og tosa um viðurskifti, sum komu mær ikki við. Vit kendust ikki so væl, at eg var næstur at fáa lut í loynidómum, sum hjúnini bæði høvdu havt sínámillum. Men eg skilti hennara støðu. At hava onkran hjá sær at skifta orð við gav henni ein linna. Og kanska var tað best at hava eitt avbygdarfólk, eitt sum hevði ikki livað so nær upp at Jákupi og henni, eitt sum hon helt ikki hava gjørt sær fasta mynd av viðurskiftum teirra. Hennara lív hevði verið so á tremur við tøgn, at tað lætti nú at sleppa at tala seg tóma.

Fleiri ferðir, tá ið ein steðgur var, ivaðist eg í at reisast og fara, men varð sitandi. Hvørt tað var av forvitni, ella av tí at eg kendi meg sum skriftafaðir fyri einari sorgarbundnari, iðranarfullari sál, fari eg at lata vera ósagt...

Hon er nú eisini farin. Fekk ikki upp í lag at flyta til Havnar. Seinastu ferð eg var og ferðaðist í bygdini, var eg úti í kirkjugarðinum og legði nakrar blómur á grøvina. Hon liggur undir liðini á Jákupi. Hansara grøv er longu ein væl aftursvarðað túgva, hennara er meira sum nýlendi. Sýruleggurin stendur so pretin og livir í summarlotinum.

Materiál chráněný autorskými právy

## Barnið, bergið og blómurnar

Vilt tú finna blómurnar,
eingin annar eigur,
gakk so djarvur huga tíns
brøttu bjargaleiðir.

Sortugrøs og hjálpurót,
út av torvu hanga,
fagrast eru blómurnar,
har ringast er at ganga.

Inni djúpt í gjáarskýmd
har dagur valla røkkur,
standa og hótta í hálvalýsing
trøllakampabløðkur.

Óttast ikki deymin har
ið fúnað er og modnað,
óttast ikki tostan har,
ið hvør er keldan tornað.

Óttast ikki hæddina
har hálkaður er klettur,
lat ei ørast fyri tær
at tú oman dettur.

Klívur tú og klintrast tú
allar leiðir finnur
upp og niður inn og út
størri fong tú vinnur.

Kanska nøgd av blómum tá
fært tú saman strevað
nógvar ferðir fagrari
enn nakar kann tær geva.

Materiál chráněný autorskými právy

Barn mítt, mangur undan tær
søkti sama lendið,
mangur, mangur undan tær
sum armur aftur vendi.

Men, mítt barn, um blómur tú
vilt vinna eingin eigur,
mást tú klúgva huga tíns
brøttu bjargaleiðir.

## Tú, sum ert undan á vegnum —

*Yrking vígd mammu mínari*

Tú, sum ert undan á vegnum,
sterkari dag um dag,
eg kenni í mær at ljóma
kenslurnar, sál tín gav lag.

Í fjarleikans fagrastu lognbrá
livir mítt barnaland
signað við eygum og hondum,
sum dugdi hin ljósasta gand.

Eg søki øll plássini aftur,
hond tín leiddi meg á,
tað elvdu mær eygu tíni,
eg ongantíð ríkari sá.

Nú eru eyguni farin,
følnað hár títt og hold,
nú rógvast tín skapandi hugi
í minni um leikin á fold.

———

Materiál chráněný autorskými právy

Eina ferð, tá eg var lítil,
satst tú og segði mær frá,
at deyðin var kyrran langa
um øldir og ævir lá.

Tá vart tú ung á aldri,
sum eg nú á miðjari leið,
tokka til lívið og deyðan
tú eigur at evsta skeið.

———

Hygg, nú er kvøldgingin sólin,
komandi kyrra við strond!
Kennir tú, fjarskotin sonur
takkandi rættir tær hond?

Tøkk fyri lívið tú gavst mær
— og deyðan, mær stendur íhjá —
tøkk fyri fuglar og blómur,
mær fylgja hvørt eygnabrá. —

Tú sum ert undan á vegnum,
dýrmetta var gáva tín,
mín hin reinasta tøkkin
tær fylgi um ytstu sýn.

Eg veit, um tú fert afturundir,
tú verður mær tó ikki fjar —
í huganum heim tín eg goymi
og altíð teg livandi har.

Materiál chráněný autorskými právy

## Myrkrið reyða

Tú væntar kanska kvæði
um blómur, ást og látur,
men í svørtum sorgarklæði
kann eg ikki vera kátur.

Mítt lyndi tað er sortnað,
og burturrikið teiti —
tað kenst so deyvt og storknað
sum kaldur reyður sveiti.

Eg syrgi mínar brøður,
og teirra blóð mær tálmar,
tí eru mínar røður
sum tungir myrkir sálmar.

Tey løg, eg havi hómað
í grønum torueldi,
í songi mínum blóma
við angistbundnum veldi.

Av eldi og av deyða
og bleikum morgunroða,
er runnið myrkrið reyða,
sum songir mínir boða.

## Tað kemur ein skýming

Tað kemur ein skýming, tá vit verða stødd,
eina ferð verða vit øll somul stødd
í brotinum uttast við strendur,
har undurið hendir,
vit hóma eitt vet av tí havmiklu rødd,
sum í og um okkum stendur.

Materiál chráněný autorskými právy

Og vit, sum í heiminum saknaðu heild,
tá kámt skulu gruna, hvør stórfingin heild
er ódnin á lívsins vegi,
at tað sum ber gleði,
er vesælur lutur og lítilsverd deild
mót heimsins oyðandi megi.

Men eiga vit gávu at óttast sum børn,
við trásjúkum sinni at harmast sum børn,
at leingjast mót stjørnunum bjørtum,
í náttmyrkri svørtum
skal dunandi rísa ein sútborin ódn
av songi í okkara hjørtum.

## Og rapla varðar allir

Og rapla varðar allir,
sum veita manni trygd,
eina í mjørka eftir mjáari rás —
komin er stundin.

Komin er stundin,
gróttøgn støkkur,
vakna røddir í steini,
løg, sum í loyndum
leingi dvaldust,
reisast sum veður og sjógvur.

Varin og flognæmur maður
lýðir á vaksandi stormljóð,
komandi nærri og nærri
fløðandi inn gjøgnum oyru
— brimar í østum blóði...

Materiál chráněný autorskými právy

Tá ið brestur tøgn í steini,
og dagar alda í hálvaskýming,
hvørjar berast sjónir fyri tá?
Eingir bátar við reystum seglum,
eingir akrar við búnum øksum,
ei børn, sum spæla í grasinum. —

Og tey hvítu, piðaðu beinini
— bleikari og reinari enn mjøll —
sum fólk finna í haganum,
og sum loypa hvøkk á tey,
heldur ikki henda sjónin er meir.

Komin er stundin, slokna sjónir,
óbygdur heimur er hugur og skil —
nøtrar sum vetrarnátt undir bjørgum
alt tað, sum maður vónar og vil.

## Ganga nú á meg minnini

*Faðir mínum til áminningar*

Ganga nú á meg minnini,
mær goymdu oyru og eygu:
dalurin fagri, mín barnaheimur,
millum brattar og brúnar heygar —
faðir mín flutti tey sjúku til,
burtur frísk og tey deyðu.

Mangan morgun eg vaknaði,
stirðnaði treyst og gleði,
hoyrdi hóvspor og vagnahjól
braka á eyrutum vegi:
faðir mín einsamallur á leið
við líki av bygd fyri degi.

Materiál chráněný autorskými právy

Fyri mær sá eg enni bleikt,
sum lá í hvítari kistu,
og faðirs enni — so dapurt bragd
myrkur og tyngsla ristu.
Tað uggaði barnahjarta mítt,
hestin eg hjá honum visti.

Lá eg bangin og slotaði,
til handan heygarnar ljóðið
fánaði burtur við og við
frá vagni og hestahóvi,
til oyrað fann aftur lív og lívd
í ævigum áarsjóði.

Vakin var altíð fossurin,
røddin úr skursli og gróti
fylgdi mær, tá ið eg burtur fór,
á heimferð hon kom mær ímóti,
var hjá mær, tá eg eina lá
í svartari náttargjótu.

———

Men sólskinsdagar við grønum bø
bjartir í minni branda,
teir róku burtur úr huganum
deyðaótta og vanda,
tá varð mín dalur eitt paradís,
har ljóst var og lætt at anda.

Heimurin brosaði móti mær:
fólk og brekkur og bøur,
teitið tendrað, leikaði milt
um faðirs livandi høvur,
tá ljóðaði áin so findarglað
sum suðið av veingjarfjøður.

Materiál chráněný autorskými právy

## Klettur

Fagur sum morgunroðin,
bræddur í sjóðandi eldi
slongdist tú út úr jarðarinnar innvøli —
varmi tín gav loftinum titrandi lív,
í havsins spegili ljómaði koma tín,
so vart tú føst grund undir landi mínum. —
Tá ið brakanin av eldi var av,
vart tú rógv og djúp tøgn.
Tú! Skæri korkagróni klettur!

Um summardimmið eins og ein brúður
leggur tú glæmu uttan um teg,
ljósa og svinna andlit títt
— krýnt av dagsins evstu glæmu —
horvir loyndarfult móti mær,
bindur meg við lívsgátu:
hvaðan komu vit, og hvagar ber leiðin?
Komnir av longum veg
hittast vit her um summardimmið. —
Spurin og tigandi starir tú at mær.
Við tøgn tíni vil tunga mín loysast.

Hvat veit eg um meg sjálvan
og um títt læsta andlit,
sum speglast í grótgráa heila mínum?
So tætt hjá mær, at hondin hvílir á tær,
ert tú mær kortini stjørnufjarur,
fjarur sum børn míni, kunningar og næstar,
fjarur sum alt, hugur mín skilir ikki av mær sjálvum
alt tað káma, sum speglast í tíðarinnar døkku flóð.

Men kortini føli eg námd tína,
hon er ein gleði í blóði mínum,
bindur okkum tætt tilsamans —

Materiál chráněný autorskými právy

fundvís leiðir hon okkum í ring
út úr upphavi, inn aftur í upphav.

Longu áðrenn her var mold og gróður,
skolaðu øldirnar fram við tær,
vatnið og vindurin sungu tær kvøður.
Ikki firrist eg tíð og tøgn, rógv og elli,
havi ikki gloymt at lýða á, har tøgn valdar,
orðini steintigandi og steindeyður ræða meg ikki,
tí eg gruni eina sál í kvirru tíni,
veit, at eisini í tær bragdar lív og langtan,
at eisini tú ert á ferð og við í fylgi,
broytist og skapast líðandi um
til tigandi dust, sum er mold,
livandi dust, sum er mold.

## Bambusljóð

Lítið visti eg,
borin til grót og gras,
at ytsta kimiliga pettið,
faðir skar av bambustráðu,
gav mær til boga,
áðrenn hann gjørdi dorgina uppundir,
var toppurin av einum strá.

Í sama darrandi viðbragdi
ørvin fleyg av streingi,
bogin lá og sang í hondini,
halgaði ljóðið meg upp í seg.
Rødd úr fjarskotnum londum
frá fremmandum fólkasløgum
— kunnug sum suðið í grasi —
tók meg fyri hjartað.

Materiál chráněný autorskými právy

Seinni kom kvøld á seiðabergi:
ljóðið frá dorg og tráðu
aldaði fyri mær
eins og víða skiftandi havið,
sum bindur saman fólk og lond.

Driftingarnir í tráðuni
fóru sum neistafok ígjøgnum meg,
gjørdu meg heitan,
búnan at ímynda mær heimin
ríkan sum dreymbornan veruleika.

Niður við klettinum
stóð spegilsmyndin,
vaks til bambusskóg fyri eygunum,
gyltu fiskarnir,
syftir upp úr myrka sjónum,
vórðu at leyvi á bambusviðju.

Hvar mundi í víðu verøld
henda tráðan vera vaksin?
Í hvørjum eygum hevði hon myndað seg?
Hvørjar hendur høvdu strokið henni?
Og suðið í bambusskógum:
í hvørjum oyrum mundi tað lenda?

Lítið grunaði meg tá,
bambus var gras.

Víða um hitalond bóru leiðirnar —
fuglur upp yvir veldigum frumskógum,
havi eg sæð tættan bambusvøkstur,
grønan úr rót í topp,
toyggja seg upp um dimmar trækrúnur.
Topparnir sum sólskinsantennur,
dandandi í grønum blaðatámi

Materiál chráněný autorskými právy

leiftraðu silkiglitrandi upp ímóti mær,
heilsaðu mær komandi og farandi.
Í svalligum urtagørðum,
gjørdum sum til djúphugsan
fann eg eisini mína ediligu urt —
ljósið spældi og skygdi
gjøgnum spelverk av fínum bløðum. —

Ongastaðni sá eg fagrari grønsku
uttan á grasi.

Tá skilti eg,
bambus var gras.

Havi verið gestur í bambussmáttu
gyltari sum korn og hálmur —
hugbindandi handabragd og kropsburður
sýndu mær blíðskap.

Hendurnar, ið borðreiddu,
bóru mær mat og drekka,
ongantíð ganga tær frá mær:
kykur og spølin hvør fingur,
yndisliga látandi
sum strá á bønum.

Kvøldið kom á,
fólk tyrptust saman í túnunum —
knappliga brast kvirran:
eitt bjart, ekkaleyst upphavsljóð
fløddi úr bambusfloytum,
sveipaði seg uttan um okkum,
tengdi okkum saman í eind.

Tá — djúpt innan úr floytutónunum —
loysti eitt ljóð seg burturúr,

Materiál chráněný autorskými právy

leingi hevði verið til innan í mær:
røddin á bambusboganum,
einaferð lá og sang í hond míni,
týðiliga kendi eg hana aftur —
um allan heim ljóðaði hon,
so víða sum suðaði í grasi.

## Brúgvar

Brúgvar, bogar úr steini og bláum stáli —
skapandi hugar og góðar hendur
spentu tykkum tvørtur um áir og avgrundir —
undir titandi fótum og rennandi hjólum
hastar vatnið móti høvunum,
uppi yvir: fuglarnir, vindurin og skýggini —
rómurin úr steininum og stálinum
heilsar komandi og farandi:
eitt kvæði um upphavligu vónir og kor manna:
langtan eftir longum ferðum,
ið byrja, halda á og ongantíð enda,
dráttur at víkjandi havsbrún,
stjørnufjarum loyndarmálum —
í stundan eftir at greiða saman alt tað,
sundur varð skilt,
lætti andin sær upp frá løgasteinum —
um stórar sjónir syngja allar brúgvar.

Eftir brúgvum, negldar í klettin,
skolar alda av monnum —
á ferð, á ferð eins og fuglur, vatn, vindur og skýggj —
opnar liggja leiðirnar, opin jørðin og rúmdin,
skiftandi landsløg strúka framvið:
jørðin, sólin, stjørnurnar, torueldurin
— og lívið —

Materiál chráněný autorskými právy

fest í fyrndina sum brúgvarnar í klettin. —
Fjøldir á fúkandi ferð í skínandi førum
mót nýggjum, ókendum heimum,
í hølunum fyrndargamlir hamar
blaktra sum skrødd segl í stormi.

Ferðamenn! Heimspekingar og yrkjarar,
sálarfrøðingar og prestar,
tit, í hugans deyðsjónir dreivaðu vallarar,
staddir í avgrund millum gamlar hamar og fljóta lívið!
Uttan um tykkum spurin eygu, slotandi oyru,
brennandi mannasálir, sum bangnar og leitandi
ynda lívið, hóma glæmuna í havsbrún.

Men tykkara ivingarsomu profethjørtu,
— bundin av avdúkingartrá og angist —
skáka seg undan lívinum.

Hvør kom banning døpur oman yvir tykkum,
tengdi tykkum fastari at deyðanum enn at lívinum,
fastari at fyrndarhamum, túsundáragomlum leiðum,
enn at skepnum, nú eiga lív, og teimum,
bornar verða í komandi døgum?
Hví syndrast heimurin í heilum tykkara,
blómar deyði í fótafari?

Ódeyðilig leiftrar glæman yvir víkjandi havsbrún.
Brúgvar bíða eftir at verða reistar:
livandi festi millum farnar og óføddar ættir,
tigandi mold og ljómandi lív —
bíða eftir skapandi hugum og góðum hondum.

Ódeyðilig stundanin eftir at greipa saman alt, ið
sundur varð skilt.
Um stórar sjónir syngja allar brúgvar.

Materiál chráněný autorskými právy

# Jens Dam Jacobsen

*(6/11 1912 - 11/2 1970)*



## Lítil vármynd

**Vaknaður vársins songur.
Á heystbaki genta og drongur
hvørva um lyngbrúnan hól.
Feta á fjalli, eygleiðandi varðar,
syngjandi sprund, meðan silvitnisskærar
vágirnar kyssast av sól.**



Materiál chráněný autorskými právy

Kúrandi vetrarljóð horvið.
Konur og menn í torvi;
nýkynt bál teimum hjá.
Skóleys børn seg á vøllin tveita.
Lombini skimast — mót løkinum leita.
Grøsini leiftra í lág.

Jótra í grønum dali
kýrnar í marglittum tali.
Í lýkkutámi hvør tjørn.
Ljómar í rúmdini spóssongur fríði.
Blómurnar spelknar sýna sítt prýði.
Í ánni vaðandi børn.

Rokmiklir piltar í báti
veittra til genturnar kátu
á seiðabergi við strond.
Nørast við eldhuga sólja og dái.
Høgt er til loftið: Himinin blái.
Jarmandi smálomb í nánd.

## Útlit

Vónleysar valda nú nætur.
Til mammur og børn eingin matur.
Hevnd húsar heimur og hatur.

Av flogførum land legðist oyði.
Á vígvøllum páparnir doyðu;
yvir líkunum vargarnir goyðu.

Mammurnar bíða og gráta.
Ravnarnir háðandi láta;
um býttleika manna mangt práta.

Materiál chráněný autorskými právy

Nær kemur dagur og friður?
Tá kærleiki kríggj bindur niður!
— Verður tað nakrantíð friður?

## Summarmorgun

Dýrd á vík og vág.
Rúmdin føgurblá.
Snjóhvítt summardáalak um eingir.
Grasið leiftrar frítt.
Lotið kennist lýtt.
Mýrisnípan spennir sínar veingir.

Rodnar rók og røð.
Búnast blómubløð.
Smálomb spæla sær á grønum slætta.
Ornar urðagrót.
Haran fim og fljót
spelar sum eitt fok á reyni bratta.

Unglingar og sprund
virka nú við skund:
hann við líggja, hon við síni rívu.
Hennar' brá og bros —
hansar' skemt og tos —
ber bert boð um tvey, ið líka lívið.

Fagra, fjálga stund!
Silvitni um sund.
Fróir flúgva fuglar millum fjalla.
Teirra káta mál
berst um vall og vál.
Gævi dagur aldri fór at halla!

Materiál chráněný autorskými právy

# Óli Dahl

(26/6 1915)



## Blóma mín

Blóma mín — yndisliga urt!
— sprottin av eymastu kenslum.
Stúran og vónloysi kyssir tú burt;
— — — ótal av hugarenslum. — — —

Tú urtirnar smáu bar mær í heim,
— — vælsignaðu blómuungar. — —
Tá legði tú neistan til gløðandi eim.
— Ein tøkk mær úr hjartanum rungar.

Materiál chráněný autorskými právy

Fjálgað meg hevur tú við tín barm,
styrkt meg við tínum anga.
Gávi vit ganga arm í arm,
til silvur er komið í vanga.

## Heyst

Nú følnar tað, sum spratt í vár,
tað lívið fjalt í moldum.
Og aftur fekk tað enn eitt ár
við góðum gróðrarholdum.

Vit minnast smædnu summardá
seg royna upp at lata,
tá svørt í díki sóljan lá,
— ja, er tað tó at fata?

Hon prýddi veitir, stokkut tó
tað reyða gullið vardi;
men fólk hon gjørdi glað og fró,
tá tey at henni stardu.

Var veitin gul og grasið grønt,
og blómur prýddu teigar,
so fær alt hetta afturlønt,
nú heystið valdið eigur.

Eitt vár, eitt heyst er lagna tín
tú mannabarn á foldum:
Fyrst ung, so mandug, silvurlín
og síðan undir moldum.

Materiál chráněný autorskými právy

Við hvørt eitt vár tú gleðir teg
til summar, sól og megi.
— Og aftur fór eitt ár sín veg,
tú eldist dag frá degi.

Men tann sum eigur gróðrarnáð,
ei nýtist hann at kúra,
tí eins og sólja, summardá
hann nýtist ei at stúra.

Materiál chráněný autorskými právy

# Bernhard Brim

*(7/11 1915 - 27/9 1969)*



## Tað var í mai

**Tað var í mai eg hitti teg**
**tá alt í blóma stóð,**
**tað var í mai eg misti meg**
**tí tú vart sum ein glóð.**
**Tvey eygu bros'tu móti mær,**
**ei neyðug vóru orð.**
**Og tað var eg sum fokin var,**
**mítt hjarta fór í sor.**

Materiál chráněný autorskými právy

Og skinnið, og skinnið, og tú mítt
lítla, fitta, mjúka skinn.

Náttin strekti aldrin til
at mussa klemma teg,
burt hon rann sum lítið bil,
og einki visti eg.
Vit hoyrdu ei at klokkan sló
tó still og ljós var nátt,
tú teskaði: Eg elski teg,
tað ljóðaði so gott.

Tú vart so snøgg og elskilig,
eg kundi myrla teg,
tú vart so von og tekkilig,
at ørur gjørdist eg
og tømdi allar steypar út,
ið tú væl unti mær.
Tá sólin hugdi inn um rút
eg ástardrukkin var.

Tað var í mai eg hitti teg
tá alt í blóma stóð.
Tað var í mai eg misti meg,
tí tú vart sum ein glóð.
Tvey eygu bros'tu móti mær,
ei neyðug vóru orð.
Og tað var eg sum fokin var,
mítt hjarta fór í sor.

Materiál chráněný autorskými právy

## Eg elski kvinnur

Eg elski kvinnur
og eg elski bátar,
byggiháttin og sniðið,
tey eru bæði eitt undur,
ið ilt er at skilja sundur.

Eg elski kvinnur
og eg elski bátar.
Nýggjar í barkastokki,
við skínandi bekkum og rongum,
— minna um kvinnur í lítlum og ongum.

Eg elski kvinnur
og eg elski bátar.
Bátar, ið liggja og vagga á floti,
og tá teir lyfta seg upp fyri aldu í vindi,
líkjast teir kvinnum — í leiki og yndi.

Eg elski kvinnur
og eg elski bátar.
Søkkladnar bátar uttan av havi,
ið fong føra til hesar strendur.
— Og kvinnur fullar upp undir hendur.

Materiál chráněný autorskými právy

# Regin Dahl

*(5/11 1918)*



## Hvar er rás?

Hvar er rásin um reynið?
eg viltist í dalinum longu,
og hvørja ferð eg vil til gongu,
er hamari fyri.

Klúgvi eg upp um hamar og knøtt,
so er oyði og eyrur har uppi —
har lætt er til fóta, tí gøtan er sløtt,
er køvandi móra.

Materiál chráněný autorskými právy

Fleyg eg mær sum hin sterka ørn
upp um hægsta tind —
kendi eg annað enn kaldan vind
frá tómasta oyði?

Er nakað blánandi, freistandi skarð,
ið beinir at reinleikans bygd?
er yvirhøvur ein leið fyri mær?
Hvar er rásin um reynið — hvar?

## Kona

Gongur inn og gongur út,
ruddar, hampar, ansar;
følnar andlit, gránar hár —
ganga dagar — ganga ár —
stundini ei sansar.
Livdi bert eitt sólskinsvár:
sóljufagrir kransar.
Kvinnuleið er sorgarsár,
tungir, vondir vansar.
Eygu turr, ei fellast tár,
um tú stokkut bara dansar.
Gongur inn — og gongur út.
Ganga dagar — ganga ár.

## Krákan

ella verjurøða yrkjarans

Vár aftur? — og hól og sól?
eyeyameg! hvørt rím eg stjól
sum pyntusjúk kráka —

Materiál chráněný autorskými právy

vit vóru nýgift, eg og orð,
hvat visti eg um málsligt hor —
   hvørt ljóð var nýtt,
   og alskin, býtt
   trúði mín fjepna sál,
at øll vóru blúgv og einki brákað!

Sól aftur? — og vár — og tár?
oy, nú er krákan fjaðursár
og full í lúsum —
hon trákkast eftir dunnuungum,
lambseygum og deyðum músum —
   um hól og ból
   og hamrastól
snjellir eitt ønskriligt krákuskról.

Vár aftur! — og sól!
Í nátt var landið mjørkafjalt
og náttgalin gól — gól upp á rím!
har krákan hølist, har er heldur kalt,
   hon misti málið — tað var alt —
   krákan fekk krím.

## Kvinnan

Harðari enn grót er kvinnan,
harðari enn jarn
og biturt stál;
grimmari enn bjørn er kvinnan,
grimmari enn garmur
og arnarmál.

Mildari enn døgg er kvinnan,
mildari enn sirm

Materiál chráněný autorskými právy

og sunnanfleyr;
skærari enn sól er kvinnan,
varnari enn vár
við áareyr —
sólskinsvár um vátan eyr.

## Vísa

Vit gingu gjøgnum viðalund,
sum fuglur kvað,
firvaldar flugu hunangsferð
av blaði á blað.

Vit gingu okkum viðalund,
tá dagur skein,
villini rósur lavaðu
av hvørjari grein.

So settust vit í viðalund
við rósurunn,
eyguni tíni mynti eg
og rodnandi munn.

Men nú er bart í viðalund,
hvør grein er bar,
fuglurin fór, og rósan fórst,
og tú, tú ert — hvar?

## Goymi eg minni

Goymi eg minni um hvítan sand
og sokkar og hosur á steinum

Materiál chráněný autorskými právy

og børn, ið vassaðu fram við land
á bleikum, smalvaksnum beinum.

Goymi eg minni um leik við strond
og hoppan á áargróti,
ráddi eg fríur um míni lond,
snarpur var eg á fóti.

Silvitnislag um tarastrond,
fossaskúm eftir kletti —
goymi eg minni um bleyta hond:
Hjálp mær, hjálp mær, eg detti!

Tú hevði fátækt og frísut hár,
eyguni biðjandi blá —
tað var ein løta ein dagin eitt vár,
aldri hon gongur mær frá.

Vassa væl børn enn við heimastrond,
byggja sær hús og brú —
enn hevur tú bønandi bleyta hond,
enn er tað bara tú.

Stuðlaveikur er armur mín nú,
fóturin stirvin at ganga —
rætt mær tó aftur hond tína, tú,
at styðja teg lívsdagin langa.

## Til unga frænda

*tá boðini vóru mær borin — og allar dagar*

Vit føddust av sama blóði,
tú og eg —

Materiál chráněný autorskými právy

vit møddust av sama móði
um manna veg.

Vit bórust av somu tíðum
um lívsins veg —
vit fórust í somu íðum
tú og eg.

Vit viltust á heimsins gøtum
av alfaraveg —
vit skiltust á lagnuløtum,
tú og eg.

Vit bórust av sama blóði,
tú og eg —
eg gráti av tungum móði
eftir teg.

*

Svik, svik — dagar og nætur
altíð svik —
frændi, frændi, fyrigev mær
alt mítt svik.

Angur og sakn, angur og sakn
nátt og dag —
fyrigev mær, fyrigev mær
eisini tað!

*

Okkum turvdi ikki Apollon
ella hálvgloymdan grikskan mann —
vit áttu Jesuspápa —
mamma gav okkum hann.

Fedrar várir í Føroyum,
mann eftir mann,

Materiál chráněný autorskými právy

møður várar í eyðmýkt
*skapaðu* hann.

Í eyðmýkt og halgari møði,
tá dagur í døkkum rann,
lærdu tær kærleikans hátign
og elskaðu hann;

tær lærdu, at lívið er ikki
at herja maður á mann,
men at elska veik og vesal
líka sum hann.

———

Tú unti øllum á foldum,
ongum vildi tú ann —
tú átti Jesuspápa,
móðir tín gav tær hann.

*

Apaldur angar mánanátt,
hunangur aldar um alla vídd,
hómi av hólmum likkulát
og sjóðandi aldudrátt.

Tað var mær sum heima í dag um nón,
hvalspýggjur róku fram við land,
sólin ló yvir tang og sand,
og tjøldur lótu á lón.

Hómi av hólmum likkulát
og vágsins lukkulag.

*

Hevnd fyri alt, tú rændi,
hevnd fyri níðingsdáð,

Materiál chráněný autorskými právy

hevnd fyri henda meinvitisheim,
her hámund og dramblæti hølast,
og gleðin liggur á strá!

Aldrin skalt tú skoða ta stund,
eg falli tær á knæ —
hákvæði skal eg rinda tær,
drápsbøðil, deyði, heljarbróðir,
til mín evsta dag!

*

Lat av so miklan orðagang
og stilla skjaldragný —
eg ráði ikki heldur enn tú
rúmdum ella tíð.

Eg fekk ikki heldur enn tú
á havi og himni vald —
vit tæna báðir veldigum harra
hvørt eitt andarhald.

Eg eigi ikki meira enn tú
á mold og myrkri ráð —
vit reka báðir ørindi
*hansara*, eingin sá!

*

So tyngjast spor, og gleðin týnist
í hesi tokkaleysu verð —
Guð er kortini við okkum,
í hvussu fer.

So tyngjast spor, og einsemi
veksur á vallaraferð —
Guð er kortini við mær,
í hvussu er.



Materiál chráněný autorskými právy

Haldi eg undan, haldi eg fram,
steðgi eg míni ferð —
Guð fyri mær allastaðni,
hvar mín fótur ber.

Tubbur og maðkar í grøvum,
og bitur og náðileys verð —
Guð, vár Guð, er í øllum,
*øllum*, ið er!

*

So verði eg aftur at royna meg
í mansins skotrandi stríð —
tó eg veit ikki hví ella hvussu
og ikki hvør langa tíð.

Men eg veit, at eg verði at líta um bak
og steðga á so mangan dag:
Tað eru so fá á foldum
av *tínum* slag.
—

So heilsi eg tær og haldi fram
í friði mín fákunnarveg:
Guð er jú lívið og vegurin,
er tú — og eg!

## Kvæði fremsta framtakskappa landsins

Vit eru føroyingar —
vit eta skerpikjøt
og knetti —
vit kasta nót og skjóta fugl
og drekka av fløskuni.

Materiál chráněný autorskými právy

Vit eru føroyingar, serstøk tjóð,
summir okkara eiga spenniskógvar,
og annað jólakvøld
dansa vit gólvleysir
saman við rættuligum bóndum.

Har fedrarnir stóðu,
var ikki standandi —
har var ov ábart —
men er ikki hugfarsligt
her í nýggjum skála,
væl — um ikki sjálvgjørdum?

Hinir skiltu ikki krav tíðarinnar
sambart og vegna tað, tí, tess —
men sleik tær um bragdið nú,
landi, fosturbróðir —
kendi tú nakra tíð matligari
royk enn úr Svartapotti —
bouillabaisse?

Vit eru føroyingar — og eingin fyrr
var tað nær ella námunda so nógv sum vit —
á hvørjum fundi (almennum)
og hvørji hátíðarstund
halda vit alt hátt
hátt í æru —
men yrkadagar — —
halt okkum til góða, vælsignaður —
yrkadagar hava vit ikki stundir.

## Innibyrgdur

Her er so oyðið,
her er so stilt;

Materiál chráněný autorskými právy

kvøldroðin doyði,
svart alt, ið var gylt.

Vóks náttarblánin
sum skyggið gler —
nábleikur mánin
á tigandi ferð...

—

Og tú sum liggur
á knæ við rút
og hyggur og hyggur:
her kemst ikki út!

Ungdómur tín farin,
— eitt angleyst strá —
og vinaskarin
fallin frá.

Tú lætst alt fara,
satst hond undir kinn
og bíndi bara
í myrkur títt inn.

So tyrptust og tustu
dreygar úr nátt,
og allar brustu
hurðar í gátt.

Tú leypst at stongsli
at skjóta frá,
men læst er fongslið
uttaná...

Við jarnsteyr liggur
tú fram á rút

Materiál chráněný autorskými právy

og hyggur og hyggur:
her kemst ikki út!
—

Og náttarblánin
er skyggið gler —
nábleikur mánin
á tigandi ferð...

Her er so egið,
her er so stilt —
og blóðsins gleði
— burturspilt.

## Genta við vindeygað

Og gleðin varð fátæk sum eitt dansistovukvøld
við draguspælsdrynjan og illramum bosi,
og heimleiðin øll berlig og køld
við boysnum og býttligum tosi.

Og gleðin varð skendsk sum eitt forstovufríggj
av handahógv við afturlatnum eygum,
har ið eingin nerting var vøkur og nýggj
uttan andstygg sum favnlag við dreygum.

...Men eina ferð hildust vit um hendur inn í dal,
og festið gat eingin slitið sundur!
Og eitt muss við einar køksdyr sum evsta farvæl
varð ein songur og unniligt undur.

## Døgurðatíð

Í regnhettu, gummistivlum og góðum lag
komst tú ímóti mær hvønn grómutan vetrardag.

Materiál chráněný autorskými právy

Havnará goysti frá sær í øðini,
niðri á Vaglinum dryppaðu trøini.

Krókabrekka so runut og hál,
vit mundu onga tíð komið á mál.

So fórt tú til døgurða, kossurin tín
var mær sum fínasta brennivín.

## Lukkuríman

ella Eg tími ikki —

Eg tími ikki longur, eg leggi einki í,
tey meyla og meyla í heilum:
Tú mást skilja tað, at hetta gongur
ikki leingi, sum tað gongur — —
eg leggi líka í, eg tími ikki longur.

Tey vilja lokka meg at leggja upp í,
at kýta meg og kjakast og keglast,
at vera framvið og kanska gerast kongur
í Svíaríki eina ferð — áje, áje, tann fongur —
eg leggi fjendin í, eg tími ikki longur.

Ágrýtin og nærlagdur og trantin upp í ský,
snildur viðhvørt, og forbiðin onkuntíð,
so kemur, um so vegurin var trongur,
okkurt burturúr: ein glæstrisjarðarferð,
og kanska eisini ferrøddur songur — —
eg leggi líka fjendin í, eg tími ikki longur.

Materiál chráněný autorskými právy

## Illi bóndi

Einki verður, sum ætlað var —
langskip royndust lasafar.

Einki verður sum væntað —
lukkudýpið: illa skantað.

Alt, sum var arvað,
burturavskarvað, sundurkarvað.

Alt tað nýggja:
hýggjað spýggja.

Hetta varð so tín hilmisferð —
eydnufolin: gomul mer

hinkulinkandi, pesjut og pøst,
stavnbeint í stóra køst.

## Blíði bóndi

Nei, roysni havi eg eingi int
og lítið og einki skil havt
á tí sum hendi —
á lívi og deyða hvaðna minni —
men eg veit líka:
hetta, at taka við,
at hava ivaleyst at takast við,
at hampa um bygd og bø,
ímeðan dagar, ár og aldur
komu so líðandi —
tað fell mær so væl.

Materiál chráněný autorskými právy

Kvøldmóður var eg aloftast,
men at fara á føtur við degnum,
at balast á báti, í bergi
og burtur í haga —
einki var sum tað — —
og so at leita at húsum,
tá ið skýmdi og lampan lýsti.

Nú vakni eg tíðum so tíðliga
og liggi við frið,
meðan gamla blæsur so blíðliga
mær við lið —
tá síggi eg gjøgnum vindeygað
sólina rísa sáttliga
aftur úr havi,
og stund um stund
taka heimastarar at láta.

Seinni klúgva so smágarparnir
upp um stokk
at klípa abban til stuttleika
og nappa høkuskeggið.
Jú, heldur heilsan so dánt,
og eyguni ikki bila,
vænti eg mær manga náðuga løtu,
áðrenn eg rógvist með alla.

## Lítil samrøða

Nú kemur tú aftur við sama svassi
um Gud og tílíkt —
væntar tú tær, av tí at tú dugir at yrkja,
at vit vilja lýða á gamalt møsn?
— Nei, nei, hetta hjá mær man helst

Materiál chráněný autorskými právy

vera nakað hýggiskotið,
men hvussu er tykkara vorðið, meðni?
Jú, vit hava Marx (endurbroyttan sjálvandi)
og Freud (endurbroyttan sjálvandi)
og ápostlar teirra, sum,
sjálvandi,
verða endur- og umskiftir
soleiðis vikuvís.
— Á du, á du, ber tað til — so lættliga?
— Ja, tað kanst tú líta á.
— Á du, á du.

## Bilferð á vetri

Snjóskørð lýsa mót norðurhimni,
í dølunum tátt,
morreytt gras og svartir seyðir
á biti —
bilarnir sum helsisperlur
um herður og hálsar.
Við bryggju virkisfræg før,
og út um fjørðin
grønligar álir av sildalýsi.
Henda var yndisbygdin,
her lá hjarta mítt eftir.
Aftur á heimferð.
inn í kolandi kavaguvur,
meðan Sornfelliskúlurnar
glíggja í seturssól.

Materiál chráněný autorskými právy

## Uppi á hagahøvdunum

Uppi á hagahøvdunum
miklar handilslonir:
lomvigabringur, lambsdrunnar,
lendatvál og alskyns fras.
Dukkur — og dukkudiddur
við spílaðum fingrum
á teljandi tólum.
Føgur hólmabrot,
skip, ið bóltast sum nísur
í sólarheglingi.
Her innan glugganna
kaffismílur, danskur poppur,
danskur poppur uttan støðg,
heiladoyving ríkra manna.
Eystnes. Havið.
Eygu tíni tvá.

## Teir

Teir týna heim mín
hvørt bil, ið fer —
teir drepa *alt*,
sum fyri er.

Teir eitra hvønn bøkk,
hvørt strá —
alt í neðra
og alt omaná.

Teir eitra kindið
í móðurlívi —
eitra sárið
undan kynstursins knívi.

Materiál chráněný autorskými právy

Fyrr var tað hin mikli, ið ræð:
frið og grið —
*nú* er tað ábyrgd *okkara*
í túsunda lið!

## Leysasøkk

Eg elski oyggjarnar, men eg hati fólkið —
eg elski fólkið og hati oyggjarnar —
eg bæði elski og hati bæði —
fegin vildi eg hvørki hatað ella elskað hvørki.

*

Janus skrivar kanska *fínari* føroyskt — men Hans Andrias skrivar í hvussu er fínari *føroyskt* enn hann.

*

Vit døma eftir eygum okkara og oyrum — men sær marflugan tað sama?

Kann ikki onkun dagin onkur við nøsum sínum kenna tann Gud, vit ikki síggja? —

Lat okkum vera varin — og vakin.

*

Listarmaðurin er tólið, tjóðin er leikarin — alt tað ið brýtst í henni: kvøl og neyð, ómegd og feiknarmáttur, yndi og óstiltur tokki, vónsvik og glaðasta áræði og fram um alt langtanin — alt leikar hon, við ósjónligum hondum leikar hon, og tólið syngur. —

*

Materiál chráněný autorskými právy

Løgið man tað ljóða, men enn tann dag í dag ivist eg í, um óndskapur sum óndskapur er at finna! — Fyri tað, um teir drepast so dúgliga?

Ja, um drápshugur, eltingarhugur og onnur slík blóðøsing verður at fáa so fínt navn, so verður sjálvsagt lítið eftir uttan óndskapur. —

Men *óndskapurin*, tað at vilja øðrum ilt bara fyri tað sama — á, hann krevur dirvi — hvør í hesum kólandi, klórandi flokkinum mundi vágað sær at lopið tað lopið?

*

Tú upplivir ikki tað tú upplivir, fyrr enn tú hevur upplivað tað.

*

Tit vanvirða annars so óendaliga fjøldina, plebs, hví í hundans navni trákkast tit so eftir hesum viðgitnu lógvabrestunum?

*

Torført er at fyrigeva teimum ið móti okkum synda — tyngri teimum, vit syndaðu ímóti, — og kortini fellur mongum sváråst at fyrigeva sær sjálvum syndir sínar. —

Materiál chráněný autorskými právy

# Bergur Djurhuus

*(12/5 1919 - 6/10 1946)*



## Konutátturin

Nú Føroyar eru hersettar og komnar upp í kríggj,
tað trýtur ei hjá kvinnunum við eingilskmanna fríggj.
Ja, allar gamlar gentur eru komnar upp í part,
tær halda, nú er hopið ljóst, sum ofta fyrr var svart.

Ja, glaðar vóru titturnar, tá troppaskipið kom,
tær troðkaðust á kaiini til uttastu trom,
so hjartaliga fagnaðu tann eingilskmannaflokk,
ja, nú er ei at drála, tí nú er mannfólk nokk.

Materiál chráněný autorskými právy

Tað hevur síðan gingið til so ørt og so vilt,
sítt navn og sína æru tær flestu hava spilt;
soldátarnir teir brúka tær jú bert til tíðsfordrív
og virða tær ei meira enn eitt mýggjabitalív.

Tær rekast við soldátunum og kenna ei til skomm,
so skiftast tær um Jim, Jack, John og Tom,
og hvønn tær fáa fatur á tað líka mikið er,
ja, sjálvt um hann er giftur, tað ongan skaða ger.

Trúlovaðar gentur og giftar konur við,
alt fylkir seg saman í hetta øra lið,
og gongur ein í gøtunum, ein lítið annað sær
enn í øðrum hvørjum króki eitt eingilskmannapar.

Ja, soleiðis ganga nú tey flestu konufólk,
tær blindar seg geva í henda villa bólk,
ein skammplett tær seta á ta føgru Føroya tjóð,
í vitloysi tær blanda saman enskt og føroyskt blóð.

Ja, hugurin er góður, hann er av besta slag,
Gud viti hvat tær gera, tá teir nú fara avstað,
so einsamøll tá hvør soldátargenta gekk,
ja, tá var brúk fyri »Skálabonki«, men nú er hann vekk.

Materiál chráněný autorskými právy

# Oskar Hermannsson

(24/8 1920)



## Fiskagentan

**Eg minnist enn sum ungur,**
**hvar gamla gøtan lá,**
**og vegurin var tungur**
**at ganga niðan frá,**
**har gingu ung og gomul,**
**væl flestu kendi eg,**
**har tráddu vit øll somul**
**tann strævna lívsins veg.**

Materiál chráněný autorskými právy

Har gingu fiskagentur
og gamlar konur við,
tann vegurin var hentur,
lá lítið vet á snið,
har mundi mangur knossa,
tað var ei bert til gleim,
har menn sum høvdu lossað,
so troyttir gingu heim.

Eg minnist gentu unga,
hon var so fótafim,
og hendan brekkan tunga
væl mýkti mjúkan lim,
— og høvuðburður háur,
og eygnadýpið blátt —
tá mundi vera fáur
ei hana vildi átt.

Hon mentist og hon giftist
og var eitt megnar vív,
var ei tað slag sum syftist,
men livdi still sítt lív,
til heim og børn so bar hon
ta kós hon hevði valt,
við manni sínum var hon
av øllum alvi alt.

Enn rennur mær í minni,
ta gøtu undir sól,
og gentuna á sinni
ið fagrar tankar ól —
hon borin var til ljósið
og drúgva eydnustund —
við hesum fagra drósi
mær leingist enn á fund.

Materiál chráněný autorskými právy

## Lítil gongumaður

Stetlar fram við songarstokk
søti fitti bróðir,
kvikur við tín gula knokk,
kemur tú so góður.

Stutt og vøkkult er títt spor,
stimbrast knotur sælar,
um av varrum einki orð,
eygnabrá títt talar.

Blítt er bros, og tonnin ein
blonk um varrar skyggir,
mennist sál og mannabein
meðan tíðin byggir.

Lítli, hvør er lagnan tann,
løgd á tínar breytir?
hvør er hann teg læra kann?
hvørjar tínar treytir?

Góðir andar goymi teg,
gøtur tínar signi,
veri vørn á tínum veg,
væl tá alt tær vigni!



Materiál chráněný autorskými právy

# Flóvin Flekk

**(16/9 1920)**



## Ein unglingi 1941

Veðrið var frálíkt. Mánalýsi og logn. Skýggini fóru so hóvliga av stað, sum ein kann hugsa, at tey fóru fyrstu jólanátt. Av og á sást ein skuggi standa niðan undir Svøðini, hann helt seg ikki vera væl lýddan niðri á tí alljósa heysthóvnum.

Á markinum á einum rótarkáli úti í Trøðni sita Jákup og Hjørdis. »Nú hava vit sitið eina slíka ævi her og ikki nomið eina rót, heldur tú ikki, vit eru ov skikkilig,« heldur Hjørdis og smíltist. »Ov skikkilig — tað haldi eg ikki, vit eiga jú einki í kálinum.«

Materiál chráněný autorskými právy

»Um vit ikki eiga í tí, so kunna vit fáa okkum eina rót úr tí.« — »So, hevur tú ikki lisið, hvat ið bløðini søgdu um rótastuldur.«

»Jú, eg las tað, men nú haldi eg, at vit fara at fáa okkum eina rót, Jákup; Mikkjal bóndi leggur ikki petti í tað.« — »Nei, tað haldi eg við.«

Hjørdis fer eftir eini rót og gevur Jákupi hana:

»Ger so væl og flys — vit býta hana í helvt.«

Meðan hann flysur, sigur Hjørdis: »Fert tú so av stað ímorgin?« — »Ja, Hjørdis, tað ætli eg, ferðin stendur í Guds hond — ger so væl,« hann rættir henni rótina og knívin.

»Hvussu — hevur »Jarnpílurin« fulla last.

»Ja, ja, vit sigla í annaðkvøld, hugsi eg.«

»So skjótt.« — »Ja, tað veitst tú — ikki er at drála, tá ið fult er — Hoyr, hvat sært tú á hasum knívinum — tú hyggur so...« »Nei, Jákup, bert tí, at tú eigur hann, og eg nú veit, hann skal fylgja tær um Onglandshav — bert tí!«

»Eg haldi, tú kanst hava hann,« sigur Jákup varliga. Hon rættir honum hondina og leggur seg aftrat honum: »Jákup, eg skal goyma tær knívin, til tú kemur aftur, men lat okkum nú fara heim, nú er seint.«

So fara tey.

Hann fylgdi henni inn í hoygarðin, har hann heilsaði henni. »Góða nátt, Jákup, og Harrin veri við tær,« sigur hon og fer. Jákup hyggur aftan á henni: græt hon? So fer hann heim, lættur sum fuglurin.

Aldri áður hevði hann kent seg so glaðan sum hetta kvøldið. Aldri hevði bygdin verið honum so vøkur, men havið — vakrari var havið. Hann steðgar á: var tað ikki lokkandi. Hann kendi havið — ikki var tað altíð sum í kvøld. Rán dugdi at vera ill. Tá ið sjógvarnir sóust sum rullandi fjøll uppi í lu, tá ið stormurin fór ýlandi av stað við glaðunum, hvin í vantum, gronan og glintan — tá var ikki so hugnaligt, men í slíkum løtum rann blóðið honum heitt í æðrum, megi og reystleika løgdu slíkar stundir honum í arm og í barm.

Hugsandi fer hann aftur til gongu. Tað var fedranna arv,

Materiál chráněný autorskými právy

hann her skuldi røkja, og hægsta ynski hans var at røkja hann væl. Havið í logn skuldi hvíla hann til stríðið í ódn.

Hann steðgar aftur undir stovuni: aldri hevði hann tó sæð bygdina so vakra sum nú, og í hesum vakurleikanum sá hann framtíð sína — ein ljómandi ferð: skip — veiða — og so — — ja, ongantíð hevur hon grátið fyrr, hann var farin.

So fór Jákup inn at leggja seg.

— — —

Um morgunin leggur postbáturin at á støðni, og Jákup skipar inn.

Meðan skiparin á postbátinum tosar við Mikkjal bónda, gongur Jákup og biður skyldfólki og vinum har á støðni farvæl. Onkur eldri maður sló hann niður á økslina og mælti: Jesus fylgi tær, Jákup! Hav eyguni við tær, havið yður av øllum illum í hesum døgum!

— So er — so er, vit gera tað, vit kunnu, og tá ið hann er við, veri vilji hansara. —

Síðst heilsaði hann mammu síni — hon græt, og tá ið Jákup hetta sá, fór ein undarlig kensla ígjøgnum hann, so snúði hann sær og fór umborð.

— — —

Í handilsstaðnum hevði Jákup ein vinmann, sum æt Jónas.

Tá ið arbeiðið var liðugt umborð — okkurt var at takast við, hóast lastin var liðug — var Jákup farin at hitta Jónas, og nú gingu teir sum so mangur annar úti á breytini í mánalýsinum.

»So fiskiskapur er eingin.« — »Nei, ikki nú og annars eru eingi stórvegis tíðindi haðani.«

»Tær dámar væl at fara av stað aftur?«

»Eg veit ikki, eg hugsi ikki so nógv um tað, heima er einki at takast við, eg trívist ei heldur heima ov leingi.«

»Men tú! Hví fert tú ikki á stýrimansskúlan í hesum vandatíðum.«

»Júst tað, eg havi ætlað, men siglitíðin er ov stutt, eg má hava 7 mánaðir aftrat, eitt heilt fiskiár í vanligum tíðum, sært tú.«

Teir fara oman á bryggjuna, har »Jarnpílurin« liggur.

Materiál chráněný autorskými právy

»Kemur tú ikki umborð, Jónas?«

»Ájú.«

Teir fara niðurundir. Ein lampa við bleikum logi hongur á pallstyttuni, á borðinum stendur ein bakki við feskum kjøti og eplum, summar koyggjulúkur eru frá, aðrar fyri, og kvirra hvílir yvir heila bunkan. »Vit fara at fáa okkum ein bita, Jónas, set teg niður.«

Meðan teir eta, spyr Jónas: »Hvar er koyggja tín, Jákup?« — »Hon er har afturi, vit sova allir har afturi, eg veit nú ikki hví — sigla vit á eina minu, ja — so ger væl ikki mun, hvar tú ert staddur á skipinum, men — sjálvandi — forendin fer fyrst — —« hann starir fram fyri seg: »Løgið! Tá ið ein hugsar um lívið, hvussu lítið vert tað tykir monnum at vera í hesum døgum, er tað rætt sum vón um alt gott og vakurt sníkir seg burt — so mangir av vinmonnum okkara í besta blóma eru riptir burt sakleysir, sum teir eru í tí, hesir búrkropparnir klandrast um — abbi segði við meg, at mær nýttist ikki at fara, eg doyði ikki í hungri enn — men tá er jú ov seint, og so aftrat liggja heima og sova tey bestu árini burtur, nei, eg sum ein annar havi ábyrgdina fyri landi og fólki — higartil hevur mær eydnast væl!«

»Og eg vóni, tað fer at eydnast tær framvegis,« sigur Jónas, hyggur so upp á Jákup og smílist: »Heldur tú ikki, at eitt tár hevði fallið í loyndum, um tú kom ikki aftur?«

Jákup smíltist bara, honum rann í huga, hví hann nú sat og piðaði bein við breyðknívi.

Skemtandi fara teir upp gjøgnum leytaran, skiparin stendur miðskips.

»Nær verður farið,« spyr Jákup heldur álvarsamur.

»Beinanvegin — bíða bert eftir motorpassaranum. — Jákup, tú mátti farið og tendrað okkum ljósini.«

»Jú, jú,« sigur Jákup og heldur so fyri við Jónas: »Tú fer niðaneftir — so sigi eg tær farvæl.«

»Farvæl, Jákup, og eydnuríka ferð.«

Jákup tekur hondina aftur um oyra, setir albogan aftrat mastrini og skakar húgvuna við hinari hondini: »Tað vóni eg — gamli er komin høgt.«

Materiál chráněný autorskými právy

Soleiðis sá Jónas hann standa, tá ið hann vendi sær við uppi á bryggjuni fyri at veittra honum.

— — —

Fýra vikur og einki frætt frá »Jarnpílinum«.

Jónas gongur oman á bryggjuna — hvørt einasta kvøld hevði hann gingið — nú hyggur hann ikki longur eftir »Jarnpílinum«, nú vendir hann sær ikki við, nú var eingin at veittra til — hann steðgar úti á endanum og lítur út móti havinum: »Sonur Føroyalands! Hesa ferð vanst tú ikki heim aftur, nú goymir havið teg, sum trúgvur í ódnini fremja vildi arvin, fedrarnir góvu tær.«

Hetta sama kvøldið gongur Hjørdis eftir vegnum út gjøgnum Trøðna; hon hevði gjørt sær ørindi inn á gólvið hjá foreldrum Jákups fyri at vita, hvussu teimum visti við. Hon gongur og hugsar um dreymin, hon droymdi fyri stuttum: hon var hjá Jákupi og hevði spurt, hví hann kom ikki aftur, men hann hevði svarað: eg skuldi fara niðurundir eini smáørindi, og rætt sum eg kom í leytaran, varð eg riptur burtur; men her er so vakurt, eg vildi, at tú eisini skuldi komið higar til mín í henda vakurleikan. — So var hon vaknað.

Við kálið steðgar hon, hyggur at teimum følnaðu bløðunum, og renna henni tá orðini í hug, hon sum barn hevði lært, men hon fekk tey ikki fram — ásannaði tey bert:

Dreymur á ungdómsárum
elvdi gleðina tær —
veran á manndómsárum
skilti, hvat dreymur var:

ein blíð, ein blinkandi stjørna —
ein sólgeisli fimur um vøll —
ein yndislig ljómandi urga —
eitt bros úr himmalsins høll —

Og so fór hon heim — einsamøll fót fyri fót.

Materiál chráněný autorskými právy

## Flóvin og valkyrjan

*Flóvin:*

Fleyg eg høgt sum hegrin,
svam eg skjótt sum eyrriðin,
livdi eg og doyði
eins og einherjin —

kortini mær longdist,
kortini eg trongdist — — —
ungdómsdreymar mínir
allir samlir rongdust.

Livdi eg sum Baldur,
alla ævi mína,
allan, allan aldur
á mær einki rína —

kortini eg ei
treivst á hesi leið —
kortini mær røkk
eygnaturra Tøkk.

Mjúkur mistilteinur
nælir mær í barmi —
yndisligur — reinur — —
drepur meg í harmi.

*Valkyrjan:*

Hvar er harpa mín?
Er hon har!
Lat meg spæla enn
fyri tær!

Hvar er hjarta mítt?
Er tað har!

Materiál chráněný autorskými právy

Tað skal sláa enn
fyri tær!

Sær tú harmin mín?
Mína sál?
Sær tú bikar mítt?
Sorgarskál!

Lat meg spæla enn
fyri tær!
Men — harpa mín — —
o — hvar — —?

II

*Flóvin:*

Tak meg upp á nátt,
tú valkyrja von,
gev mær aftur mátt
undir Óðins lon!

Lýð á sorg og tøgn,
turka benjardøgg,
tú, einasta øgn. —
Sárt sveið høgg í høgg!

Far í Óðins brunn,
tú, valkyrja fín,
rætt mær søtan munn,
rætt mær vit og vín.

Væna Óðins fljóð
fyrst í favni tær
her í harmaflóð
alt kann eydnast mær!

Materiál chráněný autorskými právy

Einans mundi tú
duga tendra ljós
mær í Óðins bú —
tú, mítt vígda drós!

Komu túsund sprund
meg at bera heim,
einki grøddi lund,
einans tú gav gleim!

Gev mær aftur mátt
undir Óðins lon,
tak meg upp á nátt,
tú, valkyrja von!

*Valkyrjan:*

Bíða mær enn um stund —
enn drívur døgg á grund,
syngja í viðalund
vitjur um skepnufund.
— — —
Bíða mær enn um stund!

## Tað vakurt er

Tað vakurt er at droyma
um sól, ið farin er,
og finna millum minni
eitt lítið fagurt ber.

Men vakrast, tá ið gloymskan
tað hevði burturbeint,
og finna tað so aftur
at vera frískt og reint.

Materiál chráněný autorskými právy

## Rætt mær hond

Rætt mær hond, o Jesus kæri,
allar staðir hvar eg fari,
hvar enn liggur leiðin mín,
Jesus, lat meg vera tín!

Veikan sær tú meg at standa
staddan svárt í syndavanda,
herjar meg hin illa verð,
steðgar mær á góðu ferð.

Søkk í syndasótt eg niður,
tú, o Jesus, vann tó sigur,
fegin vil tú hjálpa mær
yvir heimsins skuggaskarð.

Rætt mær hond, o veldisseggur,
her so stuttur er mín steðgur,
verj meg móti myrkurs gerð!
Jesus, signa mína ferð!

Materiál chráněný autorskými právy

# Esmar Jacobsen Gata

*(9/12 1925)*



## Rakul í Rama

Grátur hoyrist og ramaskríggj
— hvør uggar Rakul í Rama —:
Í dag, áðrenn sól var í suðri,
og mamman bar barn sítt at brósti,
rændu teir sonin frá Rakul.

— — —

Um mundið tá Móses var borin
við Nilá í landinum Gosen,

Materiál chráněný autorskými právy

tók Farao smábørn av døgum;
væl kendi hon sakir hans Rakul:
Hann fjølgaðist ovmikið, Jákup.
— Men hví drepur Gýðingur Gýðing?

— — —

Ei grunaði grátandi kvinna
at luturin, henni var latin,
var spámannaorð Jeremia.
Og duld vóru hyggjuráð henni:
Vá miðgarðsorm kongssonur mikli,
nú leikti við Nilá í Gosen.

— — —

Enn grætur Rakul í Rama,
eitt ramaskríggj reikar í rúmdum.
Men tel henni — Rakul í Rama —
um hann, sum varð jólanátt borin,
um ferð hans á feigdlanda fløtum.

## At kunnað —

At kunnað lagt frá sær,
latið tagna alt breyðtos,
og sitið hattleysur
á onkrum vegamóti
leikandi fiól.

Materiál chráněný autorskými právy

# T. N. Djurhuus

*(11/5 1928 - 1/8 1971)*



## Eg gangi —

Eg gangi í grasgróvna túninum,
eg gekk í sum lítil drongur,
hugurin viknar, sinnið gerst sjúkt,
í sálini loysnar og gongur.

Húsini tóm og tigandi,
várdagur ljósur og fagur,
á vegnum ein ljóshærdur drongur kemur:
»Hvat gert tú her, fremmandi maður?«

Materiál chráněný autorskými právy

»Lítli mín, spyr ikki, far og spæl,
forvitin sjáldan er fegin!«
Steinarnar hesar minnist eg væl,
fram við vegginum, henda vegin.

Og trappusteinarnir allir sum tá,
hygg, sami durastavur!
Sum piltur tú rakk ei at klinkuni upp —.
— »Har býr eingin, fremmandi maður!«

»Lítli mín, legg tú einki í tað
— og plága meg nú ikki longur!«
Býr eingin! sigur tú vinur — men
er tað ikki hurðin, ið gongur.

Ljósleittur drongur á gáttini
— lukkudagarnir hinir
livna aftur í túninum — —
»So, far so og spæl, lítli vinur!«

— undir veggi hann spældi við horn,
hvør seyður á bás varð settur
í veggjaholur, har og har — —
— »Maður, hvørjum leitar tú eftir.«

»Tú spyrt og spyrt, slepp tær avstað!
Nei, lurta so væl mín vinur:
eg leiti eftir mær sjálvum her!
Hvat? Hvarv tú nú burtur mín vinur — —.«

## Oyggjar í toybili

Sum rov av fornum djórum,
sum ræ av risahvølum,

Materiál chráněný autorskými právy

við rivjum ovurstórum,
løgnar oyggjar liggja
toybilskvøld —
og skyggja
sæst brim á hamarstjølum.

## Vesturskin í viðalund

Maifagrar furur smíla
kring tjørn í blikalogn
við grønum hólmi, har hvíla
sæst snjóhvít, klekjandi okn.

Smáir vørrir frá slíkum
skyggja í vesturskin,
vaksa og vikna við smílum
frá børnum, ið nú verða lin.

Sólin veður í vestri,
vælsignar skálkar og skøld.
Eins og hon sat undir lestri
er sálin mín kvirr í kvøld.

## Jarðareygað

Jørðin drýpur høvur niður,
dimmist longu millum heyga,
lágt í vestri letist aftur
troytt av degi jarðareygað.

Eina løtu enn í havsbrún
loga fjarar dreymalindir
undir tungum eygnahvarmi
— dagsins síðstu, dýru myndir.

Materiál chráněný autorskými právy

Men so evsti sólargeislin
undan eygnaloki dregur,
eygað fellur í, og jørðin
undir kvirrum stjørnum svevur.

## Ein vísa

Tíðin grøðir, og ikki
alt, sum glitrar, gull er.
Vísdómsorð, sum eg minnist,
viðhvørt, tá eg eri fullur.

Tá kemur — í fylgi við gloymdum
dygdum og hugarenslum —
tú, sum eg tilbað hinaferð
við villum, men vøkrum kenslum.

Tú, sum vart meiningin í einum ungum,
fjakkandi lívi vorðin.
— Hvussu tramin kundi eg vita,
tú vart ikki gudaborin!

Tá renna viðhvørt fram fyri meg
eyguni, lokkarnir hinir — — —
— Skál fyri tí sum glitrar! Fyri tíðini!
Tíðini, sum grøðir! mín vinur.

## Konfirmatión

Urgan leikar. Kirkjufólk
ber Harranum heilagar kvøður.
Eg hoyri tað neyvan, mítt eyga bert sær
títt unga, gudvakra høvur.

Materiál chráněný autorskými právy

Og presturin biður til himmalskan Gud,
tá bendir tú høvur niður,
faldar hendurnar — himmalski Gud!
eg hoyri ei, hvat ið hann biður.

Náttsvartar purlur, sóldæmað hold,
ið hvørvur í hvítum stakki,
fimtan summør á kirkjugólvi
— Gud mín! Gud mín! eg takki,

at mær skal ognast slík ein sjón
við syndugu eygum mínum
— eg, sum at kalla ongantíð
síggist í húsi tínum — —.

Og presturin røðar um kærleikan tann,
ið sálir ger stórar og reinar,
tey bíbilorð tolkar hann tokut og turr
— bert eg veit, hvat halgabók meinar!

Við altarið boyggir tú síðani knø,
sólrødd tín hoyrist ei darra:
»Eg avsanni djevulin, alt ið hans er —«.
Tá frøist eg — og Várharra.

At avsanna djevulin, alt ið hans er!
At umstoyta myrkursins harrar!
Hjarta mítt syngur og signar tínar
vøkru unggentuvarrar.

Fimtan summør, so altarvøkur,
náttsvartar purlur kring høvur —.
Urguljóð og kirkjufólk
ber — sum hjarta mítt — Harranum kvøður.



Materiál chráněný autorskými právy

## Jalousi

Hon treður dans mær í hjarta
— dansur gongur til tólv —
darrandi hjartastreingir
er hennara dansigólv.

Hon dansar við vini sínum
um skelvandi streingjakarm,
um hansara stolta nakka
hon leggur sín ljósa arm.

Tí nú er vár og fagurt
at troða kærleikans dans
hjá limafagrari ungmoy,
ið ei nýtist geva ans,

at dansin hon treður í hjarta
— og tað til meira enn tólv —
har fullspentir hjartastreingir
er hennara dansigólv.

## Síggi gjøgnum kirkjuglugga

Síggi gjøgnum kirkjuglugga
millum hvítar gravarkrossar
havtungt vestanbrim har úti
yvir Boðatanga fossar.

Seig og veldug vestanaldan
hevjar seg í lofti, brýtur,

Materiál chráněný autorskými právy

sjógrønt skyggja aldukambar,
syndrast sundur, sjóða hvítir.

Dunið inn í kirkju dregur
undir lágum furubjálkum.
Messa fyrsta páskamorgun,
kirkjan full av kvirrum fólkum.

Fremmand tunga roynir tulka
orð um heimsins størsta undur:
Børn av mold og undirgangi,
deyðans vald er stokkið sundur.

Fátøk orð tú talar prestur,
fremmand hesum havsins børnum,
ið so mangan vetrarnætur
hoyrdu Gud í tungum óndum.

Sært tú ei, í tøgn tey lýða
— ei á tað, tú trupult tolkar —
men tað drag av ævinleika,
dregur doyvt um furubjálkar.

Kemur uttan, inn av havi,
har teir stóru sjógvar ganga.
— Tung og veldug vestanaldan
brýtur yvir Boðatanga.

## Rópið

Landnyrðingsódn er,
æsingar rista.
Tungur er róður
av havmiði ytsta.

Materiál chráněný autorskými právy

Vetrarnátt stendur
í einari glaðu,
blámar um stokkar
kolbláa havið.

Menninir møðast,
ennini foyrast.
Tætt við í myrkrinum
brotsjógvar hoyrast.

Veldug er ódnin,
streymhart og vetur.
Borðini skelva,
tá báturin setir.

Brotini vaksa,
brakar í bandi,
armarnir lúgvast
— tá lívir av landi.

Leggja seg tætt undir
bergið at kroka.
Hvølt inn í gjóturnar
hvirlurnar troðka.

Ódnin harðnar,
um eggjatrom dunar,
trølslig á látrunum
havaldan runar.

Í náttmyrkum bergloftum
stunar og kallar.
— Óhugnadámur
sígur á allar.

Materiál chráněný autorskými právy

Menn duttu oman
— teir hoyra enn skríggið.
— Har dynur í erva
av veldugum víggi.

Dáttliga hoyra teir
í eini kvirru
rópa úr loftinum:
*Undir har niðri!*

Innast við holdið
fer ískaldur gjóstur.
— Aftur til ára
— tigandi, pøstir.

Hoyra so dunið,
teim kylir at mergi:
Inni í myrkrinum
loypur bergið.

Skrædnar úr erva
í neðra við skjálfta,
ræðuligt dunar,
tá klettarnir bólta.

Øgilig loft
loysna og falla.
— Grótdun og stormdun
í náttini gjalla.

Berglop og stóródn.
Tegir hvør maður.
— Veldug er veran,
ið lívinum ræður.

Materiál chráněný autorskými právy

## Á Boðanesi

Kvøldljós yvir hellustrond,
løgnar, vátar verur,
líkjast gráum mannaheila,
sum er lagdur berur.

Hesa vátu várskýming
var hjartað tungt av súti,
eg gekk og gekk og vardi ei,
eg endaði her úti.

Hetta er mín barnastrond,
um hesar hellur vátu
rann í heiðum barnaárum
eg sum folin káti.

Men tá var strondin ljós og turr,
hellur allar flógvar,
søtt kitlandi tær toygdu seg
upp til iljaskógvar.

Í klárum hyljum svumu vit,
likkurnar tær lótu,
sólin sá á dreingjakroppar
á hvítum fjørugróti.

Tá var lívið lukkuróp,
ljós um allar leiðir,
vistu ei, at vesældóm
í sál hvør maður eigur.

Vistu ei um evnini
tey, sum ikki rukku,
vistu ei um veikleikan,
sum vit burtur drukku.

Materiál chráněný autorskými právy

Vistu ei, at klárir hyljar
fyllast upp við móru,
grógva til við grønum slýggi
— at hellurnar, sum vóru — —

At hellurnar, sum vóru tá,
eru vátar verur,
eru gráur mannaheili,
sum er lagdur berur.

## Spleen

Eg vil, at nakað skal henda,
eitthvørt stórt, sum eg ikki fati,
nú sólstrálur sláa ring og dansa
á tøkum í ovfarakæti.

Letisliga havið seg breiðir
í metalmjúkum, ljósgráum fløtum.
Eg trái — veit ei mót hvørjum —
sólmorgun í húsgyrdum gøtum.

Mót harðvetrarnátt, brimi,
havsins blámandi veldi;
tí hjartkiptu frøi, tú kennir
undir grindadrápi og eldi.

Tí kitlandi kenslu, tú hevur,
tá tú skivar við hvøssum knívi
— vármorgun, heimurin breiðir
doyvandi kápu um lívið.

Materiál chráněný autorskými právy

## Hevur tú hómað —

Hevur tú hómað heimin tann
— tú sum spelknast í heimligum túni —
har atomspreingiknøttarnir opna
sína veldigu eiturkrúnu.

Hevur tú hómað tað vísdómstræ
hvørs greinar brenna og brima,
sum reis í lýggjum passatvindi
upp frá heimunum í Hiroshima.

Hevur tú hómað heimin, sum
skapast av heilans gráu ondum?
Heimin, ið ger atomir úr
skýlandi móðurhondum.

Hevur tú hómað tað vísdómstræ
við krúnu av eitrandi eimi,
sum breiðir seg út yvir londini,
so bið! bið fyri hesum heimi.

## Ishoy in memoriam

Úti er novemberkalt. Her er fjálgt
í hesum deyðans spildurnýggja skála,
loftið og bróstið og kistan alt er hvítt
og gudiligt, og gólvið er málað.

Vit syngja gravsálmar, dusa okkum
í veldugum orðum um undirgongd og sigur,
tað prikar undir húðini, tá vit hugsa um teg,
sum í dag vit skulu grava niður.

Materiál chráněný autorskými právy

Og her verður røðað — fyri fyrstu ferð —
um teg og lív títt, um pláss í himmiríki,
um góðsku og kærleika, sum nú einaferð
teir hálshvítu røða yvir líki.

Fátæki vinur, sjáldan lást tú so fjálgt
sum inni her í tíni hvítu kistu,
einsamalli vinur, sjáldan var so nógv fólk
savnað uttan um teg. Eg vildi, at tú visti.

Eg vildi, at tú kundi komið stetlandi inn,
skjálghentur, við prukku, í slitnum, svørtum frakka,
við vatnbláu, sorgblíðu eygum tínum,
sum oftani tú sást um stræti fjakka.

Og farið yvir til teir, sum taka synd í tær
í dag og sagt við tínum gamlamannamáli:
»Nú kunnu lata vera tit at taka synd í mær,
nú ikki meir um tykkar tún eg váli.

Hvat kenna tit til einsemi menniskjans,
til svongd og kulda, langar nætur
í vøku, í angist; tit sum altíð lógu trygt
í heitum songum, mettir og latir.

Væl veit eg, at oftast eru sjálvgjørdar
menniskjans torgongdu leiðir;
men eitt lítið vet av góðsku ger so vælsignað gott
hjá tí, sum ongan — ongan — góðan eigur.

Eg boðin var, sum tit, til lívsins gestaboð
í lukku, í ljósi átti part eg;
men mangan — áh so mangan — havi á kvøldi
inn í tykkar ljósu, stongdu stovur start eg.

Eg stetlaði um stræti í regni og í sól,

Materiál chráněný autorskými právy

tit góvu mær ei part í tykkar heimum;
sjálvt tykkar børn flentu, tá eg
— tápulingur — vildi nærkast teimum.

Nú liggi eg væl sum aldrin áður,
nú skal um allar ævir eg sova.
Farið heim — nú er seint — har bíðar eftir tykkum
ein kvinna, eitt barn og ein stova.«

## Í kirkjugarði

Eg siti kvirrur í kirkjugarði
kaldan januaridag.
Ein maður slættar við blonkum spaka
eitt nýgjørt leiði, slag í slag.

Sum høvir seg í slíkum førum,
slavin vestanvindur blæs
úr gráum reyni ímóti skýming
um gamlar kransar og deyðagras.

Í kulda skelvi eg, meðan hjartað
hugdjarvt roynir at skilja tað:
Her gloymist menniskjan, grivin niður,
her endar lívið, á hesum stað.

Hvat so! spyr heilin, tey kor ei broytast:
Føðast, liva, fúna her!
Men, klóki heili, beint yvir av mær
ein barnagrøv liggur køld og ber — —

Líka komið úr móðurlívi
eitt lítið mannabarn heitt og bleytt,
við smáum hondum, stjørnueygum — —
Eg andi tungt og kleimi fastari um mína sigarett.

Materiál chráněný autorskými právy

Heilin aftur: Sit ei og grem teg
um eina grøv, tær ei kemur við.
Tín sonur livir! Við heitum hondum
tú leiðir hann hansar fyrstu stig —.

Men, klóki vinur, har niðri liggur
mín egni bróðir! áh, vinur, tig!
við sínum hondum, tær vóru heitar,
hann leiddi meg míni fyrstu stig —.

Eg reisist tungan. Á gravarsteinum
eg kenni dáttliga navn í navn.
Ræðslusligin til hús eg hasti
og trýsti sonin mín fast í favn.

## Selatrað 8. juli 1626

Sólin sær í sóljukopp
— summar um blánandi vað —
sólin sær á mannakropp
— hongdur í gálgatræ.

Gev oss í dag várt dagliga breyð,
hjálp oss, Kristus, Gudsson.
— Summi søgdu, hann stjól av neyð
Pætur Jákupsson.

Tólv fiskar og seks hosnapør
— summar um blánandi vað —
tvey ærskinn og ein fótamør
— hongdur í gálgatræ.

Átta pør av húðaskóm
— summar um blánandi vað —

Materiál chráněný autorskými právy

tvey kúgvajúgur og eina brók
— hongdur í gálgatræ.

Tíggju ostar, lykkja av grind
— summar um blánandi vað —
krovini trý var tín størsta synd
— hongdur í gálgatræ.

Náttarfrið kann bóndin nú fá
— summar um blánandi vað —
spakuliga snarar tú á
— hongdur í gálgatræ.

Eitt lot av vestri teg snarar í kring
— summar um blánandi vað —
stevndur inn fyri Selatraðting
— hongdur við háls tín í dag.

Gev oss í dag várt dagliga breyð,
hjálp oss, Kristus, Gudsson.
— Summi søgdu, hann stjól av neyð
Pætur Jákupsson.

## Og dansurin gongur

Stormdunið inn yvir bygdirnar stendur
— burtur er sóltíð og gaman —
í briminum uttast við úthavsins strendur
taka sjólætnir hendurnar saman.

Stíga ein dans við so havtungum stevi,
aldar í ringinum víða
av teimum, ið reistir av vátari legu
ein dans í brotunum stíga.

Materiál chráněný autorskými právy

Og inn yvir mannabústaðir stendur
í brotum eitt havborið kvæði
— andlit læsast í ótta, og hendur
faldast í síðsvørtum klæði.

Oyruni nema ein farra av sálmum
— bátar og segl fóru undir —
ívovið ljóði frá svíkjandi málmum,
tá jarnsnekkjan liðar seg sundur.

Og dansurin gongur, oyrað nemur
— nema í hvørjari smáttu —
í kvæðinum, inn yvir bygdirnar kemur
málið á einum, tey áttu.

Og kvæðið gongur — stevtungar fjøldir
halda hvør aðra í hendur —
kvæðið frá teimum, sum gjøgnum øldir
baldust við úthavsins strendur.

Og einaferð fara vit eisini sjálvi
— tá leiðin at enda er gingin —
við úthavsins strendur — í broti og gjálvi —
fara vit sjálv upp í ringin.

## Veðratátturin

Nú ein dagin á Vaglinum
eg møtti einum Kollfirðingi
í keppi og koti og gummiskóm,
hann skuldi sær niðan í tingið.
   Og klókt ting er at vitja Løgting.

Materiál chráněný autorskými právy

Tað var enn ein løta til tingfundur varð,
so hann hevði hug at práta,
tó fóru vit fyrst í eitt skýmaskot
at lesk' okkum av tí váta.
   Og slíkt vilja menn jú forbjóða.

»Nú tosar hvørt mansbarn um fletting og skurð,
øll vilja vera skarpast,
fletta tey frens upp á seksti pund,
tað má út í luftina varpast.
   Tí vektin er tað, sum ger tað.

Hvør maður nú eigur ein radioveðr,
og javnt við Kruttsjeff seg metir;
men høvdu teir vitað um veðrin hjá mær,
so høvdu teir tagt tíbetur.
   Ei gott er við Kruttsjeff seg meta.

Hann gekk har heima í túninum
— tað gera væl veðrar flestir —
»Loytnanturin« varð hann kallaður,
hann var sum ein stórur hestur.
   Og tað er so sjáldan slíkt hendir.

Tá ið teir skuldu handla hann
— á rygginum ovarliga —
tú veitst, sum teir plaga at gera við seyð
— teir brúktu ein trappustiga.
   Ein slíkur er hentur av sonnum.

Til morgunmatar fekk hann havragrýn
— best dámdi honum »Bio-Foska«,
til døgurða oftast gullkorn og mjøð
— sum eftirbit tonglar og toskar.
   Tí fiskur er stakgott til veðrar.

Materiál chráněný autorskými právy

Í eini garagu vit drupu hann,
vit bundu hann til eina styttu,
men fyrst máttu vit bedøva hann
við eitt sindur av dynamitti.
　Teir siga at tað er tað besta.

Tá tað var brostið, í eitt korter
hann sást við høvdinum lava,
at enda fall hann niður á knæ,
og so fór Jens Andrias at svæva.
　Ja, tað var ein óførur veðrur.

Og, halga trettan, dett var eitt blóð,
nei, ikki lýgur mín munnur,
tað sprændi sum úr eini mánarakett,
upp í trettan vælvaksnar tunnur.
　Slíkt hendir í Kollafirði.

Høvdið tað máttu teir saga av,
tá skuldu tit sæð gronir.
Men tá ið teir stungu á búkin hol,
svímaðu átta konur.
　Og tær itu allar Simona.

Vilini vóru sum brandslangur til,
at rekja gekst sera trupult,
tíggju ferð runt um garaguna
tey rukku — tá lógu tey dupult.
　Ja, so eru vil á veðri.

Og hvítanýruni tey vóru stór,
eg havi ei sæð teirra líkar —
eg svørji við mánaranguna,
tey vóru sum grindakíkar.
　So fáum er slíkt beskorið.

Materiál chráněný autorskými právy

Sperðilin keyptu Geytamenn
saman við einum sjafføri,
teir fóru við honum beinanveg
— í eini trillubøru.
   Tveir vóru á hvørjum armi.

Men, veitst tú, í vombini funnu teir nógv,
sum veðrurin hevði slúkað:
eina automattelefon,
tvey kúbein og fýra húkar.
   Og tá var hann altíð bundin.

Eitt brotið elektriskt strúkijarn,
eitt blikk fult av aprikosum,
eitt knarvakot, eini spælikort
tvey pør av svørtum hosum.
   Men tey forerdi eg burtur.

Tálgina seldi til Havnar eg,
fýrs merkur hevði eg eftir —
men tað, sum eg læt, var ivaleyst
til sirkus fimm túsund knetti.
   Og okkurt má Havnarfólk fáa.

Krovið limaðu sundur vit
alt eftir gomlum skikki,
á eini bilvekt vit vigaðu tey
— hundrað pund upp á stykkið.
   Og tað var í minna lagi.

Eg hongdi tey upp í ein nótahjall,
men illani hevur gingið,
maðkur kom í — sum fimmtummaseymar!
— Nei, nú má eg niðan í tingið.«
   Ja, tú, slíkt eru radioveðrar.

Materiál chráněný autorskými právy

## V4 tátturin

*Í tí Harrans árinum 1969 — móti jólum — pákom fólki ein slík trongd at spæla í tí nýggja pengaspælinum hjá útvarpinum V4, at tað kendist mest sum ein landfarsótt.*

Nú eru Føroyar allar á gosi,
eyguni glógva sum glerpípugler
í fólki, tá ið um V4 er tosið,
V4 forstýrað hvørt mansbarn nú er.

Fyrr tá røtt var um havhest og líra,
gjørdust menn mælskir, úr tonnunum rann,
nú er alt ørt, bert tú nevnir V4,
lúra eftir grannanum, sum seinast helst vann.

Hjún liggja alsveitt og skeldast um nætur:
»Tú skuldi valt sekstan heldur enn seks,
so høvdu vit vunnið,« hon skeldar og grætur,
»men bakbeistið títt hugsar bara um sex.«

Omma er vorðin so púra forstýrað,
tí sjálvt um hon skjótt um tey níti nú fer,
alt síðan hon fór at spæla V4,
ei tveyoyra eftir av rentuni er.

Inn Sjóvinnubankan sá eg ein stýra,
hann bað um eitt lán, teir spurdu um trygd —?
Hann segði: »Men, Rasmus, eg spæli V4,
systemið er vatntætt, so lán uttan frykt.«

Hvat gagnar monnum Sólborgstór hýra,
hvat gagnar teimum at vinna sum sjey,
tá konurnar spæla alt upp í V4,
og børnini liva við tevatn og breyð.



Materiál chráněný autorskými právy

Granska títt hjarta og kanna títt nýra,
við ristandi hondum kupong tína tak,
tí spælir í kvøld tú við í V4,
so er tú eitt skelvandi V4 v-rak.

Men, keri vinur, ugga teg skal eg,
í hesi botnleysu V4 grú:
øll hini túsund hava skrivað galið,
ta røttu kupongina hevur kanska tú.

Kanska eg segði, tó allarhelst ikki,
tí so løgið sveiggjar lagnupendul,
at tá ið uppgjørt verður á Bryggju-
bakka, hevur pengarnar vunnið Niels Juel.

Materiál chráněný autorskými právy

# Jens Pauli Heinesen

(12/11 1932)



## Degningsælið

Dagur glimmar. Eg standi við gluggan og hyggi út í myrkrið og lýði á ráar røddir, ið aftur og aftur hoyrast inni í høvdi mínum. Viðhvørt er tað ein góð rødd sum teskar, so koma aðrar snjallar og harðar og doyva hana. Eg hoyri eisini dansiløg vitja aftur og skavan í gólvið av móðum beinum. Áh, hví kann eg ikki sleppa at njóta henda morgunin í friði, áðrenn eg leggi meg at sova náttina av mær.

Eg standi við gluggan og hyggi út í degningin og kenni høvuðpínuna seta at eygunum og eina remmu av sterkum víni

Materiál chráněný autorskými právy

á tunguni. Hetta er gráur morgun. Skýggini hanga tung tind av tindi og gerast alt trølsligari, nú dagurin stroymir niður ígjøgnum glottarnar. Yvir dalbotninum hanga ljótir hamrar og forða degnum at koma oman. Eitt æl kemur norðan úr dalinum, fínt og grátt, og stroyir droparnar eftir svørðinum. Tað kemur rekandi við hesum undarliga lotinum, sum eingin sær, men øll kenna anda á seg.

Løgin er tann ósjónliga luftin uttan um okkum og ógvuliga ymisk av lyndi. Vinarliga kann hon koma við einum æli og kína grøsum og morgunbleikum rútum við løttum dropum og lokkandi teska rík lyfti inn í oyru okkara. Men tað er ikki fyri einki, at tað eitur: skoða ikki hundin á hárinum og ilt er kynið í kettu. Tí best sum er kann henda ósjónliga ondin froysa eftir okkum við ískøldum klóm, blása inn í eyguni og kvøða síni feigdarljóð um drepandi hatur og ófrið.

Aftur reka myndir fram fyri mær og ljóð frá teirri farnu nátt. Hon sat undir liðini á mær og teskaði líkt lyfti inn í oyra mítt, og tá ið hon hugdi upp á meg, kom ein sælur friður yvir meg. Himinin var heiður. Men so vóru vit ósamd, vóru saman og kortini langt burtur frá hvørjum øðrum. Ófriður fylti okkum. Vit hataðu. Og eg var tungur í huga sum nú.

Ja, løgið er hetta ósjónliga, ið lúrir uttan um okkum. Stundum hvílir tað í kvirru og er sum deytt. Og kortini er tað har, durvar kanska, men liggur tó altíð alvakið framvið.

Og løgin eru skýggini, sum hetta ósjónliga ber eftir himmalinum. Sum viljaleys seyðafylgi kunnu tey rekast higar og hagar. Stundum koma tey siglandi fín og vøkur, ongantíð eins, altíð skiftandi. Stundum eru tey trevsut og tung, rami av feigd hongur uppi við tey. Tey flúgva avstað í endaleysum fylgjum og eru ongantíð í frið. Men so viðhvørt eru tey burtur, og eftir er bert ein bláur himmal og ein lívgandi sól.

Sum skýggini og luftin er eisini havið, ið liggur um oyggjar okkara, stokkut í blíðskapi, stokkut í vinsemi sum í óndskapi og vreiði. Stundum lokkandi blítt, stundum svikafult.

Døgg er komið á rútin. Við fremstafingri skrivi eg navn hennara í tað. Eg boyggi meg inn móti bókstavunum og síggi

Materiál chráněný autorskými právy

gjøgnum ta ovaru bendingina av B'num ælið fara strúkandi framvið. Teir fyrstu droparnir seta seg á rútin, sita her reinir og klárir, gerast fleiri og tættari og renna saman í størri dropar, sum seigliga fara akandi oman eftir glasinum.

Eg standi í hálvalýsingini og hyggi upp á navnið á rútinum og síggi droparnar streyma niðureftir sum heimleysir menn fleiri og fleiri. Ein heimleysur maður hevur ongan bústað, einki føðiland, hvar ið hann so fjakkar. Ómild eru eyguni, ið møta honum. Ongastaðni finnur hann ró. Friðleysur fjakkar hann avstað sum skýggini, aldan og vindurin.

Og soleiðis fjakka ørgrynni av menniskjum avstað uttan at unna sær frið. Braneggjað goyma tey bylgjur av kenslum aftan fyri læst bragd. Ósjónliga leikar í innanfyri ein afturljómi av sólargangi og villari skýferð.

Varliga turki eg navnið av rútinum.

Undarliga lík av lyndi eru menniskjan, havið og himmalin. Øll hava tey friðloysi til felags: eitt ævigt rák til eitt stað har samljóð og sæla eirast saman.

Og so er ælið av.

## Gestur

Ein vetrardag við frosti í fjøllunum fóru Ábraham og hundur hansara Gestur burtur í haga. Gestur var hvítur og svartur líkasum fjøllini við fonnum og homrum, hann var gamal og síðullaður og heldur skitin, sum hann lá og rakst í hoybosinum á hoyggjhúsgólvinum, í torvmoldini á torvhúsgólvinum ella í skittinum á fjósgólvinum.

Hagin Ytri lá langt burtur frá bóndans garði heilt norði í Sundinum, tað tók heilar tveir tímar bara at koma hagar. Gestur, sum í fyrstuni var heilavillur av gleði at sleppa í hagan, gekk nú og tivaði av møði aftan fyri Ábraham. Hann toldi ikki at leika í sum ein hvølpur. Ábraham mátti smílkast at honum. Nei, gamli, fást ikki við, vit eru ikki ungir longur, latið okkum taka tað við hógv.

Materiál chráněný autorskými právy

Og soleiðis fóru báðir knuggandi avstað, Ábraham undan við hítu og herðabandi, Gestur aftaná. Hundurin hevði elt húsbóndan í átta ár, teir vóru grónir saman, Gestur var ikki meir enn hálvur, tá ið hann var einsamallur, og syrgdi sárliga, hvørja ferð hin helvtin hevði vilt seg ov langt burtur av leið. Men tann reyðskeggjuti Ábraham hevði ongantíð givið sær far um henda stóra kærleika, hann bukaði hundin, makkaði hann ikki rætt, gav honum eitt spark, um hann mól ov nógv fyri føturnar, og virdi hann samantikið ikki meir enn húgvuna ella húðarskógvarnar, ið eisini fylgdu honum, hvar hann fór.

Komnir norður í Sundið, gingu teir fram við bakkanum, streymurin slokti fram við fjøruni og suðaði blídliga ímóti teimum, æður og æðublikar damlaðu í tarabrúnni, kegladust, gorraðu og paraðust, Gestur goyði oman ímóti teimum av gomlum vana, men tær ræddust ikki gamla spottið, smílkaðust heldur at honum, har hann stóð og erpaði sær fyri húsbónda sínum og harra. Onkur einstøk kráka hoppaði á vøllinum og fleyg avstað, ein ravnur krummaði í homrunum, forbannaður, tað er tú, sum forkemur mær lombunum, segði Ábraham, steðgaði og royndi at bera eyga við beistið. Gestur steðgaði eisini og royndi at gera eins og húsbóndin.

Friðurin var stórur og upphavligur rundan um hesar livandi verur, eingin motorur kom høggandi gjøgnum sundið, her valdaði grótið, hagin, himmalin og havið; tær gøtur og tær ræsur, ið snúðu seg gjøgnum brekkur og fjøll, vóru troddar av monnum, hestum og seyðum. Eingir telefonsteyrar stóðu og peiggjaðu á sýnunum, einki betong, einki metal, nítjanda øld ráddi í dølum og hjørtum, í Ábrahami eins væl og hansara síðullaða fylgisneyta.

Teir róku seyðin niðan frá bakkanum, Ábraham rópti og klappaði í hendurnar, rundaði lógvarnar, so brestirnir fingu eitt opið, seigligt ljóð, og Gestur goyði undir liðini á honum og erpaði sær av at renna eitt sindur av og á.

Uppi í líðini gongur ein svørt geldær, stygg, sterk, hánasað og væl í holdum, altíð einsamøll, avvísandi og biðlavond, hon vil ikki koma sær í hóslag við nakran, ikki fæst hon í rætt, og

Materiál chráněný autorskými právy

tá ið brundarnir eru eftir henni, rennur hon undan teimum fúkandi óð og firtin.

Ein lúsa vargaseyður, sigur Ábraham um hana, nú hevur hon spælt sær nóg leingi, nú sleppur hon ikki at spæla soleiðis ein dag aftrat. Og tí er Ábraham farin av húsum í dag við sínum ullinta vinmanni: at steðga geldkokkinum í sínum fría leiki og taka hann við heim til hús.

Teir ganga spakuliga niðan móti ærini, men hon grunar á lagnum, hvat teir vilja, lítur oman móti teimum við einum háðandi høvuðburði og tekur til beins í fjøllini. Ábraham beitir Gest eftir henni, og hetta gamla spottið heldur seg til og fer stunandi aftaná við tungum, bylgjandi lopum. Komin eitt sindur burtur frá húsbónda sínum steðgar hann og vendir sær við, og tá ið hann sær, at maðurin hevur beitt hann avstað í fullum álvara og als ikki í spølni, hvøkkur hann við ovfarin og heldur aftur í brekkuna glepsandi í øðini. Tey eru komin niðan undir hamarin, og nú ger ærin tað, hon plagar at gera. Hon stoytir á høvdið og heldur á skák oman móti sundinum. Gestur roynir at fjasast uppií, men hann er eitt gamalt burturkast, so tað er alt samalt berar lótir. Forbannaður kom higar, rópar Ábraham, koyrir tú hana á sundið, skalt tú sjálvur aftaná. Hetta skilur Gestur alt samalt og er satt at siga ógvuliga fegin at sleppa frá at fara aftan á hesum burturblíða vittugginum, so hann steðgar takksamur, men heldur smolturskotin um, at hann er ikki førur fyri at gera sínar skyldur.

Teir ganga spakuliga oman um seyðin, fara fyrst ein langan umveg, men ærin órar ilt, hon stendur still uppi á eini høvd og hyggur aftan á teimum og veit akkurát, hvat teir ætla. Men Ábraham veit eisini akkurát, hvat hon ætlar, kennir hon hann, hann kennir eisini hana og veit, hvat hon hevur í kvittanum. Fyrst fer hon at renna fram við bakkanum, til hon kemur at Gjógvará, hon kennir mannagongdina, hetta er ikki fyrstu ferð, teir søkja at henni; síðan fer hon niðan við ánni, yvir um og heldur niðan móti Skarðinum. Sleppur hon niðan á Skarðið, er hon sloppin, tað skalt tú vita, Gestur, so er hon sloppin, og vit síggja hana ikki aftur í dag. So tú veitst, hvat ið er at gera.

Materiál chráněný autorskými právy

Teir sluppu oman um hana og royndu á øðrum sinni. Men tað miseydnaðist aftur. Tá var Ábraham farin at ilskast, hann gapaði av møði, og Gestur skammaðist ómetaliga illa, lútaði við høvdinum, so tungan hekk niður á vøllin.

Teir royndu triðju ferð, Ábraham beitti hundin, nevaði aftan á honum og bannaði, at fekk hann ikki ærina, skuldi hvørt bein í honum knúsast. Gestur kendi, hvussu tað brendi aftan fyri seg, har hann fór seigliga togandi niðan eftir við longum, seinum lopum, kúlaði seg saman deyðamóður; geldærin spelaði undan honum frí og fræls, fleyg um gil og lág við reystum høvuðburði einsamøll og biðlavond.

Fært tú hana ikki, tín fani, so hevur tú livað tín seinasta dag, rópaði Ábraham. Gestur skilti hvørt orð, goyði aftan á ærini at vísa, at hann hóast alt royndi at gera okkurt í síni stóru neyð, men goyggini gjørdust meira og meira hvøll og stukku at enda yvir í eina eymkiliga glepsan. Gestur bønaði og bað ærina um at steðga, tað var skilligt.

Ábraham bríkslaði hundin til sín. Hann var í øðini, treiv í hálsullina og gav honum nakrar leðrarar á kjálkan, við nevanum, forbannaður, at eta dugir tú, men at renna eftir seyði dugir tú ikki. Gestur hvein, ók eftir jørðini og hugdi við sínum trælsku hundseygum upp á húsbóndan og bað hann miskunna sær. Ábraham gekk oman á klettin skjótari enn hann var vanur, og Gestur var í knæsbótunum á honum við halanum millum beinini samanstungin av ringari samvitsku.

Komin oman á klettin loysti Ábraham herðabandið, tók knívin úr leðurslíðranum og kvetti sær ein stubba uppá tveir favnar burturav. Eina løtu gekk hann og kveitti rundan um seg, tók so ein avlangan stein, sum hann bar heilt út á klettatromina. Annan endan av tveirfavnastubbanum bant hann um hálsin á Gesti, hin rubbaði hann um steinin, og áðrenn Gestur fekk umrátt seg, varð hann tveittur fyri bakka saman við stubba og steini og fór til botns beinanvegin. Ábraham hoyrdi klamsið, hugdi út fyri og sá bløðrurnar og skúmfroðuna kóka upp úr sjónum, har hundurin var horvin, og helt væl til standa, men tað vardi ikki leingi, tí okkurt mundi vera hent, har lá jú Gest-

Materiál chráněný autorskými právy

ur og svamblaði tætt inni við land, høvdið skein av vætu og var so spískt og avlangt, nú ullin lá kloynd inn móti skinninum. Gestur klóraði seg upp í fjøruna undir klettinum og dró bandið eftir sær. Har var eingin steinur, ov illa mundi vera rubbað. Gestur rann nøkur fet eftir gjarinum, steðgaði, risti sjógvin av sær og fór aftur at renna fyri at finna sær eina uppgongd og sleppa upp á bakkan. Tað eydnaðist honum, hann kom uppá og helt við tað sama niðan í hagan við bandinum aftan á sær so langur fram eftir jørðini við halanum millum beinini. Komin nakað niðan steðgaði hann, vendi sær beint móti húsbóndanum, lyfti høvdið og oyruni upp og hugdi oman til hansara.

Kom higar, rópaði Ábraham, men Gestur hevði ongan hug at akta, rann nøkur fet, ikki burturfrá, men til viks, so at sama strekki var millum hann og mannin, og steðgaði aftur at hyggja. Ábraham rópaði nakrar ferðir, men Gestur var varin og vildi ikki trúgva húsbóndanum.

Men hvat nú. Hví er Ábraham knappliga so blíður, hygg, har stendur hann framyvir, brosar og klappar sær á lærið, kelar fyri hundinum, kom her hin gamli, ræðist tú meg, hví ræðist tú meg, einki er at ræðast, ha.

Tá fer høvdið á Gesti eitt sindur niðureftir, hann letur nakrar ferðir við halanum og nærkast nøkur fet. Steðgar so aftur bilsin og vantrúgvin.

Áh, hin gamli, sigur Ábraham, kom nú bara til mín, vit hava verið saman so leingi, so tú kennir meg, ha? kom nú bara.

Og alt meir og meir nærkast Gestur, nú er hann bara nakrar favnar burturfrá. Hygg, nú leggur hann seg niður og kemur krúpandi og smálátandi yvir til mannin, leggur seg fyri føturnar á honum, hyggur upp á hann og sleikir húðarskóm hansara við síni tunnu, reyðu tungu. Ábraham trívur eftir bandinum, sum Gestur enn hevur um hálsin og fer við hundinum oman á klettin. Gestur stendur stillur og ristist, smáhvínur og roynir at gera húsbóndan blíðan. Tað rýkur úr hansara váta skinni, og hóast hann heldur halan fast inn millum beinini sum fyri at

Materiál chráněný autorskými právy

krógva hann, roynir hann at láta við uttasta haladoddinum, ja, hann ger seg so lítlan og undirbrotligan, at tá ið Ábraham toyggir seg niður at binda stubban í ein stein, har liggur, lyftir Gestur trýnið upp ímóti honum og sleikir honum eftir hálsinum og tí skeggvaksna kjálkanum. Nú mígur hann av berari ræðslu, landið rennur eftir helluni og verður til ein hyl í eini kullu. Kalt og stilt er í veðrinum, so tað rýkur upp úr kulluni og landslóðini.

Ábraham hevur fingið fast, tekur í hundin, men Gestur setur ímóti, spílar klørnar út og roynir at krøkja seg fastan í helluna, men einki munar, hann hvínur, vísir tøkutenninar og høggur eftir hondini á Ábrahami. — Tín fani, rópar maðurin, bítur tú, og tveitir alt, hann hevur í hondini, fyri bakka.

Hesa ferð eydnaðist betur. Gestur kom ikki upp aftur. Eitt hvítt blaktraði niðri í taraskógnum, sum ein fiskur, ið vendir hvítumegin upp. Tað var Gestur.

Seint á kvøldi kom Ábraham bóndi heimaftur móður og alsveittur. Men hann kom ikki einsamallur. Ærina hevði hann við.

## Rógv, sonurin, rógv

Teir sótu og hugdu inn ímóti landi, meðan maskinan arbeiddi fyri teir, og sóu, hvussu húsini minkaðu og fóru undir eitt fyri og annað eftir. Sást ein kópur í vatnskorpuni, ella lá ein skarvur og floytti sær, so harmaðist pápin um, at hann onga byrsu hevði hjá sær. Og hann peikaði á lundarnar, ið fóru flagsandi eftir sjónum, og á lomvigagarðarnar, ið vóru sum svartar strikur yvir havsbrúnni, lætst at hava skotvápn í hondini, siktaði og skeyt í flokkin. Hann hevði ongantíð havt ráð til at keypt sær eina byrsu. Ella fór ein trolari grøvandi framvið, so lýstu eyguni á honum. Hoyrir tú ikki, hvussu skrúvan arbeiðir í honum, spurdi hann sonin, hatta er ikki sum umborð á »Gloria mundi«. Hann var ongantíð komin so høgt sum at sigla við

Materiál chráněný autorskými právy

trolara. Men hann murraði og sang, tí at havið var so stórt og oyggjarnar so grønar.

Ein slíkan dag var pápin góður at vera saman við. Tað var hann ikki altíð. Hann sigldi sum motorpassari við eini slupp, tað hevði hann gjørt í fimtan ár, og lá hann ov leingi heima og slapp ikki á sjógvin við áttamannafarinum fyri veður, so fór hann at drekka, og tá var hann ikki so góður at fáast við. Hann var tvørur og illsintur og mátti bindast.

Komnir nakrar fjórðingar úr landi, legði pápin stilt, báðir kastaðu og fóru at fíla. Bátar lógu innanfyri sum fuglur á sjónum, tað var blikalogn, bert ein seig og long bylgjan undir vatnskorpuni, bátarnir hvurvu og komu undan aftur, og nísurnar spældu rundan um teir. Har var lítið at fáa. Teir sigldu afturáaftur nakrar ferðir, fóru á eitt annað mið og ótu, meðan teir sigldu, so kastaðu teir aftur, fílaðu eina løtu, so hugdi hann at maskinuni, fílaði aftur, so balladi hann sær eina sigarett. Hann hevði altíð eina sigarett hangandi millum varrarnar, og fingrarnir á høgru hond vóru gulir. Tá ið hann var fullur, hevði hann so nógv, ið mátti sigast, at hann gloymdi at roykja. Og hann var bláligur í andliti og á ørmum av at hølast niðri í gamlari dangu, ið var 80 ár og enn larraði millum Ísland og Føroyar, og sum æt »Gloria mundi«, ið merkir »heimsins dýrd«.

Pápin tók skrúvuna úr og læt maskinuna ganga spakuliga, so læt hann snørið renna út, og sonurin sat og hugdi at maskinuni. Hann sá nakrar fínar, bleikar eldtungur kaga uppundan, tær vóru gjøgnumskygdar og bláligar sum luftin, men alt í einum skalv báturin, tað hoyrdist ein brestur, og maskinan stóð í ljósum loga.

— Kvett á stokkinum, rópti pápin og legði ein svartan frakka yvir maskinrúmið. Hvítur roykur slerdi upp ígjøgnum smá hol í honum, og maskinan steðgaði.

— Rógv, sonurin. Far fram á toftubekk, vælsignaður, og rógv inn ímóti bátunum, rópti pápin og oysti við einari pøs sjógv niður yvir frakkan. Men áttamannafarið var gamalt og líkasum pápin gjøgnumdrukkið av olju og bensini, fínar eldtungur slerdu upp úr botninum báðumegin maskinrúmið,

Materiál chráněný autorskými právy

klænar royksúlur stóðu úr holum í pløgingini og kurlaðu seg uppeftir, sum roykurin frá bálum, ið eru langt burtur. Hol kom á frakkan, og svartur roykur og vatnguva bullaðu upp ígjøgnum.

— Rógv, vælsignaður sonurin, segði pápin, bátarnir hava sæð okkum og koma at hjálpa. Hann var so blíður og mildur á málinum, viðhvørt var hann burtur í roykinum, stundum kom andlitið undan í einum glotta, hann hostaði og oysti við pøsini. Bensindunkurin djumsaði í sjógvin og sakk, men kom upp aftur beinanvegin, stóð og hoppaði upp og niður í sjónum sum ein kobbadulla og hvarv í roykinum aftur um bátin. Pápin leyp gjøgnum eldin fram um maskinrúmið, sjógvurin dreiv úr honum, og hann díkti eisini sonin undir, til eingin trevil var turrur á kroppinum. So legði hann at oysa á bensintangan, men alt í einum leyp hann gjøgnum eldin aftur í skutin, og sonurin, sum sá bátarnar koma stimandi, undraðist á, at ein maður kundi ganga ígjøgnum eld.

— Rógv, sonurin, rógv, hoyrdist gjøgnum roykin, og sonurin róði við sveittabrot, hitin sveið í andlitið, og báturin var tungur. Hann var aggandi gamal, tá ið pápin keypti hann fyri nøkrum árum síðan, og æt Elsa, sum mamma hansara. Ein sekkur og nøkur klæði komu gjøgnum roykin og vórðu løgd oman yvir bensintangan og síðan undirdíkt í sjógv.

— Tú ert raskur, sonurin, rógv nú bara, hoyrdist úr bálinum, røddin var veikari, men mild og rólig. Eldurin hevði arbeitt seg fram ímóti bógbekki og hevði fest í aftara kantin, sum sortnaði allan vegin. Tað brakaði og hvein í bátinum, og pápin stríddist har afturi í skutinum. Hann hevði fult hús av børnum, og eingin skilti henda lítla mannin, ið drakk seg fullan, tá ið hann kom heim, sum ár eftir ár kundi vera niðri í heimsins dýrd, har tað var so trongt, at tú ikki kundi venda tær uttan at koma í, har tað var ein sovorðin gangur, at ikki hoyrdist mannamál, og har tað var so nógv sót, olja, bensin, rustur og rotið kjalarvatn, at hann var bláur í andlitið og fekk ikki vaskað tað av sær.

Tann fyrsti, ið kom til teirra, var avbygdarbátur, men Gull-

Materiál chráněný autorskými právy

akur kendi menninar. Teir løgdu stevnið ímóti stevni, og drongurin leyp umborð, og tá ið teir spurdu hann eftir pápanum, og hann peikaði aftur í roykin, fóru teir at rópa og skrála; summir bannaðu illa og skrálaðu, at nú máttu teir for helviti ansa eftir ikki at seta eld á teirra bát eisini. Teir díktu stavnin undir í sjógv og sigldu inn í roykin, drógu nakað svart út úr honum og tóku tað varliga inn í bátin, so bakkaðu teir frá í fullari ferð og settu kós móti landi. Gullakur sat aftan fyri maskinrúmið og sá áttamannafarið liggja og rúka á sjónum, tveir bátar komu til tað, sigldu nakrar ferðir rundan um. Tá legði annar stilt, meðan hin helt aftan á teimum í kjalarvørrinum. Stutt eftir hvarv roykurin knappliga.

Teir gjørdu eina legu til mannin og løgdu nøkur klæði oman yvir hann. Eingin talaði orð, og tá ið Gullakur skuldi venda sær frameftir at vita, hvar ið pápin var, stóð ein maður fyri honum og forðaði. Teir høvdu siglt eitt fitt strekki, tá ið hesin sami maðurin boygdi seg niður og skuldi siga okkurt, men hann var so algoystur, at hann fekk illa sagt tað. — Pápi tín livir, hann spurdi, hvar tú vart, og vit søgdu honum, at tú sat her í øllum góðum.

Tá hugdi Gullakur niður í hendurnar og sá, at hann hevði fingið bløðrur á knúgvarnar, og tá varnaðist hann, at hann var kaldur og vátur, og at tað sveið í hondini, men hann hoyrdi einki frá pápanum, og tað var hann fegin um, tí ein maður, sum einki sigur og ikki eymkar seg eftir at hava stríðst við eld og royk, kann ikki vera illa farin.

Nakrar mánaðir seinni kom hann aftur av sjúkhúsinum. Tey høvdu pyntað seg fyri honum, og Gullakur og nakrir aðrir beiggjar hansara vistu, hvussu hann sá út, tí at teir høvdu verið og vitjað hann eina ferðina, og vóru nú spentir eftir at fáa at vita, hvussu hann fór at eta fyrstu máltíðina saman við teimum. Mamman koyrdi matin í munnin fyri hann, tí hann hevði ongar fingrar. Hann hevði heldur einki hár á høvdinum, eygnabrýrnar og eygnahárini vóru burtur, og hann sat í sólbrillum sum ein fínur maður. Tá ið hann hevði etið, stakk mamman eina sigarett í munnin á honum og festi honum í.

Materiál chráněný autorskými právy

— Doktararnir eru so ógemeina fittir í hondunum, segði hann, teir kunnu gera mekaniskar hendur, ið eru minst líka góðar sum ordiligar, við fingrum og øllum. Eg eri so óluksáliga troyttur av hesum forbrendu útlendsku sigarettunum, at tað verður ein sannur lætti aftur at sleppa at roykja ball.

## Ein einsligur floytitóni

Jóansøka og stórur veðurgarður um sólina. Aftanfyri í kjalarvørrinum liggur Havnin og svevur sunnumorgunin burtur, og frammanfyri stígur Skálhøvdi frískur og fregin upp úr sjónum og sær floyið fara framvið í einari bylgjandi andante gracioso, meðan lomvigagarðarnir tita sítt præsto undirspæl yvir sjónarringinum. Sum vit ganga og mala uppi á ovasta dekki aftan fyri aftasta bjargingarbátin í bakborð og alt tónar í og uttan um okkum, hoyra vit sang aftanfyri. Á niðasta dekki standa dreingir og gentur í einum trunka og syngja og nakað burtur frá teimum fyri seg sjálvar tveir unglingar, ið bína ilskir at hesum káta liði. Eg hevði stundum sæð teir í havnartúnum, oftast ólátaðar og fullar, hóast teir neyvan vóru farnir um tey tjúgu. Heldur ikki nú eru teir edrúir, men einki kátari kortini. Annar er myrkur og tættur, hin lítil og visaligur. Seinni — nakrar morgnar seinni — gjørdust hesir báðir stavnarnir mínir vinir á gøtuni, meðan stararnir flugu uppiyvir, sólin logaði handan húsatekjurnar á Tinghúsvegnum og eitt lítið, ókent gentubarn stóð uppiyvir kyk í látri. Tað var mær alt í einum greitt, at hesir báðir unglingarnir ikki hoyrdu upp í tann syngjandi ungdómin á dekkinum, men so gloymdi eg teir. Har var annað, ið dró.

Til dømis Dalsfles. Har sat einaferð ein maður og kúrdi, meðan æðurnar kurraðu útifyri, og flóðin skolaði niðan ímóti fótum hansara. Av og á fekk hann sær tang at eta, tí hann hevði ongan mat hjá sær. Hundrað og seksti ár eru liðin síðani, og eitt og annað er hent ímeðan, tó at Dalsfles er tann sama. Hesin maðurin var

Materiál chráněný autorskými právy

skipari og eftirnavnið var Hansen, og hann hevði vissuliga verið bæði goymdur og gloymdur, um hann ikki ein dagin hevði krógvað seg aftan fyri ein stóran stein uppi á Nabbi. Henda sama dag hevði Hansen av berari tilvild ein ómetaligan týdning í landsins søgu, tí niðri í Havnini gekk ein barónur við brillum, sum æt von Hompesch, og von Hompesch hevði lovað, at funnu teir ikki skiparan, skuldi hann skjóta høvuðsstaðin í grús. Skiparin var tí hálaður út undan steininum og stýrdi krígsskútuni til Íslands, og á heimferðini sýndi barónurin sítt takksemi við at seta Hansen av á Dalsfles, har hann fekk tveir deyðar at velja ímillum, annaðhvørt at doyggja í hungri ella at verða skolaður út av brimi. Men ungdómarnir niðri á dekkinum syngja als ikki um henda mannin, sum elskaði seg sjálvan hægri enn landsins søgu, og tað er teimum eitt tað sama, at hann ein dagin var funnin og førdur til Havnar aftur í øllum góðum; harafturímóti syngja teir um tað, sum er eldri enn søgan veit um at siga og tó spildurnýtt í hvørjum ættarliði.

Nú koma teir báðir unglingarnir upp gjøgnum leytaran, tann visaligi prátandi á odda.

— Tú hin gamli, rópar hann á meg, kanst tú ikki bjóða mær eina sigarett?

Meðan eg leiti sigarettirnar fram og festi teimum í, hyggi eg niður í hansara andlit, tí hann tosar alla tíðina við meg.

— Halt kjaft, eg havi einki sovið í nátt. Vit hava ballast báðir, hetta er vinmaðurin hjá mær. Hansara kristna navn er Sunnleif, men okkara millum eitur hann bara Sunni. Og hvussu eitur tú, hann sjálvur? Tú ert ein stásmaður. Tá ið eg eina ferð fari til helvitis, vónandi verður tað ikki alt ov skjótt, skal eg heilsa tí grábeinta har niðri og geva tær mítt besta viðmæli. Annars kann eg fortelja tær, áðrenn eg gloymi tað, at eg hati gýðingar, blámenn, skrælingar og øll bygdafrell. Farvæl hann sjálvur, takk fyri sigarettina, og ansa tær fyri tvørámonnum og hvalbingum. Tvørámenn drepa smábørn, og hvalbingar eta tey aftur við sinoppi, so sigst. Men eitt aftrat áðrenn eg fari, kongurin av Svøríki og eg eru navnar, so kanst tú sjálvur gita, hvussu eg eiti. Farvæl.

Eg var eitt sindur paff av hesum orðafloymi og kundi als ikki

Materiál chráněný autorskými právy

flenna so illa at honum, sum Sunni, ið mól fleiri ferðir rundan um seg sjálvan av látri. Tá ið teir fóru, helt Sunni seg tætt í hølunum á honum.

Og í tí sama snaraði Smyril og skifti kós yvir í ein útsynning, lítla Dímun kom undan skipssíðuni og henni á baki stóra Dímun. Reystar risu tær upp úr sjónum, myrkagrønar úr erva og niður í gjáir og skorar, svartar í neðra við eini hvítari lind millum fjøru og sjógv av streyminum, sum skolaði upp á tær. Og alsamt vaks fuglalívið, fleiri og fleiri lomvigagarðar, tættari lundatorvur, sum kavaðu og flagsaðu fyri at sleppa undan okkum, men tað var stilli, so fuglarnir vórðu hangandi í vatnskorpuni og sluppu ikki á flog.

Nú vit nærkaðust stóru Dímun, kom bóndagarðurin undan, einasta mannabýli á oynni og berg at kalla til allar síður, ein grótborg upp á tríggjar kvadratkilometrar við fenaði og fugli og nøkrum menniskjum. Har slepst bert upp í tveimum støðum, í Kleivini og í Barmi. Høvuðsuppgongdin er í Kleivini, har heilt mjáur stíggjur snýr seg niðan fram við bergið. Í torførastu støðum eru jarnkongar festir í klettin og tog spent ímillum at halda í. Snávar tú og fert útav, lendir tú aftur á øðrum strondum.

Henda grótborgin við sínum tornum og sølum er shakespearsk í besta týdningi, eitt drama upp úr sjónum, eitt univers úti á stórhavinum, sum skaldini hyggja langtandi at, men tora ikki at herja á.

Stór var ást tín, Annika,  
og stórt var títt hat.  
Hvør av monnum man nakrantíð  
hava grunað, at tú græt.

sigur Ólavur í einari yrking um kvinnuna, ið kvetti alt samband við umheimin í trý ár, tí hon elskaði og hataði so nógv. Hevur hon verið ljós ella myrk, sýslumansdóttirin av Sandi?

*Fyrsta sýning:* Pápi hennara og dímunarbóndin, ein eldri maður, sita í glasstovuni í sýslumanshúsinum og spæla kort. Teir hava løggin standandi við lið og gerast druknir. Teir fara at

Materiál chráněný autorskými právy

spæla um pengar, um jørð, og sýslumaðurin tapir í heilum. At enda hevur hann spælt alt burtur, hann eigur. Annika gongur til og frá, og hon er trúlovað við einum bóndasoni av Sandi, men í ørvitisskapi fara teir at spæla um hana: bóndin vinnur og fer avstað við henni niðan á oynna. Seinni fáa tey skipað tað so, at hesin bóndasonur gerst húskallur á Dímun.

*Onnur sýning:* Tey beina fyri dímunarbóndanum. Annika tekur húskallin til mann, men verður samstundis dømd frá lívinum av myndugleikunum. Hon vil ikki ganga inn undir dómin og setur menn at verja uppgongdirnar báðar, at eingin sleppur upp, onnur vestanmegin, onnur eystanmegin, tveir við hvørja. Í trý ár verja teir oynna. Men umsíðir svíkur annar kleivverjin. Bátur var komin inn á Breiðanesbarm eystarumegin, og bátsmenninir sluppu upp. Ein nólsoyingur stóð fyri ferðini. Hann hevði gjørt fyri lívi sínum, men tað var lovað honum, at fekk hann tikið dímunarkonuna og ført hana til Havnar, skuldi hann tiggja lív. Rætt sum hon stendur og ger í mjólkgreytarpottin og einki varir, koma menninir á hana — pápi hennara millum teirra. Hon flaknaði við, tí nú vóru eingi ráð at halda ímóti. Tó gav hon húskallinum, ið hon hevði til mann, greytasneisina um skortin og segði, at hetta skuldi hann hava í løn afturfyri, at hann hevði ansað so væl eftir. Pápan spurdi hon hvønn stakkin, hon skuldi fara í til Havnar: tann reyða, tann bláa ella tann grøna. Tað lá sektin á, helt pápin: hon var ikki boðin í brúdleyp. So var hon tikin og førd til Havnar. Tá ið menninir fóru avstað við henni, rópaði hon, at ikki mátti verða tikið frá soninum tað, sum hon var von at geva honum hvønn morgun: Eina tint (3 1/2 pegil) av náttróma.

*Triðja sýning:* Annika verður niðursøkt á Havnarvág. Í fyrstuni fleyt hon, tí hárið helt henni uppi, men so vóru flætturnar skornar av henni.

Uppi á eggini standa fólk og hyggja niður á okkum, súsið frá bógnum rennur saman við dunið innan úr innvøli skipsins, vit stevna móti Froðbiarnípu, har lindirnar ganga á skák niður í sjógvin, og skulu til Tvøroyrar á jóansøkustevnu. Tað er blikalogn á fjørðinum, menn ganga hvítklæddir á gøtum og túnum, flokkar av ungum gentum fara gjøgnum býin í berum kjólum, og



Materiál chráněný autorskými právy

dreingir sita uppi í bønum og rópa aftan á teimum. Aðrar eru í føroyskum klæðum við svørtum møtli fóðraður við reyðum silki. Hópur av ungdómi gongur í løttum ítróttarbúnað og skal royna seg á leikvøllum og á firði, og »vit drukku mjøð og kláran vín, so glaðir á hvørjum sinni«, at allar hurðar lata seg upp, og maðurin á gøtuni verður tín skyldmaður og bróðir, meðan sólin gongur sín boga høgt yvir Oyrnafjalli.

Á leikvøllum tyrpast fólk saman at hyggja at, hvussu »hindirnar leika um vøllir vítt«, og rópini og geylini vísa grant gongdina í spælinum. Eg og jóansøkuvinir mínir eru ikki í parti við nøkrum og ganga mest og darta rundan um. »Tá stendur hon hjá mær, hitt grannvaksna drós«, sum Janus sigur um gentuna, og vit steðga hjá henni. Hon letist ikki um vón, uttan hyggur alsamt út á vøllin, har unglingarnir »kunnu so væl sínar listir og leikir«. Ljósið skínur á hennara myrku purlum líkasum á tí svarta møtlinum, ið er fóðraður við reyðum silki. Pápi, hvønn stakkin skal eg fara í, tann reyða, tann bláa ella tann grøna. Men tá ið gentan vendir sær ímóti mær eitt bragdið er hon biðlavond, hon skeitir kaldliga at mær og er burturblíð, har er hvørki klúgvandi um Barmin ella Kleivina, tað runar ov mikið á Breiðanesbarmi. Latið okkum fara víðari, brøður, sólin elur skugga, og vakurleikin ógleði, og latið okkum syngja, meðan vit ganga, tí vissuliga er gentan føgur, men fagrari er lívið: Jag älskar de sköna, men vinet ändå mer.

Vit fara til Hvalbiar við einum bili, koyra gjøgnum náttarmyrkrið í bergholinum og hava milliónir tons av basalti hangandi yvir høvdinum, og eru tó púra óttaleysir, tá ið vit koma út í dagin og síggja fjøllini, dalin, fjørðin, sandin og bygdina frammanfyri, alt púra fremmant og kortini so heimakent, somu garðar, somu hamrar og líðir og sami grønleiki í bø og haga.

Fram við vegin eru smáar holur inn í líðina, lágar og smalar inngongdir í fjøllini, har menniskjan í langar tíðir hevur kropið ígjøgnum, grulvað á øllum fýra hundraðir av metrum og høgt seg fram tumma fyri tumma inn í grótið. Væl visti eg, at hvalbingar brutu kol, men at tað var so lágt til loftið, vardi meg ikki.

Vit koyra niðan Hvalbiareiði, standa á Norðbergseiði við Ham-

Materiál chráněný autorskými právy

ara uppiyvir og síggja vestur í havið, havhestar fara singlandi framvið í sólskininum, vindurin suðar á upsini, brimið brýtur í fjøruni, og ung hjún fara spákandi eftir gøtunum við barnavognum og smáum børnum. Til vinstru handar gongur streyrrætt forberg og undir tí er breið hella við stórum, leysum klettum. Tað bar so á fyri árum síðani, at hann brast á av útnyrðingi sum eitt skot, so skriðan stóð eftir sjónum. Maður var umborð á motorbáti, sum lá á Sandavági, og kom veðrið so knappliga, at ikki vóru atstøður at koma sær í land. Báturin sleit og fór rekandi suður gjøgnum Vágahavið. Tað eru næstan 30 fjórðingar millum Sandavág og Hvalba, og her undir forberginum var hann funnin. Hann hevði kropið sær upp á helluna, men haðani slepst ikki víðari.

Millum býlingarnar í Hvalba oman fyri sandin er stór grasfløta, vegur gongur ígjøgnum. Mitt í grasinum liggja tveir hvítklæddir menn afturá og sova, sólin brennir niður í andlitini, tað er óðamannaverk at lata teir liggja soleiðis, teir forkoma sær sjálvum. Vit steðga, og nú eg nærkist, síggi eg, hvør ið er. Gustaf Adolf og Sunni, og í somu stund eg kendi teir aftur, sá eg fyri mær lítlu Dímun og stóru við hvítari lind í sjóvarmálanum. Teir verða skryktir úr svøvni og mestsum sovandi leiddir inn í bilin. Nú eru vit eftir lógini ein ov nógv, men vit fáa blíðkað bilstjóran, og onkur skemtar um, at tann eini maðurin er so lítil, at lógin fer at bera yvir við honum. Tað verður flent at hesum, men okkara nýggju gestir halda tað ikki vera so stuttligt. Sum heild hildu teir einki vera stuttligt, uttan tá ið tað kom frá Gustafi Adolf. Hann var tystur, segði hann, og bað um at fáa okkurt at drekka. Hann fekk eina fløsku og kelkaði í seg, stoytti hana niður í sítt lítla, kvika høvd, tók so orðið og vildi treyðugt sleppa tí aftur, og tá fór Sunni at rista við høvdinum, at nikka og flenna, andlit hansara var eitt mátingartól, ið týðuliga registreraði orðastreymin hjá vinmanninum. Honum dámdi lítið genturnar her suðuri. Tær eru hjólbeintar og dovnar, segði hann, óvitandi og skitnar sum øll bygdafrell. Sunni brølaði av hesum og skuldi rulla seg runt í sætinum, men tað var ov trongt. Hann hevði vøkur eygu og vakrar tenn.

Materiál chráněný autorskými právy

— Men tær hava til at bregða, segði Gustaf Adolf, oldommurnar orkaðu ikki at síggja ein turk ella ein muhamedanara, uttan at tær máttu makast við honum. Úrslitið síggja vit, her er alt svart sum kolamógvur, eftirsløð frá einari fremmindari racu alt samalt. Verðin er syndafull, tað er vist og satt. Men hvør veit, Sunni, um ikki hesi nátúrbørnini her suðuri eru framtíðin í føðilandinum. Leingi livi suðuroyingar. Mentunarloysingar og barbarar um allan heim fylkist, so vit aftur kunnu seta miðøldina á stovn og forkoma tí ússaliga bókmentalívinum í Havnini, sum hóttir við at køva allar Føroyar. Hvat sigur tú, Sunni, kanska eru vit komnir at sita ímillum nakrar forfínaðar pennasleikjarar, ið hava selt sína sál til stinkandi blámenn og pengasúgvandi gýðingar.

Seinni somu nátt sat eg á svalanum í dansistovuni og hugdi niður í meldurin av garterandi dansifólki. Eg bar eyga við teir, og tað var líkt til, at eg ikki kundi síggja teir, uttan samstundis at síggja fyri mær lítlu Dímun og stóru. Hansara hátign neig fyri einari av gentunum, ið hann hevði avmyndað so eirindaleyst í bilinum, men hon lætst ikki um vón. Hon sá hann ikki. Gustaf Adolf bakkaði nøkur fet inn í fólkafjøldina og varð standandi hendur í favn, og hann var ikki blíður undir brúnaskorum. Eg skilti hann væl, eitt gul av ógleði fleyg inn yvir meg eisini, og eg mintist tvey eygu, kaldlig og óblíð, ið hugdu at mær.

Nakrar dagar — ella nætur — seinni var eg staddur millum dansandi skúlaungdóm, eg hevði nakrar vikur verið vikarur í einum realskúla og var boðin í skilnaðarveitsluna. Nakrir ungdómar stóðu á einum palli og spældu á gittara og trummu og sungu afturvið alt samalt so hart, at ikki hoyrdist mannamál. Svørt klæði vóru drigin fyri vindeyguni, at tann ljósa summarnáttin ikki skuldi sleppa inn. Salurin lá í einum reyðum skýmligum ljósi, har angaði av smyrslum og genturnar fuku framvið í reyðum, bláum, gulum, grønum, hvítum, í alskyns littum kjólum og høvdu ein drong í myrkum klædningi at halda í. Summir gingu hvítklæddir, og tey liðaðu og snaraðu sínar kroppar og fóru sum hvirlur eftir gólvinum. Men fleiri, bæði gentur og dreingir, fóru ikki út á gólvið, uttan sótu ella stóðu í krókunum og hugdu at og vóru ógvuliga álvarsom. Og sjálvur var eg ein

Materiál chráněný autorskými právy

teirra, bara nøkur fá ár eldri, og kortini so gamal, at eg visti, at tað ikki er »ein sangur í smíli« at vera sekstan, fyrrenn nøkur ár seinni tá ið tú lítur teg aftur um bak.

Ungdómsgildi hava lyndi til at halda fram langt eftir at tey eru komin í hæddina. Men umsíðir er veitslan liðug, og hvør fer til sín. Morgunin er av teim fagrastu. Niðan eftir vegnum fara tvey lið um lið, tey hyggja niður fyri føturnar, stundum eru tey langt frá hvørjum øðrum, stundum tættari saman. Kjóli hennara er hvítur sum mýrifípurnar á oyruni og fuglarnir yvir vatninum. Skógvarnir eru svartir, og fótafet hennara ekkóa millum húsaveggirnar. Nú vendir hon sær og hyggur omaneftir, men bregður sær alt fyri eitt á aftur, í tí hon ger nøkur dansifet eftir asfaltinum.

Eg fari til gongu beint ímóti sólini. Klokkan er útvið fýra, og alt liggur og svevur. Sum eg gangi gjøgnum eina smogu, hoyri eg gentulátur, og tá ið eg komi um eitt húsarhorn, stendur eitt ovvekrað gentubarn har í leðurjakka og cowboybrókum, neyðarslig og ófantalig. Hon hevur hendurnar upp fyri munnin og lær inn í tær, og tað, hon hyggur at, eru tveir dreingir, sum liggja í túninum, annar undir og annar omaná. Tann, ið undir er, roynir at sprakla við beinunum, og klæðini eru gliðin upp eftir kroppinum, so tú sært inn á bert holdið. Eg gangi framvið á fortúninum hinumegin, og nú síggi eg, at tað eru teir báðir, lítla Dímun og stóra. Sunni liggur oman á Gustafi Adolf og knúlvar hansara hátign niður í vegin. Tá ið eg eri komin eitt sindur framvið og alsamt eri hyggjandi at hesum í iva um, hvørt eg skal steðga og leggja uppí, hyggur Sunni upp og sær meg.

Hansara myrka hár lá niður í pannuna, andlitið var reytt og uppsvølpað, og eg sá, at hann bar kenslu á meg. Tað var eitt brá av hati ella stikni til mín í eygum hansara, men eg visti ikki hví.

Her lá hann og knúlvaði sín spraklandi vin niður í gøtuna, himmalin var reinur og bláur uppiyvir, aftan fyri húsini uppi á høvdini ljómaði sólin, og starar fóru flagsandi yvir tekjunum og høvdu makkar í nevinum. Hann skammaðist kanska eitt sindur, men har var eingin øði at síggja á honum, hann var tann sigrandi, og øðin rennur burtur við sigrinum. Men har var hetta bráið av andstygd og vónloysi, ið verður sitandi í mær sum ein sonata,

Materiál chráněný autorskými právy

ein einsligur floytitóni, ið ikki slepst av við. Starar í sólarrenning, eitt ófantaligt gentubarn, føtur, ið sprakla út í luftina, holdið á einum klænum kroppi, og aftan fyri hesa sólarrenning ein annar ungdómur, ein sangur í smíli, ein genta í hvítum kjóla og svørtum skóm, ið ger nøkur dansifet eftir asfaltinum. Eg læt teir liggja og gekk eystur um býin, tvær súlur fóru gjøgnum Nólsoyarfjørð kritahvítar við svørtum veingjaroddum.

Á Vaglinum hitti eg tey trý aftur. Tey komu spakuliga omaneftir, hon eitt sindur aftanfyri, Gustaf Adolf hevði sigarett í munninum, og tey sóu út, sum gingu tey og kúrdu. Av tí at eg var einsamallur í húsi, bjóðaði eg mínum jóansøkuvinum heim.

Eg gav teimum at eta og skonkti upp í glasið, men gentan vildi einki hava. Hon æt Marjun. Nú flenti hon ikki, men sat samankropin við hond í lumma og segði ikki eitt orð. Hon var ikki vøkur, men sum hon sat har, ovvekrað, móð, skitin og litleys og hugdi niður í gólvið við bleikum varrum og myrk undir eygunum, var ein vakurleiki yvir henni líka so rørandi sum tann poesiur eg sá millum húsaveggirnar, tá ið gentan í hvíta kjólanum og svørtu skónum vendi sær við og hugdi at mær eina stutta, men stóra løtu.

Heldur ikki Sunni segði eitt orð. Tað vóru vit báðir Gustaf Adolf, ið tosaðu, av og á kom hann við drúgvum einarøðum, í so máta var hann ótroyttiligur. Sunni var morgunljótur og lurtaði ikki eftir honum, men sat og hálvsyvjaði. Eg segði teimum frá Gabriel uppi á loftinum, sum hevði livað har í tvey hundrað ár, at eg hoyrdi hann ganga har um næturnar og tosa við seg sjálvan. Marjun hugdi upp undir loftið og niður aftur í gólvið, og tað var, sum hon hevði ikki skilt, hvat ið eg hevði sagt. Eg bað hana koma yvir til vindeygað, vit høvdu bæði albogarnar niður á karmin og sóu oman í víkina uttan fyri Skinnarasker, har nakrar æður lógu og damlaðu við ungum sínum, og meðan eg hugdi inn í hennara litleysa kjálka og legði hondina niður á herðabløð hennara, ið kendust neyðarslig og smá, fortaldi eg henni, at eitt skip eina ódnarnátt rendi á land beint undir vindeyga mínum. Tá ið eg vaknaði um morgunin, visti eg av ongum, fyrrenn eg sá beint niður í stevnið, har eg sá menn ganga í oljuklæðum og strevast

Materiál chráněný autorskými právy

við spøl og veirar. Men eg fekk ikki Marjun at smílast, eg fekk púrt einki samband við hana. Hon var sum gjørd av øðrum tilfari enn menniskjaligum, og tað gjørdi hana vakra, tó at hon var mishátt.

Tað, Gustaf tosaði um, lá á einum øðrum bógvi. Hann tosaði um girnd holdsins, men brúkti ongantíð slíka umskriving. Hann kom við hugleiðingum, ið ljóðaðu sjálvsmíðaðar, og læt tær í ein búnað uppaftur ófantaligari enn tann, Marjun var í, sum tosaði hann um eina herviliga landfarsótt, ið herjar millum menniskju og dýr.

— Tætt við har eg búgvi, hava eini gomul hjún eina tík, ið er ikki størri enn ein svávuldós, segði hann, og eg svørji tær uppá, at tað er ikki tann hundur til í verðini, ið setur seg so lágt, at hann tímir at skeita at henni. Men so hendir tað, sum tú veitst, at dýrið við vissum millumbilum fer at ganga á illum, og tá hendir eitt satt undurverk. Henda tøtlandi svávuldósin veksur so nógv í virði, at Sjóvinnubankin og Føroya banki til samans als ikki eru kappingarførir. Tíkin strálar av gulli og gimsteinum, ein heilt ófatiligur máttur er farin inn í hana, so at hon sum onganting kann draga átta, tíggju, tólv prúðar hundar eftir sær, teirra millum ein sankta Bernhards hund, ið man vera nakrar hundrað ferðir størri enn hon. So ganga teir púra ørir í høvdinum og renna aftaná pinkulinginum og trokast so illa, at teir rúka saman at berjast og skræða skinnini av hvørjum øðrum fyri at sleppa at vera næst. Tá ið tey gomlu hjúnini ikki vilja út við svávuldósini, ganga teir uttanfyri og snodda at hvørjari steinpirru og hvørjum grasstrái og kyssa sporini hjá henni við tárum í eygunum, og er tað ein blettur, har okkurt hevur likið niður úr kryplinginum, sleppa teir ikki av fetinum. Hetta heldur á í fleiri dagar og stendur við og versnar. Tað strálar út úr húsinum hjá gomlu hjúnunum, luftin er øll laðin við roykilsi og myrra, so beistini koma valfartandi úr øllum ættum og standa still og snodda inn ímóti Mekka, lyfta høvdini, strekkja hálsin og ýla um kapp, túta seg milliónir av árum aftur um civilisatiónina. Einki er so ørt, so býtt, so láturvert, sum at síggja ein sankta Bernhards hund royna at makast við einari svávuldós. Tað er bæði harmiligt og upp-

Materiál chráněný autorskými právy

skakandi, og kortini er tað ikki nakar parodiur, tí hetta er kærleikin hjá tykkum, mín harri. Hvat er hann annað enn svik og gyklaverk. Í grundini er kvinnan mishátt, Várharra hugsaði ikki um proportiónir, tá ið hann skapti hana, og tá ið skaldini lovprísa henni fyri vakurleika, so er tað bara tí, at teir síggja við eygunum hjá sankta Bernhardi.

Eg vísti gestunum hesi gomlu húsini, tey eru yvir tvey hundrað ára gomul, og tá ið vit komu inn aftur í stovu mína, vóru Gustaf Adolf og eg einsamallur. Marjun og Sunni høvdu smoygt sær burtur. Gustaf Adolf fór yvir til bókhillina hjá mær, sum hann ikki hevði givið gætur, og stóð har eina løtu.

— Intellektuellur? segði hann og lætst at hyggja at bókunum, pilkaði við tær, so vendi hann sær ímóti mær, kenningin hevði fingið hansara bláu eygu at glitra. — Óinnbundnar? Eg havi altíð verið av teirri uppfatan, at fólk, ið hava óinnbundnar bøkur, eru bókasnobbar. Tey látast at hava lisið, men hava einki lisið. Tey látast at vita, men vita einki. Intellektuellir saman við gýðingum og blámonnum eru største spillan í okkara tíð.

Tá ið hann fór at tosa soleiðis, dugdi eg ikki at taka hann álvarsliga. Eg flenti at honum. — Mín góði vinur, hvussu fært tú teg til at siga sovorðið. Og hvussu er tað? Stendur tú her og spælir fyri mær? Meinar tú nakað av tí, tú sigur?

Hann rendi ein lítlan neva inn ímillum bøkurnar. — Eg eri aldeilis ikki nakars vinur, segði hann, og eg eiti ikki Gustaf Adolf, men Gustaf. (Eg mundi hava nevnt hansara navn.)

— Men hevur tú nakrantíð heilsað uppá ein nekara? Hevur tú nakrantíð sæð ein jøda?

— Eg fari aldri í mínum lívi at heilsa upp á ein blámann, eg fari ikki at dálka hesar hendurnar við at nerta við ein gýðing. Tað eru tit, intellektuellu, ið halda tykkum vita so nógv og vera so nógv betri enn onnur menniskju, sum av ræðslu fyri tykkara últsaliga lív hjálpa hesi smittuni at breiða seg út um heimin í staðin fyri at steðga henni.

Eg flenti at honum; tað var mær ógjørligt at siga, um hann var sarkastiskur ella reinmeintur, men honum dámdi ikki at eg flenti.

Materiál chráněný autorskými právy

— Hvussu fært tú teg til at taka hasi orðini í tín munn? Hevur tú nakrantíð verið saman við jødum og nekarum? Hevur tú livað saman við teimum og havt so ringar royndir av teimum, at tú kanst ikki virða teir sum menniskju?

Eg royndi at skifta orð við Gustaf, men tað var vónleyst. Fyri hvønn spurning eg setti honum, fekk eg dungar av álopum og pástandum blakaðar aftur í heysin. Hann dugdi ikki at geva skilagóðar grundir fyri síni sjónarmið, hann bara spýði orð upp úr sær uttan fyrilit. Tá fór eg at ilskast, tí eg visti av royndum, at tað ber til at drepa menniskju við orðum, og eg kom í sinnismuni at siga, at um hann í roynd og veru meinti tað, ið hann hevði sagt, so var hann annaðhvørt hálvbýttur ella ikki rættsiktaður.

Gustaf bráðtagnaði. Higartil hevði hann altíð verið so kvikur við sínum viðmerkingum, at hann byrjaði við teimum, áðrenn eg var liðugur við mínar. Hesa ferð var øðrvísi. Hann tagdi og stardi at mær, og eg kendi eygnabráið hjá Sunna aftur, tá ið hann lá í gøtuni. Eisini Gustaf hevði hetta vónleysa stiknið til mín. Í tøgnini legði eg til merkis, hvussu vakurt veðrið var uttanfyri, stilli og sól. Eg hugdi at klokkuni, hon var sjey, og tað var sunnumorgun. Vit høvdu staðið og høgt eftir hvørjum øðrum í góðan tíma, og eg hevði av berum ivri gloymt at skonkt.

— Bókasnobbar, segði hann, og sokallaðir mentamenn við allari sínari mentan halda øll vera býtt uttan seg sjálvar. Teir síggja ikki fyri berum bókum og berari mentan, at tað eru teir sjálvir, ið eru teir stóru býttlingarnir. Ikki fyrrenn gýðingar, blámenn, skrælingar, bókasnobbar og mentamenn verða útruddaðir, kunnu vanlig menniskju liva lukkulig á jørðini.

Eg var troyttur av vøku og misti tamarhaldið á mær sjálvum. Tað var summar og sól, men lívið var lítið og skitið. Eg peikaði á hurðina.

— Nei, nú orki eg ikki at hoyra meir. Sært tú hurðina har, títt lítla lort. Hon er til at ganga út ígjøgnum.

Hann fór beinanvegin, reiv hurðina upp, men kom so at hugsa um, at hann hevði gloymt okkurt, fór yvir til mína sovikamarshurð og skræddi hana upp eisini. Á einum teppi á gólvinum lógu Sunni og Marjun og svóvu. Marjun lá inn yvir hann við øðrum

Materiál chráněný autorskými právy

beininum oman á hansara, og hennara trongu cowboybuksur vóru loystar um miðjuna og brettar niður um mjadnarnar, og undirklæðini vóru leysliga stungin niður í aftur. Tey vaknaðu ikki av okkum, men tá ið Gustaf bresti flata hond niður á endan, ið vendi upp eftir, støkk gentan uppfrá, hugdi í ørviti um seg og skar út úr at gráta.

Eg havi ongantíð tosað við hesi menniskju síðani. Eg møti teimum stundum á gøtuni, men tey heilsa ikki upp á meg. Teir báðir duga at látast, sum teir ongantíð hava sæð meg fyrr, men Marjun dugir ikki, hon gerst álvarsom og hyggur niður í vegin mestsum alt ov gjølla. Eg gruni, at tað finst ein fíggindaskapur okkara millum, ið ikki er so lættur at rudda burtur, tí at hann er grundleysur og høpisleysur. Og hann harmar meg og pínir meg, tí tá ið eg í huganum síggi føturnar á Gustafi hjálparleysar sprakla út í tóman heim út undan kroppinum á tí størra, uppsvølpaða Sunni, so kemur inn yvir meg hesin einsligi floytitónin í sólarrenningini, rúmið rundan um meg víðkast út, og eg fái samkenslu við týnaranum eins væl og við týnarans offri, tí eg veit, at hetta lítla menniskjað, ið hevur vitjað meg í nátt, og milliónir av hansara andslíkum ikki fara at verða lukkuligari, um so orð teirra ein dagin skuldu gingið út.

Eg fór út í garðin at standa. Marjun vinglaði á beinunum av møði og royndi at fáa klæðini í rættlag, meðan tey gingu norð eftir Reyni. Hetta er gamal kirkjugarður. Hóast her eru ongar gravir og eingir krossar at síggja, so hava beinini á havnarfólki hvílt í moldini her í árhundraðir. Tá ið eg hyggi til høgru handar, síggi eg oman í Eystaruvág, har mín tjøraði bátur liggur og flýtur, og har Annika í Dímun søkk, eftir at flætturnar vóru skornar av. Og hetta havi eg so skrivað inni í stovu mínari uttan at gera mær til fulnar greitt hví, og byrjaði tað sum best ber til við einum symfoniskum hátíðardámi undir Skálhøvda, so fer tað at enda sum best ber til við einum einsligum floytitóna, ið kanska er tað einasta, ið bindur hesi brot um nøkur menniskju, livandi og deyð, saman. Og meðan eg sigli mín lítla bát fram við landi, skolar morgunin inn yvir Havnina og málar við grønum og bláum litum. Tað rýkur upp úr kolarúgvuni í grótbrotinum, og roykurin

Materiál chráněný autorskými právy

av brendum koli fylgir mær á leið. Einir svartir skógvar fara dansandi eftir asfaltinum, kjólin er ein hvítur fuglur millum húsaveggirnar, og inni á Válgaravík hongur ein terna still í luftini, áðrenn hon skjýtur seg í sjógvin.

## Brúgvin og mýran

Ein brúgv bant býlingarnar saman. Í øðrum var stór mýra, tætt við rann eitt gil, og millum gilið og mýruna stóðu hjallar, torvhús og hoyggjhús á rað. Niðanfyri var ein urtagarður, har vuksu rabarbur, sólbersrunnar, stikkulsbersrunnar og nøkur asktrø, ið toygdu krønglutar og veðurbardar greinar út um garðin, og síðani komu aftur nakrir hjallar á rað. Har reyk av skerpikjøti, torvmold, hoyggi og móru. Norðanfyri gekk ein gøta niðan á koyrivegin, og har var eisini ein høvd við einari lítlari, niðurrapaðari toft.

Brúgvin var smøl. Kom ein lastbilur, mátti tú bíða við annan endan at lata hann sleppa yvirum. Ella tú kundi klúgva upp á rekkverkið og kroysta teg inn ímóti jarnstongunum, meðan beistið fór framvið, knýta hendurnar um jarnið við einari kenslu av beinknúsing oman eftir ryggjargeislunum. Jarnstengurnar vóru kjøkrutar av rusti á undirsíðuni.

Miðskeiðis á brúnni var ein breiður betongstabbi, sum stóð niður í ánna. Omanfyri var hann háttaður sum eitt skipastevni. Tú kundi klúgva upp um rekkverkið niður á stevnið og sigla norður gjøgnum ánna. Í áarføri breyt um bógvarnar. Tá var óðamannaverk at standa har, slerdi tú fyri borð, sjólætst tú í brúnum øgilvatni. Um summarið svumu torvur av makkapirrum undir brúnni, kvørkvisnar verur, ið smugu oman og niðan og tordu ikki at vera til, hugsaðu bara um at krógva seg. Har vóru grásíl, bleikjur og onkuntíðina eyrriðar stórir sum upsar. Állar skrivaðu dovisliga s eftir eyrinum og krógvaðu seg inni undir moldbakkum, í buglaðum blikkum ella boraðu seg niður gjøgnum runu-

Materiál chráněný autorskými právy

veitirnar niðan í mýruna og óku í grasinum regndagarnar. Teir vóru hálir um at halda av slýgginum á skræðuni. Skuldi tú halda teimum, mátti tú skora teir fastar innan fyri longutong og upp um lekifingur og fremstafingur, so hingu báðir endarnir hvør sínumegin við og ringdust. Høvdið var elalítið, og teir gapaðu, sum fingu teir ilt.

Eg setti smáar sílalínur undir hólmabakkanum, rendi høvdið á einum makki upp í agnhaldið og læt ongulin í hetta dýrið, sum tú letur teg í einar reyðar hosur. Var makkurin stórur, kom hann upp í rulk, hann fekk ikki rørt seg uttan veittraði við haladoddinum, um hann stakk ov langt fram. Makkapirrurnar sóu ikki hesar vælpjøssaðu onglarnar, ið lógu og veittraðu í vatninum. Tær gloyptu teimum, og tað skygdi sum silvur undir bakkanum, tá ið tær vendu hvítumegin upp. Longur niðri á sandinum stóð eitt sjúkt tjaldur, likkurnar sveimaðu uppi yvir tí, stoyttu seg niður á tað og løgdust at skræða tað sundur, og tað skríggjaði so ønskriligt, at enn dagin í dag situr málið í tí í sálini sum ein lítil heilsan úr helviti.

Fremmandafólk komu eftir brúnni. Prestur sveiggjandi í gráum frakka og galosjum, og tó at hann smíltist og var blíðoygdur, hekk nakað av óhugna við honum sum var hann guds veldishond. Tað komst honum ikki nær. Endaleysir sálmar, skriftstøð og prædikur hingu aftur úr frakkaskeytanum og løgdust í fótafarið. Einki slapst tú at gera fyri honum, altíð var ein ávarandi hond á lofti. Sjálvt í loyndum lúrdi eitt alvakið eyga. Ikki banna, ikki stjala, ikki lúgva, ikki ilskast, og vei tær, um tú ikki aktar og skikkar tær væl, ein mylnusteinur verður bundin um hálsin á tær, sum tann norði í mylluni í Myllá, og tú verður tveittur í havið nakað sunnan fyri Klovning.

Og har kom sýslumaðurin undir keppi við leðurtasku undir arminum og foyrum á enninum sum ein reimavelta í brekkuni. Hann var upp aftur verri. Tað gjørdist púrt einki fyri honum. Hvat ið tú tókst tær til, rendi tú teg í klørnar á honum. Eg var ikki meira enn farin at stetla út í verðina, so var galið. Helt meg eiga allan heimin, men sjónlig og ósjónlig markaskjøl byrgdu meg inn í eina villiniborg. Slepp tær úr grasinum. Slepp tær av bønum.

Materiál chráněný autorskými právy

Far burtur frá bátinum. Tú nertir ikki við súkkluna. Slepp tær út hiðani. Tú eigur einki í hasum. Her hevur tú einki at gera. Far út úr garðinum. Far av vegnum. Slepp tær burtur. Far út úr handlinum. Lat okkara ting hava frið. Tig við tær. Tosa ikki uppií. Sit stillur.

Við endan á hvørjum veg stóð maðurin við lógini og skerdi lut tín við forboðum uttan tal. Tað galt um at fara av brúnni, tá ið hann kom eftir henni, sleppa sær inn undir hana sum ein bangin sílavera og biðja til, at hann fór ikki at koma aftaná og taka teg.

Har komu tveir fremmandir dreingir eftir brúnni. — Hey tú, róptu teir og komu rennandi. Tað var ov seint at hopa undan. Annar var stórur og grefligur við pirrum á andlitinum. Hin var visasligur, sást næstan ikki, var næstan burtur undir liðini á honum. Teir vóru skitnir og kloddutir og stóðu og hildu í meg og flentu at mær. Tann størri hevði eitt yvirvaksið høvd, tað var uppaftur størri av hárpesjuni. Muðurin var breiður, nógv av tannhaldinum kom undan, og tenninar vóru brendar.

— Hvussu eitur tú? spurdi hann.

Eg teskaði honum navnið, men hann fýltist á tað. Tað var eitt undarligt navn at hava, hann tók tað uppaftur fleiri ferðir, og tað ljóðaði, sum eyknevndi hann meg við tí. Eg mátti ikki ganga við einum sovorðnum navni.

— Hvussu eitur pápi tín?

Mær dámdi ikki væl at siga tað, kanska fór hann eisini at eyknevna pápa mín. Hann helt í økslina á mær, kambfjaðrar stóðu sum høvdir á knúgvunum, summar vóru sundursproknar.

— Og hvussu eitur mamma tín?

Hann vildi fáa at vita, hvar ið eg búði, og hin stóð og flenti at tí. Alt gjørdist skitið inni í munni hansara og minkaði burtur í einki, eg skammaðist um mítt heim, míni foreldur, mítt egna lív og vildi helst farið við míni skomm inn undir brúnna, men slapp ikki fyri rekkverkinum. Eg vildi halda leiðina fram, teir førkaðu seg saman við mær, eg royndi at snúgva inn ímillum teirra, men teir trongdu seg saman um meg. Eg var komin upp í ein tronga, sum eg slapp ikki út úr uttan at hopa undan og flýggja. Og tað mátti eg ikki. Aftan fyri eina slíka gerð stóð eitt av lívsins mest

Materiál chráněný autorskými právy

árendu forboðum. Tað var skomm at hopa undan, bert ræddiskítar og kventlar flýggjaðu, rættir menn herjaðu á.

Eg hopaði undan. Teir róku meg av brúnni og heim eftir vegnum, ein smøl gøta var vinstrumegin, og fyri at sleppa av við óflýggjakropparnar fór eg eftir henni. Hon førdi burtur frá vegnum, fremmandafólk høvdu einki at gera á henni, tey áttu at farið víðari fram, har ið handlarnir og arbeiðsplássini vóru, men teir komu aftan á mær, sum áttu teir brúnna, vegin og gøtuna. Teir løgdu einki í nakað. Sýslumaðurin og hansara foyraða enni gjørdi teimum ikki mun, teir fóru ikki av vegnum fyri nøkrum at krógva seg, eingin mylnusteinur kundi forða teimum í at gera, sum teir sjálvir vildu. Teir vóru heidningar, sum jagstraðu tey, ið gjørdu sum prestur og sýslumaður søgdu, og vóru nú komnir eftir mær. Leiðin gekk norðureftir, hagar húsini fækka í tali og burtur frá mínum egna heimi.

Upptornaðir hyljar vóru á gøtuni við skorpnaðari móru, sum var stokkin sundur í puntut mynstur. Niðurkleyrað neytamykja lá har, og steinar stungu uppúr, eg mátti hava eyguni við mær aftanfyri og frammanfyri, royndi at skunda mær, men teir vóru tætt í hølunum. Hvagar eg skuldi fara, visti eg ikki, og hvussu eg skuldi sleppa frá teimum heldur ikki. Eg tordi ikki at renna, so sóu teir at eg ræddist, og teir prikaðu meg í ryggin við fingrunum.

— Hvar fert tú? Kunnu vit ikki sleppa at spæla við teg inni hjá tykkum? Hví ert tú so illa kliptur, hvør hevur klipt tær. Hygga hárið í nakkanum á honum. Sum rossafaks.

Og teir trakkaðu upp á hælarnar hjá mær, so gummiskógvarnir smokkaðu niður um. Eg royndi at lata meg í teir aftur, meðan eg gekk.

— Kanst tú ikki fara heim til tykkara at stjala okkum nakrar sigarettir. Vit hava svávuldós, hygg.

Tann størri tendraði ein svávulpinn og tveitti hann í ein boga upp um høvdið á mær. Hann slóknaði og lá og reyk á gøtuni aftan fyri okkum.

Vit komu fram við einari langari lon, hon var tjørað. Hinumegin var ein grótgarður, og stór trø vuksu innanfyri. Einki fólk var

Materiál chráněný autorskými právy

at síggja, og sjálvt um onkur hevði verið har, hevði eg ikki kunnað biðið um hjálp. Hjálp fyri hvørjum? Eingin gjørdi mær nakað. Eg var í einari neyð, eingin kundi hjálpa mær úr. Tað var eg, sum búði her á staðnum. Eg skuldi tosað um hárpesjur teirra, trakkað teir á hælarnar og rikið teir burtur. Men eg var tann fremmandi. Teir høvdu gjørt meg fremmandan í mínum egna bústaði.

Vit fóru norður um ta longu lonina. Har sneiddi eg til høgru, ætlaði mær niðan eftir gøtuni norðan fyri mýruna, men fór ikki. Tað var líkt til, at devlarnir høvdu hug at steðga jagstringini, stóðu og tosaðu saman uttan at hyggja upp. Kanska fóru teir at rýma, so eg slapp mær aftur undir tann fyrsta hjallin, har stóð, ætlaði at krógva meg har, kreyp tætt fram við honum eftir einum smølum, túgvutum geira av fastum hógvi. Fór eg eitt fet til vinstru, søkk eg niður í mýruna. Høgrumegin vóru hjalsrimarnar rað á rað klæddar við grønum mosa og undir teimum ein ógvuliga lág grund av gróti, onkustaðni var steinur dottin burturúr, og eitt hol var innundir, men so trongt, at bert kettur kundu ganga ígjøgnum tað. Hjallarnir vóru áfastir, skuldi eg sleppa burtur úr hesum, mátti eg annaðhvørt venda við ella krúpa longur og longur, til eg kom til urtagarðin.

Tá sá eg, at teir komu aftan á mær. Eg nærkaðist einum hjalli, ið stakk seg niðan úr hinum. Toygdi eg meg til vinstru, sá eg greinaverkið í urtagarðinum hanga út yvir mýruna. Hagar skuldi eg fara, klúgva upp um grótgarðin og krógva meg millum berjarunnarnar. Eg kom til tann breiða hjallin, skuldi sneiða um hornið, men smokkaði niður í móruna og mátti skunda mær inn í krókin. Tá vóru teir hjá mær. Mýran var øll gul av sóljum, men eg kundi ikki fara til gongu millum blomstrini uttan at søkka niður ímillum tey og forkomast.

— Hví ert tú bangin? spurdi tann stóri, pirruti drongurin. Tann minni var aftan fyri hann og slapp ikki til mín, men hann toygdi seg út undan honum og flenti at mær, stakk annað beinið inn ímillum føturnar á honum og royndi at trakka meg á tærnar. Hann var rak og bleikur og sá út, sum var hann sjúkur. — Nú hava vit hann, segði hann.

Materiál chráněný autorskými právy

— Hví ræðist tú okkum, spurdi tann størri.

Eg visti ikki, hví eg ræddist, og svaraði ikki. Hann tók í kjálkan á mær og klípti. Fingrarnir vóru saksalopnir, tað sveið eftirí, men eg læt sum einki.

— Hvat skulu vit gera við hann, segði tann minni. — Klíp hann eina ferð aftrat.

Hann klípti meg eina ferð aftrat. Eitt sindur fastari. Teir høvdu fangað meg, men vistu einki at gera við meg uttan klípa og trakka á meg. Hann helt í troyggjuna hjá mær og klípti meg aftur, mestsum bert fyri at gera okkurt, meðan hann bíðaði eftir, hvat hann skuldi finna uppá.

— Royn at fáa hann at gráta, segði tann minni.

Men tað eydnaðist honum ikki, eg var handanfyri alt, ið æt grátur. Var ikki farin í skúla, men visti, at Gud var almáttugur, at hann kundi slætta aldurnar, ganga á sjónum og metta 5000 menn umframt konur og børn við fimm breyðum og tveimum fiskum, men meg kundi hann ikki føra yvir hetta mýrulendið. Ein fuglur kundi fara á flog. Ein állur krógva seg inni í einum bugladum blikki, bora sítt lítla høvd gjøgnum runuveitirnar og fjala seg millum sóljurnar. Eg stóð við lútandi høvdi inni í krókinum, teir tingaðust um meg, men eg lurtaði ikki eftir, mær kundi tað vera eitt tað sama, hvørt teir vóru hjá mær ella ikki, eg var einsamallur í verøldini.

Tað reyk av roti og rustaðum runuvatni út millum rimarnar. Teir vóru farnir. Eg var fríur, men flutti meg ikki úr stað. Einki høvdu teir tikið frá mær, og tó var tað, sum átti eg einki eftir. Dagurin hevði verið eitt veldugt vónbrot. Eitt ólekiligt. Hvør kann hjálpa einum sjúkum fugli, sum skríggjar á sandinum, einum makki, sum liggur og veittrar í vatninum undir einum moldbakka ella einum smádreingi, sum fyri fyrstu ferð í sínum lítla lívi hevur skoðað menniskjans óbøtiliga einsemi í neyðini.

Materiál chráněný autorskými právy

## Hattleysir lítlingar uppi í oyðuni

Alt var øðrvísi nú, luftin kaldari, og bøurin bleikari. Eisini fjøllini vóru bliknað. Malinstindur stóð har kulsin og døsin og tyktist alt ov illa klæddur. Ikki so frætt sum eitt skýggj hevði hann at verma seg við. Og vit vóru heldur ikki teir somu. Høvdu vassað gjøgnum grasið á berum beinum at fanga makkapirrur í Myllánni. Høvdu hjálpt teimum stóru dreingjunum at byggja hús millum klettarnar úti á hólmanum. Hús við vindeyga í skjøldrinum. Høvdu hentað ber giljamegin norður ímóti Jarðarkonuáum, meðan Stórá og spógvarnir sungu um kapp. Nú hentaðu vit sigarettstubbar upp úr túninum og koyrdu í lumman at hava til ball. Í skýmingini vóru vit fullir og royktu heimagjørdar sigarettir, vinglaðu og duttu av, meðan vit sungu og hildu um hálsin hvør á øðrum. — Vit báðir eita Jens Kristjan, sungu vit. Eg æt Jens, og hann æt Kristjan. Um kvøldið lógu vit á køksbeinkinum bleikgrønir sum bøurin og spýðu og orkaðu ikki at eta vaflurnar hjá mammu.

Um dagin kríggjaðust vit norðan fyri Eingjartoftir, har sum Torkel Ønundarson hevði rist sínar rúnur. Turrir eplaslokkar vóru skjótivápn, og vit krógvaðu okkum niðri í Kongsgili fyri ikki at verða raktir av fíggindans ørvum. Har bar væl til at krógva seg. Summastaðni var bakkin tvær ferðir so høgur sum eg sjálvur. Har vóru kullur við hundalandi og trøllakambi, sum trøllini úr Stampabergi brúktu at kemba sær hárið við. Í Spanialandi var eisini kríggj, spaniólarnir stóðu uppi í bønum og kluvu høvdini á hvørjum øðrum. Teir skutu við eplaslokkum, og fleiri lógu deyðir niðri í Kongsgili. Borgarakríggj vóru herviligast av øllum kríggjum, tað hevði pápi sjálvur sagt. Borgin Alcasar, sum teir sprongdu í luftina, lá beint oman fyri bøgarðin, tað var rættin Heimanfyri, landsins størsta.

Vit stóðu í einari eplaveltu niðan fyri Alcasar. Tað var lítið eftir av skjótivápninum hjá Kristjani, sum hann hevði skotið. Tætt við tutlaði Kongsgil.

— Kom ímóti fjallgonguni, segði Kristjan. Pápi hansara og beiggi vóru hagamenn í Oknadali, teir vóru farnir eftir veður-



Materiál chráněný autorskými právy

lombum tíðliga í morgun, vit høvdu hoyrt fjallstavar glintað í myrkrinum, røddir, fótafet og hundagoyggj, sum firraðust burtur. Tað hevði einki nyttað okkum at júka um at sleppa við, føtur okkara vóru alt ov smáir at ganga ta longu leið, høvdu vit fingið at vita, dreingir, sum ikki vóru farnir í skúla enn, skuldu vera heima hjá mammu síni. Nógv fyri at hoyra.

Eg hevði ongantíð verið í Oknadali, og ivasamt var, um Kristjan hevði verið har heldur. — Vit skulu bara ganga handa vegin og so handa vegin, segði hann og peikaði. Vit fóru til gongu fram við garðinum norður til liðað, fingu lirkað portrið upp við at standa á tá og komu út í hagan. Her var beinanvegin ófjálgt og fremmant, tarvurin hevði gingið her, og bøgarðurin vardi ikki longur fyri ómildum veittrum. Beint uttan fyri portrið rann Stalláin við nógvum eyri í, vit kláraðu at leypa yvir um. Sólin skygdi í streyminum, og smásteinarnir vóru púra sjónskir, summir vóru hvítir og summir grønir.

Her reyk av neytum enn, tó at tey vóru rikin heim á básin fyri veturin. Evjudíkið av mykju hevði fingið skorpu, har var tætt í tætt av storknaðum sporum frá kleyvunum. Vit hildu okkum kenna framkleyvarnar á tí svartflekkuta steigatarvinum, ið plagdi at smyrja tann hvíta og altíð grómuta giljatarvin av í stangingardysti. Sporini vóru ovurstór eftir hann, vit kendu okkum tvífalt fríar at kunna ganga óttaleysir í hesum velduga fótafari, hildu niðan ímóti Loftansbrekku tætt inni við garðin, at eingin skuldi síggja okkum, tordu ikki at ganga gøtuna, máttu sníkja okkum avstað.

Í einum innviki settust vit at hvíla longu ekkamóðir. Í grasinum lógu seyðasparl og smáir ullarlagdar. Eitt starareiður hevði verið inni millum grótið. Ella var tað kanska mortítlingurin ella steinstólpan, ið hevði húsast har. Steinarnir høvdu hvítar strikur av fuglaskvetti. Vit kagaðu inn í garðin og sóu fjaðrar og hoystrá. Tað mátti vera deiligt at liggja harinni og fáa makkar í nevið, men vit vildu ikki býtt kortini, nógv deiligari var at fara ímóti gonguni, vit tivaðu og fingu livurhøgg. Summir bakkar vóru so høgir, at vit máttu grulva upp um teir í gummiskóm við hvítum botni.

Hundar goyðu niðri í bygdini, smádreingir spældu á sand-

Materiál chráněný autorskými právy

inum, í ánni og niðri á Valloyruni. Vit lógu og lúrdu út undan garðinum og hoyrdu rópini frá teimum og tóku synd í teimum, tí at teir sluppu ikki ímóti fjallgonguni, og tí at teir vóru so evarska lítlir harniðri. Húsini vóru eisini nógv minkað, og næstan allur vágurin kom undan, ein enskur trolari lá uppankraður harúti, hann var grønur. Vit fóru at síggja niður yvir giljabrekkur, meira og meira kom undan av Vágadali. Nú nærkaðist Loftansbrekka og Loftansból. Ein risi hevði staðið inni í Giljum og hevði tveitt henda steinin yvir í Steigina.

— Mátti verið snópisligt fyri ein giljastein at ligið í Steigini, segði Kristjan. Eg hugdi at steininum, hann sá eitt sindur snópisligur út, hevði ein bøkk uppi á kollinum at fjala seg undir, og menn høvdu roynt at krógva hann burtur í bólvegginum, men hann skeyt seg útundan allastaðni. Ófatuligt at risar kundu blaka hesar stóru steinarnar so langt.

Eg hevði eina ferð droymt um hesar risarnar, teir komu træðandi oman av Reynsatindi. Tað var farið at skýma, tá ið eg sá teir koma undan sýnini uppi í giljabrekkum, kolsvartir og stórir sum hús. Har steðgaðu teir, hugdu oman yvir bygdina, og tá ið teir bóru eyga við smádreingin, sum lá og skalv uppi í lítlakamari, skóru teir í róp: — Vit koma *frá fjallanna*, róptu teir, tað var sum at hoyra steigatarv ýla upp á tað ringasta. Ikki fyrrenn eg fór í skúla, kom mær í hug, at risar eru sørir í mállæru og duga ikki at skilja ímillum hvørjumfall og hvørsfall. Men kanska var tað nettupp hetta, ið gjørdi dreymin so mikið óhugnaligari, at so stórir menn og sterkir ikki rættiliga duga at tosa.

Vit komu til garðshornið og kundu nú sneiða norðureftir eftir gøtuni uttan at verða sæddir úr bygdini, garðurin fjaldi okkum. Dunið frá Fossá varð alt harðari, og nú skráaði gøtan niðaneftir móti Reynabrúgv, har tvey torvhús dagaðu móti luftini og sóust úr túninum. Eg ørmintist um, at onkustaðni hinumegin lá Oknadalur, og vit gingu hugaliga, tí nú mundi gongan nærkast í stórum, tað fór at verða stuttligt og spennandi at sleppa at reka veðurlombini.

— Menninir fara at halda okkum vera øgiliga raskar, hildu vit, teir fara at halda, at vit eru raskastu dreingir í verðini. Men tað

Materiál chráněný autorskými právy

eru vit eisini, heldur tú ikki eisini tað. Heldur tú, at nakrir dreingir nakrantíð hava verið so langt burturi einsamallir, heldur tú tað? Eg haldi tað ikki.

— Heldur tú, at tað eru nógvir veðrar við í gonguni?

— Tað eru fleiri enn hundrað, tað kann eg bara siga tær, segði Kristjan, hann dugdi ikki at telja. — Og vit eiga — eiga — eiga sjey.

— Vit eiga tann størsta, segði eg, og vit fóru at trætast um tað. Kristjan vildi ikki lata sita á sær, at vit skuldu eiga tann størsta, og eg fór at ivast sjálvur. Her galt um at vara sín munn og vanda sær um orðini. Ikki bara visti Kristjan vegin, men pápin og beiggin vóru hagamenn. Yvirmaktin var mær ov sterk, og landið púra fremmant, so vit samdust skjótt um, at okkara veðrur var ikki meir enn næststørstur, og tá vóru vit komnir til Myllánna. Hon var ring at koma um. Vatnið fossaði um kneysarnar, ið stóðu upp úr helluni, og teir vóru hálir av áarmosa og slýggi. Men vit vóru nakrir baksarar, og Myllá kundi ikki steðga okkum, og nú mundi fjallgongan vera nær, vit hildu okkum hoyra seyð jarma og menn rópa. Kanska sóu vit gonguna, tá ið vit komu upp á Reynabrúgv. Vit skundaðu okkum.

Torvhúsini haruppi høvdu flagtak og vóru av gróti, har var rimahurð fyri heingilás, og tað reyk av torvmold út ígjøgnum. Og har var eingin gonga at síggja nakrastaðni, bara ein endaleysur hagi. Malinstindur var vorðin himmalhøgur og komin so nær, at vit sóu seyð og steinar og smáar bakkar á honum. Ongastaðni vóru skýggj at síggja, hann stóð púra reinur og úrlatin og speglaði sær í luftini. Aldri hevði eg verið honum so nær, hann hevði verið har langt burturi, eg hevði ongantíð hugsað um, at har vóru seyðir og steinar og smáir bakkar.

Og Sandavágur var næstan minkaður burtur í einki. Valloyran var ein pikkilítil fýrkantur við nøkrum prikkum á, ið fluttu seg. Húsini hjá okkum og Kristjani vóru eini dukkuhús, kirkjan ein dukkukirkja, og vegurin norður gjøgnum Sarparnar var ein kløn strika. Fyri nøkrum árum síðan høvdu tey koyrt meg tann vegin á sjúkrahús í Havn. Eg sat í einum luxbili og át eina appelsin, skalið slapp eg at koyra í lummar, sum bilurin hevði á hurðunum.

Materiál chráněný autorskými právy

Ein bilur við lummum. Tað var tað undarligasta í verðini. Sjálvur hevði eg ongar.

— Vit skulu ganga handa vegin og handa vegin og so handa vegin, segði Kristjan og peikaði. Vit fóru tann vegin, bygdin við øllum dukkuhúsunum fór undir, eitt tað síðsta, ið hvarv, var kirkjan. Vit høvdu kvett seinasta bandið, ið knýtti okkum at mammu og pápa og systkjum og øllum menniskjum, tað var eitt heiðið land, vit nú gingu ígjøgnum, so tað galt um at vera allarraskastur í verðini, og tað var ivingarsamt, um vit vóru tað. Gøtuna funnu vit ikki aftur, og seyðurin heruppi var óblíðari enn tann niðri við garðarnar, hugdi forhánisliga at okkum og hevði púrt onga samkenslu við tveimum hattleysum lítlingum uppi í oyðuni. Vit komu til eina døssasliga á og fóru yvir um hana. Tí hatta undir Malinstindi man vera Skarðið, segði Kristjan, hann var farin at ivast, — og so liggur Oknadalur hinumegin, og so síggja vit gonguna.

Hana hoyrdu vit annars í heilum. Hvørja ferð ein seyður jarmaði, steðgaðu vit á og lurtaðu og hoyrdu menn tosa, og so var tað kanska bara áin, ið lá og prátaði fyri seg sjálva her uppi millum fjøllini. Vit vóru komnir heilt niðan undir Malinstind. Hann var nógv hægri og nógv brattari, enn eg hevði droymt um úr túninum, hann stóð næstan steyrrættur beint upp og niður. Fjallagreinin, ið var rein og nosslig úr bygdini, vísti seg at vera skurvut og ljót, og fjallasíðan, ið var vallað heilt upp á tindin, breiðkaðist omaneftir og kom sum eitt dun oman ímóti mær. Seyður lá haruppi í himmalinum og át akkurát sum einki. Eg visti at menn høvdu verið haruppi í himlinum, at pápi hevði verið ein teirra, men eg fór ongantíð har niðan, eg hevði trillað omanaftur sum eitt skipstroyggjunoða og skjótari enn nakar bilur við lumma á hurðunum. Framman fyri okkum skeyt eitt annað minni fjall seg sum ein tangi út úr Malinstindi. Lá Oknadalur hinumegin, so máttu vit uppum, tað fór at vera harvið, og vit gingu hugagóðir niðan eftir brekkuni.

Nú var farið at skýma. Tá alt fyri eitt hoyrdu vit eitt gallróp koma niðan til okkara, og har langt burtur í fyrstu skýmingini sóu vit eitt løgið skepilsi, tað var svart, yvirkroppurin var ovur-

Materiál chráněný autorskými právy

vaksin. Hetta rópti aftur á okkum, og vit vistu beinanvegin, at tað kundi ikki vera annað enn ein maður við deyðseyða á bakinum, sovorðið høvdu vit sæð fyrr, og himmalglaðir tóku vit til beins yvir til hansara.

Hann stóð við deyðseyðanum og bíðaði eftir okkum, tað var ein svartflekkutur seyður, høvuðleysur, hálsurin darlaði niður úr og blóð dryppaði niður úr honum. Maðurin hevði fatlað beinini um høvdið á sær og bar seyðin sum ein grótleyp, og vit stóðu og hugdu upp á hann og vendu andlitini beint upp í loft.

— Vælsignaðir, segði hann og var blíður, eru tit komnir ímóti fjallgonguni so pikkilítlir. Eg helt meg hoyra smádreingir tosa saman, og tað var gott eg sá tykkum. Høvdu tit farið handa vegin, høvdu tit gingið tykkum út av Vatnsskarði, og tað hevði ikki verið so gott.

Hann streyk deyðseyðan av sær og legði hann á ein bakka, tað var eitt veðurlamb, høvdið á tí stakk upp ígjøgnum skurðin, sum tað hevði á búkinum. Teir høvdu kruvt tað og koyrt høvdið inn í har, hornini vóru reyð av blóði, og tað hevði ein hvítan blett millum eyguni, ið eisini var blóðgaður, og tað hugdi at okkum upp úr búkinum. Eitt sindur ákærandi, helt eg.

— Nú skulu tit bara ganga eftir gøtuni her, segði maðurin, gongan er beint haryviri. Tað er vist og satt, at tað var gott, at eg sá tykkum.

Vit høvdu ongantíð hugsað um nakran vanda og gjørdu tað upp aftur minni nú, vit vóru so nær fjallgonguni. Tá ið vit høvdu runnið eina løtu um kapp við skýmingina, opnaðist ein víður dalur fyri okkum við fremmandum fjøllum rundanum, niðanfyri lá havið, og hinumegin var eitt nýtt land við skorum og fjøllum, sum sólin skein á enn.

Nú var einki at ivast í longur, vit hoyrdu menn tosa saman, nøkur fet aftrat, og vit sóu beint niður yvir gonguna, ið kom togandi niðan ígjøgnum brekkuna, ein rúgva av svørtum og hvítum seyði. Rundan um gingu menninir, summir í morreyðum kotum, og høvdini gingu í eitt við kroppin, tí teir høvdu hettu á høvdinum, sum teir ikki høvdu knappað saman undir øsini, andlitini komu hvít til sjóndar í opinum, og hettukvarðarnir flagsaðu sum

Materiál chráněný autorskými právy

svartir veingir fyri hvørt knuggið. Hundarnir mólu stillisliga rundan um, og einki lív var í nøkrum.

Vit vóru stórliga fagnaðir av hesum móðu monnum. Teir vóru glaðir fyri at verða avloystir, søgdu teir, og vit fingu at vita tað, sum vit longu vistu frammanundan, at sovorðnir baksarar sum vit báðir vóru ikki til í verðini, men at vit máttu kortini ansa eftir, at veðrarnir ikki bitu okkum í rumpuna, veðrarnir í Oknadali vóru herviligir til sovorðið. Teir læntu okkum hettur at smoyggja niður um høvdið, og vit næstan hvurvu inni í teimum. Tær ruku av gomlum klæðum, roðstúkum og fremmandum húsum og máttu bindast við høftum, at tær skuldu ikki detta niður yvir eyguni. Og vit fingu at eta frá teimum. Ein farbróðir mín var har, hann læt upp matskjáttuna, og eg fekk breyð frá honum við margarini uppiá, mjólk at drekka og skerpikjøt, sum hann skar við felliknívi, ið hevði tvey bløð og brúnt skefti av beini.

Um vit ikki vóru móðir? Vit vildu treyðugt svara upp á sovorðið tvætl. Var eg bragdligur, Kristjan var altíð eitt kvink bragdligari. Eg visti hví. Hann átti alt, ið her var. Pápi hansara og beiggi vóru kongar millum hesi fremmandu fjøll, og hundurin hjá teimum Fram gekk sum ein varðeingil rundan um hann, eg mátti geva meg til tols við, at tað var ein náði at sleppa at vera saman við honum. Hann mátti sleppa at ganga har, ið tað var brattast, eg skuldi ikki vága mær at nerta við ein seyð, sum hann ikki hevði nortið við fyrst. Farbróðir mín var hagamaður norðuri í Reyni, og tá ið vit fóru ímóti fjallgonguni har, so skuldi Kristjan ikki sleppa at ganga har, ið tað var brattast, hann skuldi bara vága sær at nerta við seyðirnar fyrst. — Afturum, søgdu menninir við hundarnar. — Afturum, rópti eg. — Afturum, rópti Kristjan upp aftur harðari. Tá ið vit komu norður í Reyn, so skuldi hann sanniliga ikki sleppa at rópa so hart sum eg.

Nógvir seyðir vóru greipaðir saman um hálsin við høftum. Har vóru greipur, ið treyðugt vildu ganga, stóðu og bíndu treiskt niður í jørðina, fingu eitt skump í afturpartin og gingu nøkur fet. Í øðrum greipum sást eitt veðurlamb draga eitt annað eftir sær, hetta setti kleyvarnar ímóti, treiskaðist, hvæsti og vildi kvalast. Kristjan og eg keddust skjótt av hesum slagnum, vit vildu hava

Materiál chráněný autorskými právy

seyð sum rann, vargar, ið royndu at sleppa sær burturúr. So við og við loystu menninir greipurnar, men gongan var framvegis ógvuliga friðarlig, bert av og á jarmaði onkur seyður mestsum av óvart. Tað reyk upp úr teimum, smá skýggj stóðu úr nasunum. Í brattanum sóu vit, hvussu gongan lagaði seg eftir landslagnum, hvussu høvdir og lægdir og gil sóust aftur í henni.

Tað var hálvmyrkt, tá ið vit komu oman á Skrábeinafløtu, og næstan kolmyrkt tá ið vit komu oman á Reynabrúgv, himmalin var avtakin við stjørnum, uppi yvir Reynsatindi blaktraði norðlýsið, og niðri í myrkrinum sóust nøkur kám ljós. Ringur standur var harniðri. Tveir seks ára gamlir smádreingir vóru horvnir, eingin hevði sæð teir síðan eina ferð í dag, og fólk vóru farin at leita. Tey høvdu gingið fram við fjøruni, høvdu verið uppi í Fossá og Myllá, kanska lógu teir druknaðir onkustaðni.

Nú gingu teir oman av Reynabrúgv og máttu leiðast, teir máttu lyftast yvir um Myllá, og tað var gott at vera inni í hettuni, teir høvdu vant seg við húsroykin harinni. Seyðurin jarmaði ikki longur, skrímdist so dánt í myrkrinum, hundarnir høvdu halan millum beinini av møði. Bert av og á tosaði onkur fjallmaður spakuliga, hutsaði á seyð, ið ikki vildi ganga. Tøtlið frá kleyvunum móti gróti.

Niðri við Stallánna hoyrdi eg eina kenda rødd í myrkrinum. Tað var pápi. Tá ið eg hoyrdi hetta heimkunnuga málið, orkaði eg ikki at vera fjallmaður longur, eg læt hann bera meg. Vit vóru ikki komnir oman á liðað, tá var tann lítli fjallmaðurin sovnaður niður á økslina á pápa sínum, og ikki vaknaði hann aftur, fyrrenn hann kendi royk av vaflum í nøsina. Hann varð hálaður niður úr hettuni og stóð á køksgólvinum og snerkti móti petroleumslampuni undir loftinum. Eitt reydligt lýsi skein í eyguni á honum, og har var ein hópur av andlitum, ið øll vóru sjelaglað, tí at nú var tann burturvilsti sonurin afturíafturkomin. Hann setti seg í fangið á mammu sínari við einari vaflu í aðrari hondini og fortaldi um alt tað, ið hann hevði sæð í sínum lítla lívi. Ein luxbil við lummum, og seyð, ið lá og át heilt uppi undir himmalinum. Eitt mortítlingsreiður hevði hann sæð við fjaðrum og hoystráum, og eitt veðurlamb, ið hugdi út úr sínum egna búki.

Materiál chráněný autorskými právy

# Í aldingarðinum

Livandi ljósbíløt skuldu vísast í skúlanum, eg sat við vindeygað, uppi undir loftinum hekk ein optimuslykt og surraði, og ein maður gekk og manreraði við eitt undarligt tól, sum hann setti upp aftast í stovuni. Hann legði ein leidning frá tí eftir gólvinum millum øll beinini og fór út gjøgnum eitt vindeyga við honum, kom inn aftur og hongdi eitt veraldarkort við ranguni úteftir á talvuna, so kreyp hann út aftur gjøgnum vindeygað og stutt eftir fór ein motorur í gongd tætt undir oyranum á mær, eg mátti rópa, skuldi beiggi mín hoyra tað, ið eg segði. Lyktin varð tikin niður úr loftinum, risavaksnir skuggar kastaðust upp eftir veggjunum og upp undir loftið, og maðurin, ið bar, setti hana út í gongina at surra. Tað var bølamyrkt inni, motorurin leikaði í sum eitt ótt, hvussu ólukkan kundu vit síggja livandi bíløt í myrkri. Ein ljósur fýrkantur tendraðist á vegginum, skalv og blaktraði, tað fór at kava haruppi, hvítir prikkar komu og fóru.

Og so alt í einum opnaðist veraldarkortið fyri okkum, vit sóu ígjøgnum tað og út á eina havfløtu, ið aldaði upp og niður. Eg kundi droyma, gykla okkurt fyri mær uttan at síggja nakað av tí liva uttan fyri eygað, hetta var eingin dreymur, heldur ikki nakar veruleiki, men har sást tó týðuliga og greitt eitt áttamannafar koma rógvandi, menn sótu við árarnar og ruggaðu aftur og fram, tað breyt frá bógnum, og í tí báturin fór skúmandi út úr veraldarkortinum, vendu menninir sær við og veittraðu inn í stovuna til okkara. Eg veittraði afturímóti og turkaði mær eyguni við troyggjuermuni, sum eg flenti. Hvussu í harrans navni kundi ein veruleiki soleiðis blandast saman við ein annan. Vit sótu í skúlastovuni, men samtíðis fóru vit í brúdleyp, gingu á rað aftan á einum brúðarpari, og stutt eftir fóru vit til bjarga. Gangurin av motorinum uttanfyri firraðist burtur, veraldarkortið var eitt berg, og vit sveiggjaðu í lesninginum. Alt kundi henda. Eg var ryktur út úr mær sjálvum og førdur inn í ein annan heim sum í einum ævintýri, men ævintýrið var einki gyklaverk uttan ein veruleiki í tveimum planum, lívið hevði forskotið seg á ein margháttligan hátt. Hygg, har sótu miðvágsdreingir á rað og hildu í eina línu,

Materiál chráněný autorskými právy

eg kendi andlitini, hevði onkuntíð barst við onkran av teimum, teir vóru til bjarga inni í havnagrótbrotinum og háladu ein vinmann upp gjøgnum bergið.

Tá gjørdist bølamyrkt inni, ljósbíløtini hvurvu, og lyktin varð tikin inn úr gongini, maðurin kreyp út gjøgnum vindeygað at fáast við motorin. Hann bað ein ungling koma útum at ansa eftir honum, og unglingin fór, men lá hálvur inn gjøgnum vindeygað. Har var eitt týðuligt samband millum motorin og tey livandi bíløtini, men eg skilti tað ikki, og lyktin varð borin út aftur. Ein veruleiki hvarv saman við ljósinum og ein annar tók við. Miðvágsdreingir høvdu ikki fingið vinmannin upp um eggina enn, teir drivu á at hála, og har kom hann flennandi, fyrst høvdið og síðan allur kroppurin. Um tað nú var eg, ið kom soleiðis undan. Hvussu hevði tað verið at sæð seg sjálvan ljóslivandi. At vera tveir persónar samstundis.

Stundum hoyrdi eg tey tosa um filmstjørnur. Eg hugdi upp í himmalin, men sá bara mínar vanligu vinir, norðlýsið dansaði millum teir, og har hekk vetrarbreytin sum ein ljósstrála, men uttan at enda í livandi bíløtum. Eg dugdi ikki at seta eina stjørnu í samband við eitt menniskja, og tað gekk drúgv tíð, áðrenn eg lærdi, at tann, ið hevði leiklut í einum filmi, eisini var ein av himmalsins stjørnum. Tí at leika við í filmi var at vera í paradis. At hugsa sær, at miðvágsdreingir høvdu verið himmiríkið so nógv nærri enn eg.

Lógvin fyltist uttan steðg við grønum og hvítum fyllingum, tær bóltaðust heim gjøgnum urðargrótið, niðan á sandin og brustu móti Loftagrund. Tær flestu steðgaðu har, men summar sprændu ovasta kambin argandi inn yvir tann gamla kirkjugarðin saman við slintrum av brúnum og grønum tara. Tó at tað var ikki lukkuligt at vera á lónni, lógu æðurnar har í øllum rokinum og fiskaðu smádýrini, ið uppgangurin mól frá botni.

Tað var ikki loyvt at skjóta æður, men omma lá sjúk og mátti hava feskan mat, segði læknin. Ba stóð norðan fyri gamla Haraldsstovuhandilin í gomlu grundini á Lofti. Har lívdi fyri storminum, og vit eygleiddu æðurnar, tann eina var sannur úrmælingur av einum útróðrarmanni, kom tætt inn í urðargrótið at

Materiál chráněný autorskými právy

royna. Ella var hon kanska sjúk og orkaði ikki meir at stríðast við storm og brot. Ba hevði byrsuna upp til kjálkan, siktaði, skeyt og rakti. Eina løtu seinni skolaðu óløgini æðuna upp á sandin, har lá hon sum ein dimmur klútur, flógv at halda um, ljósabrún við myrkum tvørstrípum, og nevið rann út í eitt við ennið.

Óløgini skolaðu inn yvir Europa um hetta sama mundið, ófrættatíðindi bórust gjøgnum radio, og menn flyktust rundan um tað, pápi legði oyrað tætt inn við fyri at hoyra betur. Teir høvdu eitt kort av meginlandinum hjá sær, hugdu í tað og tosaðu um tað, ið hendi. Teir lurtaðu eftir danskaranum, ein kend rødd boðaði frá, at týski herurin hevði hersett Danmark. Farbrøður mínir vóru har, teir hugdu umsorgarfullir hvør upp á annan og søgdu, at hetta mátti omma ikki fáa at vita, hon fór ikki at tola tað. Nakrar vikur seinni andaðist hon. Lá í seingini lítil og bleik við gráum purlum um ennið. Vit stóðu á rað hjá henni og aftan fyri stóð abbi og græt, og hon segði okkum, hvat ið vit skuldu gera, tá ið vit blivu stór. Vit skuldu fáa okkum ein stóran høsnagarð inni á Sandforunum og hartil ein gásafarm og ein grísastall, segði hon, og einki visti hon um tað, sum hent var í Danmark.

Eg hevði ilt í búkinum. Tað var morgun, og eg vildi spýggja, men eg tordi ikki at siga tað við læraran. Pínan kom í herðindum og fekk sveittan at næla fram. Rundan um meg sótu javnaldrarnir á gulum skúlabeinkjum millum ljósagrønar veggir og vistu av ongum. Tey kýttu seg við at rokna, skriva ella lesa. Summi vóru skitin, høvdu kambfjaðrar og saksagingnar hendur og hálsar, og í hárinum reiðraðust feitar lýs, ið fóru túrar oman í klæðini og viltust har. Troyggjur og hosur vóru dúgliga stoppað, og tað vóru bøtur á brókaendanum, og yvir øllum hekk ein deymur av súrum klæðum, blekki, blýantsstiftum, roti og brendum koli.

Vit høvdu hoyrt ein brest av fjarum grótskoti og úti í fríkorterinum frættist, at ein enskur trolari var bumbaður í Vágafjørðinum og var um at søkka, fólk gingu út á Bakka at hyggja. Skúlabørnini vistu ikki, um tey skuldu tora at fara mitt í skúlatíðini, men eitt fyri og annað eftir streyk avstað, tað tømdist alt meir rundan um meg, búkilskan vesaði inni í mær, og eg visti ikki, hvørt eg skuldi fara heimeftir ella úteftir. Tað hoyrdist, at ein maður var

Materiál chráněný autorskými právy

deyður umborð. Hvat, um eg fór ytst út á Niklasabakka, kanska sá eg trolaran haðani, og so var ikki neyðugt at fara longur út við mínum brennandi búki. Har sást eingin trolari. Eg fór longur út á Bakka, kúlaði ryggin úr mær fyri at halda pínuna í skák. Fólk hastaðu framvið út á endan á vegnum, og eg kom sjølkandi aftaná við míni byrðu. Úti á sýnini steðgaðu fólk á, áðrenn tey fóru víðari. Mundu tey síggja nakað? Eg gekk á vegjaðaranum, niðanfyri lá eitt fiskastykki, úti í havsbrúnni sást Suðuroyggin, Skúvoy við einum parti av Lítlu Dímun, meira og meira kom undan av Sandoynni. Eg toygdi meg út av vegbakkanum fyri at leggja so nógv av Vágahavinum inn undir meg sum gjørligt. Hestur og Koltur komu undan, og har lá trolarin á liðini sum ein bátur, ið stingur skrubbu. Hann lá stillur og venaði seg í sjónum við sári á síðuni og tætt við lá eitt annað skip lætt á føti sum tann miskunnsami samariubúgvin hjá einum særdum dýri, ið hevur lagt seg niður av pínu.

Eg fór út á endan á vegnum, heilt út á Dunnagjógv, gekk fram við Vakhúsi, leivdir av einari toft millum klettarnar, har menn høvdu sitið og hugt eftir ófriðarskipum. Á kneysum og knaddum stóðu fólk og hugdu, summi gingu niðan við gjónni, fóru upp um garðin út á Klovning og út á Niðastu Skorar, har tey kundu síggja niður yvir tað skammfílaða farið.

Men eg fór ikki longur, sat og heyk framyvir á einum kletti við ørmunum um búkin og vildi ikki fara heim beinanvegin, tey fóru bara at siga, at eg tordi ikki at hyggja at trolaranum, eg mátti líða eina løtu aftrat. Tað var slætt í sjónum, næstan einki lot, eitt gráligt lýsi lá yvir øllum, og einki hendi nakrastaðni.

Eg fór á føtur og ljódliga dró eg meg burtur og fór heim gjøgnum fjøruna. Av og á vendi eg mær við. Hjálparskipið hevði fingið ein enda umborð á trolaran. Spakuliga kom tað inn eftir við honum og tí deyða manninum. Varliga sum tú leiðir ein løstaðan mann. Komin niðan á vegin fór eg at smárenna, eg hevði ein kilometur heim, men við tí krossi eg bar, kendist hann endaleysur. Skundaði mær fram við tí hvíta skúlanum, og pínan vaks sum teinurin styttist. Eg fór at smágráta tey seinastu fetini. Úthurðin stóð opin. »Mamma«, rópti eg, men eingin svaraði. Eg rópti aftur

Materiál chráněný autorskými právy

og líðandi skilti eg, at húsini vóru tóm. Í køkinum reyk av saltgrind og torvi, ikki eitt kis hoyrdist nakrastaðni. Her var eingin at luta mína pínu við og gráta fyri, so eg gavst við tí, fór upp á loftið, kreyp undir dýnuna í klæðunum, og einki var til uttan hesin ormurin, ið át seg gjøgnum innvølir mínar, og ein ómetalig kensla av einsemi og forfjónilsi.

Eina ferð um vikuna høvdu bretsku hermenninir filmfyrivísing í Hjalmarsa pakkhúsi. Hetta var fríggjakvøld klokkan átta. Børn undir sekstan ár høvdu ikki loyvi at vera úti eftir klokkan átta, og har stóðu vit í flokk og rað uttan fyri dyrnar og bíðaðu við piprandi hjarta. Aftanfyri stóð bretsk og føroysk løgregla og framman fyri okkum vóru dyrnar, haðani boðskapurin skuldi koma, hvørt vit kundu sleppa inn ella ikki. Hermenninir høvdu fyrsta rætt, fyltu teir salin, gjørdist einki, og vit vórðu rikin heim sum kríatúr. Men var salurin ikki fullur, so opnaðust himmalsins grindir fyri honum, ið snúðin var, tí her galt um at vera snildur. Í somu løtu fult var, fór hurðin aftur, og fyri tann, ið hevði ikki bjargað sær innum, var ólukkan vís, honum bíðaði grátur og tannagrísl. Stundum var eg fyri hesi vanlagnu. Meinari kundi lívið ikki raka ein smádrong, sum so tráliga stundaði eftir himmiríki.

Men tað bar á, at tú kundi lumpa teg innum, eftir at hurðin var stongd av lyklapæturi, ið gekk undir heitinum sargi-margi (sergeant-major), ein soltin maður grískur í andliti sum lógvin eina landsynningsódn. Vinstrumegin inngongdina vóru einar trappur upp á loft, og í vegginum inn í salin var eitt ferhyrnt hol við lúku, ivaleyst til sølu av atgongumerkjum, tá ið slík skuldu seljast, filmfyrivísingar vóru ókeypis. Ta einu ferðina høvdu vit sníkt okkum inn í gongina, og tað var eydnast at fáa lúkuna frá. Eg var komin at liggja við høvdinum beint við holið, har eg sá inn í tað lovaða landið. Eg lá á knøum í trappunum, og tveir, tríggir lógu oman á mær, men eg bar fegin hesa tungu byrðu aftur fyri tað, ið mær var unt at síggja.

Gjøgnum eina fjallalíð fór eitt tok koyrandi fult av hermonnum í myrkum búnum við blonkum knappum. Ein teirra tóktist at vera heldur óynsktur, teir skutu eyguni ilskliga eftir honum.

Materiál chráněný autorskými právy

Hann fonglaðist við eina hurð, fekk hana upp, leyp út og fór rullandi oman líðina. Mundi hann sora seg sundur? Fór hann at koma heilskapaður burtur úr hasum?

Teir skoraðu høvdini ímóti mínum frá øllum síðum, holið var lítið, og talið av høvdum, ið vildi sleppa at síggja, vaks í hvørjum. — Far inn ígjøgnum holið, teskaðu teir aftanfyri, ið einki sóu, og eg so gjørdi, kreyp við høvdinum fyri, teir skumpaðu upp undir afturpartin, hildu í føturnar og loraðu meg niður á gólvið, har eg stóð á hondunum eina løtu, áðrenn eg kom upp á rættkjøl. Vit fóru at lossa smádreingir inn, teir boraðu seg ígjøgnum holið sum ormar, og eg tók ímóti so hvørt, men sum vit strevaðust uppá tað harðasta, rungaði eitt brøl út úr sjálvari opinberingini gjøgnum himmiríkis salir, og trampandi eftir gólvinum kom sargi-margi saman við sínari landsynningsódn. Holið varð skalkað til, og tey tandur, ið inn vóru komin, flýddu út í ymsar krókar, har góðvarnir einglar tóku tey í sína varðveitslu, og nøkur sekund seinni var sargi-margi gloymdur.

Tey flýddu undan fíggindanum nú. Har fór ein hestavognur tvísporandi, ein smádrongur sat uppi í honum. Hvat hendi? Varð hann raktur? Hjólini øðrumegin kvettust av, vognurin bóltaði rút og fór í spønir, og drongurin varð slongdur eftir jørðini, har hann varð liggjandi, men gud havi lov, tá ið vit sóu hann aftur, lá hann í einari song og svav á einum hvítum kodda, og mamman stóð uppi yvir honum. Nakað seinni var tað vetur, eitt følv av kava. Har var ein langur betonggarður, og eingin uttan sjálv filmstjørnan í sínari dýrd fór spákandi fram við honum. Hon steðgaði á, bendi seg niður, blásti følvið av garðinum og hugdi við sínum undurføgru eygum at nøkrum bókstavum, ið komu undan kavi. »The End« stóð har á garðinum. Filmurin var liðugur, bretski tjóðsangurin varð sungin, hermenninir stóðu rætt eins og eg, meðan bretski kongurin hansara hátign George VI hugdi stranliga at okkum niður av løriftinum, áðrenn hann vendi okkum vangan. Ein long vika var eftir, áðrenn vit aftur sluppu at síggja í handan vangan. Fór eg at verða millum tey útvaldu.

Vit høvdu ein kálhaga inni á Sandforunum, tvey sátulendi til støddar og býttur sundur í ymsar deildir. Har vóru long røð av

Materiál chráněný autorskými právy

gularótum, kolrábi, mairótum og turnips. Har vóru reyðkál, hvítkál og kálhøvd og nakað av reyðrótum, persillu og sellarí, men betur enn allar urtirnar til samans vuksu dái, arvi og karsi. Stórur partur av okkara summararbeiði var at liggja framyvir á knøum og lúka, hvønn dag í vikuni, ofta langt út á kvøldið. Eisini fríggjakvøld. Klokkan fór av sjey, og klokkan hálvgum átta mátti eg vera uttan fyri dyrnar fyri at tryggja mær eitt gott pláss. At biðja pápa um loyvi nyttaði einki, hann fór at siga nei, ligg tú og lúka í frið. Best var at lata sum einki.

Nú mundi klokkuni nærkast hálvgum. Pápi lá framyvir og lúkaði, eg kreyp á øllum fýra oman eftir raðnum millum bløðkurnar, angi av karsa og hvítarót slerdi krydrandi upp úr jørðini, eg smeyg upp um garðin og niður í eina sóljuveit, fram við einari dunnu, ið varp burtur, yvir um ein teig, aftur um ein bakka og oman fram við honum við afturpartinum hægst. Steðgaði á og summaði meg eina løtu, kagaði upp undan bakkanum við øðrum eyganum. Pápi lá enn framyvir í síni myrkamorreyðu troyggju og visti av ongum. Eg grulvaði yvir um ein annan teig og upp um garðin, ið gongur yvir ímóti Valloyruni, sníkti meg framvið honum, streyk eftir bláari krøkju inn í eitt fylki av kirkjugarðshvonn og yvir til gilið við Valloyraenda. So helt eg á ánna, einki kundi steðga mær. Rópti hann á meg nú, so fór tað at vera harvið, heldur tola allar veraldar kvalir enn lata kvøldið fara fyri fok og feigð. Men hundur var ikki meir enn hálvbardur, tí nústani byrjaði skerseldurin rættiliga. Fór salurin at verða fullur. Fór eg at verða millum tey vælsignaðu, ið sluppu inn, um pláss var eftir. Ella hvussu. Hvør mundi fara at verða sterkastur hesa ferð. Inn skuldi eg, stóðst hvat av, ið má. Eg sveik mínar bestu vinir, mítt egna upphav uttan at blunka fyri at ognast eitt pláss í himmiríki, sjálvt um tað bert var eitt standipláss, og eg bert sá ein lítlan part av løriftinum.

Ella vit máttu í torv ein fríggjadag. Norður á Háls við tí æviga gjóstrinum. Hetta var alt í lagi, bara vit komu heim í góðari tíð, men tað leið út á seinnapartin, og einki røktist fyri, at arbeiðsdagurin fór at verða liðugur. Eg fór so smátt at biðja um at sleppa heim, eg kundi gott fara einsamallur, segði eg. Men tað var nei.

Materiál chráněný autorskými právy

Nú átti eg at hildið uppat, eitt nei var eitt nei, men var eg ikki uttan fyri Hjalmarsa pakkhús klokkan hálvgum átta, so var ikki vert at liva longur, so var ikki vert at skera torv, velta eplir, hoyggja ella gera nakað yvirhøvur. Slavin toka dreiv gjøgnum Skarðið á Kellingini. Stórá súsaði oman ígjøgnum Ravnagjógv haryviri, og lívið var so óunniligt, hetta staðið serstakliga, at sjálvt Malinstindur vendi okkum bakið.

Eg royndi eina ferð aftrat. Einki svar. Og tíðin streyk avstað, kanska var eg longu ov seinur. Eg var kaldur og svangur og móður, segði eg, tað var ikki sørt, at eg hevði ilt í búkinum eisini, eg orkaði ikki meir, júkaði eg, og endin var, at pápi bað meg sleppa mær avstað, áðrenn eg fekk eina torvu í kroppin, og eg legðist ikki á boðini uttan tók til beins heim eftir eyrvegnum, rann alt eg orkaði fyri at fáa tíðina aftur. Kanska var tað ikki ov seint enn. Gjøgnum Lírurðar, eftir Líraleiti, heim gjøgnum Sarparnar. Hevði út við fimm kilometrar at renna. Vegurin heim gjøgnum bygdina sást týðuliga frá Sørpum, har var einki fólk at síggja á honum. Mundi klokkan vera farin av átta. Vóru børnini koyrd inn og sótu tey útvaldu í Hjalmarsa pakkhúsi og hugdu at livandi ljósbíløtum. Eg spenti í, tuskaði fram við teimum fyrstu húsunum á Steigini vátur í sveitta, niðri á Nullinum stóð ein politistur, tað fór at vera harvið, framvið mátti eg. — Slepp tær inn, hin gamli, segði hann, klokkan er hálvgum níggju.

Og soleiðis raplaði øll verðin. Á øllum heimsins vígvøllum buldraðu kanónirnar, býir sorlaðust undir luftálopum, men tað var so langt burtur, so óveruligt. Eg átti bara mína verð, og hon stundi eftir at sleppa inn í Hjalmarsa pakkhús fyri enn eina ferð at kenna angan av lívsins træi í aldingarðinum í Eden.

Eg stóð og spældi inni í torvhúsinum. Eina ferð hevði tað verið eitt fjós, tá ið vit gróvu í torvmoldini, komu vit niður á flórin. Har hevði eg gjørt mær eitt verkstað og smíðað mær ein lastbil av kassafjalum, rustaðum seymum og rekaviði úr lónni, og hóast hann var ljótasti bilur, ið nakrantíð hevur koyrt eftir nøkrum veg, trillaði hann so væl sum nakar í fleiri ár og frøddi ein árgang fyri og annan eftir av skitnum smádreingjum við skruvum á knøunum.

Materiál chráněný autorskými právy

Ein riðil av dreingjum fór framvið og fremst gekk ein unglingi við byrsu. Teir fóru aftur undir gamla Haraldsstovuhandilin, stóðu í gomlu grundini á Lofti, og eg fór yvir til teirra. Tað var silvitni á vánni, upp úr fjøruni rak deymur av fiskaslógv, sum blandaðist við roykin av rotnandi tara, loppusandi og fjarum anga av nýslignum hógvi. Smágentur spældu á sandinum, og nakrir menn við føroyskari húgvu sótu yviri á neystatrænum og prátaðu. Bátar flutu á vánni við slagsíðu, smádreingir lógu út í annað borðið og hugdu niður á sandbotnin og steytaðu eftir skrubbum við skrubbustongum. Likkur og skurar sveimaðu uppiyvir, flugu pliandi inn í ósa og fram við sandinum yvir ímóti Loftagrund og snaraðu á út fram við fjøruni. Unglingin meddaði fleiri ferðir, ætlaði at pilka sær ein skura burtur úr at brúka til agn, men tað var ringt at skjóta flúgvandi fugl, hann mátti vera bráður í vendingini. — Har kemur ein, royn handa, søgdu vit við hann. Skurin kom tætt yvir ímóti okkum, snaraði yndisliga á úteftir, og vit sóu, hvussu hann liðaði høvdið, meðan hann fleyg, og hann var eitt sindur ljósari í fjaðrunum enn aðrir. Skotið gekk av, men hann fleyg nøkur tøk aftrat sum einki var hent. So kollveltist hann í luftini, bóltaði rút, bardi við veingjunum og datt niður ímóti vatnskorpuni sum ein sundurskrødd pappdós í nógvum vindi.

Soleiðis stóðu unglingar og meddaðu um allan heim. Vit sóu tað í livandi ljósbíløtum. Teir gingu eisini í túnum okkara í stórum gaggum. Tíðliga um morgunin fóru teir í skrúðgongu til arbeiðis við riflu á øksl og bajonett við lið og komu aftur um kvøldarnar móðir og troyttir. Stundum høvdu teir skjótivenjingar uppi í haganum fyri at læra seg at raka betur. Europa var alt ein rúkandi toft og okkara einasta lív ikki stórt meira vert enn teir skurar, sum fóru pliandi út eftir vánni.



Materiál chráněný autorskými právy

## Heimsins minsti sangur

Sum eg sat har á skúlabeinkinum millum ljósagrønar veggir og hoyrdi um øll hesi fremmandu londini við stórum áum, høgum fjøllum og miljónbýum, komu sovorðin ivaherðindi á meg. Eg vildi ikki rættiliga trúgva hesum. Mundu tey ikki lúgva fyri mær. Mundu tey ikki bara penta allar hesar søgurnar saman við tí í hyggju at bera blak fyri eyguni á mær. Ongland, Týskaland, Himalaya, Bikinioyggjarnar, var hetta ikki bara lygisøgur, ið tey tilkomnu royndu at lumpa upp á meg. Mundi nakað annað land í roynd og veru vera til enn Føroyar og so eitt hav uttan enda út í allar ættir?

Høgt uppi í tí bláa vetrarhimmalinum flugu flúgvarar, ið komu úr fremmandum londum. Inni á Nesi og niðri við Leitisvatn buldraðu kanónirnar, og ljósir doddar spruttu úr tí bláu luftini sum mýrifípur rundan um flogfarið, ið snúði og snaraði sær á. Bjargingarflakar komu rekandi uttan av havi og strandaðu á sandinum, og fremmandir hermenn gingu í túnunum í tungum gaggum og tosaðu eitt fremmant tungumál. Var tað ikki heldur ótrúligt, at øll skuldu pøsa seg so bara fyri at lumpa ein lítlan smádrong á einum skúlabeinki. Bikinioyggjarnar? Kanska vóru tær til. Uttan iva gingu dreingir har og runnu í grasinum við skruvum á knøunum eins og eg sjálvur, men so ófatiliga langt burtur vóru teir, at tað mestsum líktist eini lygn.

Men ævinleikin var eingin lygn. Sjálvt um jørðin ein dagin fór at ganga til grundar, so nervaði hetta ikki ævinleikan meira, enn tað nervaði mín ljósa knokk, at lotið streyk eftir honum. Í brekkunum lógu korkavaksnir steinar, eg legði mína tólv ára gomlu hond á ein teirra og hugsaði, at soleiðis høvdu menn lagt hendur sínar á hann gjøgnum túsund ár, men at hesi túsund árini vóru ikki meir enn eitt eygnablunk í hansara longu søgu, og mær tókti hetta so undarligt, at eg mátti festa tað á blað og lata steinin syngja sína longu søgu í fýra ørindum, sum endaðu við hesari ásannan:

> Tó tryggur enn eg standi her,
> køvt eg havi mangt eitt toruslag,

Materiál chráněný autorskými právy

eg lurti eftir tí sum kring meg er,
sólin skínur hitandi í dag.
Ofta hevur veðrið verið gott.
Í heilum, í heilum kvøld til mín stundar.
Setandi sól heilsar góða nátt.
Her standi eg til fold fer til grundar.

Eitt ár seinni ivaðist eg ikki í, at bæði tann syngjandi steinurin og eg sjálvur skuldu ganga til grundar nógv skjótari, enn vit høvdu droymt um.

Amerikanarar skuldu hava eina av sínum fyrstu atombumburoyndarspreingingum, vit kendu bæði dag og tíma. Teir høvdu ankrað upp ein hóp av týskum og japanskum krígsskipum frá heimsbardaganum rundan um eina av Bikinioyggjunum, umborð á summum teirra vóru dýr, ið skuldu sleppa at royna, hvussu tað var at vera staddur í einum tílíkum bresti, kanska stóðu kýr á bási og mýldu hoyggj í seg, ella tær lógu og jótraðu við tankatómum eygum og vistu einki um tað, ið henda skuldi.

Vísindamenn um allan heim komu við hvøssum atfinningum. Royndin var óðamannaverk. Hetta var at spæla við ragnarok. Vissuliga kundi maðurin klúgva atomið og soleiðis loysa ein bundnan mátt av higartil ókendari styrki, men hevði hann tamarhald á hesari klúgving? Hvat, um nú klúgvingin helt fram? Svarið var líka avskræmiligt sum einfalt. Jørðin sprongdist í luftina upp á fá sekund, og alt okkara æviskeið var at enda. Hetta var einki nýtt, tíansheldur stórtíðindakent í alheimssøguni. Ein lógvabrestur í einum ókendum dali, ikki meir. Menn høvdu myndir av stjørnum, sum vóru sprongdar í luftina fyri túsundum av árum síðani og sum framvegis fóru singlandi út í rúmdina sum eitt veldugt dustskýggj. Skuldu nú vit øll enda sum eitt dustskýggj á ævinligari ferð út í rúmdina, dreingir við ljósum knokkum og allir korkavaksnir klettar?

Aðrir vísindamenn bert smíltust at hesum undirgangshýri. Teir søgdu seg at hava fult tamarhald á atominum og kundu nágreiniliga gera av, hvussu sterk spreingingin skuldi vera á hvørjum sinni, har var einki at óttast fyri. Men var tað nú vist. Menn-

Materiál chráněný autorským právy

iskjan hevði áður víst seg sum ein sera svikaligur skapningur, og kanska var hugurin til kanningarroyndir størri enn kunnleikin um trygdina.

Men líka so lítið sum vit fóru at sleppa undan evsta degi, líka so lítið sluppu vit undan hesari atombumbuspreingingini, hon var eitt óundansleppandi lið í náttúrulógunum sum landskjálvtar og ódnarstormar. Dagurin var longu upprunnin, tímin nærkaðist fet fyri fet, tók seg rundan um skallan, kyldi niður í kríllin og niður í kroppin. Jørðin, eg gekk á, minkaði undir fótunum. Klótan, eg livdi á, var, sæð frá sjónarmiði mikla máttsins, ikki stórt øðrvísi enn bólturin, vit sparkaðu millum okkara smáu føtur niðri á Valloyruni, og Bikinioyggjarnar vóru nógvar ferðir nærri Malinstindi og Húsafelli, enn eg hevði grunað í míni býttisligu ivasjúku. Mundu teir hava ført smádreingirnar burtur av oynni.

Tað var ein dimmur dagur við nógvum vindi, himmalin var avtakin við illgráum pesjum, ið bóltaðu vestureftir sum ein seyðagonga, ið trokar á út úr rættini. Av berum yvri skotraðu skýggini hvørt annað oman ímóti bøgørðunum niður í dalarnar, har tey stóðu føst eitt bil, áðrenn tey sluppu upp í fylkingina aftur og longur fram á vegin. Hví høvdu tey so nógvan skund? Royndu tey at sleppa sær móti fjarum, hesperiskum strondum í ótta um tann mikla brest? Sum leið út á dagin skifti hetta hastandi liðið lit, dagurin fyrireikaði seg til at taka við tí, ið koma mátti. Aldri fór sólin at rísa av nýggjum. Fyri seinastu ferð vóru bátarnir komnir stimandi fram við Dunnagjógv uttan av havi við blankum toski. Men hvussu? Fór buldrið at koma úr firruni og nærkast sum ein veldig alda, ið tekur alt við sær? Ella fór jørðin at flóna líðandi upp? Ella varð hon eldur og øska við brestin?

Tað aftnaði. Um ein tíma fór tað at henda, neytini lógu í haganum, eingin var at fara eftir teimum uttan eg, men av tí at eg firnaðist fyri at geva nøkrum lut í mínum ótta, kundi eg ikki synja fyri at fara hetta nyttuleysa ørindið, eg noyddist at látast sum fór tað at koma ein dagur eftir henda.

Eg fór til gongu niðan bøin, brimið veltist á sandinum, dunið frá vindinum rann saman við bralanina frá briminum og fylti tað lítla rúmið millum skýggj og jørð við einum postludium, sum í

Materiál chráněný autorskými právy

ólukkumáta var ómilt. Illlýsið lá um dalin vovið inn í ein reydligan glampa, ið kom úr erva, skýggini vóru nú korkalitt innan og morreyð á holdinum, eitt veldugt bál logaði úti í rúmdini og sendi ljómin ígjøgnum tey, so húsini, brekkurnar og dalurin allur fargaðist í hesum dámi. Vissuliga. Hetta var inngangurin, nú kundi tað henda hvørja løtu, um eitt bil fór jørðin at geva seg undir fótum mínum.

Uppi á traðarvegnum kom ein eldri kona við einari kúgv og einum stavi. Andlit hennara og kúgvin, ið skuldi verið grá, vóru myrkabrún í summarkvøldinum.

— Neytini hjá tykkum eru ikki komin til liðað, eg sá tey ikki, segði hon, kanska eru tey úti í Dysjum. Far so við tær, segði hon við kúnna, ið skundaði sær at fáa nøkur strá upp í kjaftin av vegjaðaranum, far so, segði hon og læt stavin lættliga dansa niður á huppin.

Neytini liggja kanska úti í Dysjum! Far so! Var hetta alt fólk søgdu á heimsins síðsta tíma. Eg hugdi at teirri eldru konuni og var ikki førur fyri at siga nakað, hon var líka sinnilig sum kúgvin, ein vert illbrýntari kanska, men tað var eyðsæð, at hon einki óttaðist, og at hon helt seg sleppa at reka kúnna heim á básin um aldur og allar ævir. Ikki eitt orð um Bikini og tann mikla brest. Neytini liggja kanska úti í Dysjum. Úti í Dysjum. Var tað har, eg skuldi vera staddur á degi Harmageddons? Eg var komin út á Fobbaklett, sneiddi um Vínheyg og fór eftir brúnni um Mataránna, bygdin var farin undir, eg var einsamallur á veg út í Dysjar við trettan árum á baki og uttan vón um eitt longri lív. Rundan um meg lógu korkavaksnir steinar við sínum longu søgum, og var tað nakað sum bar á at vera lív í teimum, so var tað tann ævinleikans tolinmøði, sum búði í teimum, og sum lá og læt harinni óhoyriliga sum verkið í einum uri. Teir, sum vóru undan á vegnum, høvdu eins og eg dag og dagliga gingið fram við teimum í ymsum ørindum, høvdu stundum sett seg á onkran teirra at tosa um seyð og útróðrarlíkindi og høvdu ikki droymt um, at tað, teir sótu á, í næstu løtu kundi mylgrast sundur sum myldingur av einum bresti við Bikinioyggjarnar. Teir høvdu fast undir føti. Jørðin var ikki ein bóltur, ið hoppar á Valloyruni.

Materiál chráněný autorskými právy

Hvat mundi klokkan vera? Eg hevði onga klokku uppi á mær, men nú mundi tað ikki fara at verða leingi aftrat. Tætt við læt ein lógv. Eg royndi at bera eyga við hana, men hon var samlitt við hagan og tey morreyðu skýggini og rann út í eitt við vøllin. Eg sá hana ikki, men gjøgnum brimdun og vind hoyrdi eg hennara evarska lítla sang. Hvat var hann. Eitt einsamalt lát, ein einsljóðandi mollstemtur e-tóni í tí høga lagnum, ikki longur enn eitt sekund. Hesin nyttuleysi sangurin millum fjøllini, hvat skuldi hann til. Hygg, har var hon, har stóð hon so nakkaføst á einari túgvu við myrkum turriklæð um hálsin og hevði borið sín lítla sang trúliga niður ígjøgnum ártúsundini, og tað var eingin lukkuligur sangur, viðbrekin sum ein kavaflykra og óendaliga góðlíðin. Men tað var ein undirtóni í sangi hennara, ein boðskapur og ein brigdan alt í senn, sum eg ongantíð hevði varnast um fyrr, men sum eg nú skilti gjøgnum mína egnu neyð.

Eg var ikki rættiliga farin undir lívið enn, hevði so dánt gjørt míni fyrstu varligu fet út í tað, men hugur mín var ein kókandi pottur av villum dreymum, sum allir búleikaðust uppi í hástiginum: størst, vakrast, mest. Lív mítt skuldi anga av berjalyngi og smæru. Eg skuldi velta tær størstu velturnar upp úr nýggjum, skriva upp í breiða hill av bókum, elska tær vakrastu genturnar og yrkja heimsins longstu og bestu sangir. Mær bíðaði ein framtíð so glæsilig, at eg hevði ikki tol at bíða, tíðin var sum ein treisk kúgv, ið liggur og etur av vegjaðaranum.

Men nú eg fataði, at mær fór ikki at verða lagað at yrkja nakran sang, fataði eg eisini boðskapin frá láini og hennara góðsligu brigdan. Tað var ein boðskapur frá teimum vónleysu og neyðstøddu. Tann langa vegin gjøgnum ártúsundini hevði hon biðið fyri teimum, ikki við einum drúgvum kvæði, men við heimsins minsta sangi. Kanska hevði hon eina ferð í forðum yrkt long kvæði sum tey, ið halda seg hava nógv upp á hjartað, men við tíðini var hon komin til ta sannkenning, at tú lýsti tínar lívsroyndir best við at samanfata tær í henda lítla sorgardropa, ið vissuliga var góðlíðin og viðbrekin, men samstundis valladi ein váttan um treysti og ótroyttiligleika í honum.

— Eg veit, at eg eri lítil og veik, sang láin túgvu av túgvu, men

Materiál chráněný autorskými právy

aldri kemur tann dagur, at eg haldi uppat at biðja fyri okkum vónleysu og neyðstøddu, at tit mugu eira okkum. Og aldri fari eg at gevast við brigdan míni og áminning um tykkara eirindaleysa bardaga á Harmageddons blóðigu fløtu.

Ein kúgv beljaði, áh, hvat mundu neytini nú gera umborð á týsku og japansku krígsskipunum, mundu tey fáa tíð at varnast, hvat ið hendi. Eg var komin út á liðað, har stóðu nakrar muur og trákkaðust heim, men okkara vóru ikki ímillum teirra, eg mátti út í Dysjarnar at leita. Vindurin var so nógvur heruppi, at tað var strevið at fáa portrið upp, og eg hevði ikki gingið nógv aftrat, so køvdi hann av. Eg var komin upp í skýggini. Nakað uttan fyri Dysjaleitið gekk eg fram á kýrnar, ið enn lógu á biti við afturpartinum móti veðrinum, men tað var so kjaftsvart, at eg skrímdi tær ikki allar ísenn, tær sóust bert sum døkkir blettir í tí illgráu tjúknini. Eg rópti á tær fyri at fáa gongd á tær, tær hugdu uppúr, snaraðu oyruni ímóti mær, men høvdu als ongan skund.

Lukkuligu kleyvar. Tykkara góðu, dølsku eygu. Rúmdarmyrkrið fjálgaðist í teimum. Ein brunnur av mettleika og tolinmøði sum í steinunum. Eingin undirgangshýrur órógvaði javnvágina harinni. Fortíð og framtíð vóru teimum ókunn. Hábærsliga blunkaðu eygnalokini síni forgeingiligu tíðarbrot burtur av tí langa veg, ið royðurin eins væl og einkyknudýrið høvdu lagt aftur um bak.

Har fóru tær skinklandi framman fyri mær og vistu einki um heimin uttan fyri Dysjarnar, gras og vatn lá fyri fótunum, og einki var har um vegir at gera nakað hóvasták burturúr. Ein skón av smáum dropum lá á feldinum, eg legði hond mína niðurá og sá handamerkið mítt standa eftirí.

Men hvat var av tí mikla bresti? Neytini komu inn á básin, og eg vaknaði morgunin eftir til ein nýggjan dag, skýggini høvdu tikið seg høgt upp í loft. Har stóð Malinstindur og Húsafelli og ristu sínar kendu rúnir upp í himmalin. Fobbaklettur lá í sama stað og hevði ikki flutt seg eitt vet. Uppi á Reynabrúgv dagaðu tey bæði gróthúsini móti luftini, og norðuri í Sørpum skutu slokkarnir síni skæru bløð upp í ljósið gjøgnum teir bøkkar, eg hevði grivið. Brekkurnar lýstu nýtvignar, bert í útsynningi út

Materiál chráněný autorskými právy

sunnan fyri Prestland hekk eitt svart skýggj enn og hótti, men tað var bert náttin, ið hevði lagt ein part av sær eftir í degnum, sum maður, ið hevur gist hjá tær og gloymt sín svarta vadmalsfrakka eftir í durunum.

Eg læt meg skundisliga í og fór út. Verðin var ikki gingin undir. Bikinioyggjarnar firraðust burtur sum ein dreymamynd í hugans alt annað enn kyrra havi, og jørðin var góð og stór, tí nú visti eg fyri vist, at eg fór at fáa høvi til at yrkja heimsins longstu og bestu sangir.

## Faðir og sonur

Sjálvsagt fór eg ongantíð at verða ólukkuligur, lívið lá frammanfyri, og einki her í verðini var so gott sum at sleppa at liva tað.

Og hvat hendi so. Eg var farin úr tí kálkaða skúlanum, prestur hevði lagt hond sína á mín ljósa knokk, fyrr gjørdist eingin til rættan mann, men longu tá stóð eg við fyrsta sárinum í hjartanum. Tað var um heystið. Ein genta, sum eg vildi hava, vildi ikki hava meg. Hetta var so ótrúligt, at eg lá í heystnáttini og bardist við grátin. Hon vildi ikki hava meg. Her fekk hon dýrastu gávu, ið hugsast kann, borna upp í hendurnar, og so skoytti hon einki um hana. Var tað løgið, alheimurin gjørdi eitt rættiligt hirs á seg, nú sjálvur miðdepilin í honum fekk rist í røturnar so dyggiliga?

Men eitt tað sama. Hvussu ringt hetta var, kundi tað ikki skala mína trúgv upp á, at onkustaðni frammanfyri lá kongaríkið í Babylon og bíðaði eftir mær við øllum tí, sum yndisligt er. Eg mátti út at finna tað, men hvat í Harrans navni skuldi eg gera.

— Ja, hvat skalt tú gera? Hvat ætlar tú tær at vera? Ætlar tú tær at ganga her og mala millum høsnini alt títt lív? spurdi pápi.

Tað ætlaði eg avgjørt ikki. Einki høsnarhús var so stórt, at tað kundi rúma mínum ætlanum. Men eg tordi einki at siga um tað.

— Skalt tú vera sjómaður?

— Eg veit ikki.

Materiál chráněný autorskými právy

— Bóndi kanska?
— Veit ikki.
— Lærari?
— Nei, tað er tað seinasta, eg skal vera.

Har var ikki so nógv at velja ímillum. Flestu av mínum javnaldrum valdu sjóleiðina. Eg kundi farið sama veg, men tað barst mær fyri, at fór eg tann vegin, fór eg ikki at náa fram til tað, sum eg visti, eg vildi vera, og sum eg longu hevði offrað allar mínar dreymar, ja, alt mítt lív. Eg hevði ongantíð sagt tað hart, tað var akkurát so, at eg tordi at hugsa tað fyri meg sjálvan. Men í míni sál var eingin ivi, eg vildi skriva upp í tjúkkar bøkur av søgum og yrkingum. Men hvussu kundi ein fjúrtan ára gamal piltur opinbera fyri upphavi sínum eina so út av allari leið høpisleysa fáfongd. Tað hevði ikki verið niðurafturlagt.

So vit hugdu ígjøgnum bløðini, um ikki onkur lýsti eftir einum dreingi til eitt ella annað, kríggið var akkurát av, og tað var sjáldan nakað at gera fyri so ungt fólk. Fyribils var einans kostur í at velja: at fara á bryggjurnar at landa saltfisk og lossa kol. Kostiligt var at koma heim um kvøldarnar svartur í andliti, men hinvegin fekst ikki upp í nógvar tjúkkar bøkur av at ganga døkkur í skonini sum ein mannúlvur. Soleiðis fór veturin og várið og ein partur av summarinum.

Ein dagin lýsti ein prentsmiðja eftir einum prentaralærlingi. Á prentsmiðjum prentaðu teir bøkur við søgum og yrkingum. Kom eg so langt, var eg ið hvussu er tað nærri mínum ósigiliga dreymi. Eg setti meg niður og skrivaði eina umsókn tað besta, eg hevði lært, og varð hon send avstað í skundi. Men til fánýtis, og har endaði so mín lívsleið innan fyri prentkynstrið, áðrenn hon var byrjað.

Stutt eftir varð lýst eftir einum skrivstovulærlingi. Hetta hevði ikki nógv at gera við kongaríkið í Babylon, men nú var eg so altráur eftir at sleppa út í ta stóru verð, at tað fór at vera harvið. Nýggj umsókn varð skrivað og send á posthúsið saman við nógvum góðum ynskjum.

Vit vóru staddir uppi í Ovastuhjøllum, stóðu og slerdu. Skurar og likkur flugu yvir dalinum, og pápi kom seigliga niðan brekk-

Materiál chráněný autorskými právy

urnar. Tá ið hann kom undan ovasta hjallanum, sást at hann brosaði. — Nú sleppur tú til Havnar, rópti hann á meg.

Í somu stund var heimurin sum umskapaður fyri mær. Har stóð miðskeiðis í stykkinum ein stórur steinur, fleiri ættarlið høvdu rist sínar forbókstavir inn í korkan á honum, mínir stóðu har eisini. Men steinurin var heilt øðrvísi, enn hann hevði verið, tað var mestsum lív komið í hann. Hvat skal hetta siga, rýmir tú? spurdi hann. Og alt tók undir við honum, túgvan tætt við, sum fuglarnir høvdu dánað, áin, sandurin, enntá hømiliurnar, sum stóðu í tøttum fylkingum niðri við vegin, har sum tøðrúgvurnar plagdu at liggja um várarnar, tær, sum eg ongantíð hevði varnast um og ikki virt sum rættiligar plantur, eisini tær spurdu meg, um eg fór at kvitta frá teimum og ikki koma aftur.

Einki fór eg at kvitta frá nøkrum. Eg fór burtur eina stund, og so fór eg at koma aftur. Og harumframt fór eg at skriva um alt. Bæði um steinin og túgvuna, sandin og ánna, enntá hømiliurnar komu at standa onkustaðni í mínum tjúkku bókum saman við nógvum, nógvum øðrum — eitt nú børkubóndanum við teimum frøknutu bløðunum, ið angaðu sum gentur, ið fara í dans. Og eg skuldi skriva so inniliga um allar lutir, at eisini onnur menniskju fóru at verða líka góð við teir, sum eg var sjálvur.

Alt í einum hevði eg fingið so nógv at hugsa um, at eg næstan gloymdi at vera hjartkiptur. Fyrireikingar skuldu gerast til avstaðferðina, klæðir seymast, skógvar keypast, men mesta fyrireikingin fór tó fram innan fyri skinnið. Tey nýggju viðurskiftini skuldu leggjast til rættis harinni og helst so hegnisliga, at einki mein stóðst av nøkrum.

Seinasta kvøldið heima. Frá skyldfólki og vinum hevði eg fingið nóg mikið av formaningum til at fara fleiri ferðir kring jørðina við. Eg var sostatt til reiðar at geva meg upp til ta stóru verð við hennara freistingum og snarum. Einki kundi mær granda. So var tað neytini. Síðani eg hevði fingið tey stóru boðini um at flyta heimanífrá, hevði eg verið eftir teimum hvørt kvøld, sum bar eg ótta fyri, at tað fór at vera seinastu ferð, hóast mítt lyfti um at koma aftur. Tey vóru øll komin heim hetta kvøldið uttan ein kvíga, hon gekk allarhelst og fjeppaðist uppi í tarv-

Materiál chráněný autorskými právy

inum. Eg beyð mær til at fara út á uttara liða at vita, um hon var komin.

Hetta var seint á sumri. Eins og eg gjørdu flytifuglarnir seg til at fara, neyðarsligir og skundigir á málinum. Úti við uttara liða sást eingin bygd, tú vart púra einsamallur úti á heiði. Har var eingin kvíga. Kanska lá hon við norðara liða. Ella norðuri í Dalhaga. Og so var tað, eg fór at renna fram við garðinum við mínum fjúrtan ára gamla ljómandi hjarta. Hygg nú væl at øllum, ljómaði tað, at steinstólpuni og grátítlinginum, at bøgarðinum við teimum óteljandi steinunum, allir lagdir av mannahondum. At dalinum, áunum og húsunum, teimum gomlu, flagtaktu við tjøraðum klædningi, og teimum nýggju, sum lýsa bjartoygd í øllum litum. Og hoyr Mataránna. Steðga á eina løtu og legg tær lagið væl í geyma. Sært tú kluftina, sum hon rennur ígjøgnum, og beðin av blágrýtisgróti. Drag so andan djúpt og kenn roykin av ull og mykju uttan úr haganum og legg alt niður í dragukistina hjá tær at goyma, ikki bara tí at hetta er títt seinasta kvøld heima, men eisini tí at tað er haðani tú eina ferð skalt finna alt hetta fram aftur at seta onkustaðni inn í tíni meistaraverk.

Dagin eftir fóru vit, pápi kom við. Vit fóru til Miðvágs, haðani sigldi ferðabáturin, og skjótt fóru vit klikkjandi út eftir vánni. Sandavágur kom undan Giljanesi, kirkjan við tí reyðu tekjuni lyfti tornið høgt upp um øll húsini, og haruppi við garðarnar í teimum mildu brekkunum hevði eg runnið í gjárkvøldi á hastandi beinum. Í somu løtu ferðabáturin setti gronina út um Presttanga, kom hann út á streymasjógv og fór at kastast til ymsar síður, rokið stóð inn yvir hann, og fólk máttu halda sær í fyri ikki at fara um koll. Soleiðis tók tann stóra verðin ímóti sínum lítla vini. Komin út um Klovning fór seinasta húsið undir.

Eg var føddur á sjúkrahúsinum í Havn. Trý ár seinni var eg aftur fluttur hagar til lítla skurðviðgerð. Fyri einum mánað síðani høvdu pápi og eg verið har suðuri eina heilt stutta ferð í grind, og tað var fyrstu ferð, eg hevði havt høvi at vitja aftur síðani mína sjúkahúsvist sum trý ára gamal. Eg var næstan púra ókendur uttan fyri heimbygd mína, tað longsta eg hevði verið, var onkur túrur til Sørvágs, ein til Vestmanna og um summarið út í Hest at

Materiál chráněný autorskými právy

vitja ommu. Hetta komst av heimsbardaganum. Vágoyggin var hersett av enskum hermonnum, og tað var ikki loyvt at fara av henni, uttan at tað var avgjørt neyðugt. Umstøðurnar høvdu læst okkum inni við tí úrsliti, at vit av egnum royndum vistu einki um heimin uttanfyri. Men nú var eg náðileyst borin avstað móti ókendum strondum.

Trøllkonufingur stóð og peiggjaði upp við berginum. Havhestarnir, sum flugu um miðliðin, vóru evarska smáir, og teir sum sveimaðu heilt uppi við snippin, sóust næstan ikki, so ovarlaga vóru teir. Undir honum lógu stakkarnir við sínum lundaskorum, og heilt niðri við sjóvarmálan sóust gapandi láturgjáir. Harinni á botni í ævigari niðu runaði aldan, og langt eftir at eg fór at vera komin til Havnar, langt eftir at eg fór at vera komin væl inn í mína glæsiligu framtíð, fór hon at bróta harinni við tí sama súsandi lagi. Satt at siga fór hon eisini at halda fram aftan á tað, tí hon fór at runa harinni í allar ævir. Tað var løgið at hugsa sær, beinleiðis skakandi og ikki so lítið harmiligt.

Men nú vóru ikki stundir at villa seg burtur í slíkar syrgiligar tankar. Vit sigldu ímóti Velbastaðlandi, ein kós ódeyðiliggjørd í bókmentunum, og eg hevði túsund ting og fleiri at súgva til mín og stappa niður í ta fínu dragukistuna. Okkurt um tveir tímar eftir at vit høvdu lagt frá landi, rundaðu vit Glyvursnes, framman fyri okkum lá tann ævintýrligi býurin, óføra stórur í mínum eygum, undir lágum, rundum herðum. Fram við strondini nakað uttan fyri molan stóð ein langur, gráur bygningur, har eg hevði sæð ljósið á fyrsta sinni. Vit komu inn um molan og løgdu at inni undir nøkrum pakkhúsum, ið stóðu har rað á rað. Fremmand fólk allastaðni, fremmand andlit. Hvussu mundu tey fara at roynast?

— Vit ganga bara niðan, segði pápi, tað er so stutt.

Vit tóku viðføri í hond, og tað var ikki leingi, so gingu vit inn undir eina brúgv, sum hekk høgt uppi yvir høvdi okkara. Hon var løgd yvir um eina gjógv, ið var sprongd gjøgnum klettin. Fólk stóðu uppi á henni og hugdu niður í skallan á okkum. Stutt eftir komu vit inn í eina langa gøtu, gingu eitt lítið petti eftir henni fram við einum bilverkstað og snaraðu so til høgru niðan í eina lítla brekku og komu til einar langar trappur. Ovast uppi á

Materiál chráněný autorskými právy

teimum stóð ein ung, smílandi kona og tók ímóti okkum. Ájesus, sum hann er langur, segði hon.

Hetta var mín nýggja húsmóðir. Hon vísti okkum inn á eitt kamar beint við inngongdina, har skuldi eg búgva fyrstu árini av míni framtíð. Vindeygað vendi niðan í býin, langt uppi á eini sýn dagaði Kongaminnið móti luftini. Vit settu viðførið frá okkum. — Tit eru væl saktans móðir og troyttir av sjógv, segði mín nýggja húsmóðir, komið og fáið tykkum ein drekkamunn.

Mín fyrsti drekkamunnur mín fyrsta dag í einum av mínum fyrstu langferðum. Alt, ið hendi mær, líkasum hendi á fyrsta sinni. Eg visti lítið um lívið og næstan einki um stóru verð, men eg vildi læra tey at kenna, tað var mítt stóra ynski, og av tí at eg var so ómetaliga bjartoygdur og góðvarin, vildi eg drekka alt í meg líka so gramliga sum henda mín fyrsta drekkamunn. Ikki eitt bil ivaðist eg í tí góða í øllum.

Ikki vóru stundir at sita ov leingi. Vit skuldu hitta skrivstovustjóran hjá mær og fóru avstað út í tann ókenda bý. Uppi á einari høvd steðgaðu vit á eina løtu. Tætt við var brúgvin, vit høvdu gingið inni undir fyri løtu síðani, uttan fyri hana lá skansin, og har var eisini ein viti, reyður og hvítur. Útsýnið var gott, so tað sást í allar ættir, men hvar vóru ættirnar í hesum býi, hvat í Harrans navni var suður og norð. Haðani eg kom, ivaðist eg ikki í tí, hvussu eg vendi mær. Men her var einki skil á nøkrum, fyri tað kundi eg farið til gongu í ein eystan uttan at vita av, at eg gekk í ein vestan. Villingarsami heimur. Men enn hevði eg pápa at fylgja mær og vísa mær veg.

Ýlini frá bilum logaðu í heilum upp millum húsini sum lúðurblástur, har var ein stákan í býnum, sum meira hoyrdist enn sást. Niðan fyri okkum var ein vík umgyrd av húsum og neystum. Vit fóru oman ímóti henni gjøgnum einar brekkur. Av og á hugdi pápi at mær við umsorgarfullum eygum, sum helt hann meg vera sjúkan, men eg hevði annað at hugsa um enn sjúkur, øll hesi nýggju húsini, hesar nýggju gøturnar, hvørt stig var eitt nýtt stig inn í ein nýggjan heim, og soleiðis komu vit, áðrenn meg vardi, til eini stór, hvít hús. Tað var har inni, eg skuldi arbeiða, segði pápi. So for dekan, var tað her eg skuldi arbeiða.

Materiál chráněný autorskými právy

Vit fóru inn í tað hvíta húsið. Ein ókendur roykur slerdi í nasarnar púra ólíkur tí, eg var vanur við, ein blandingur av ymsari sápu, miðstøðuhita, gomlum pappíri, prenti og bonivox. Eftir at hava gingið upp gjøgnum einar trappur og inn gjøgnum eina krókuta gongd, komu vit inn á skrivstovuna, har eg skuldi arbeiða í framtíðini og restina av mínum lívi.

Stjórin var har, hann sat við eitt stórt borð, ein skarpur maður, kvikur í brøgdum við ljósum purlum. Vit tóku hann í hondina, og hann bjóðaði okkum sess. Teir fóru at tosa saman. Eitt blað lá á borðinum, eg tók eftir tí og setti meg at lesa í tí og skildi á lagnum, at teir stundum tosaðu um meg.

— Hann hevur ongantíð verið burtur frá okkum fyrr, segði pápi, so tit fara vónandi at taka mær væl av honum.

— Tað skulu tygum ikki bera nakra bangheit fyri, segði stjórin, vit skulu royna alt, hvat ið vit kunnu fyri at gera ein mann burtur úr honum. Og hann blinkstraði til mín.

— Tað er ikki sum at siga tað at lata eitt so ungt fólk úr hondunum á sær, segði pápi.

— Nei, nei, segði stjórin, tað er ikki sum at siga tað.

Pápi varð sitandi leingi, sum dámdi honum einki at fara. Hann hugdi gjølla rundan um seg og kannaði alt, fann sær okkurt at tosa um, men umsíðir máttu vit fara, og tá tók hann uppaftur, ja, nú vóni eg, at tit taka mær væl av honum, farvæl, — hann drálaði á gáttini, — ja, ja, farvæl meðni.

So fóru vit báðir. — Tygum skulu ikki siga sovorðið býtt tvætl, hevði eg at honum uttanfyri, situr og mølmar upp í saman sovorðið steinbýtt.

Seinnapartin nýtti hann til at vísa mær býin. Vit vóru uppi á Vaglinum og sóu tey stóru trøini har. Og gamla bókhandilin. Hetta var fyrstu ferð í mínum lívi, at eg hevði sæð ein bókhandil. Og har var ein hópur av bókum, bæði føroyskar og danskar, summar lógu og hvíldu á stuðlum eitt sindur afturav við frampermuni upp, aðrar stóðu øksl við øksl sum hermenn, og eina ferð inni í framtíðini fóru mínar at standa soleiðis í sýnisglugganum. Sum herlið til reiðar at fara til gongu við tí dýra farmi.

— Kom so avstað við tær, segði pápi og mátti siga tað fleiri

Materiál chráněný autorskými právy

ferðir. Vit skuldu keypa mær eitt armbandsur, mítt fyrsta í lívinum, men sjálvt hetta ótrúliga fekk meg ikki at fara burtur frá tí gamla bókhandlinum soleiðis alt fyri eitt.

Leiðin gekk longur niðan í býin, fram við einum garði við nógvum trøum, millum teirra stóðu eini hús av gróti og Færø Amts Sparekasse stóð á vegginum við gyltum stavum. Áin rann omanfyri, og beint har stóðu eini gul hús við myrkareyðum vindeygum. Brúgv gekk yvir um ánna, men undir liðini á hesi brúgv var ein onnur, sum var nógv smalri. Hon var úr viði og bert at ganga eftir. Tað ljóðaði opisligt at ganga eftir henni, og niðri undir lógu dunnur í streyminum og sutlaðu. Í kjallaranum í teimum gulu húsunum helt ein urmakari til, og vit máttu niður ígjøgnum einar trætrappur fyri at sleppa inn til hansara. Har var ein íðin tutlan og mutlan av størri og smærri urum og klokkum. Tað var sum allar hesar smáu maskinurnar hvør á sínum máli royndu at títta fyri at skunda sær framum og longur fram á leið enn hinar, og mitt ímillum allar klokkurnar og ein hóp av silvurlutum gekk hann, ein bleikur, lágvaksin maður, kaldarak og við kúlu á bakinum. Vit valdu mær eitt ur í silvurlitum, og hann spenti tað um armin á mær. Áh, hann hevur líka klænar skøvningar sum eg, segði maðurin, bretti upp um armin og vísti okkum ein smalan, lodnan skøvning.

Eg hevði aldri fyrr rættiliga givið mær far um, hvat tíð var fyri nakað. Nú var øðrvísi, sum hevði eg nústani uppdagað hana. Við einum løttum sveiggi við vinstra armi mátti eg fimta hvørt minutt fáa greiði á henni og kundi nú gjølla fylgja við, hvussu pinnarnir báðir spakuliga, men miðvíst óku inn í seinnapartin. Og meðan pinnarnir báðir trúliga røktaðu sítt starv, sóu vit Tinganes, Vágsbotn, Plantasjuna og tað mesta av býnum. Úti við Landavegin vóru vit eisini, har vitjaðu vit kunningar. Men umsíðir var dagurin komin hagar til, at eg mátti fara heim til mín sjálvs.

Pápi fylgdi mær á leið, og nú kendi eg gøturnar aftur, Vaglið, bókhandilin og Áarvegin, áin rann tutlandi framvið. Tætt við tey hvítu húsini, har eg skuldi arbeiða, steðgaðu vit. Tað æt á Kongabrúnni, segði pápi. Har var ein hópur av svørtum neystum út-

Materiál chráněný autorskými právy

eftir, men aftanfyri okkum og uppiyvir hekk ein stór, hvít, rund klokka. Her var aftur ein handil, sum seldi ur, klokkur og silvurlutir. Eg hugdi at klokkuni yvir høvdinum á mær og bar hana saman við mína. Mín var eitt sindur fyrri. Pápi var ógvuliga tigandi, bert av og á segði hann okkurt. Nær man hasin maðurin fara, hugsaði eg, hvørjum bíðar hann eftir. Av og á vendi hann sær burtur og suffaði spakuliga.

— Nú mást tú lova mær, at tú skikkar tær væl, segði hann.

— Ja, ja, segði eg meir og meira ótolin. Hann hevði sagt hetta fleiri ferðir fyrr.

— Og tú gongur ikki seint úti og melur um kvøldarnar, tú fert tíðliga í song.

— Ja, ja — ja.

Og aftan á eina langa tøgn. — Og tú fert í kirkju hvønn sunnudag.

— Ja, ja.

— Og minst til at ringja til okkum, um tað skuldi verið okkurt.

— Ja, ja.

— Um tú skuldi fingið ilt í búkin ella okkurt sovorðið, so ring endiliga. So kunnu vit skaffa tær medisin frá apotekinum.

— Tað er alt í lagi.

— Og lat teg væl í, at tú ikki verður kaldur.

— Ja, ja.

So stóð hann aftur leingi og híndi. Hvat mundi hann nú hugsa um at siga.

— Er tað ikki best kortini, at eg fylgi tær heim? Heldur tú, at tú finnur?

— Eg finni nokk, tvætla. Tygum skulu ikki fylgja mær heim.

— Ja, ja, sum tú vilt, men ansa tær nú so væl. Bilarnir koyra so skjótt.

Nei, tað var líkt til, at hann ætlaði sær ikki at fara enn á sinni, og ikki kundi eg rýma frá honum. Og hví stóð hann og segði alt hatta tvætlið, ansa tær, skikka tær væl. Sum hevði eg ikki hoyrt tað fyrr.

— Skikka tær nú so væl. (Gud hjálpi tú mær, segði hann tað aftur). Og ger ikki ónáðir, har tú býrt. Tú mást ikki vera ólátaður

Materiál chráněný autorskými právy

inni hjá teimum, so at tey fáa fortreð av tær. Men ver nú so rask-ur. Ring endiliga, um tað skuldi verið okkurt.

Hann segði alt hetta nakrar ferðir aftrat. Tá endiliga tók hann fast í hondina á mær og segði, ja, ja, farvæl meðni, troyttur á málinum og eitt sindur ilskliga, sum var hann argur inn á okkurt. Eg fór beinanvegin til gongu niðan móti Skansabrekkuni einsamallur á fyrsta sinni í teirri stóru verð. Komin eitt sindur niðan í brekkuna vendi eg mær við fyri at síggja oman á Kongabrúnna. Tá stóð hann og hugdi aftan á mær undarliga sorgarbundin í andlitinum, og eg visti ikki hví. Hvat mundi bila honum? Men eg hevði so nógv at varða um, at eg kundi ikki fara at taka mær av hansara sorgum, um hann hevði nakrar, og eg gloymdi hann straks.

Á bústaði mínum fekk eg nátturða, og tó fólkini vóru blíð og týð, so vóru tey fremmand, og eg skundaði mær inn á kamar mítt. Tá var skýmt, men enn hómaðist Kongaminnið uppi á sýnini gjøgnum vindeygað. Beint uttanfyri høgrumegin var ein hamari, ein gøta gekk niðan á hann. Næsta húsið eitt sindur niðanfyri var hvítt, tað var av betong. Beint yvirav stóðu eini onnur hús, tey vóru lítil og reyð og kløddt við rukkutum sinkplátum. Á bønum oman fyri tey stóðu nakrar reyðbrúnar hømiliur og lavaðu við krúnunum. Men har vóru eingi fjøll og ongar líðir.

Eg læt meg úr og kreyp upp í mína nýggju song í mínum nýggja kamari og legði meg at sova, men fekk ikki. Fremmandur roykur, fremmand ljóð. Nú, beint í hesi løtu, brutu aldurnar inni á botninum á látrunum undir Trøllkonufingri, og vatnið rann við sama lag eftir blágrýtishelluni uppi við garðarnar í Mataránni.

Eg visti einki um tónlist. Næstan einki. Nøkur sálmaløg dugdi eg og nøkur sangløg. Og sjálvsagt hevði eg verið í føroyskum dansi og dugdi saman við øðrum at kvøða nøkur av okkara gomlu kvæðum, harmonikan hevði spælt strúkandi valsir og hartil foxtrott, men nøvn sum Mozart og Beethoven vóru mær líka so ókunn sum øll klassisk tónlist. Eg hevði aldri hoyrt hasi nøvnini grett. Og kortini var tað, sum hevði eg alt hetta inni í mær, nakað ósigiligt, sum var størri enn orð, nakað, sum var fylt av ómetaligari gleði og ómetaligum myrkri. Hvat hevði eg ikki hoyrt uppi í



Materiál chráněný autorskými právy

Kálvadalsskarði. Har sang og suðaði vindurin vilt og ólátað, stundum hoyrdust blaktrandi ljóð sum frá stórum, ósjónligum seglum. Uttan av stórhavinum komu aldurnar tungar av ófrættaboðum og kastaðu seg við teimum, brakandi, niðan á sandin. Náttarmyrkur, ikki eitt ljós, stormurin treiv í húsini, so tey ristust og skakaðust, men mitt ímillum tvær hvirlur hoyrdist ein seyður jarma uppi í bønum, hesin neyðarsligi, heiti tónin í tí ræðuliga myrkrinum. Men so var tað eisini lýregn og grønt summar, hamara av hamara sang Fossá sína mildu vøgguvísu út í mjørkan. Ella summarmorgnarnir. Dalurin var á tremur av fuglaljómi, har vóru alskyns røddir, av og á legði ein kúgv uppí, og ein hundur. Og allatíðina, allatíðina brýtur aldan inni á látrunum undir Trøllkonufingri.

Meðan eg lá og slotaði mína fyrstu nátt úti í stóru verð, fyltur av vón og væntan um alt, ið koma skuldi, hoyrdi eg ikki bara tey ytru ljóðini sjáldsama væl, fólk, ið tosaðu saman, føtur, ið gingu, ein krani, ið rann, men eisini tey innaru, — neyt, ið belja, tutlið av vatni eftir harðari hellu, suðið av aldum inni í myrkum hellum. Tey ytru og innaru ljóðini runnu saman og skolaðu inn yvir meg í komandi og farandi bylgjum, og sum eg lá har og læt meg flytast og sveiggja aftur og fram sum taraskógur í aldudrátti, varliga, spakuliga, var eg varur við eitt ókent lag, sum óvarandi hevði vovið seg upp í tónameldurin. Langt burtur var tað, hoyrdist næstan ikki, og kortini var tað so vist, at ótti var uppi í tí og okkurt, sum líktist sorg. Men hví ótti? Hví sorg? Hví komu so ómildar vættrar at vitja meg hesa løtuna, áðrenn svøvnurin var komin til mín og náðiliga fór at bera meg burtur og longur fram á leið til ein ókendan dag?

Materiál chráněný autorskými právy

# Ólavur Michelsen

*(16/9 1933 - 1/5 1978)*



## Lovorð til lívið

**Lívinum, eg fekk sum gávu,
beri eg kvøðu í dag,
nú várið í lágættarvindum
ber ófrið í kjarnrík fræ.**

**Eri eg lutur av stórari eind
av øllum, ið sleppur at liva.
— Lívið mín gudur, eg tilbiði teg
við langtan og skapandi iva!**

Materiál chráněný autorskými právy

Samljóð av livandi lovkvæðum
røkka at fjarastu stjørnum.
— Kvøður so bundið sum grasið grør
eindin av lívsins børnum.

Sum lutur av hesi veldigu eind
— lutur av sól og alheimi —
beri eg lívinum lovorð í dag
sum barn í skapandi gleimi.

## Eg óttist

Eg óttist teir menn, ið gloyma,
at lívið er heilag gáva,
ið rørist í minstu kyknum
uttan dun og háva.

Annars ikki óttin, mær gavst til trega,
heldur eitt sindur av iva,
sum eg tó altíð var førur at basa
í vissuni um at liva.

Men óttin kemur viðhvørt, tá eg síggi,
at menn í álvara royna
at gera menniskjuni til tól
og einfeldni lívsins loyna.

Eg *ræðist* teir menn, ið gloyma,
at lívið er heilag gáva,
ið rørist í minstu kyknum
uttan dun og háva.

Materiál chráněný autorskými právy

## Annika

Himmal og hav, myrkur og sól
og brim um Dímunar strendur.
Dunið av stormum og lomvigakarr
vóru tær skapandi hendur.

Tær skaptu tær hugdjarva kvinna
litfloymdar leiðir at ganga.
— Góvu í sál tær eld og sól
og húsroyk av upphavsanga.

Eld sum oyðir lívið alt,
og sól sum fær øsku at liva.
Húsroyk, sum fær ættarlið
at øtast og undrandi biva.
— — —

Stór var ást tín, Annika,
og stórt var títt hat.
Hvør av monnum man nakrantíð
hava grunað, at tú græt.

Mær tykir tó hóma foldfjaran grát
í norðlýsinum í kvøld,
ið glampar uppi yvir Stóru Dímun
sum boð frá farnari øld.

## Rossini á Skoradali

Í heita vesturskininum hevði allur rossaflotin ligið og durvað í sælum friði. Nú sólin fór undir, og døggin legðist á sevjumikla grasið á Skoradali, reistist ein prúður fýra ára gamal greðingur,

Materiál chráněný autorskými právy

rembdi sær og geispaði langan og inniliga, áðrenn hann legðist at ríva í seg hitt grøna grasið. Brátt var allur flotin á fótum.

Nakrar dagar frammanundan høvdu rossini ligið í Kaldbaksbotni, og hitt feita grasið á Kráartanga hevði fallið teimum væl. Men so var ein kaldbaksbóndi komin fram á tey og hevði beitt hundin á kroppin á teimum.

Ørt var fylgið farið niðan gjøgnum Tunguna — men hin reyði greðingurin hevði enn einaferð víst, at hann var oddahesturin í fylginum. Hann vendi aftur móti hundinum og gav honum eitt spark, sum ikki rakti nóg væl til at gera av við hann, men sum fekk hann at fara rínandi og hvínandi við halanum millum beinini oman aftur á Hólman, har bóndin á Bøgarði í Kaldbak stóð og hóreiggjaði sær, illur inn á rossini, sum ótu tað grasið, ið skuldi gera seyð hansara feitan um heystið — og bjarga fjallseyðinum næsta vár.

Ófriður var tó komin á rossini. Tey steðgaðu ikki ferðini norður undir Bláhomrum, um Skeiðskarð og Gjáarbotn, til tey vóru á Skoradali, ið lá sum ein mjúkur lógvi í vesturskininum. Hitt sevjumikla grasið fekk rossini at kenna, at tað er gott at vera ross ein summardag á Skoradali. Tað ráddi um at draga hold á seg, so nakað var at missa av, tá teir grassvongu vetrar- og várdagarnir komu. Summarullin lýsti blonk, og einki sást longur til rivjabeinini, ið vóru so sjónsk í vár.

Meðan rossini lógu hugaliga á biti í Skoradali, sótu menn suðuri í Havn og tingaðust um rossaprís.

Ein rossakeypari var komin úr Bretlandi at keypa føroysk ross til kolanámini. Føroysku rossini vóru so sera væl egnað til hetta endamálið, smá og kná. Nú vildi bretin hava so nógv ross, sum hann kundi fáa hendur á, og hann sat og prátaði við umboðsmann sín í Havn, sum var millummaður millum hann og bøndurnar, sum áttu rossini, ið meira at kalla vill reikaðu um hagarnar á sumri og skotraðust í bygdunum um veturin.

Stórbóndi norðarlaga av Streymoynni var eisini hjástaddur. Hann visti at siga, at hann átti ein fýra ára gamlan hest, sum ongantíð hevði verið í hond. Tað var so galið, at hann ikki hevði fingið so frægt sum markað hann. Hetta var eitt sera prútt og

Materiál chráněný autorskými právy

kimiligt ross, men tað var so vilt og óregerligt, at allar royndir at handtaka tað higartil høvdu miseydnast. Hetta hevði verið vorðið sum ross at selt, helt bóndin. Sterkt mundi tað vera sum ber ólukka, og var tað komið í hond og gelt, so mundi tað fara at sissast. Men Várharra skuldi vita, hvar rossið gekk nú — seinast, teir høvdu sæð tað, lá tað heilt norðuri í Sjeyndum.

Avrátt varð, at menn skuldu fara at rætta ross dagstevndan dag, tá skip skuldi koma úr Bretlandi eftir rossunum.

Reyði greðingurin, hvørs lagna varð avgjørd á fundi suðuri í Havn, lyfti alt í einum høvdið. Nasagluggarnir stóðu á tambi, og oyruni vóru spílað út. So setti hann alt í einum í eitt gneggj og fór tvísporandi niðan brekkuna.

Breið var bringa hansara, og reystur var høvuðburðurin — summarmegin leikaði í kimiligum vøddum. Dósin seyður lyfti høvdinum, undrandi og óttafullur. Í hølunum á Reyða fór allur riðilin niðan gjøgnum brekkuna og stóð brátt sum skorin í bláa loftið á Vatndalsegg.

Tá Reyði sá oman á vatnið oman Stígar, setti hann aftur í eitt gneggj, og svarað varð aftur har niðri. Hann kendi málið og setti enn meira ferð á — hann nam lívið við jørðina, og lívsfýsnið leikaði í hvørji æðr. Ryssan, ið svaraði aftur har niðri, hevði fylgt honum mangan summardagin, og bæði høvdu tey av Streymoyarfjøllum rætt høvur móti hini rísandi sól og gneggjað í alvaldandi girnd.

Rossaflotin hittist við kæti, sum kom til sjóndar í harðligum lótum.

Undir liðini á svørtu ryssuni var ein brúnur greðingur, spelkin og andbráður. Hann hevði verið oddahesturin hjá flotanum oman Stígar nú í fleiri vikur, eftir at hava bart av allar teir hestar, ið vágdu sær meira enn teir formáddu. Brúni visti, hvat nú leikaði á, og hann gjørdi seg til bardaga. Tá ið tey høvdu runnið í ring og bitið eftir hvørjum øðrum, brustu Reyði og Brúni saman, og tað vóru brestir, sum bóru aftur í Núgvuni, og sum fingu harurnar í botnunum at krúpa longur inn í holur sínar av ótta.

Rossini steðgaðu á og hugdu at hinum mikla leiki, bert svarta ryssan legðist at eta, sum um hon einki petti legði í tað, sum

Materiál chráněný autorskými právy

hendi. Grópanin var ófør, moldrokið stóð um greðingarnar báðar, sum bardust um ryssuna og um plássið sum oddahestur í hinum stóra rossaflotanum oman Stígar. Báðir vóru teir javnsterkir og kvikir, men í bardagafýsni vann hin Reyði. Eitt óført spark upp undir undirkjaftin á Brúna gjørdi enda á mesta bardaga, ið staðið hevur oman Stígar. Brúni stóð sum í ørviti og risti við høvdinum eina góða løtu, so fór hann smoykin oman undir ein stein, har hann stillaði seg at bína.

Tað er ryssulæti at fagna honum, ið sterkastur er, og eftir rossasiði løgdu Reyði og svarta ryssan hálsar sínar saman og fóru at lata tenninar strúka fram við faksarótini.

Tá ólavsvøkudimmið legði mjúku hvíldarhond sína um landið, lá svarta ryssan undir liðini á Reyða — hinum sterkasta hesti í Streymoynni.

Komandi dagarnar reikaði rossaflokkurin víða um. Hann hevði gjørt eitt rend suður í dalarnar, var eisini komin oman í Havnardal, men har hevur so nógv fólk verið burturi í torvi, at har fekst eingin friður, og hin Reyði hevði ongan hug at nærkast mannabygdum, tí maður var meinfýsin. Fylgið var so farið norðureftir, hevði ligið í Grønubrekku, í Mjørkadali og í Mannafelsdali, uttan at hava borið eyga við eitt menniskja. Síðan var fylgið farið oman í Kollfjarðardal, fram við vøtnunum og fram til Gjónna, har fylgið varð liggjandi í fleiri dagar, til Miðgerðarbóndin kom við levint og gang, soleiðis at øði kom í rossini, sum fóru í somu øði um Barmarnar, um Hvalvíksskarð og oman á Mýrarnar, har fylgið aftur legðist á bit.

Kátir vóru hesir summardagar. Tá mettan var fingin, leikaðu hinir spelknu folar um grønan vøll. Fóru strúkandi í kátum leiki um Loysingarfjall yvir á Fossadal, drukku hitt reina fjallavatnið úr Bjarnadalsá.

Náttúran beyð rossunum at njóta summarløturnar, tí tá veturin kom við kulda og kava, tá vóru glaðu løturnar av. Kulsin og rak fóru rossini tá at finna sær skjól undir einum steini ella einum garði, og har skuldu tey standa við lútandi høvdi og afturlatnum eygum — meðan tey innan eygnalokini sóu hin káta summarleikin um grøna hagan, Ørvitisfelli í gyltum sólarroða, meðan veturin so líðandi seyg megina úr teimum.

Materiál chráněný autorskými právy

Við gyltari Postalakirkju kallaði vesturskinið og sólsetrið. Upp Mosarøkur og oman í Dalar bar leiðin. Har niðri við Djúpadalsgjógv sóu rossini sólina seta og ganda landið alt í teir litir, sum hava gjørt fólk í vesturbygdum til eina serliga fólkaferð.

Her í Dølum var rossaflotin liggjandi. Her var nógv gras, her var friður, og her var gott at vera.

Ein dagin kom ein maður fram á rossaflotan, men hann hvarv aftur beinan vegin. Næturnar vóru nú longdar, men enn var summar.

So var friðurin úti, og tað í ólukkumáta.

Rossini lógu nú í einum gili, og áðrenn tey vistu av, vóru tey umgird av monnum við hundum. Menninir høvdu sníkt seg móti vindinum til rossaflotan. Rossaskipið var komið, og menn høvdu verið sendir at leita eftir rossunum. Ein av monnunum hevði sæð rossini í Dølum, og so gjørdu vestmenningar seg til at fara eftir rossum, meðan rossaskipið var komið á Vestmanna, har rossini skuldu verða tikin um borð.

Reyði skimaðist í allar ættir, men har var bert eitt lítið lið í manngarðinum, og tann vegin helt hann. Alt fylgið fór aftaná, men tað var alt í einum, at fylgið var komið í tronga, tað hevði runnið seg beint í rættina. Gríma varð løgd á aftastu rossini, sum ikki vóru komin longur enn í frágarðarnar. Onkur ross vórðu slept aftur, og okkurt ungrossið varð markað, áðrenn tað varð slept út aftur. Menn hugdu at oyrunum, so eingin ivi skuldi vera um, hvør rossini átti, so hann kundi fáa eingilskmannapengarnar afturfyri.

So við og við rúmkaðist í rættini. Hin Reyði innast á botni fekk rásarúm, hann mól í klingur, og so alt í einum gjørdi hann ferð á seg og leyp í leysum lofti yvir garðinum. Tá svóru vestmenningar við, at slíkt ross høvdu teir ikki sæð fyrr.

Leiðandi í bandi fóru so vestmenningar við teimum rossunum, sum takast skuldu. Teir fóru við nógvum rossum, og tey rossini, sum eftir vóru, førkaðu seg spakuliga aftaná. Tá kvøldið kom, lógu tey við garðarnar í Vestmanna. Reyði gneggjaði oman í bygdina, men har hoyrdist einki aftursvar. Rossini vóru longu sundað um borð á rossaskipið og stóðu nú í kassum í lastini. Tá

Materiál chráněný autorskými právy

myrkrið kom sníkjandi seg sunnaneftir inn gjøgnum Vestmannasund, løgdu rossini seg á ból.

Mettir og væl settir, í rossagildi, ómóðir aftur av nøkrum gløsum av brennivíni, sótu menninir, sum høvdu verið í Dølum, og reypaðu niðri í Hálvdansstovu, har millummaðurin sunnan úr Havn helt til. Hann hevði ein heilan kagga við sær, tá hann sum ein annar barónur varð fluttur í land av rossaskipinum. Bóndin, ið átti Reyða, sat eisini har, illbrýntur, tí hann ikki fekk teir dálarnar, ið Reyði hevði snýtt hann fyri, tá hann var lopin um rættargarðin.

Hann royndi fleiri ferðir at birta uppundir. »Rossini liggja beint oman fyri garðin, tað mátti borið til at blindað tey, so tey fingust í hond, ha?« Eingin hevði ønt honum aftur, tí allir menn vistu, at tað vóru ikki fleiri ross at taka uttan Reyði, greðingurin, sum leyp um rættargarðin, eitt ólátað beist. Men tá møðin var runnin og reiðiliga tað, helt onkur av teimum ungu fyri, at tað var best at fara eftir honum. Tað ráddi um at fáa gelt hann beinan vegin. Grækaris á Rógvu var vanur at gelda. Jú, boð fóru eftir honum, og tá hann hevði tømt eitt peglaglas, var hann eisini til dystin fús.

Tá var lykt í hvørjum húsi í Vestmanna, og tað var, sum menninir vóru drignir á tráð, tá teir fóru niðan ígjøgnum bøin. Konurnar fóru út fyri dyr, tí so vakra sjón høvdu tær ikki sæð fyrr. Hini blaktrandi kertuljósini móti hinum svarta fjallinum hetta stilla heystarkvøldið. Konurnar søgdu frá hesi vøkru sjón fyri ommubørnunum, og tey bóru søguna víðari, soleiðis at tilkomnir og trekir vestmenningar á hvørjum gamlaárskvøldi fara at festa í kertur heilt út á Gassadal.

Lyktirnar fóru vaggandi niðan gjøgnum bøin, og tað var alt í einum, at rossini vóru umgird av ljósum. Reyði var einasta rossið, sum fór á føtur. Øll hini lógu púra dølsk. Reyði stóð har so andbráður, men hann sá einki. Tey mongu ljósini blindaðu hann. Hann visti ikki til sín, fyrrenn tvær reipsbuktir vóru um beinini á sær, og hann var kollveltur. Beinini vóru fatlað, og meðan hann lá og bardi høvdið niður í vøllin, varð ein ræðuligur sviði, har eymast var. Í myrkrinum oman fyri garðarnar í Vest-

Materiál chráněný autorskými právy

manna hendi tað, at Reyði ikki longur var greðingur.

Tá hann varð loystur aftur, fekk hann ikki rørt seg fyri pínu. Hann varð drigin oman gjøgnum bøin við gleivandi afturbeinum, og síðan varð hann bundin í ein steyra uppi í Gørðum, har menninir settu seg inn aftur at reypa og drekka brennivín. Her stóð hann so og bíndi alla náttina, hann royndi viðhvørt at toga í bandið, men geldingavónloysið seig saman um hann — og hann setti múlan niður í svarta svørðin.

Tá teir snimma morgunin eftir skuldu leiða Reyða oman til strandar, beit hann eftir rossaumboðsmanninum, ið næstur stóð, og tá øtaðist mangur vestmenningur, tá Reyði stóð við einum parti av oyranum í kjaftinum. »Noy, noy, eitt sovorðið boyst skal temjast,« søgdu teir við ein munn, og nú máttí Reyði bíta í grasið móti sterkum vestmenningum.

Blóðsprænurin stóð úr oyranum á rossaumboðsmanninum, og hann var markaður til sín doyggjandi dag. Tá hann seinri saman við øðrum umboðsmonnum fyri okkurt útlendskt sat í Havnar klubba uppafturá við feitari sigár, við einum glasi á borðinum og kortblaði í hondini, plagdi hann at reypa av tí vanda, sum hann hevði verið í. »Tú, hin gamli, vit uppoffra okkum fyri landið, tá vit selja ross til Onglands. Bara skomm og skitna løn fært tú afturfyri, at tú skaffar pengar til landið. Pengar eru aftan fyri alt, tú hin gamli.« Hann peikaði á markið — og var stoltur av tí.

Dósin og dølskur varð Reyði fluttur um havið.

Viljugur læt hann seg leiða í land, men tá onkur vágdi at strúka hondina eftir snáðini á hesum vakra rossinum, tá beit hann frá sær.

Tað illa hevði Grækaris gelt.

Við jarnbreytarvagnum vórðu rossini av Skoradali flutt til kolanámini og í einum kassa lorað niður í hitt æviga myrkrið, har smáar karbidlampur lýstu so mikið, at kolasvartir hvítir menn fingu trilvað seg fram ígjøgnum myrkrið. Her skuldu tey liva restina av ævi síni saman við smádreingjum og monnum, sum livdu í somu trælakorum.

Tað tók sína tíð at venja rossini at draga vagnarnar, sum gingu á skinnarum, men tey flestu rossini vórðu lagalig eftir fáum døg-

Materiál chráněný autorskými právy

um. Tey gingu beint fram og hildu uppat at kløkkast, tá hitt lága námsloftið nam við herðarnar. Tey hoyktu seg bert niður undir hinum tunga lofti, soleiðis sum teir menn høvdu gjørt, ið høvdu markað tey í Føroyum, gingu bert beint fram í blindum og í myrkri.

Øðrvísi var við Reyða.

Hann leikaði í sum eitt ótt hvørja ferð teir løgdu hond á hann, og tá týggini komu á hann, varð hann garvillur og brótaraross.

Eitt hím gekk har í náminum. Eitt 13 ára gamalt, ið valla rakk úr rossaspori. Ein faðir- og móðurloysingur, sum teir høvdu sent niður í myrkrið, har tað kundi stríðast við kol, so leingi tað orkaði, til tess tað útslitið doyði av elli. Hetta smáa var eisini so hent at senda inn í tær trongu holurnar, har tilkomin maður mátti grulva.

Soleiðis var mannalagnan tá í mongum bretlandsbygdum, meðan teir á kostskúlum aldu upp eitt mentað lið at leggja undir seg lond í øðrum heimspørtum, meðan háttvirdir havnarmenn og limir í Havnar klubba fingu føroysk ross til ensku kolanámini, har menn høvdu sæð, at føroyska rossið hevði tolt so nógva ómegd, var so illa viðfarið, at gavst tú tí ein kjaft av hoyggj av og á, so sleipaði hetta smáa og knáa rossið seg í hel, bert tað fekk búkfylluna.

Men Reyði var ikki so at temja.

Hvørja ferð ein av námsmonnunum nærkaðist honum, so sparkaði hann, sletti við høvdinum í hesum landi, har hann bert hevði møtt myrkri. Teir ræddust.

Tá allir høvdu roynt seg, so bóðu teir lítla John, hitt 13 ára gamla hímið fara at royna seg, tað var so lítið í veiggi, at um tað varð sparkað til deyða, so var ikki stórvegis missur í tí. Arbeiðið í náminum fór ikki at verða tarnað so mikið, at námstjórin fór at illkennast inn á teir av teirri orsøk.

Á honum, sum nakkahárini eru brýnd av undir lága loftinum, hjá honum, sum meginpartin av ævi síni hevur gingið og kropið, gevur tað ein feril av mannavirði, tá tú sært hann, ið andar eins og tú, hevur valt tað stóra og djarva, og teir rættu seg í rygginum við tí gjóstri í sálini, sum er øllum monnum lagað, tá lítli John nærkaðist Reyða.

Materiál chráněný autorskými právy

Tá lítli John legði sína lítlu og svørtu hond á Reyða, tá mótmælti hann ikki. Hann stóð púra kvirrur. Lítli kláaði honum aftan fyri oyrað — og hann sissaðist so mikið nógv, at hann stóð púra stillur, tá lítli legði týggini á hann og spenti hann fyri vognin.

Soleiðis vórðu týggini løgd á Reyða.

Og tað var so skjótt, at hann dró kol móti fleiri rossum.

Teir góvu teimum rossadreingjunum, sum drógu mest kol, okkurt framíhjá. Lítli John og Reyði drógu so nógv kol, at báðir trivnaðust av øllum framíhjábitunum. Ikki vaks Djonnurin nógv, men hann trivnaðist og fekk búk, og Reyði gneggjaði av frøi hvørja ferð, hann nærkaðist. Teir drógu kol, og alt var gott.

Men ein dagin helt námstjórin, tá hann frætti, hvussu nógv kol hann og Reyði høvdu drigið, at John mátti fáa eitt betri starv, og hann varð fluttur upp at sita á einum av dampspølunum, sum drógu kolið upp úr dýpinum.

Har sat hann so og vantrivnaðist uppi í luftini, sum var full av koladusti, og sum var lítið øðrvísi enn luftin í neðra uttan tað, at her var gjóstur í erva.

Men Reyði varð aftur garvillur, tá Djonnurin var farin. Á ymiskan hátt royndu teir at temja hann, men har var einki við at gera. Hann var aftur brótaraross, bardi týggini av sær.

Tá nógvir mans vóru um hann, bar til at fáa hann spentan fyri ein vogn og fáa hann at draga, men so skjótt sum hann sá eitt karbidljós, kom øði í hann. Hann rann sum óður eftir ljósglæmuni.

Námstjórin fekk hetta at vita á einum av ferðum sínum niðri í dýpinum, og hann hevði beinan vegin ráðini: »Stingið eyguni úr honum!«

Og so varð gjørt.

Nú hendi Reyða eitt rættiligt undur. Tá gløðandi jarnoddarnir brendu seg inn í eygu hansara, var tað, sum høvdið fór í sor, allur heimurin stóð í einum báli — men so sá hann sólsetrið av Skoradali! Roðin gylti Skæling og Oknadal, og vesturi í sundinum var eldur í. Reyði sá fyri sær Vatndalsegg, vatnið oman Stígar, Kaldbaksbotn, Kollfjarðardal, Dalar og Sjeyndir — alt so livandi í øllum myrkrinum.

Materiál chráněný autorskými právy

Teir undraðust allir á, hvussu róligur, ið Reyði var vorðin, nú hann hevði mist eyguni. Tolin dró hann hinar tungu vognarnar hagar, ið námsmenninir vildu, tolin læt hann teir leggja hini skitnu týggini á seg, og tolin bíðaði hann eftir hoynum og korninum, sum hann fekk tríggjar ferðir um dagin. Reyði var vorðin besta arbeiðsrossið í náminum, og námstjórin fekk nógv rós fyri síni klóku ráð.

Tað, ið hinir smáu menn í náminum ikki vistu um, var tað stórbæra lívið, sum Reyði livdi. Meðan teir gingu har og longdust heim til skitnu kroysur sínar, har ein tannleys kona full upp undir hendur við einum svongum og grátandi barnaflokki uttan um seg tók í móti teimum, rann Reyði í kátum summarleiki um Streymoyarfjøllini við svørtu ryssuni undir lið. Hann, ið upplivað hevur so stóran vakurleika, so mikla summareydnu, hann verður ongantíð heilt fyri ongum, og tá teir tóku eyguni frá Reyða, fór hann at síggja inneftir — tað var hansara eydna her langt niðri undir jørðini í Svarta-Onglandi, har kolið var alt, og hann livdi annað lív enn at draga kolavagnar.

Sterkur var hann, og tað sóu menninir, teir spentu hann fyri tyngri og tyngri vognar; men tá Reyði varnaðist, at nú var í tyngra lagi, so steðgaði hann bert. Stóð púra stillur, og hóast teir bukaðu hann, so flutti hann seg ikki av fetinum. Tískil slapp hann aftur at draga vognar, sum hann fór lættliga við. Meðan koladustið setti seg sum ein skón um allan kroppin, so liturin ikki longur var reyður, men svartur, rann Reyði framvegis sum kátur greðingur um Vatndalsegg.

Og so kundi søga okkara um rossini av Skoradali endað, um ikki ein serlig hending varð, tá Reyði endaði sínar dagar.

Eitt fyri og annað eftir av rossunum høvdu verið dripin, tá tey ikki orkaðu meira, vóru útslitin. Hóast tey fingu nógv at eta, so vardi tað ikki nógv ár, fyrr enn hetta møðsama arbeiðið í náminum gjørdi rossini óarbeiðsfør.

Tað var veitslurómur í náminum, hvørja ferð eitt ross skuldi avlívast, ella sláast niður, sum teir søgdu tað har. Rossaslaktið týddi tað, at nú varð kjøtveitsla í myrkrinum. Við lýsandi eygum sótu námsmenninir og koyrdu í seg rossakjøt og rossaslambur,

Materiál chráněný autorskými právy

teir tugdu væl og leingi, áðrenn teir svølgdu, seigari var, tess betri, longur høvdu teir henda vælsignaða kjøtsmakkin í munninum — og best av øllum: Teir sluppu at hava ein bita heim við sær til tey svongu børnini, soleiðis at tað eisini varð veitsla í teimum smáu, skitnu kroysunum, tá rossaboð hevði verið í kolanáminum.

Reyði var ikki fallkomin, tá hann mátti lúta.

Ein dagin hendi tað, at loftið í teirri námsgongdini, har Reyði dró kol, rapaði, soleiðis at menninir vórðu innistongdir. Har var róp og grátur, so sjálvt Reyði, sum livdi í øðrum heimi, varnaðist, at okkurt óvanligt var áfatt. Hann var ófriðarligur, og Djonnurin, sum hevði vantrivnast so uppi í gjóstrinum, at hann var sendur niður aftur í námið, kláaði honum aftan fyri oyrað fyri at sissa hann. Hann varð eitt hím, sum vanlukkan ikki rámaði. Hann skildi neyvan, at lívsvandi var á ferð. Og meðan menninir runnu aftur og fram, róptu og geylaðu, stóðu teir báðir, Reyði og John, og kendu samveruna.

So við og við sissaðust menninir. Teir vóru innistongdir. Teir fóru at grava burtur tað, sum lopið var niður, og so var bert at vóna, at teir gróvu frá hinari síðuni, so teir kundu bjargast út, áðrenn teir doyðu í hungri. Námið var turt, og tað var eingin vandi fyri, at tað skuldi fyllast við vatni, og víðar gongir vóru inneftir, so tað fór at taka langa tíð, áðrenn luftin varð uppbrúkt. Teir kundu liva leingi, um bert var nóg mikið at eta.

Men óttin á monnunum var mikil, og teir arbeiddu ófært fyri at grava burtur tað, sum lopið var niður úr loftinum. Tað hevði jú hent seg, at námstjórin gav boð um at gevast at grava eftir innistongdum námsmonnum, tí hann helt tað vera tíðarspell, sum einki kol gav, og eingin vón var jú at finna menninar á lívi.

Allir vistu at siga søgur um slíkt, og onkur av monnunum visti at siga, at seinri vóru teir komnir fram á námsgongdir, har ein hópur av upptornaðum líkum var at finna. Skemdir á summum líkum høvdu best sýnt, hvørji neyð, ið hesir menn høvdu verið í, áðrenn teir góvu upp ond. Hvussu stórt lopið var hesaferð, visti eingin.

Teir høvdu svøltað fleiri dagar, tá teir gjørdu av at drepa

Materiál chráněný autorskými právy

Reyða, sum allir vóru so góðir við, hann var so spakur og góður í sær, at teir allir høvdu snýtt seg til at geva honum ein kjaft framíhjá, teir høvdu kent seg sum uppreistrarmenn, tá ið teir gjørdu tað, og høvdu rætt ryggin undir lága loftinum.

Tá hinir svøltandi og innistongdu námsmenninir ótu Reyða, vóru teir kátir, sum teir høvdu drukkið brennivín. Mettir sótu teir har og ropaðu, sovnaðu sum teir sótu — og gloymdu eitt bil, at teir vóru innistongdir. Lítli John slapp at eta eygnamørin á Reyða, men um hann sá tær stoltu sjónir, ið Reyði hevði sæð, tað sigur søgan einki um.

Materiál chráněný autorskými právy

# Steingrím Niclasen

*(12/11 1934)*



## Mítt síðsta tjaldur

Einsamalt á fjørusteini —
hyggjandi um hav —
situr tú mítt síðsta tjaldur,
nú ið vitjanin er av.

Ferðagladir fóru frændur
flúgvandi um sjó —
eftir situr tú og kúrir
einsamalt í sævarflóð.



Materiál chráněný autorskými právy

Veingir vildu ikki bera
aftur teg um sund —
unnast tær á vársins degi
seta farnu frændum fund.

Vilja ikki villir vindar
unna tær ta stund —
gævi teir tá høviskliga
bera teg í síðsta blund.

## Mínar troyttu hendur

Harri, mínar troyttu hendur
rætti eg í móti tær,
biði, at tú hjálp mær sendir,
tá ið heimur harðast slær.

Skjól og skjøldur, Gud mín, ver mær,
brynja mín í lívsins stríð',
andans svørð tú gev og herð mær,
tá meg herjar heljar ríð.

Eri eg í víggi staddur,
inni ikki vilja tín,
falli, um enn brynjuklæddur,
reis meg aftur, Harri mín.

Gloym, o Gud mín, misgerð mína,
hana søkk í djúpan sjó;
Harri, fyri miskunn tína,
reinan tváa meg sum snjó.

Materiál chráněný autorskými právy

Fram við míni lívsleið stendur
ritað: Hann ov veikur var!
Harri, mínar tómu hendur
rætti eg ímóti tær.

## Átti eg orð

Átti eg orð —
gitin
í andans eldi —
laðaði eg
úr teimum
varðar
á leiðum teirra
ið lagnan
feldi
á
lívsins morgni
og
seinni —
varðar —
ið veittu
teimum
og
teirra
lívd
og
læ
á
dagsins
ljósleysu
løtum

Materiál chráněný autorskými právy

men
eingi
eg eigi

minnist tó
sang
mínar móður
á
dagsins
mangan møðsamu
stundum —
sang
um
miklan mann
ið mælti
orð
sum í øldir
hava verið
lívd
og
læ
og
ljós
á
ljósleysu
løtum
landa

verði tey
eisini tykkum
varðar
og
vitar
í
lívsins víggi.

Materiál chráněný autorskými právy

## Undir heimsins súlnagangi

Undir heimsins súlnagangi
fjaðka vit her øll so leingi
okkum her er tilmáld leið;
stríðist hvør av øllum alvi
vinna mest í lívsins talvi
gevur øðrum gætur ei.

Undir sama súlnagangi
sótu mong við skerdum veingi —
tey, ið skuldu samhug átt;
eingin vildi hond teim rætta,
eingin veita minsta lætta,
dagur teirra var sum nátt.

Undir heimsins súlnagangi
sita fjónað enn í meingi
tey, ið verða kallað veik;
ongan leik í lívsins talvi
flyta tey av egnum alvi,
hvør vil flyta teirra leik?

Undir heimsins súlnagangi
er so torført mangan geingið,
hál er rás, og mjá er rók;
um vit tí hvør annan studdu,
geingið hvør hjá øðrum ruddu,
lívsins sól at skína tók.

Materiál chráněný autorskými právy

# Magnus Dam Jacobsen

(6/7 1935 - 21/8 1978)



## Nýggjársyrking

Ongantíð hevur nationala heksabálið brimað so óført,
sum undir seinna heimsbardaga.
Nasjonalløvurnar brølaðu og traðkaðu hetz-dansin í villasta
tjóðskaparliga delerium tremens.
Litirnir bleikstraðu, blaktraðu og blinkstraðu.
Tað dundi úr homrum og fjøllum, tað avaði úr skotum og
hyljum.
Eitt bil stóð tíðin still — søgutímin.

Materiál chráněný autorskými právy

Orð profetanna gingu út:
»Meg droymdi um stormstoltar lúðrar og dynjandi orrustuljóð,
um sterkar, ormvegandi Sjúrðar!«

Men sápubløðrur vóru, og so rak aftur milt um flúrar og sker,
tangar, klettar og igulker.
Tarabløðini kelaðu hvørt annað og nationalandin skifti búna.
Dansurin gekk so lystiliga millum tey »fínu« til útvatnaðar
tónar av rokoko- og skinføroyskum vertskapsromantikki.
Simba brølaði ikki longur í fjøllunum, fjallapurnar høvdu
leitað sær oman á slætt og vóru
farnar at samla uppá føroyskar pengaseðlar og frímerki.
Í Amtmansgarðinum, undir heystbúnum trøum, stóð »fólkið«
og hugdi undrandi, forvitin og skemtandi
at nationalløvunum, sum nú vóru vorðnar selskapsløvur og
lærdu danskar embætismenn,
heil- og hálvintellektuellar, føroyska mentan, dans og
vertskapssið.

Onkuntíð leikti mín fótur so frítt —
leikar hon vítt, leikar hon frítt, leikar mín hindin
um vøllir vítt.

## Í Grønlandi við Kongshavn
*(Brot)*

Sunnudagur 20.6.
Komu til Føringahavnina, keðiligasta pláss í Grønlandi, klokkan 13 mikudag. Her osar av arbeiði, plikt og missión. Á sjómansheiminum Lívd ber til at spæla pop og billiard, eta smákøkur, drekka te og kaffi. Hann, ið hug hevur at lurta og syngja, kann luttaka á teimum uppbyggjandi møtunum. Norðmenn hava her eitt samaslag fyribrigdi. Annars er bio og sjálvandi alt, ið hoyrir einum framkomnum fiskiídnaði til.

Materiál chráněný autorskými právy

Vit spákaðu eftir havnaøkinum. Snoddaðu, um lotið ikki bar okkurt forkunnugt við sær. Hittu skyldmann. Hetta mátti gerast til eina góða løtu. Umborð á einum eysturtýskara fingu vit eina liturfløsku av vodka. Hetta var prýðilig fløska við vælskapandi plantu innaní. Plantuna háladu vit burturúr, men sloktu hana væl, áðrenn vit sleptu henni á sjógv. Skyldmaðurin, ið róði út hiðani, bjóðaði okkum heim í skúrin. Luddi fór eftir gitarrini. Songur, harmonika, gitarr, prát og skemt. Tíðin kleyvaði av stað. Fløskan var góð, vóru vit á einum máli um. Bert spell, at hon ikki var rúmari. Kifakkar vóru í skúrinum (kifakkur: at halda hús). Tær vóru fryntligar, blíðar og fittar. Bjóðaðu okkum eina máltíð at ganga á. Bacon og egg, rugbreyð og te. Mettir og væl settir, vælfagnaðir, bóðu vit farvæl, takkaðu fyri gestablídni.

Leygarmorgun vóru bátarnir klárir til útróðrar. Hetta var eisini tíð uppá. Vit vóru ikki sørt villir. Høvdu gingið fyri einki so leingi. Og lastin, hon var stór, og skralltóm. Klokkan 8 sigldu vit í Grátufjørðin. Kongshavn skuldi bunkra. Falkurin og Toftanes vóru longu farnir. Turid, Glansur og vit, Trý systkin, fylgdust, til vit komu á fiskileið. Vit kastaðu, men lítið var at kenna. Klokkan var tá 13. Hetta er snellufiskiskapur. Frá 9 upp í 12 húkar. Stimaðu í ymsar ættir. Toskaveiðan var byrjað. Klokkan 21 vundu vit snellurnar inn. Høvdu bert fingið 103 toskar. Hinir bátarnir høvdu haft sama fiskarí. Turid var undantakið, hon var rokað.

Leygarkvøld var. Einasta kvøld í vikuni bátsmanningarnar hjálptu bøndrunum at gera reint. Luddi annar valdu lastina. Fingu tveir hjálparmenn og krupu so niður á banjaran. Her vóru fjøll av skínandi hvítum salti. Hvørt korn skygdi og glitraði. Skottini vóru blonk, slitin, grønlig og ljósgul á liti. Eingin skræðir seg sjálvan og aðrar sundur fyri at sleppa í lastina. Høvuðsorsøkin er helst tann, at teir, ið her starvast, eisini eru teir, ið seinast eru lidnir. Í mesta lagi ein hálvan tíma minni í koyggjuni enn hinir. Men lastin hevur sínar fyrimunir. Her avgert tú sjálvur, hvussu tú starvast og leggur til rættis, ert tín egni harri. Viðvíkjandi hálvatímanum er hetta eisini ein fyrimunur. Tá kanst tú í friði og náðum, uttan at skunda, skumpa og skotrast, bíða eftir pøsum, kustum og vatni, gera teg kláran. Í lugarinum er sami

Materiál chráněný autorskými právy

vælsignaði friður, rúmsátt, matnáðin er viss. Luddi hevði transistorin við í lastina, musikkur til arbeiði... I am a poor lonesome cowboy, and very far from home...

Flakti og vaskaði, fiskurin skreið ljósur, grønur og gráur gjøgnum sliðskuna niður á banjaran. Av og á tóku vit ein fisk og handfóru hann. Hugdu gjølla, atfinningarsamir. Teir skuldu ikki sleppa so. Men her var einki at finnast at. Hetta var mest sum skilamanning, eingir snýtarar. Tað var eisini eitt skip, vit vóru á, ein avmarkaður heimur. Um ráddi, ikki at gera sær fyri skommum. Eitt lítið manssamfelag var hetta. Vit umboðaðu okkum ikki bara sum menn, menniskju og einstaklingar. Eisini vóru vit umboðsmenn fyri bý, bygd, ja, húsfólk okkara. Báðar hendur vórðu brúktar at leggja við, so skjótt gekk. Feski fiskurin varð dungaður undir í salti. Vit hoyrdu og sóu, hvussu hann drakk og slupraði í seg. Stakkurin vaks, lastin var ikki longur tóm.

Í dag er sunnudagur, klárur heiður og sól. Vindurin er nógvur, og hann er kaldur. Marité og Atlantsfarið komu í nátt, so nú eru vit trý bátaskip. Hava júst tosað við teir. Ikki eru teir so vælmannaðir, at teir kunnu manna dekkið við bøndrum. Inni í fjørðinum, vit liggja beint uttanfyri, hava fleiri bátsmanningar tilhald. Hví eitur hesin fjørðurin Grátufjørðurin. Ein av manningini gav mær hesa frágreiðing:

»Fyri mongum árum síðani var búpláss í Grátufjørðinum. Sjálvur hevði hann vitjað hetta pláss. Húsini stóðu tóm og gapaðu. Vindurin blásti og suffaði. Kirkjugarðurin ríkti, snaraði á hongslunum. Garðurin var villini heiður. Bygdin vorðin søga. Dagandi yvir øllum, merkið hjá Hans Egede og øðrum slóðbrótarum, kirkjan og krossurin. Hann fór inn í kirkjuna, gekk fram við teim tómu sessunum, innar í kór. Á altarinum lá bíblian uppslegin. Eg fregnaðist á hvørjum teksti, men hetta hevði hann ikki givið sær far um. — Eina villa vetrarnátt, í ýlandi vindum, brotum og glaðustroki, gekk mannfólkið alt burtur. Teir vóru farnir á veiðuferð um morgunin. Eingin teirra spurdist aftur. Havið hevði kravt sín skatt. Tað, ið eftir var av fólki, gomlum og sjúkum, kvinnum og børnum, fluttu til onnur búpláss.«

Materiál chráněný autorskými právy

Eri ófriðarligur, spjaddur í dag. Finni onga hvíld. Skal eg taka árabátin, rógva inn í fjørðin. Til búplássið, bygdina. Dvala har eina stund. Súgva inn í meg, drekka og uppliva søguna. Úr tøgnini, á gomlum breytum og túnum, í tigandi stovum anda fólkið, bygdina og landið inn í meg. Síggja tey fara og koma. Hoyra sang, prát, látur, pinkulingagrát, venan og stunan. Úr oyðuni ganda fram teirra livandi hendur. Veiðumannatjóðin, eins og ættfedrar mínir í kvennlegg, fjallasamarnir, nomadar. Við hetta borð hava tey sitið, á benkrum, gólvi. Etið fisk, kóp og hval. Stungið, skorið, flett, bitið. Skrætt og gnaddað, piðað bein. Í skinnbátum sínum, kajakkum og konubátum, á ferð framvið strendurnar. Inn í gjótur, sund og firðir. Um ísar, sandar og oydnar heiðir. Frændafólk okkara, brøður og systrar. Eins og vit bert stjørnudust og mánastøv. Mannakorn í rúmdini. Fúkandi neistar. Lið, í alheimsins ævigu vallaraferð.

Tjakfundur var í lastini í gjárkvøldið. Felagar okkara høvdu hug at bera fram hugsjónir. Báðir eru teir giftir, men annars ólíkir. Annar var loysingarmaður, vildi kvetta beinan vegin. Verturin skuldi blakast úr húsinum. Sjálvur vildi hann sleppa at mjólka kúnni. Njóta gagn og vinning av mjólkini. Her var eingin ivi, einki himpr. Leiðin var vís. »And so is it written and so is it done!« Hin var socialistur og kristin etikari. Meinti, at tað einasta rætta var socialisman. Hon tók ongan framum. Eingin mismunur varð gjørdur. Málið varð, at øll høvdu eins ágóða av ognum samfelagsins, fíggjarliga, sum andaliga. Grundarlagið undir hesum var kristindómurin, kærleiksboðið og moralurin. Hetta, at hava virðing fyri næsta sínum, eins og fyri sjálvum sær. Tann fyrri vildi í song, brúdleyp ella ei. Tann seinni, trúgvur sjónarmiðum sínum, hugsjónum og anda, vildi fyrst hava prestsins hond á høvdið. Báðir høvdu teir rætt. Úr politikkinum og moralinum løgdu teir út í landsins og heimsins viðurskifti annars. Endaðu við at tosa um ætt og kent fólk. Leygarnátt á Grátufjørðinum. Meðan Kongshavn lá og skrykti í teymarnar. Í lastini, millum salttirnur, vátan tosk, skróið av spakum. Millum klamsini, tá fiskurin varð lagdur. Ljóðið av gummistivlum á vátum banjara.

Materiál chráněný autorskými právy

Meðan vatnið seyraði niður í kjølin. Her gjørdist høgt til loft og vítt millum veggja, meðan heimsins viðurskifti vórðu løgd fram, viðgjørd, og sett upp á sítt rætta pláss.

Hevði samrøðu við bátsformannin í dag. Hann hevur róð út frá tí, hann var óviti. Sær út til at vera skilamaður. Virkar álítandi og tryggur, lítur á seg sjálvan, tó viðkvæmur. Í útsjónd og verumáta minnir hann meg nógv á musikklærara mín. Somu skørpu, reinu, asketisku andlitsbrøgd, ið saman við brillunum við tí kraftiga stellinum, geva honum eitt andsarbeiðara yvirbragd.

Vit hava nú roynt í 14 dagar. Hava veitt 200 skippund. Hon tekur 1700 skippund, 276 tons.

Fríggjadagur 2.7.
Fóru út at rógva klokkan 5. Stimaðu út til Skerini og kastaðu har. Nógv graps var at byrja við, men, sum fráleið, kom góður og stórur toskur á. Hann regnaði, stilt og tætt. Slætt og gott veður. Knappliga eitt vindblak, men so stilti hann aftur. Fiskurin stóð tættur. Vit kastaðu, heintaðu og vundu við sveittan í barm. So vindaði hann aftur. Gjørdist stúttur, sterkari og vaks. Formaðurin skimaðist, hugsaði og snoddaði, gjørdist álvarsamur. »Snellurnar inn!« Stimaðu suðurá. Ætlaðu at kasta í le av landinum har. Men tað var ikki hugsingur um. Skjótt stóð alt í einum roki. Neyvan sást, hvat var upp, hvat var niður. Frammanfyri okkum, í le, lá seksæringurin hjá Marité. Skiparin, Dunga-Jógvan, stóð við róðrið. Teir bardust við aldurnar, vendu kjølin upp í heilum. Ikki sá tespiligt út. Hvat so við okkum, ið bert var eitt tíggjumannafar. Týðuligt var at síggja, at seksæringurin helt munin. Lá klárur, um óhappið kom fyri. At liggja soleiðis, at teir høvdu møguleikar at taka okkum inn við rákinum, um báturin fórst av vindi og aldubrotum.

Loysti Ellendur av aftur við pumpuna. Pumpa! tað var hetta, ið umráddi. Fáa fossarnar av sjógvi útum stokkin aftur. Eingin tíð at hyggja ella hugsa. Brúka armarnar og kroppin, pumpa! Ellendur avloysir, hann er bert 15 ára gamal. Fyri tveimum árum síðani druknaði ein bróðir hansara á grynnunum við Towkussak, bert

Materiál chráněný autorskými právy

15 ára gamal. Tveir fórust, triði kom á kjøl. Hann royndi at halda hinum báðum. Men áhaldandi aldurnar, og kuldin, loystu takið. Teir bløðraðu til botns, har teir róku við havsins streymum. Annar, ið druknaði, var eldri maður. Hann, ið helt, var maður á miðjum aldri. Ellendur arbeiðir, stúttur og sterkur, stillur og róligur, á honum merkist einki.

Siti á bekkinum. Eygleiði formannin. Undir slíkum umstøðum sæst, hvat maðurin er verdur. Hann stýrir. Róðurpinnurin er læstur undir vinstra armi. Brillurnar hevur hann tikið av. Sjógvurin drívur av honum. Klæðini glinsa, liggja í rukkum. Skyggja í grønum, frá tí ljósasta til tað myrkasta. Sum klæði, dúkar í silki og floyali, málningar í barok. Teir eru samanvaksnir, báturin og hann. Hesin ævigi bardagin millum náttúruna og menniskjað. Vitið, seiggið, treisknið. Hettuna hevur hann sligið frá. Dýggjvátur kollur á svørtum hári. Hetta er fiskarin, miðamaður okkara. Hann, ið lærdi havið og streymin at kenna. Ið av pápanum, forfedrunum, lærdi at leggja ýti. Vaksin upp við loftinum, vindinum, storminum, harðveðrinum. Ið »sá« botnin, íður, sker og boðar. Kendi hvønn tanga, hvørja nøv, hvørt nes og hvønn flúr. Visti um kalva- og flundrumið, tosk og hýsu. Dyrgingarløtur, meðan landið søkk í dimmið.

Frammanfyri, í stýriborð, hómaðu vit skrokkin, yvirbygningin, mastrarnar, Kongshavn. Hon vaks úr glaðustrokinum. Sneiddu inn við borðið. Høgdu taljurnar í. Skjótt varð atborið og vit vórðu stjóraðir inn á dekkið. Hetta var sjómansskapur. Einki var sýnið. Eingin var peilingin. Einki radio- ella navigatiónstól. Bert tað, sum í náttúruni og høvdinum var. Royndirnar frá teimum, ið løgdu frá sær. Arvurin. Her, nýttur við skil og hegni. Og eg skilti nú forfedranna trúgv. Teirra hugaheim, skil og mentan. Lítillætni teirra, hóvligu framferð og tol.

Bátsmanningarnar vóru komnar, Falkurin undantikin. Vit órógvaðust, fregnaðust. Skiparin kom út á brúnna, greiddi frá Falkinum. Teir høvdu sett upp í eini vík sunnanfyri. Tað hvítaði so um nesini, at ógjørligt var at sigla at borði, fyrrenn veðrið fór at batna.

Nú, eg liggi og skrivi, er klokkan 22. Hann er blíðkaður aftur.

Materiál chráněný autorskými právy

Manningin á Falkinum er afturíafturkomin. Situr og skaffar við góðum matarlysti. Saltkjøt og ertur. 8 skippund vá veiðan í dag.

## Skitsur — býurin og stórbýurin
*(Brot)*

Steen og gentan fóru strúkandi gjøgnum býin. Hetta hevði verið ein góður dagur. Steen hevði keypt sær einar velour buksur fyri 200 krónur. Meðan hann hevði rokast við at passa, hevði gentan stolið fyri einar 2000 krónur. Í einum bókhandli hevði hann fingið fatur á tveimum av teimum heilt dýru listabókunum. Frálíkt, so nógvir listarmenn, ið doyðu blóðfátækir og í djúpastu neyð, kundu verða einum til hjálpar, tá teir lógu undir grønu torvu. Eisini hevði tað eydnast honum at fáa ein góðan Lee-vest undir hondina. Jú, moralurin var í hæddini. Meira tað eydnaðist Steen at stjala, betur hevði hann tað. Hevði hann til dømis verið inni í eini krambúð og kom tómhentur útaftur, var hann ikki nærkomandi.

Komin til ta stóru krambúðina, helt gentan leiðina fram, meðan Steen støkk innum at keypa døgverða og annað til matna. Frakkin hevði stórar og rúmligar lummar. Steen plagdi at siga: »Tá tú stjelur, skalt tú vera væl ílatin, men ikki ov væl. Hav altíð pengar uppiá tær, men ikki ov nógvar. Ver róligur, men ikki ov róligur. Keyp mjólk, keyp fløta, keyp breyð, keyp margarin. Keyp tað bíligasta. Stjal dýrar vørur. Flatar pakkar. Sting teir innundir buksureimina. Troyggjan fjalir. Framman og aftanfyri bakið. Er summar, og heitt, sting teir innum skjúrtuna. Men, ver í undirtroyggju. Tað er dekan og kalt, og skaðiligt fyri heilsuna, at hava frystivørur inni at tí bera kroppinum. Og Steen greiddi frá konuni, ið steinsvímaði beint framman fyri kassanum. Bráðboð vórðu send eftir læknanum. Stuttligt var at síggja, hvussu krambakallar og -kvinnur, portørar og lækni hjúklaðu um ta neyðars konuna. Stuttligt var eisini at síggja gronina á teimum, tá læknin

Materiál chráněný autorskými právy

fann ein frystan kjúkling millum bróstini á henni. Steen helt fram: »Sting ongantíð nakað innundir armarnar. Vørurnar kunna detta niður á gólvið, og forða tær eisini í at vera natúrligan. Stingur tú vørur niður í taskuna, syrg so fyri at hava pengarnar uppiá tær, ella best, hav teir í hondini til reiðar at gjalda, prísseðil er á vørunum. Hetta gevur eisini góðvilja hjá teimum, ið handilin røkja, sparir tíð. Ert tú so gáloysin at hava gloymt hesar reglarnar, og vandi er fyri, at vørurnar í taskuni daga undan, tá tú opnar. Hendir hetta, tak so til lumman, slá teg fyri pannuna ella, hvat tú nú kanst finna uppá, tú skalt gera tað, sum *tú* heldur vera best, og so sigur tú: »Tað var spell!« So sigur daman: »Hava tygum nú gloymt pengarnar?« Tú svarar: »Ja, og tað eri eg harmur um, men eg búgvi tætt við krambúðina.« Og so fert tú útum og syrgir fyri, at sleppa av við tað, sum í taskuni liggur. So vendir tú aftur eftir vørunum, tú keypti, letur gjaldoyra, takkar, og sigur kursteisliga, men ikki ov kurteisliga, farvæl.«

Tveir piparostar í vinstra, tveir hvítleyksostar í høgra lumma. Ein flatan pakka við eingilskum búffum undir buksureimina framman. Ein flatan pakka við kotelettum aftan. Steen arbeiddi skjótt og sikkurt, ov sikkurt. Mjólk, fløta, rómastamp, smør, jarðber. Steen hugdi at pakkanum við jarðberum. Hugsaði. Skuldi hann vága tað? Ja, hví ikki! Faint heart never won fair lady. Og hetta hevði verið ein góður dagur. Hann stakk pakkan innundir frakkan, undir armin. Nústani varnaðist Steen glasrútin, ið gekk ovarliga høgrumegin, rúturin var langur. Ein slaktari, stórur á vøkstri, vendi týðuliga, alt ov týðuliga, andlitinum allar aðrar vegir enn júst har, Steen var staddur. Ja so, hann var kanska uppdagaður? Skuldi hann leggja vørurnar uppá pláss aftur, hetta kundi hann saktans náa enn. Men nei! ikki talan um. Hann helt leiðina fram móti kassanum. Gjøgnum eygnakrókarnar sá hann tríggjar menn í hvítum kitlum hittast og samráðast. Hin stóri var teirra millum. So *var* hann sæddur. Róligur! Vit láta sum einki.

Kassadaman taldi vørurnar saman. Steen keypti ein plasticposa. Fylti vørurnar uppí. Gekk móti úthurðini. Tá hann nærkaðist dyrnum, hann hevði ongan skund, stóð maður fyri honum. Hesin var eldri maður, ið mong sporini hevði slitið. Miðal til

Materiál chráněný autorskými právy

hæddar. Klænur av vøkstri. Bar brillur. Hann var sligin í herðunum, sá troyttur út. Yvirskeggið lavaði syrgið niðurvið munnklovunum. Steen var greiður um støðuna. Aftanfyri bjórakassarnar við úthurðina, stóðu hin stóri, sjálvur Judas, og triðimaðurin.

»Tað var nakað vit ætlaðu at spyrja tygum um,« maðurin var fólkaligur, men avgjørdur, »hava tygum stundir eina løtu?«

»Sjálvandi,« svaraði Steen, »sjálvandi.«

»Hava tygum nakað ímóti at koma afturum, inn á skrivstovu okkara?«

»Nei, ikki petti,« Steen flutti seg fólkaliga, »tygum fyrst, gerið so væl.«

»Nei, betur er, at tygum ganga undan.«

»Eg takki.«

Teir gingu framvið kassan. Fólk høvdu varnast. Men, tá tey sóu, hvussu friðarligir báðir partar vóru, mest sum vinarligir, mistu tey áhugan. Steen legði sær alt í geyma, og hin fullkomni brotsmaðurin viðgekk altíð, um tað ikki var alt ov álvarsamt.

»Gerið so væl,« maðurin opnaði hurðina til rúmini aftanfyri. Steen hugsaði, um teir kanska ætlaðu at taka hann niður í kjallaran at buka hann av. Ein hevði hoyrt um slíkt áður, hóast tað ikki var loyviligt. Men, tað var heldur ikki loyviligt at stjala. Og gjørdu teir hetta, so var, í hesum føri, mátin tann ikki at sláa aftur. Men, kaldur!

»Eg takki.«

Innanfyri stóðu tveir menn. Stutt eftir komu hinir báðir við einum triðja í hølunum. Teir vóru vælmannaðir. Tað mátti ein siga. Steen var ein týdningarmikil persónur. Tað ráddi um at bera seg.

»Hvat hava tygum undir arminum?« Hann, ið seinast var innkomin, peikaði innundir frakkan.

»Hetta?« Steen tók pakkan við jarðberunum fram.

»Ja so, handan pakkan hava tygum stolið. Vís okkum uppgerðina, tygum hava fingið frá kassadamuni.«

»Er ikki neyðugt, eg havi stolið hann.«

»Jú, men hví gera tygum slíkt?«

»Vildi so fegin hava ein pakka av jarðberum, men sum tygum síggja, so havi eg *keypt* fløtan.«

Materiál chráněný autorskými právy

»Ja, tað skuldi bara mangla annað. Hvat skulu vit gera við tygum?«

»Tað lati eg upp í tykkara hendur. Eg veit, nær eg havi tapt.«

»Hví stjala tygum?«

»Eg havi verið illani fyrikomin, sálarliga sjúkur.«

»Psykopatur, sjálvandi.«

»Nei, nei, nei! Eg eri ikki psykopatur. Fólk ána ikki, hvat ein psykopatur er. Ein psykopatur er eitt menniskja uttan kenslur. Ja, teir hava ikki so mikið sum kenslur fyri tær sjálvum. Eru menniskju uttan samvitsku og moral. Tit ána ikki, hvussu sjáldsamt hetta fyribrigdið er, líka so sjáldsamt sum ein ektaður dipsomanur.«

»Dipsomanur?«

»Ja, kvartalsdrankari. Var eg psykopatur, var eg ongantíð vorðin sálarliga sjúkur. Nei, tað er mítt ovviðkvæma lyndi, sum ikki tolir hin harða veruleikan, ið atvold er til hetta.«

»Hava tygum verið innlagdur til kanningar og viðgerðar?«

Steen byrjaði við tungufimleika, góðu sjónleikaraevnum sínum og minni, at reksa upp alt Tonni hevði greitt honum frá um sálarfrøðisligar deildir. Hann málaði fyri teimum eina mynd um sjúkur, sálarlæknar, pleigarar, sjúkrasystrar, sjúklingar. Um sproytur, tablettir, el-hvøkkir, opnar og afturlatnar deildir. Um spennitroyggjur, sálarskjálvtar og sjálvdráp. Honum nýttist ikki at lúgva, sannleikin var nógv harðari. Og í heilunum á krambakallunum og keypmanninum vaks ein heimur av neyð og pínslum, longslum og einsemi, armóð og elendigheit. Og teir takkaðu og prísaðu sínum skapara fyri, at teir ikki høvdu verið úti fyri slíkum, og bóðu stillan, at slíkt ei heldur mátti berast teimum fyri. Jú, eingin ivi var um tað, Steen var listarmaður. Steen helt uppat at tosa, sló út við hondunum: »Ja, soleiðis er tað bara.«

»Jú, men hví skal tað ganga út yvir okkum?«

»Tygum hava allan rættin. Eg havi ikki meira at bera fram. Tit hava maktina, og rættin.« Hann segði hetta við einum stillum, fyrikomandi, ikki ov fyrikomandi brosi. Hann, ið Steen nú visti var keypmaðurin, tók ein hvítan lepa fram og handaði honum, Steen fyrst hevði tosað við, so hvarv hann út í krambúðina. Hesin

Materiál chráněný autorskými právy

legði lepan fram fyri Steen. Steen skeitti niður á pappírið. Hetta var ikki álvarsamt. Vørurnar á kroppinum hevði eingin kannað, fyri ikki at tosa um taskuna.

»Vilja tygum skriva undir her?«

»Jú, sjálvandi.« Steen tók sjúkraprógvið, hann hevði stolið frá einum deyðum narkomani, upp úr lummanum. Skrivaði týðuliga og klárt, samvitskufult, ógvuliga samvitskufult, føðingardag, ár, persónnummar og undirskrift.

»Gerið so væl,« Steen handaði krambakallinum lepan.

»Takk, og so møta tygum upp mikudagin hjá socialráðgevara okkara klokkan 12. Minnast tygum til tað?«

»Jú, eg skal vera har á slagnum, men, kann eg ikki fáa jarðberini við mær?«

»Nei, vita tygum nú hvat? jarðberini, sum tygum hava stolið?«

»Eg gjaldi sjálvandi fyri tey.« Steen tók pening úr lummanum, legði teir á borðið. Fekk jarðberini. Heilsaði blídliga farvæl og fór útum. Veðrið var gott. Steen skundaði sær heim at matgera. Hann var gorhungraður. Á leiðini støkk hann inn í ein vínhandil og keypti fýra litrar av hvítvíni.



Materiál chráněný autorskými právy

# Steinbjørn B. Jacobsen

*(30/9 1937)*



## Seiðaberg

Tá vit etandi sótu
í móðurs eygum
snerktu
móti morgunsólini
leikti vindur og fjørður
bangin
í móður rødd.

Vit bóru okkara leypar
gjørdar av faðiri

Materiál chráněný autorskými právy

gjøgnum heystskýggini
hitaði sólin
nakkarnar.

Frammanfyri vindin
fóru torvurnar
framvið klettinum
áðrenn tað vendi
fiskaðu vit
nakrar fiskar
úr ymsum torvum.

Heimkomnir
gav hann henni
fisk fyri fisk
stórar og smáar
brúnar og gráar.
Mínir,
ælabogin
stóð í gólvið.

## Vatnkvæði

Látur úr fjøllunum
læandi kemur
í látrakyrru
áarløk
sirma móti oyra:
einstakar látupípur
láta millum gnadd
sirr og gnis
dropagný
stiklandi ljóð
áarløk

Materiál chráněný autorskými právy

einstøk drypp
undir takleysum helli
veksur til gnell
í tankatómum skalla
sussandi áarløk
suða
suð.

Leysir garnaendar
sløðast um brekkur
stika moldríkar líðir og gil
tvinna seg saman
línuendi
úttambdur
á tremur
av leysum endum.

Stetlandi røddir
tuttmutlandi
vatn gnagar stein.

Ein línuendi
dalsins beinagrind
blóð og hugarensl,
eitt træ við látandi greinum
heldur jarðarknøttin
millum sínar røtur.

Materiál chráněný autorskými právy

2

lotið
tolið

síl
smíl

á
á

## Tøl í degnum

400 t av saltfiski
sigla heim
100 t í einum kasti
royna meira
500 t av spreingievni
400 íbúgvar
2 frikkadellur
ein turr hjartailska
ein vitan um
at tú burdi klí
matarlystin fór.

Hví binda teir ikki frið
mús vil matnáðir eiga
slóða fullfermd
av tveimum frikkadellum
enn fermd
av minnum um
spaniu
teir frívilligu
gustav munch-petersens

Materiál chráněný autorskými právy

við ella mót
at menn láta sítt lív
í mansaldrar fyri tað
vit ei vilja gjalda
við einum oyra.

Sjálvt úr kyksendi
er seyði frítt at fara.

Innar úr góðu stovu
kemur eitt klipp
eitt tjaldursnev
móti brósti
sviðin í holdi talar
gev vápna og sakleysum
urtini
grið.

Gustav Munch-Petersen er
danskur yrkjari, ið doyði
sum frívilligur hermaður
í spanska borgarastríðnum.

## Róðursmenn

Eg eri triðja ættarliðið
onkur er fjórða
abbi mín var við at byrja
var í liði Jóannesar bónda
liðið ið fór til verka
sólin reis í teimum og millum teir

Materiál chráněný autorskými právy

stavnhaldið fyri framman og í teimum
andróður var, tjúknir komu
men stavnhaldið var
og tá teir løgdu árarnar inn
hildu teir seg komnar innundir land.

Eldhugaðir settust synir at rógva
komnir uppundir land
nú var hitt evsta eftir
nú var bara at taka á
armar orna, sungu teir
nú og nú
takið á
nú, nú
og so
teir vunnu ikki upp land
teirra land var sum fuglur at sjá
tá róður var av
fóru menn at tjakast
summir treiskaðust
vildu halda á at rógva
aðrir løgdu inn
lýddu á nýggjar menn
sum trokaðu seg fram
rópandi: leggið á av nýggjum
til brots í morgin
nú í morgin nú
aftur nú
nú.

Eg var bara við, var óviti tá
alspentur lýddi á tosið
sá íðuna ið var uppi
menninar, ið høvdu ilt við
at klára seg sjálvar
allar ábøturnar sum tørvaðu teimum

Materiál chráněný autorskými právy

sá hvussu tað fjaraði
í huganum fyri stavnhaldinum
kom sjálvur millum menn
tá hvør var farin at hugsa
um sjálvan seg
húsini, børnini og bátarnar.

## Ognartaka ogn okkara

Í túsund ár hava vit lívbjargað okkum í hesum landi.
Heilt at okkara døgum var hetta eitt samfelag
ið hvíldi í sær sjálvum.
Menn lótu tað, sum samfelagið kravdi, og royndu
at goyma eitt sindur eftir.
Samfelagið brúkti einki til sín sjálvs, og yvirskotið fór
av landinum
Embætismenn krámaðu til sín sjálvs og fóru av landinum.
Í søgnunum livir alt hetta, og nøkur dømi eru eftir.
Um menn, sum ikki lótu sær lynda.
Um ein prest, sum gekk burtur. Eisini oyruni sukku.
Hetta land og hesir grunnar vóru keldurnar til alt lív.
Tað stóra havið læt reka, reka at hesum strondum.
Við miklum kynstri og áræði fingu teir lív burtur úr hesum.
Men uttanífrá — úr øðrum londum — komu menn við
stórum førum.
Hesir menn løgdust á teirra grunnar og gjørdust naskari
og naskari.
At enda hildu teir seg eiga alt — dygst í sjálvan klettin.
Tá høvdu forfedrar okkara bert ein dreym um at fáa slík
før. Kistubotnurin varð kannaður aftur og aftur, men
ikki bar til.
Samfelagið, hvat gjørdi tað? Tað átti ongan kistubotn.
Yvirskotið av hesum samfelag var farið til eitt annað
samfelag.

Materiál chráněný autorskými právy

Umsíðir fingu teir høvi. Hinir fingu sær onnur før.
Við egnari hjálp fingu teir sluppirnar. Tóku lógvatak
saman.
Sluppirnar komu tá grunnar teirra vóru avtaknir av
togarum.
Teir royndu so aðrar grunnar, har rúmsáttari var.
Dreymar høvdu teir við sær um tey nýggju førini —
togararnar.
Eitt uggilsi vóru fransaskonnartirnar, og onkur togari kom.
Áræði treyt teimum ikki. Fjarar og nýggjar havleiðir
teir troyttu.
Góðir sjómenn, arbeiðssamir. Væl fiskin teir hagreiddu.
Men útlendskur floti lá á heimabeiti á heimlandsins
grunnum.
Við eitt var flotin har, og nú pening teir høvdu, tó ikki
nóg mikið.
Endurnýggjan av skipaflotanum. Bert tveir nýggjar
togarar teir fingu.
Endurnýggjan av skipaflotanum — hvør kennir ikki hetta
heitið?
Hetta er søgan, vit kenna hana allir sum ein:
Ferð eftir ferð upp í saman hevur hon endurtikið seg.
Í fimti-árunum sóu vit norskar línubátar, stórar togarar.
Hetta var loysnin — tó onkur sá longu, at hekkutrolararnir.
Men hetta var alt aftur bert dreymur. Peningur vantaði
teimum.
Stuttfreistað lán teir umsíðir so fingu. Línubátarnir komu
til landið.
Tóku lógvatak saman, meðan hinir uppaftur størri før
fingu.
Og nú fimm hekkutrolarar við einum 200 monnum.
Tó hinir longu ein stóran flota uppaftur størri
hekkutrolarar hava.
Hetta er søgan, vit kenna hana allir, hon endurtekur seg
sjálva.
Á okkara egnu grunnum vóru vit ov seinir, ja síðstir.

Materiál chráněný autorskými právy

At kappast á fjarleiðum, kappast við aðrar.
Nógv peningasterkari altíð teir vóru.
Nógv peningasterkari altíð teir okkum vóru.
Okkara menn hálvár og meir noyddust at vera burtur frá heimligum hugna.
Kjarnan av okkara frægu var ongantíð heima, skilir eingin tað?
Skal hetta óskil viðvarandi endurtaka seg aftur og aftur, ætt eftir ætt?
Vit skulu aftur taka lógvatak saman, standa saman allir sum ein.
Hvønn ein stertin, sum fiskaður verður við hesar oyggjar, skulu vit fiska einsamallir.
Landgrunnurin er okkara, aftur hann vera skal keldan.
Kjarnan í okkara samfelagi, hvør skilir ikki hetta?
Hava tit gloymt, hvat tit hava verið førir fyri at gera?
Lat okkum gera landnám av nýggjum. Taka okkara gomlu grunnar.
Ognartaka ogn okkara.

## Fólkið frælst

Tíðin var myrk korini trong,
fólkið í Føroyum fekk so ein song.

Sangin um frælsið, áræðið og mot
dugur var í tí føroysku rót.

Sangur um frælsið nørdist og vaks
bliknaði myrkrið búgvið stóð aks.

Tíðin er myrk málini mong
aftur skal fólkið syngja ein song.

Materiál chráněný autorskými právy

Mót til at stríðast einaferð enn
framburð til fólkið frælslyntir menn.

Standa vit saman einaferð enn
vinna vit vónina verða til menn.

## Bilurin

Óvitin fekk ein av hesum bilunum
ið kann alt bert trýst verður á ein knapp
og eyguni glógvaðu í honum —
sum ein gandakallur gekk hann
bilurin koyrdi bakkaði lýsti støðgaði
óvitin trýsti og trýsti á knappin
minst ein hálvan tíma
so setti hann seg niður
leingi sat hann meðan andlitið tømdist
við eitt reisti hann seg brosandi
hann royndi at koma inn í bilin
standa uppi á honum
men bilurin hevði ikki brúk fyri honum
hann skuldi bert trýsta og trýsta
bert møta honum við einum fingri
líðandi fór brosið úr andlitinum
nakað annað legði seg á tað
hann fór at traðka og hegla
sparkaði so vrakið í ein krók
og fór at spæla bil við stólunum
tá loysnaði okkurt inni í mær
í fleiri dagar gekk eg og hugsaði
hvør veit kanska ein frelsari
er føddur millum okkum
ið skal frelsa okkum frá
at vera fremmand fyri øllum

Materiál chráněný autorskými právy

lutum og menniskjum
ein vilji vaks til at gera tað
ið eg var førur fyri nú
ofta skeitti eg eftir hesum lítla menniskjanum
men fleiri vóru tey ið harmaðust
hvussu fór at gangast honum var hann sjúkur
burdi hann ikki kannast
venjast mátti hann
tí verðin er sum hon er og kann ikki broytast
hildu tey.

## Tú skal siga og skriva

Tú skal siga og skriva
sova kann tú altíð
tað tú kennir er rætt
tað sum tú ferð eftir ferð
hevur hoyrt fólkið siga
ella kent at tey eisini kendu
innast inni sum rætt
men vóru ov lítillátin
til at gera vart við seg
tú skal siga og skriva tað
sum eisini hini
innast inni
lata liggja í hørðum skali
og krypla tað
men tað er har kanska
lat teir bara leypa á teg
teir leypa ikki á tað
tú hevur borið fram
men á teg, títt starv o.s.fr.
hitt, ið tú hevur víst á

Materiál chráněný autorskými právy

stoyta teir øsku á
sum várvindurin tekur
og teir lempa og lempa
ofta gamlir og troyttir
og fólkið sær teir
undrandi spyr tað
hví ómaka teir seg so nógv
hví vilja teir grava tað
ið eisini tey halda er rætt
undir í sand og øsku
og fleiri og fleiri skilja tað.

## Regn

Um at sovna loysnar himmalin niður
ótald pikk á vindeygað og eitt suð aftanfyri
javnt og stilt sílar tað niður
tungt flótt summarregn
og tú liggur bara og letur tað regna
hóast kensluna av hesum óvanliga
fyrsta ælið, upphavið til alt regn
liggur tú bara fjálgur um at sovna
hómar tá onkuntíð tú sá
stórar áir í uppblotnaðari jørð
minni ið síla úr huganum
luftin úti verður stórt djúpt vatn
tað sílar javnt og stilt niður
kanska er tú á botni nú
ella flýtur og flotnar alsamt
pikkini á vindeygað pikka á teg
suðið aftanfyri sjóðar í tær
um at sovna um at vakna
til stórar áir og stríðir streymar
taka teg meðan regnið sílar niður.

Materiál chráněný autorskými právy

## Heygurin

Í skýmingini stóð ein heygur og hugdi
lurtaði eftir kátum barnarøddum og fetum
uttan fyri eitt býarskapilsi ið vaks.

Fór býarskapilsið ein dag at javna hann við jørðina
tað kom líðandi úteftir, át alt ið fyri var
vakrar steinar, fløtur, hyljaeygu og áarløkir.

Í túsund ár hevði fólk hugt at honum
hvílt seg, spælt ella kyst hvør annan
roynt at gita hvat hann goymdi í sær.

Frá fyrndini av hevði ljósið brúkt hann
skuggarnir og døggin ligið á honum
um hann fuglasongur, jørmini og ættirnar allar.

Býarskapilsið át bara alt ið fyri var
sá einki, hoyrdi ikki, eirdi ongum
mannabørnini góvu tí alt uttan kanska.

Kanska okkurt hjá teimum, úr teirra hondum
okkurt tey óttaðust ella hildu seg heiðra
huldufólk nevndu tey gomlu alt livandi hjá honum.

Býarskapilsið vaks og yvirhugurin, stakkalastásið
eina kongsvitjan mátti tað eisini hava
eitt kongsspír, ein kongsvarða, einfeldi.

Nøkur ár má ein bera hesa grótnál
hjálparleys hugstird glerpípumynd
tó livandi enn í býnum langt inni.

Ljósið og ljóðið eiga heyggin enn í dag
gloymdur er kongur, hvør varnast varðan
men børnini spæla á honum í skýmingini glað.

Materiál chráněný autorskými právy

## Einaferð rann ein á

Einaferð var tað ein á, ið var ein á
hon átti seg sjálva, hevði sítt lyndi
sína egnu náttúru fyri seg sjálva
fekk vætuna frá landslagnum
glerið frá vetrinum
ælabogan í fossinum
skinið og spegilsmyndirnar
frá sólini og mánanum
var kínd av lotinum
ella vindurin turrlegði hyljarnar
sendi fossin niðaneftir
var alheimurin hjá áarsílinum
leskaði allar skapningar ein sopa
var røddin í landslagnum
altíð skiftandi aldrin tagnandi
einaferð rann ein á.

Ein dagin kom eitt hús til ánna
dag um dag fingu tey sær av hennara ríkidømi
vatn at drekka, vatn at tváa sær í
onkra eyrriðu tá illa stóð til og til agn
til hennara ljóð sovnaðu og vaknaðu tey
góðveðursdagarnar átti hon børnini
hennara síl frøddu mangt eyga
Fór sum ein livandi neisti um sinnið
frá teimum fekk hon burturkastið
rukkulakkin fór sær oman eftir á
niðanfyri kom onkur køstarenna
onkuntíð fór hon ódliga móti grundunum
tók seg so sáttliga aftur og fór omaneftir
eitt heitt lív kølnaði einaferð í henni
meðan húsini og farandi skýggj spegladu sær
húsini við ánna, húsið við á.

Materiál chráněný autorskými právy

Dagur datt av degi, hús fyri hús hoyktu seg niður
fram við øllum áarbakkanum kom ein grótgarður
løgarsteinarnir lógu enn tá fyrsta brúgvin fór
men tá kom vatnið ikki longur frá ánni
vatnið kom úr einum røri í vegginum
enn gleddist tó onkur um ljóðið
sóu sínar barnadagar spegla sær í henni
í mylluhylinum svumu tey viðhvørt
meðan køstarennurnar og bukkurnar vuksu
fóru dunnurnar upp úr henni og sílini hvurvu
aftan á toybilsdagar minti hon um seg sjálva
men burturkastið og ruskið vaks, lortavatnið, súrgan
og stillar summardagar lá hon og doyði
lívleys lá hon deymandi og stinkaði
leggið hana undir heilt, kosta hvat kosta vil
ein býur fekk eina stóra rennandi kloakk.

Í morgun kom ein óviti á veg í skúla
í huganum sang ein sangur
ein sangur um áarsuð og tutl
ein sangur um eina á sum einaferð
var ein livandi sjálvstøðug verð
einaferð rann hon onkustaðni her
fyri árum síðani gav hon einum smádreingi
myndir og ljóð, henda og aðrar sangir
við skúlataskuni og myndini av eini á
fór hann sinniliga millum bilarnar
á veg í skúla og eingin hugsaði annað
varnaðust tey óvitar, tey ið drupu áir
hvussu kundu tey skilja hansara longsil
ríkidømi nú at sæð eitt livandi síl
kosta hvat kosta vildi, hann skuldi einaferð
ein á skuldi aftur liva í býnum.

Materiál chráněný autorskými právy

## Alt í lagi

Tað gongur nokk
alt lagar seg
»det greier sig i sjøen«
segði norðmaðurin
doyggja vit doyggja eisini hini
Orkan er í vegginum
Hitin á vegginum
Maturin í kuldakassanum
keyp bara bygg bara
alt í lagi
brúka blaka burtur
»der er flere hvor den kom fra«
vøksturin og menningin
menna okkum
Hví spyrja hví
Hví siga ístaðin
Hví samanbera
bilar og sjónvarp
vindmyllur og graslendi
ístaðin fyri sjónvørpini
vindmyllur
vit hava
Orkuna í vegginum
Hitan á vegginum
Matin í kuldakassanum
øll eta jú ov nógv
vit mugu klænkast.

## Maðurin og hundurin

Hann var miðskeiðis í sjeytiárunum, og fyri hvørt árið fór hann munandi aftur, men enn hevði hann verið við til alt felags arbeiði, tó tað var ikki tað sama sum fyrr.



Materiál chráněný autorskými právy

Nú stóð hann úti í túninum og skimaðist eftir veðrinum, meðan hundurin mól rundan um hann. Men veðrið var gott. Av besta summarveðri. Beint áðrenn nakar hevði sett á at sláa.

Hann var prúður maður, hevði havt góð kropsevni, og enn var hann einki bogin, fór helst ongantíð at vera tað. Hin stóra bringan var líka brøtt sum altíð, men eyguni bilaðu. Sjálvur var hann vanur at siga við hvørt, tá ið tað góða lagið var á honum, at hann kendi seg sum ein unglingi, og kundi sum einki vera í øllum arbeiði. Bara eyguni ikki vóru farin at bila.

Men fyri aldurdóminum máttu vit øll lúta, menniskjan var sum grasið. Vit blómaðu eina tíð. Arbeiddu sum skuldu vit liva ævigt, var hann eisini vanur at siga. Og við hvørt sang hann reystliga: »Al kød det er kun hø.« Deyðan skuldu vit ikki óttast. Øll vóru vit deyðanum skyldug. Eina ferð hvurvu vit øll og máttu lata alt hetta vera eftir, har tað var. Við hvørt longdist honum eftir at sleppa burtur hiðani.

Hann hevði arbeitt nógv bæði á sjógvi og landi.

Vanligt var kanska, at fólk í bygdini hildu, at hann hevði verið grammur eftir verðini. Ein jarðormur. Men eingin visti tó um at siga, at hann hevði tikið nakað, sum hann ikki átti.

Sjálvur segði hann, at hann bara hevði roynt at klára seg sjálvan, og ikki skylda nøkrum nakað, og at alt skuldi ganga rætt fyri seg.

Tað, sum var rætt, tað var rætt, og her hevði hann aldri slakað.

Og tað var hetta, sum ikki altíð líkaði øllum, men tað legði hann einki í. Móti honum, sum minni formáddi sær, og børnum, var hann góður. At hann hevði verið ein raskur maður, vóru øll samd um, tó tað ikki vóru øll, ið tosaðu um tað.

Við Guds hjálp hevði hann klárað seg sjálvan.

Altíð hevði tað verið honum ógvuliga frammarlaga í huganum at royna at klára seg sjálvan, og at ein máttur var uttan fyri hann, ið var størri og sterkari enn hann sjálvur.

Ja, stakkalin, okkara fjørður er rógvin. Vit báðir koma ikki í hagan aftur. Hundurin hugdi sum eitt fólk upp á hann. Hann hevði havt nógvar hundar, og allir vóru teir líka góðir.

Ofta var hann vanur at tosa um at venja hundar. Tað skal hegni

Materiál chráněný autorskými právy

til at venja teir. Tú mást vera eisini góður við teir, segði hann.

Hann hugdi upp í luftina. Ein sjáldsamur morgun, og dagurin mundi fara at halda sær.

Hann hugdi niður á hundin. Ja, stakkalin, tú hevur verið mær trúgvur, og mangt fótasporið hevur tú spart mær. Men nú er okkara fjørður rógvin.

Hundurin læt við halanum og legði seg aftur at beinunum á honum, hevði tað verið sum fyrr, hevði hann lopið upp á hann. Men nú var hann gamal og so upptjúknaður. Tað var synd at lata hann liva so. Men hann hevði ikki fingið seg til at skjóta hann, og biðja onnur um tað, vildi hann ikki. Hann hevði altíð skotið sínar hundar sjálvur. Kanska hann sjálvur fór burtur hiðani fyrst, hevði hann forsvarað seg við hvørt. Men kanska hann gjørdist blindur skjótt, og so fekk hann ikki hjálpt hasum ólukkudýrinum. Hóast eingin sá tað á honum, hevði hetta pínt hann, hetta við hundinum. Hann hevði ongantíð gingið frá nøkrum, hóast tað var tvørligt. Men hann fekk seg so illa til at fara at skjóta hundin.

Tá ið hann vaknaði í morgun, við at morgunroðin stóð um alt kamarið, var ein sovorðin friður komin á hann. Hann hevði hugsað um hundin og aftan á faðirvár bað hann um styrk til at gera tað.

Tað var best at gera tað, áðrenn bygdin vaknaði. Syngjandi eitt sálmaørindi fór hann inn eftir byrsuni. Hundurin var í hølunum á honum alla tíðina. Byrsan hekk har, sum hon var von. Hann tók hana og turkaði smyrslið av henni. Amboðini hevði hann altíð røktað væl. Har hekk eisini ein salónrifla kalibur 9. Henni kom hann ikki at skjóta við aftur. Síðst hann skeyt við henni, mundi ein ólukka hent. Tað var einaferð í vetur; ein kálvur skuldi drepast; honum dámdi einki at gera tað longur, men eingin góði var.

Ein óviti hevði verið hjá honum. Kálvurin lá á einum leypi. Hann gav sær góðar stundir, siktaði og skeyt, men ólukka í tað, kúlan fór ígjøgnum høvdið, knústi eina rim í leypinum og í beinið á honum sjálvum, og har sat hon enn.

Men kálvurin var deyður, óivað hevði kálvurin gjørt eitt lítið kast við høvdinum, nett sum hann skeyt. Best mundi vera at geva

Materiál chráněný autorskými právy

honum eina skál við mjólk at leppa, so stóð hann stillur.

Við byrsuni í hondini og tveimum patrónum í lummanum fór hann inn, smásyngjandi og mutlandi fyri seg sjálvan: »Al kød det er kun hø.« Deyðanum eru vit øll skyldug. At kunna sloppið burtur hiðani. Hundurin elti hann trúliga.

Hann tók tann fyrsta bollan við mjólk, sum hann kom fram á, og fór so oman í garðin.

Tað var gott, at bygdin svav. Hetta kom ikki teimum við. Hann hevði onkuntíð hugsað um at fara út við bakkanum og so kasta hann oman har, men honum dámdi tað ikki. Tað hevði hann aldri gjørt við nakran hund. Hann setti bollan frá sær. Ája, stakkalin, men tað verður ikki leingi, til eisini mín harri loysir upp fyri mær.

Sum eitt lamb læt sjálvur frelsarin seg føra og tað upp á krossin at hanga, so menniskjurnar kundu pína hann.

Men hundurin vildi einki til at fara at leppa. Hann hevði nú koyrt báðar patrónirnar í. Tí skuldi tað hent, at skotið miseydnaðist...

Hann fór yvir til bollan. Lepp, stakkalin. Eingin av okkum sleppur undan deyðanum. Men hundurin kendi á sær, at alt var ikki, sum tað plagdi vera.

Hann mól rundan um beinini á honum, fór so til bollan og hugdi spyrjandi upp á mannin, sum var tað ein menniskja.

Hundurin skilti, at maðurin vildi hava hann at vera har, sum bollin var, men hann skilti ikki hví.

Lepp, stakkalin. Hundurin snoddaði niður í skálina aftur og skuldi leppa, tá small skotið. Men hundurin fall ikki. Hann gjørdi eitt ýl og sprakk avstað.

Maðurin sá, at høgra oyra hekk leyst og lavaði, og hann bløddi um høgra bógv.

Kom higar, gamli, rópti maðurin bønandi og biðjandi, men hundurin helt inn eftir vegnum, burtur frá bygdini. Og maðurin aftaná, meðan hann so bønliga rópti og bað hundin koma aftur.

Onkuntíð støðgaði hundurin og hugdi aftur um seg, men so helt hann avstað aftur. Fyrst rann hann á vegnum, men tá ið teir

Materiál chráněný autorskými právy

vóru komnir væl út um bygdina, fór hann oman í mølina, og har misti hin gamli maðurin hundin burtur.

Einki gjørdist uttan at fara til hús aftur. Hann tók patrónina úr byrsuni og gekk sorgtungur at húsum. Hann mátti biðja fólk um hjálp.

Seinni, tá ið hann segði frá tí — og tað gjørdi hann ofta — segði hann altíð, at tað vóru næstan tyngstu spor, hann hevði gingið aftur at húsum.

Tá ið hann kom út í bygdina, sá hann, at sonarkonan var uppi. Tað reyk longu hjá henni.

Fyrst fór hann inn til sín sjálvs, leitaði allastaðni, men har var hann ikki komin.

Kanska var hann úti hjá sonarkonuni. Har var hann so ofta. Børnunum har dámdi hann so væl, og honum dámdi eisini tey.

Jú, har var hann. Hann lá inni undir borðinum, stakkalin. Tey høvdu roynd at hjúkla fyri honum, men einki var um hann.

Tíbetur var bara ein 12 ára gamal drongur uppi. Hann hevði gitt, hvussu vorðið var. Sonarkonan helt, at hann hevði bitist við onkran hund ella kettu.

Hin gamli maðurin fór til hundin og pliaði fyri honum, men hundurin vildi ikki koma til hansara. Hann smáhvein og tók seg longur inn undir beinkin.

Her gjørdist einki. Hann mátti taka hann, men tað var ógvuliga tungt, og tað skar hann í hjartað.

Haldandi í hálsbandið fór hann við hundinum og slepti honum ikki aftur, fyrr enn teir vóru komnir inn í hoyggjhúsið.

Har slepti hann honum, og so fór hann aftur eftir byrsuni.

Tá ið hann kom aftur, lá hundurin og smárein í einum sindri av hoyggi, sum lá og rakst á gólvinum.

Hann varð standandi í durunum og siktaði at hundinum. Hundurin lyfti høvdið og hugdi at honum, meðan hann siktaði. Nú gav hann sær betri stundir, men hann var ikki stillhentur.

Ein løta gekk, men hundurin lá stillur. Hesaferð rakti hann. Høvdið á hundinum datt niður. Tað kom ikki eitt ljóð ella ein rørsla frá honum.

Materiál chráněný autorskými právy

Hann gróv hundin niður í garðin. Ofta segði hann frá tí seinni, og vísti á, hvar hundurin lá grivin.

Fyri óvitunum plagdi hann at siga, at hann skuldi í hagan eftir einum sjáldsama vøkrum steini at seta á grøvina. Men hetta segði hann bara fyri óvitunum.

Materiál chráněný autorskými právy

# Hans J. Glerfoss

*(19/11 1937)*



## Tey

Tú — kennir tú tey —?
Tey — sum vistu at Janus
        hevði brotið beinið —
— tey sum vistu at Pól hevði
        verið ótrúgvur
og at Jóhanna skuldi hava
        smá —
og at hon ikki sjálv visti
        hvør faðirin var — —

Materiál chráněný autorskými právy

og tey sum vistu at vegna ólevnaði
kundi Elsa ikki fáa fleiri børn,
tí tað segði læknin — —
og tey sum vistu at siga frá tær tað,
tú ikki visti sjálvur?

Sært tú — fyri eygu hesa teimum,
sum eingin veit navnið á,
torir tú ikki út í ópressaðum
brókum —
og vegna tankar hesa navnleysu
skammar tú teg yvir tað, tú als ikki
hevur grundir at skamma teg yvir,
og áðrenn títt fríska sinni letur
ein látur av, vegar tú løtuna
um tað nú kann vera hóskandi.
Ella — — ert tú ein av hesum, »TEIMUM«
— — —

FJANDANS BØLMENNI!!

## Hvør grunar

Hvør grunar leið og lagnu mans —
tín káti hjartasláttur
bar boð um vón og ungdómsmátt,
men millum lív og deyðanátt
er bert ein andadráttur.

## Lívið

Ein longsul frá tí vit
hava —
til tað ið ikki er til —

Materiál chráněný autorskými právy

ein glotti har sólargeislar
        stava
og gykla eitt andabil —

Eitt viðbrá av ørandi
        fløva,
tá tvey leita leik lið um lið —
ein nú og ein
        forntíðarsøga —
eitt ørindi — ástpoesi —

## Til eina skøkju

Tú hevur einaferð elskað,
kanska tú gert tað enn —
hvør veit —?
men, tú hevur fingið orð
fyri at vera monnum góð.

Men eg havi hoyrt teir, ið hava
        misbrúkt teg —
hoyrt teir flent at tær, fyri tann
avbera góða vælvilja teir siga
        tú hevur sýnt teimum —
og røddir teirra hava havt hin
sjálvsama farran av løgnari frøi,
sum tá búkkærir menn tosa um
        góðan mat — — —

Og teir hava tosað um kropsrørslur
        tínar —
á sama hátt sum grovreyparar tosa
um vandafulla skipsferð...

Materiál chráněný autorskými právy

Men, eg veit at tú einaferð hevur
elskað — —
og tann, tú ert í dag, hevur tú
neyvan verið einsamøll um at
gjørt teg til!

Men — hvar eru svíkjararnir —?
á »respektablum« kontórum — sjálvandi!
ímillum onnur hampafólk, og tosa
um teg — til næstu løtu teir hava
brúk fyri tær!

Einaferð, kanska — tú finnur onkran
ið elskar av sonnum — gævi at
so verður!

———

Tú situr einsamøll við tínum
ótta,
meðan teir, ið teg brúktu, hvurvu
í skuggarnar aftur!

———

Víst vóru ikki allar gerðir góðar!
men tað tú av sonnum gav —
hvør kann tað døma...?

Eg minnist nøkur orð — —
»Tann, ið reinur er, kasta tann
fyrsta steinin!«

———

Materiál chráněný autorskými právy

Ei var vitandi tað, at tey
upphavsins spøl,
ið natúrunnar heildargud
gat,
skuldu hóttast við dómi
og ragnarokskvøl,
meðan rættferð í fangilsi
sat.

Men so vorðið er víst —
Gud hann geri tað gott,
at tín fjáltur í bráðskundi
hvarv!
harragud, verður ást lønt við
helvitis nátt!
hvør skal tá fáa himin
í arv?

## Tøgn

Rekst eftir loknum kæti
sløð eftir breytum reytt —
andar í oydnum stræti
lotið av háðan mett.

Varisligt lati meg førka
— varnist bert egna slóð —
meiningsleyst, sinnsjúka, ørska,
gev mær eitt annað ljóð!

Gev mær tað áðrenn eg kvalist!
buldur, brak ella sjóð,
so at eg veit eg ei balist
í eini verð uttan ljóð!!

Materiál chráněný autorskými právy

## Kvirra í reyðum og bláum

Ein endaleys gongd
við steyrrøttum súlum
við krúnugreinum —
— ein kirkja —
er sálarhøllin.

Einsamallur —
í hesi risahøll
við dimmbláum hválvi
— í eini kvirru
við reydligum lýsi.

Einasta ljóðið
er fótafet míni
sum smella í gólv
av bláum krústalli,
og afturljóð teirra
ið sleingist sum ørvar
aftur og fram
undir hálvskýmdum hválvi
og klúgvast
av greinaðum súlukrúnum.

Eg vænti hvørja løtu at hoyra
tøgnina klovna
og sindrast
av brimandi urgutónum
— postludium —
og hurðarnar latast upp
til ævinleikan.

Standi sum á nálum
og bíði —
eftir hesum sæla gosi

Materiál chráněný autorskými právy

ið er sum gulið um fjøll
eina toybilsnátt
meðan fannvætan veksur
til flennandi løkir.

Materiál chráněný autorskými právy

# Líggjas í Bø

(18/7 1938)



## Skal tað henda?

Ein hvøllur brestur skal verða
og eitt sterkt, hvítt ljós.
So skal ikki vera meira
uttan reint, hvítt fon.

Alt skal verða til frið og fon
og í dølunum
skal tøgn teska til tøgn
sum fyri milliónum árum síðani,

Materiál chráněný autorskými právy

langt áðrenn seyðurin
jarmaði í líðunum
og fuglurin bygdi landið.

Káti fuglasongurin
og afturljóð úr fjøllum,
klandur og mannamál á bygd
— alt skal sova ævigt
í somu stóru song
uppreidd við hvítum, reinum foni
um tigandi ong.

Eingin skal elska meira,
og ongatíð aftur skal ein mamma
halda einum heitum, livandi barni
at spentum, bláæðraðum bróstum
— tí tey sova
í stóru, hvítu songini.

Og eingin skal vera
at eygleiða stjørnurnar
á gátuføru ferð teirra í rúmdini;
og loyndarfulli mánin
skal lýsa bleikt
á eina stóra, hvíta song.

## Maðurin og moldin

Tað eru menn í Føroyum
sum elska mold
— hesa deiligu, svørtu moldina.
———

Men heimurin er fullur av tápulingum,
og aðrastaðni eru menn

Materiál chráněný autorskými právy

sum einki eiga
og liva í fátækdømi
tí teir hava halgað listini
lív teirra.

Ja, til eru teir
sum elska kvinnur
og annað
sum er vakurt.

Og nú um dagarnar
í einum fongsulsforgarði
í Spanialandi
varð Grimau skotin,
tí hann stríddist
fyri rættvísinum.

Men í Føroyum eru menn
sum hava funnið
størsta sannleikan:
teir elska mold.
Tað kitlar hægstu kenslur teirra
at teska orðini »gyllin« og »mørk«,
og størsta gleðin er stríð,
stríð um snórapelar
og teigar og torvheiðar.
Onnur skilja teir ikki,
og tí eru teir tunglyntir
á at líta
sum teir bøla
yvir stóra loyndarmálinum,
teir funnu.

Sigst,
summir teirra
eta mold.

Materiál chráněný autorskými právy

Og einaferð
verður gleði teirra fullkomin,
og teir skulu verða til gleði
fyri samsintar eftirkomarar:
teir skulu verða til mold!!

## Sólarris

Náttin dvølur í myrkari tøgn yvir jarðarríki, og fjøllini daga svørt móti dimmum lofti. Tyngd og óttakend standa tey, tá skuggarnir eru lagstir og ikki uttan dapurleika, sum bølandi yvir álvarsligari meðvitan um innastu loyndarmálini í náttúruni.

Hin tunga hvílan er søkt í havið, har tað sum ein sveiti svevur við fjalsins fót og í óendaligari vídd breiðir seg heilt út í havsbrúnna, og tungi svøvnur tess hoyrist sum eitt drúgført ljóð, harmatungt sum móðursorg, uttan av havi um dagin sum fánaði burtur.

Fjart handan fyri stjørnurnar og vetrarbreytina er gud staddur á gudatingi, og menniskjurnar eru yvirlatnar til sín sjálvs eina stund. Í avmakt og óttafullari undran skelva tær millum hesar veldigu durvandi kreftirnar. Tær minnast, tá Jahve í forðum í Ísraelslandi spurdi: hvar vart tú menniskja, tá eg setti stólpar undir jarðarríkið og festi stjørnurnar á himmalhválvið? Og hvat skulu tær í lítilleika sínum svara, menniskjurnar, tær eru sum dust á marmortrappunum millum súlugongir fornu tempulhalgidómanna, eitt lítið vindkast, og tær eru ikki meira.

Flytfuglafjart hoyrist suð av veldugum veingjum og menniskjurnar stara við tómum eygum móti havsbrúnni, sum tær altíð gjørdu.



Materiál chráněný autorskými právy

Einslig er menniskjan
móti opnum havi
á ytstu strond.

Einslig er hon
— upphavs reyði brandur
glógvar í eygum hennar'
í sólarrenning
á ytstu strond.

Veingir morgunroðans eru spentir til flog, og so veldugt er suðið, at í eystri rapa skansagarðar myrkursins, og hinar fagurlittu veingjafjaðrar síggjast skyggjandi móti himmalboganum.

Úr dunganum av ruddu náttarborgini rísur við veldi hin nýggi dagur og smildrar myrkrið og hinar óndu skepnur í fjalladølunum á sigrandi ferð síni yvir heimin.

## Vallarar

Hetta er ikki yrking um vallarar
á ferð til Jorsala
men um teir
ið løgdu inn gerði í rúmdini
og veiddu fuglar millum stjørnurnar.

Einki er teimum fremmant.
Sum aðrir fóru teir ungir til skips,
royndu við snøri í oyðuni
eftir løgnum fiski,
ýtaðu av eftir skýggjunum
og egndu stórt
— men flundran er eingin miðafiskur
og gongur ikki í torvum.

Materiál chráněný autorskými právy

Sjólívið hevði sínar tvørleikar
fyri hetta farandi fólk,
teir lósu norðlýsið á norðurhimninum
og sóu ælabogan,
ið er ein stigi út í blánan.

Síðan hava teir vallað um heimin
og hugans glerstoyttu lond,
men hvílingarsteinur var eingin
og vallarans mál er longri á leið.
Um alt var berligt at koma til
var einki ið dró fyri aftan.

Einaferð laðaðu teir eingjargarðar
gjøgnum vetrarbreytina,
leiddu út rossini
og drógu saman grót av stjørnunum.
Tað var lætt og hugaligt arbeiði
og tá steinarnir vildu ikki liggja
nýttu teir stjørnuskot sum klípi.

Tá ið liðugt var at laða
varð farið niðan á eina høvd at skimast
men enn vóru stórar víddir uttangarðs.

Og teir, sum vóru móðir av degnum,
fóru aftur til gongu
hóast tað seinkaði nakað
og nú er vandi fyri
at myrkur kemur á.

Materiál chráněný autorskými právy

Materiál chráněný autorskými právy

# Rithøvundarnir

**Kristian O. Viderø**

| | |
|---|---|
| 1906 | Føddur í Skálavík |
| 1931 | Studentur |
| 1941 | Gudfrøðiligt embætisprógv |
| 1957 | Ferð mín til Jorsala |
| 1961 | Bíblian. Gamla Testamenti og Nýggja (týðing, saman við J. Dahl) |

**Jákup Berg**

| | |
|---|---|
| 1905 | Føddur í Hovi |
| 1926 | Læraraprógv |
| 1942- | Barnatíðindi (blaðstjóri) |
| 1943 | Heima og heiman (yrkingar) |
| 1956 | J. H. Schrøter: Sagnir (týðing) |
| 1972 | Kappakvæði. Havnarferðin 26. mai 1835 |
| 1973 | Regin í Toftum (sjónleikur) |
| 1981 | Ernst Krenn: Einar drottur av Dímun (týðing) |
| 1982 | Ari Þorgilsson hin fróði: Íslendingabók (týðing) |
| 1982 | Ritreglur |
| 1982 | Ib Spang Olsen: Kattahúsið (týðing, barnabók) |
| 1982 | Ár og orð (yrkingar) |
| 1984 | Hovs søga I-II |

**Andreas Andreasen**

| | |
|---|---|
| 1906 | Føddur í Vestmanna |
| 1929 | Læraraprógv |
| 1977 | 100 sangir (sangbók) |
| 1981 | Heiðaljóð (sangbók) |

Materiál chráněný autorskými právy

**Valdemar Poulsen**

1909 Føddur í Havn
1930 Hárskeri
1948 Havnar telvingarfelag 25 ára minnisrit (ritstjóri)
1960 Meðan havaldan dúrar (søgur og hugmyndir)
1960 Sat sapienti (sjónleikur)
1961 Børkuvísur (hittinorð)
1963 Hin ivingarsami (útvarpsleikur)
1965 — og tó skínur sólin (sjónleikur)
1968 Næstringarnir (útvarpsleikur)
1978 Osvald (skaldsøga)
1979 Ein tíðarmynd (søgur og leikrit)

**Georg Lindenskov Samuelsen**

1910 Føddur í Havn
1930 Sól og sirm (yrkingar)
1936-81 Blaðstjóri á Dimmalætting

**Sigurð Joensen**

1911 Føddur við Gjógv
1929-30 Á Føroya Fólkaháskúla
1934 Studentur
1941; 1944-45 Blaðstjóri á Búgvanum
1944 Løgfrøðiligt embætisprógv
1958 Gráa dunna (barnabók)
1958-70 Løgtingsmaður
1959 Kálvamuan (barnabók)
1959 Lítli Sjúrður (barnabók)
1960 Lambamæið (barnabók)

Materiál chráněný autorskými právy

**Karsten Hoydal**

1912 Føddur í Hoydølum
1936 Cand. agro
1940 Lic. agro
1940-44 Jól uttanlendis (ritstjóri saman við Regini Dahl)
1945-52 Útiseti I-VII (ritstjóri saman við Chr. Matras)
1946 Myrkrið reyða (yrkingar)
1948-50 Fiskivinnublað Føroya (blaðstjóri)
1951 Syngjandi grót (yrkingar)
1953 Gagnfiskur undir Føroyum (saman við Jákupi S. Joensen)
1953 Sild og salting
1954-57 Ráðgevi í fiskivinnu í Ecuador fyri FAO
1955 Fiskalikamið (týðing, saman við Jóhs. av Skarði)
1960 Vatnið og ljósið (yrkingar)
1961 J. H. O. Djurhuus: Yrkingar í úrvali (við Karsteni Hoydal)
1961-72 Varðin (ritstjóri: bd. 34-40)
1962 Viðgerð av fiski
1963-67 Landsstýrismaður
1966-70 Løgtingsmaður
1971 Leikapettið (stuttsøgur)
1972 Teinur og tal (yrkingar, upprunaligar og týddar)
1974 Móttøka og goyming av feskum fiski. Góðskumetan
1974-75 Varðin (ritstjóri: bd. 42-43)
1977 Frændarøddir (týddar yrkingar)
1979 Heðin, Marjun og tjøldrini (barnabók)
1981 Hans Mølbjerg: Føroyskar speglmyndir (yrkingar, týðingar)
1982 Sólarkringur (enduryrkingar)

**Jens Dam Jacobsen**

1912 Føddur í Havn
1976 Vaknaður vársins songur (yrkingar, Magnus Dam Jacobsen legði til rættis)

Materiál chráněný autorskými právy

**Óli Dahl**

1915 Føddur í Funningi
1938 Lærarprógv
1960 Landnám (yrkingar)
1962-74 Norðlýsið (blaðstjóri fleiri ferðir í hesum tíðarskeiði).
1966 Hví? (smásøgur)
1970 Jólamaðurin sigur børnunum frá (smásøgur)
1974-75 Vit fara upp á gólv, bd. 1-4 (savn)
1975 Fjalla-brúður (yrkingar)
1976 Við abba á floti (barnabók)
1977 Við gubba at kasta nót (barnabók)
1977 Við ommu til neytar (barnabók)
1978 Við mammu í torvi (barnabók)
1978 Við »Núpi« á Munkagrunninum (barnabók)
1980 Til bjarga (barnabók)
1983 Til látra (barnabók)

**Bernhard Brim**

1915 Føddur við Gjógv
1956 Bardagaskaldið (yrkingar)
1959 Vinir mínir (yrkingar)
1967 Tað var í mai (yrkingar)

**Regin Dahl**

1918 Føddur í Sandagerði
1937 Studentur
1937 Í útlegd (yrkingar)
1940-44 Jól uttanlendis (ritstjóri saman við Karsteni Hoydal)
1943 Barnasongbók (valt og skipað)
1943 Gevið brøður. Veitslusongbók (savnað og skipað)
1944 Leysasøkk (hittinorð)

Materiál chráněný autorskými právy

1944 Tokkaljóð (yrkingar)
1948 Charles Baudelaire: Dagbøkur (týðing)
1948 J. Dahl: Sólin og sóljan (útg.)
1948 Dirk van der Heide: Systir og eg (týðing)
1949 Beltisgyrði (yrkingar)
1955 Óttukvæði (yrkingar)
1964 Veitslugávan. Vertskapssongbók (savnað)
1965 Gongubitar (yrkingar)
1970 Ærinde uden betydning. Sneisaboð (yrkingar)
1973 Lukkurímur og fagnarljóð (pláta)
1976 4 vísur (pláta)
Hans A. Djurhuus: Barnarímur (pláta)
1978 Ordkumler. Orðakumlar (yrkingar)
1978 Pinkusavn (yrkingar)
1978 Tríkirni (yrkingar)
1981 Eftirtorv (yrkingar)
1983 Hans A. Djurhuus: Sjómansrímur
(pláta við løgum eftir Regin Dahl)
1985 Rekagrót (yrkingar)

**Bergur Djurhuus**

1919 Føddur á Sandi
1977 Ungur at fara (Árni Dahl savnaði)

**Oskar Hermannsson**

1920 Føddur í Vestmanna
1938 Prentari
1940-79 Følv (ritstjóri)
1957-59 Gluggin (blaðstjóri, 3.-5. árg.)
1979 Rani og Rúna (týðing, barnabók)

Materiál chráněný autorskými právy

**Johs. Andr. Næs (Flóvin Flekk)**

1920 Føddur í Nesi í Hvalba
1942 Læraraprógv
1949 Keldufar (yrkingar)
1951-78 Sunnudagsblaðið (blaðstjóri)
1964 Stavkistlar
1965-83 Føroysk lesibók 2.-10. skúlaár (í ritstjórnini)
1966 Orðatalvur og orðakort
1970 Martin Luther
1971-74 Kennir tú orðið (lagt til rættis saman við øðrum)
1972-79 Kristnikunnleiki 4.-6. skúlaár (í ritstjórnini)
1972 Stubbar úr søgu Føroya Lærarafelags
1973 Atburður lærarans og innlæring næmingsins
1976-83 Skúlabøkur og bøkur til skúlabrúks I-II
1977-83 Kees de Kort: Frásagnir úr Bíbliuni I-VIII (týtt og tilevnað saman við P. J. Sigvardsen, barnabøkur)
1979 Martin Luther: Luthers katekismus. J. Joensen týddi. 3. útg. (lagt til rættis hevur Johs. Andr. Næs)
1980 Ein genta úr gamla Kina (barnabók)
1980 Duncan Leighton: Jesus hittir ein blindan mann (týtt saman við P. J. Sigvardsen, barnabók)
1980 Albert Schweitzer: Flogvitið í frumskóginum
1983 Føroya skúlasøga, 1 (ritstjóri)
1984 Anita Behrendt: Páskirnar (týðing)

**Esmar A. Jacobsen (Esmar Jacobsen Gata)**

1925 Føddur í Norðragøtu
1946 Prentari
1956 Fiólin (yrkingar)
1960 Trúboðari
1963 Sáðkorn (stuttlestrar)
1963-84 Kirkjuligt missiónsblað (blaðstjóri saman við øðrum)
1964-69 C. O. Rosenius: Lógin og gleðiboðskapurin I-IV (týðing)

Materiál chráněný autorskými právy

1970 Hugo Odeberg: Kristus og skriftin (týðing)
1973 Øivind Andersen: Andsdópur og andsfylling (týðing)
1974 Øivind Andersen: Hvussu fái eg frið við Gud (týðing)
1974 Erik Pontoppidan: Dópurin og kvøldmáltíðin (týðing)
1976 Carl Fr. Wisløff: Eitt støði og eitt stevnumið (týðing)
1977 Øivind Andersen: Høvuðssannleikar til sælu (týðing)
1980 Øivind Andersen: Rættvísgjørd av trúgv (týðing)
1983 Øivind Andersen: Gerandiskristin (týðing)

**Tummas Napoleon Djurhuus**

1928 Føddur í Kollafirði
1946 Studentur
1951 Ung løg (yrkingar)
1952 Læraraprógv
1955 Greinar (yrkingar)
1958 Og dansurin gongur (yrkingar)
1961 Tættir og vísur
1970 Háfjalssólin og hostasevjan (tættir)
1978 Yrkingar (Ólavur Michelsen legði til rættis)

**Jens Pauli Heinesen**

1932 Føddur í Havn. Uppvaksin í Sandavági
1952 Studentur
1953 Degningsælið (stuttsøgur)
1956 Læraraprógv
1958 Yrkjarin úr Selvík (skaldsøga)
1958-61 Blaðstjóri á Mentum
1959 Hin vakra kvirran (stuttsøgur)
1959-63 Mín jólabók (í ritstjórnini)
1962-66 Tú upphavsins heimur I-III (skaldsøga)
1965-76 Føroysk lesibók 8.-10. skúlaár (í ritstjórnini)
1966 Føroyar í dag (ritstjóri)
1967 Gestur (stuttsøgur)

Materiál chráněný autorskými právy

| | |
|---|---|
| 1969 | Aldurnar spæla á sandi (stuttsøgur) |
| 1970 | Leggur lærarastarvið frá sær |
| 1971 | Í aldingarðinum (stuttsøgur) |
| 1973 | Frænir eitur ormurin (skaldsøga) |
| 1974 | Gamansleikur (stuttsøgur) |
| 1977 | Rekamaðurin (skaldsøga) |
| 1978 | Dropar í lívsins havi (stuttsøgur) |
| 1979 | Tey telgja sær gudar (skaldsøga) |
| 1980 | Nú ert tú mansbarn á foldum (skaldsøga) |
| 1981 | Lýsir nú fyri tær heimurin (skaldsøga) |
| 1982 | Leikur tín er sum hin ljósi dagur (skaldsøga) |
| 1983 | Markleys breiðist nú fyri tær fold (skaldsøga) |
| 1984 | Eitt dýpi av dýrari tíð (skaldsøga) |
| 1984 | Íkast til 1984 (greinar) |
| 1985 | Fýra sjónleikir |

**Ólavur Michelsen**

| | |
|---|---|
| 1933 | Føddur í Øravík |
| 1953 | Lovorð (yrkingar) |
| 1958 | Lærarprógv |
| 1958-61 | Blaðstjóri á Dagdvølju |
| 1960-73 | Blaðstjóri á 14. September |
| 1961 | Kirkjusøga |
| 1964 | Kálvur lítli (sjónleikur) |
| 1968 | Norrøn Gudalæra |
| 1976-78 | Blaðstjóri á 14. September |
| 1978 | Brøgd og bjørg (barnabók) |
| 1978 | T. N. Djurhuus: Yrkingar (Ólavur Michelsen legði til rættis) |
| 1978 | Mark Twain: Tom Sawyer (týðing) |

**Steingrím Niclasen**

| | |
|---|---|
| 1934 | Føddur í Hvalba |

Materiál chráněný autorskými právy

1960 Læraraprógv
1965-76 Føroysk lesibók 8.-10. skúlaár (í ritstjórnini)
1972-79 Kristnikunnleiki 4.-6. skúlaár (í ritstjórnini)
1983 Ian Serrailler: Silvurknívurin (týðing, barnabók)

**Magnus Dam Jacobsen**

1935 Føddur í Havn
1975 17 yrkingar
1976 Í Grønlandi við Kongshavn
1976 Jens Dam Jacobsen: Vaknaður vársins songur (yrkingar, Magnus Dam Jacobsen legði til rættis)
1977 Skitsur. Býurin og stórbýurin (skaldsøga)
1982 Gleðilig jól (yrkingar, savn)

**Steinbjørn B. Jacobsen**

1937 Føddur í Sandvík
1963 Læraraprógv
1966 Heimkoma (yrkingar)
1968 Fræ (yrkingar)
1970 Hønan og hanin (barnabók)
1971 Hin snjóhvíti kettlingurin (barnabók)
1972 Flytifuglar (týddar yrkingar, savnað saman við Heðini M. Klein)
1972 Krákuungarnir (barnabók)
1972 Mæið (barnabók)
1974 Kjøkr (yrkingar)
1974 Lív og hundurin (barnabók)
1975 Á veg millum bygda (stuttsøgur)
1975 Grái steinur (barnabók)
1975 Ivaliva og aðrir leikir (sjónleikir)
1976 Vindharpen. Et TV-spil fra Færøerne (skrivað saman við Gunnari Hoydal)
1977-81 Varðin (ritstjóri: bd. 44-48, hft. 1-2)

Materiál chráněný autorskými právy

1978 Gardinurnar fyri og hvat so (útvarpsleikur)
1979 Deyður ella dripin (útvarpsleikur)
1979 Hin reyða ryssan (barnabók)
1980 Maria og rossið (barnabók)
1980 Tægr (yrkingar)
1981 Lív (yrking)
1981 Lív og dýrini (barnabók)
1981 Mia og Eyð (barnabók)
1982 Brá úr USA (ferðafrásøgn)
1982 Mia og Dia (lesibók)
1982 Skipið (sjónleikur)
1982 Tey bæði í húsinum (sjónleikur)
1983 Erlendur Patursson: Sjón og seiggj (lagt til rættis saman við Heðini M. Klein)
1983 Reyða (barnabók)
1984-85 Ung orð 1-2 (í ritstjórnini)
1984 Hall (skaldsøga)
1984 Læraramyndir
1985 Si og Sú (barnabók)

**Hans J. Glerfoss**

1937 Føddur í Mikladali
1966 Til B (yrkingar)
1967 Fjallafossar (yrkingar)
1969 Kvirra í reyðum og bláum (yrkingar)

**Líggjas í Bø**

1938 Føddur í Klaksvík
1964 Til lívið (yrkingar)

Materiál chráněný autorskými právy

FØROYSKAR BÓKMENTIR Í ÚRVALI 4

Í hesum bindi eru verk eftir høvundar, sum eru føddir í tíðarskeiðinum 1905 - 1938

*K.O. Viderø*
*Jákup Berg*
*Andreas Andreasen*
*Valdemar Poulsen*
*G.L. Samuelsen*
*Sigurð Joensen*
*Karsten Hoydal*
*Jens Dam Jacobsen*
*Óli Dahl*
*Bernhard Brim*
*Regin Dahl*
*Bergur Djurhuus*
*Oskar Hermannsson*
*Flóvin Flekk*
*Esmar Jacobsen Gata*
*T. N. Djurhuus*
*Jens Pauli Heinesen*
*Ólavur Michelsen*
*Steingrím Niclasen*
*Magnus Dam Jacobsen*
*Steinbjørn B. Jacobsen*
*Hans J. Glerfoss*
*Líggjas í Bø*

FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNUR

Materiál chráněný autorskými právy